LANDSGRANNSKOÐANIN

Fíggjarárið 2017

Ársfrágreiðing

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

SEPTEMBER 2018

Innihaldsyvirlit

0 INNGANGUR 7

0.1 LANDSROKNSKAPURIN 2017 7
0.2 GRANNSKOÐAN AV ROKNSKAPINUM 7
0.3 FRAMLØGA 9

1 ALMENNAR VIÐMERKINGAR 11

1.1 FRÁGREIÐINGAR UM ÚRSLITIÐ AV GRANNSKOÐANINI 11
1.2 EGNAR BÚSKAPARSKIPANIR 12
1.3 LØNARÚTREIÐSLUR, YVIRTÍÐ OG FLEXTÍMASALDUR 14
1.4 KONTERINGAR 14
1.5 TRYGG HANDFARING AV UPPLÝSINGUM 15

2 LØGMANSFYRISITINGIN 17

2.1 FELAGSFYRISITINGIN Í TINGANESI (LG 2017/202-0111) 17
2.2 ENDURGJALD TIL BROTSVERKSOFFUR (LG 2017/202-0141) 17
2.3 FØROYA KÆRUSTOVNUR (LG 2017/202-0141) 18
2.4 DÁTUEFTIRLITIÐ (LG 2017/202-0142) 19

3 FÍGGJARMÁL 21

3.1 LANDSROKNSKAPURIN IKKI FULLFÍGGJAÐUR (LG 2014/100-0001) 21
3.2 VEÐHALDS- OG EFTIRLØNARSKYLDUR 22
3.3 EFTIRLØNIR HJÁ FÓLKASKÚLALÆRARUM (LG 2017/203-0181) 23
3.4 REGLUR UM MATSTOVUR (LG 2014/203-0111) 24
3.5 GJALDSTOVAN (LG 2016/203-0151) 24
3.6 TAKS (LG 2016/203-0151) 25
3.7 KERVISGRANNSKOÐAN 25
3.7.1 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ TAKS 25
3.7.2 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ GJALDSTOVUNI 26
3.7.3 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ KT LANDSINS 26
3.8 HAGSTOVA FØROYA (LG 2015/203-0152) 28
3.9 LANDSBANKI FØROYA (LG 2017/203-0151) 29
3.10 TALGILDU FØROYAR (LG 2017/203-0111) 32
3.11 AVGJALD AV KAPITALEFTIRLØNUM (LG 2017/220-0521) 33
3.12 INNHEINTING AV BARNAPENINGI (LG 2017/203-0151) 35
3.13 ÓMAKSGJØLD (LG 2014/203-0151) 38

3.14 BUNDIN EFTIRLØN AV B-INNTØKUM (LG 2016/220-0521) 39
3.15 NEGATIVT MEIRVIRÐISGJALD (LG 2016/220-0522) 40
3.16 NOTAT UM KEYP AV VØRUM OG TÆNASTUM (LG 2016/405-0008) 41

4 FISKIVINNUMÁL 43

4.1 FISKIMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/205-0111) 43
4.2 EFTIRLIT VIÐ UPPBOÐSSØLU (LG 2017/205-0111) 43
4.3 FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ (LG 2017/205-0342) 44
4.4 EFFEKTIVAR VEÐHALDSÚTREIÐSLUR (LG 2017/205-0345) 46

5 MENTAMÁL 49

5.1 NÁM (LG 2017/207-0231) 49
5.2 PRÓVTØKUR (LG 2017/207-0231) 49
5.3 FÓLKASKÚLIN (LG 2017/207-0232) 51
5.4 MIÐNÁM Á KAMBSDALI (LG 2016/207-0233) 52
5.5 FAB LAB (LG 2017/207-0233) 52
5.6 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK, LØGUJÁTTAN (LG 2016/207-0233) 53
5.7 SKÚLADEPIL VIÐ MARKNAGIL, LØGUJÁTTAN (LG 2016/405-0009) 53
5.8 GLASIR (LG 2017/207-0233) 53
5.9 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (LG 2014/207-0235) 58
5.10 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA, LØGUJÁTTAN (LG 2017/207-0236) 59
5.11 GRANSKINGARRÁÐ FØROYA (LG 2014/207-0236) 60
5.12 ES-GRANSKINGARSKRÁ (LG 2017/207-0236) 60
5.13 MÁLRÁÐIÐ (LG 2017/207-0241) 61
5.14 TJÓÐPALLUR FØROYA (LG 2015/207-0242) 63
5.15 MENTANARGRUNNUR LANDSINS (LG 2015/207-0242) 63
5.16 SØVN LANDSINS (LG 2014/207-0243) 63
5.17 KIRKJUGRUNNURIN (LG 2014/207-0245) 64

6 HEILSU- OG INNLENDISMÁL 65

6.1 HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/211-0111) 65
6.2 FÓLKAHEILSURÁÐIÐ (LG 2016/211-0201) 65
6.3 LÆKNAKANNINGAR AV BØRNUM (LG 2014/211-0201) 66
6.4 HEILSUTRYGD (LG 2015/211-0202) 66
6.5 GIGNI, HEILSUFRØÐI TIL BØRN OG UNG (LG 2016/211-0213) 67
6.6 ELVEITING, UMSITING (LG 2017/211-0321) 67
6.7 FERÐ Á GRØNA ORKU (LG 2017/211-0321) 69
6.8 UMHVØRVISSTOVAN (LG 2017/211-0374) 73

7 ALMANNAMÁL 75

7.1 ALMANNAMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/212-0111) 75
7.2 ALMANNAVERKIÐ (LG 2017/212-0211) 75
7.3 STUÐULSJÁTTANIR, § 12 ALMANNAMÁL (LG 2017/212-0211) 79
7.4 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LG 2015/212-0213) 80
7.5 EINKJUBARNASTYRKUR (LG 2014/212-0213) 80

7.6 BARNAÍSKOYTI (LG 2015/212-0213) 81
7.7 KASSAEFTIRLIT Á EINDUM UNDIR BARNAVERND (LG 2016/212-0213) 81
7.8 DAGPENINGUR VEGNA SJÚKU V.M. (LG 2014/212-0214) 81
7.9 KASSAEFTIRLIT Á VERKSTØÐUM OG VERKHÚSUM (LG 2016/212-0216) 82
7.10 ALMANNAVERKIÐ, TRIVNAÐARTÆNASTAN (LG 2016/212-216) 82
7.11 VANLIG FORSORG (LG 2014/212-0217) 86
7.12 ARBEIÐSFREMJANDI TILTØK (LG 2017/212-0217) 87

8 UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL 93

8.1 UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/213-0111) 93
8.2 KUNNGERÐIR O.A. TIL VINNUFELAGALÓGINA (LG 2014/206-0111) 93
8.3 STUÐULSJÁTTANIR, § 13 UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL (LG 2016/213-0111) 94
8.4 JARÐFEINGI (LG 2017/213-0321) 96
8.5 MARKNAÐARFØRING AV LANDGRUNNINUM (LG 2017/213-0321) 99
8.6 DJÓRALÆKNATÆNASTUR (LG 2017/213-0331) 100
8.7 SJÓVINNUSTÝRIÐ (LG 2015/213-0351) 101
8.8 VINNUSTOVNURIN (LG 2017/213-0371) 101
8.9 SKRÁSETING FØROYA (LG 2017/213-371) 106
8.10 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LG 2017/213-0373) 109
8.11 HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN (LG 2017/213-0375) 109

9 SAMFERÐSLUMÁL 115

9.1 LANDSINS OGNIR (LG 2017/217-0111) 115
9.1.1 LANDSINS OGNIR, RAKSTRARJÁTTAN 17.11.1.23 115
9.1.2 LANDSINS OGNIR, LØGUJÁTTAN 17.11.1.62. 116
9.2 LANDSVERK (LG 2017/217-0381) 116
9.2.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI 116
9.2.2 ORKUTØK 121
9.2.3 LEIGA AV ASFALTVIRKI 123
9.2.4 LØGUJÁTTANIR 135
9.3 STRANDFARASKIP LANDSINS (LG 2017/217-0382) 136
9.4 STUÐUL TIL ÚTOYGGJAR (LG 2017/217-0382) 141
9.5 AKSTOVAN (LG 2017/217-0384) 142
9.6 ARBEIÐS- OG BRUNAEFTIRLITIÐ (LG 2017/217-0391) 143
9.7 BARSILSSKIPANIN (LG 2017/217-0394) 143

10 FÍGGJARSTØÐA 147

10.1 FÍGGJARSTØÐA (LG 2017/300-0000) 147
10.1.1 KAPITALINNSKOT (LG 2017/300-0102) 147
10.1.2 VIRÐISBRØV 149
10.1.3 ÚTLÁN 151
10.1.4 ÁOGN O.A. 151
10.1.5 TØKUR PENINGUR 153
10.1.6 SKULD 155
10.1.7 ÚTJAVNINGARKONTA (LG 2017/300-0203) 156
10.2 FYRISITING AV GJALDFØRI OG SKULD (LG 2017/300-0104 OG 0202) 156

10.2.1 LANDSKASSASKULD - BRÆVALÁN 157
10.2.2 PORTEFØLJUSKIPANIN OG PLASERINGAR AV GJALDFØRI 163

11 ORÐALISTI 165

0 Inngangur

0.1 Landsroknskapurin 2017

§ 45, stk. 1 í stýrisskipanarlógini ásetir, at landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok. Sambært § 1, stk. 1 í løgtingslóg nr. 33 frá 23. mars 1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skal Landsstýrið, innan mai mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.[1]

Tað er eisini ásett í § 11, stk. 1 í grannskoðanarlógini, at landsstýrismaðurin í seinasta lagi 5 mánaðir eftir fíggjarárslok skal lata løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini tann árliga landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.

Aðalráð og stovnar skulu leggja fram ein rættan roknskap – gjørdur í BSL.

Neyvari reglur um roknskaparhaldið eru ásettar í kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 "um roknskaparverk landsins o.t."[2] Aðalráðini og teir stovnar, sum hoyra undir aðalráðini, skulu leggja fram ársroknskap, sum er gjørdur í Búskaparskipan landsins, og sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og av ognum og skuld við fíggjarárslok.

Aðalráðini og stovnar teirra skulu eisini støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini verða roknskaparupplýsingar samsvarandi góðkendum ársroknskapum tiknar við í landsroknskapin, sum Gjaldstovan setir upp.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal leggja fram samlaðan landsroknskap.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal, áðrenn mai mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin.

Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2017 varð latin Løgtinginum 23. mai 2018.

0.2 Grannskoðan av roknskapinum

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

Endamálið við grannskoðanini

Endamálið við grannskoðanini.

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

- at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- at eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,

[1] 2015 var tíðarfreistin stytt úr 6 mánaðum í 5 mánaðir.
[2] Broytt við kunngerð nr. 110 frá 14. juli 2017.

at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og víkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin

Ábyrgd grannskoðarans.

Landsgrannskoðanin er stovnur undir Løgtinginum og er óheft í virki sínum. Landsgrannskoðanin skal grannskoða árliga landsroknskapin, t.e. samlaða roknskapin fyri landsumsitingina og allar landsstovnarnar.[3]

Grannskoðanin skal fevna um fíggjarliga grannskoðan, løgfrøðiliga-kritiska grannskoðan og fyrisitingargrannskoðan. Harafturat skal grannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin ger sjálv av, hvussu grannskoðanin verður útint. Grannskoðanin verður løgd soleiðis til rættis, at øki og stovnar verða grannskoðað við jøvnum millumbili. Landsgrannskoðanin fer út á stovnar og deildir at kanna t.d. roknskapar- og lønarviðurskifti ella at kanna mannagongdir fyri umsiting av lóggávu og játtanum. Aðrar uppgávur eru t.d. játtanareftirlit, gjøgnumgongd av fíggjarstøðu og avstemman.

Frágreiðingar umbidnar av løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um viðurskifti, sum teir vilja hava lýst. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu eisini áleggja Landsgrannskoðanini at gera víðkaða fyrisitingargrannskoðan á ávísum økjum ella at gera tvørgangandi fyrisitingargrannskoðan, sum fevnir um fleiri játtanir, stovnar o.a.

Dømi um slíka frágreiðing er frágreiðing “um landsins keyp av vørum og tænastum”, sum Landsgrannskoðanin lat løgtingsgrannskoðarunum í juni 2017.

Millumlanda samstarv

Landsgrannskoðanin er við í norðurlendskum samstarvi og tekur lut á fundum í millum norðurlendsku ríkisgrannskoðanirnar og á fundum ímillum skrivararnar hjá parlamentarisku grannskoðarunum í Norðurlondum.

Landsgrannskoðanin hevur umboð í grannskoðaranevndini, ið grannskoðar ES-stuðul til Northern Periphery and Arctic Programme.

Landsgrannskoðanin er við í tveimum norðurlendskum samgrannskoðanum. Onnur er um talgilding, har kannað verður, hvussu talgildingin virkar, tá ið ávíst slag av virki verður stovnað. Hin er ein fyrisitingargrannskoðan av universitetum í Norðurlondum, har tað verður kannað, um og hvussu tað ber til at máta effektivitetin. Eftir ætlan verða úrslitini av grannskoðanunum tøk í 2019.

Í 2016 vórðu stig tikin til eitt norðuratlantiskt samstarv ímillum grannskoðanirnar í Føroyum, Íslandi og Grønlandi, har felags áhugamál og avbjóðingar eru á skránni.

Privatir grannskoðarar

Hjá nøkrum landsstovnum og grunnum er tað við lóg, kunngerð ella viðtøkum ásett, at grannskoðanin skal verða útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum. Í øðrum førum verður grannskoðanin útint sambært avtalu ella siðvenju.

[3] Tó ikki roknskapirnar hjá teimum, har tað í lóg, kunngerð, viðtøkum, siðvenju e.l. er ásett, at grannskoðanin verður útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum.

Grannskoðararnir lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um úrslitini av grannskoðanunum. Seinnu árini hava løgtingsgrannskoðararnir gjørt ein samandrátt av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum, sum er latin Løgtinginum saman við uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum.

Viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismonnum

Í § 12, stk. 1 í grannskoðanarlógini er ásett, at landsstýrismaðurin skal hava eina skrivliga fráboðan um úrslitið av grannskoðanini. Vanligt er, at stovnsleiðslan frammanundan fær høvi at gera sínar viðmerkingar til frágreiðingina. Tað er fyri at tryggja, at ongar misskiljingar eru, og at tey skriv, sum verða send landsstýrismanninum, eru so røtt sum gjørligt, og at allir partar fáa høvi at lýsa síni sjónarmið.

Landsstýrismaðurin skal hava frágreiðingar til viðmerkingar.

Í § 12, stk. 3 er ásett, at áðrenn frágreiðing um úrslitið av einari grannskoðan verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri viðkomandi landsstýrismann til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu takast við í frágreiðingina til løgtingsgrannskoðararnar.

Frágreiðingin skal sendast landsstýrismanninum til viðmerkingar til tess at tryggja, at tað tilfar, sum verður latið løgtingsgrannskoðarunum, verður so objektivt rætt sum gjørligt, og at eisini landsstýrismaðurin fær høvi at lýsa síni sjónarmið.

0.3 Framløga

Sambært § 12, stk. 2 í grannskoðanarlógini skal roknskapargrannskoðanin innan 8 mánaðir[4] eftir fíggjarárslok lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2017 fyri Løgtingið til samtyktar.

Frágreiðingin er løgd fyri tey landsstýrisfólk, sum umsita avvarðandi øki, til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrisfólkunum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til, eru tiknar við.

Landsgrannskoðanin roknar grannskoðanina av landsroknskapinum 2017 sum lidna. Kortini kann Landsgrannskoðanin seinni fara at kanna mál og spurningar, sum viðvíkja bæði 2017 og eldri árum. Upplýsingar kunnu koma fram, sum elva til, at tey mál, sum eru umrødd í hesari frágreiðing, verða mett og viðgjørd av nýggjum.

Argir, 5. september 2018

Beinta Dam
landsgrannskoðari

[4] Í 2015 var freistin stytt úr 10 mánaðum í 8 mánaðir.

1 Almennar viðmerkingar

1.1 Frágreiðingar um úrslitið av grannskoðanini

Løgtingsgrannskoðararnir hava eftirlit við landsroknskapinum og roknskapum hjá sjálvstøðugum almennum stovnum. Sum grundarlag undir hesum virki skal roknskapargrannskoðanin lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini.

Áðrenn løgtingsgrannskoðararnir fáa frágreiðing frá grannskoðanini, skal hon sendast landsstýrismanninum til viðmerkingar. Í endaligu frágreiðingina skulu takast við møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum.

Hetta er ein týðandi fyriskipan, har landsstýrismaðurin fær fráboðan um úrslitið av grannskoðanini og kann taka stig til møguligar tillagingar o.a. Somuleiðis brúka løgtingsgrannskoðararnir frágreiðingarnar til at fremja sítt eftirlit við almennum stovnum og leggja síðani frágreiðing fyri Løgtingið.

Fyriskipanin er galdandi fyri allar almennar stovnar, uttan so at undantak er ásett í lóg um ein ávísan stovn. Tað kemur fyri, at ein stovnur er skipaður sambært lóg, og har tað er ásett, at hann ikki skal takast við í fíggjarlógina. Ein tílíkur stovnur hevur ofta eitt stýri ella eina nevnd, og virksemið er meira leyst av landsfyrisitingini. Talan er tó um almennan stovn, har roknskapurin skal grannskoðast, og frágreiðing latast løgtingsgrannskoðarunum, sambært lógini um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Tílikir stovnar hava vanliga privatan grannskoðara. Virksemið hjá privatum grannskoðarum er skipað sambært lógini um góðkendar grannskoðarar og grannskoðaravirki. Í tí lógini er einki nevnt um nakra frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini. Men sambært § 18 skal grannskoðarin føra eina grannskoðanarprotokoll til nýtslu hjá tí, ið hevur biðið um grannskoðanina.

Higartil hevur siðvenjan verið, at privatu grannskoðararnir lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapin og grannskoðanarprotokollina. Protokollin verður tá roknað sum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini.

Siðvenja er at lata løgtingsgrannskoðarunum grannskoðanarprotokoll

Í undanfarna ári fingu løgtingsgrannskoðararnir ikki protokollina viðvíkjandi Búnaðargrunninum, sum annars vanligt, hóast fleiri áminningar. Løgtingsgrannskoðararnir sendu tí formansskapi Løgtingsins skriv um, at tað ikki bar til at fremja tað eftirlitsvirksemið, sum higartil er gjørt. Eftir tað sendi grannskoðarin hjá Búnaðargrunninum skriv til løgtingsgrannskoðararnar, har stutt var tikið saman um trý tilmæli.

Málið varð umrøtt í Lm. nr. 62/2017 um góðkenning av landsroknskapinum 2016. Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu harðliga, at siðvenjan var brotin, og vístu á, at teir sambært § 45, stk. 2 í stýrisskipanarlógini kunnu krevja at fáa allar upplýsingar og øll skjøl, ið teimum tørvar.

Í sambandi við málið um protokollina hjá Búnaðargrunninum bóðu løgtingsgrannskoðararnir um frágreiðing frá landsgrannskoðaranum um, hvørjar ásetingar eru í sambandi við grannskoðan av grunninum.

Í februar 2018 sendu løgtingsgrannskoðararnir privatu grannskoðarunum skriv, har teir gera vart við ta týðandi eftirlitsuppgávu, sum er áløgd løgtingsgrannskoðarunum. Tað er tí av avgerandi týdningi, at teir hava rættstundis og nøktandi atgongd til upplýsingar og skjøl, sum teir meta tørv vera á, fyri at útinna starv sítt.

Í skrivinum vísa løgtingsgrannskoðararnir á siðvenjuna við, at privatu grannskoðararnir senda grannskoðanarprotokollina til løgtingsgrannskoðararnar, og at hon verður roknað sum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini.

Løgtingsgrannskoðararnir hava undirstrikað, at frágreiðing um úrslitið er protokollin.

Sambært § 12, stk. 4 kunnu løgtingsgrannskoðararnir áseta nærri reglur um uppseting og innihald í grannskoðaranarfrágreiðingunum. Í skrivinum enda løgtingsgrannskoðararnir tí við at undirstrika, at so leingi annað ikki er ásett, skal frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini skiljast sum í minsta lagi grannskoðanarprotokollin.

1.2 Egnar búskaparskipanir

Búskaparskipan landsins er grundarlagið undir samlaða landsroknskapinum, sum verður lagdur fyri Løgtingið í uppskoti til samtyktar. Í roknskaparkunngerðini er ásett, at allir almennir stovnar skulu nýta Búskaparskipan landsins.

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri umførum umrøtt stovnar, sum hava egna búskaparskipan.

Tó at nógv teir flestu stovnarnir skráseta sínar roknskapardátur beinleiðis í Búskaparskipan landsins, er tað neyðugt ella ynskiligt hjá nøkrum stovnum at hava egnar búskaparskipanir til at gjalda út, føra bókhald, umsita lønir, lán, skuldarar o.a.

Fíggjarmálaráðið kann geva loyvi til egnar búskaparskipanir.

Fíggjarmálaráðið kann loyva stovnum við serligum tørvi heilt ella lutvíst at nýta sínar egnu búskaparskipanir. Tílíkar skipanir skulu lúka ásett krøv í roknskaparkunngerðini, t.d. um munadygga viðskiftisslóð.

Flestu búskaparskipanir, sum stovnar brúka, eru komnar um aldarskifti, tá ið talgildar bókhaldsskipanir gjørdust alsamt vanligari. Formligu loyvini, sum kunngerðin áleggur stovnunum at útvega, eru kortini ikki givin.

Fær ein stovnur loyvi til at nýta egna búskaparskipan, skal ein skrivlig rakstraravtala verða gjørd við Gjaldstovuna, sum gjølliga útgreinar treytirnar fyri dátusamskifti o.t. Stovnar skulu eftir reglunum lata skipanini upplýsingar og eftirkanna tað tilfar, teir fáa úr skipanini.

Nakrir stovnar, ið nýta egna búskaparskipan uttan formligt loyvi, eru saman við Gjaldstovuni í einari tilgongd at lýsa og skipa markamótið ímillum skipanirnar og at leggja treytirnar fyri, hvussu roknskaparupplýsingar kunnu flytast ímillum.

Endamálið við formligu loyvunum er at tryggja, at roknskaparligu upplýsingarnar í egnum búskaparskipanum hjá stovnum verða fluttar Búskaparskipan landsins umvegis markamót, ið eru væl lýst; tað skal tryggja, at ivi ikki stingur seg upp um, at upplýsingarnar í Búskaparskipan landsins eru tær røttu. Tað er stovnsleiðslan, ið hevur ábyrgd av at tryggja sær, at upplýsingarnar í Búskaparskipan landsins eru tær røttu.

Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir staðfest, at samsvar er ikki ímillum skipanirnar. Avleiðingin av tí kann gerast, at roknskapurin sum stýrings- og eftirlitsamboð hjá

Løgtinginum ikki verður nøktandi, og at Løgtingið sum evstu avleiðing góðkennir ófullfíggjaðan ella misvísandi landsroknskap.

Í ársfrágreiðingini 2015 vísti Landsgrannskoðanin á týdningin, at samsvarið millum Búskaparskipan landsins og egnar búskaparskipanir verður tryggjað, og at góðkenningarmannagongdir verða tiknar í álvara, tá ið stovnsleiðslur vátta, at samsvar er millum skipanirnar.

Bæði í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 2015 og 2016 (Lm. nr. 41/2016 og 62/2017) hildu løgtingsgrannskoðararnir, at tað var als ikki nøktandi, at ósamsvar er ímillum skipanirnar. Lm. nr. 37/2016 snúði seg um at leggja frágreiðing fyri Løgtingið um, hvussu viðurskifti, sum eru viðgjørd í grannskoðanarfrágreiðingum í fleiri ár, verða fingin í rættlag. Í tí málinum vístu løgtingsgrannskoðararnir á, at viðurskiftini als ikki vóru nøktandi, og tí eru skeiv roknskapartøl løgd fyri Løgtingið.

Løgtingsgrannskoðararnir mæltu tí Fíggjarmálaráðnum til at tryggja, at tølini, sum verða latin landsroknskapinum, eru tey røttu.

Í niðurstøðuni um kæru frá Vinnumálaráðnum um fyrrverandi grannskoðara hjá Strandfaraskipum landsins hevur Grannskoðanarnevndin 8. juni 2016 gjørt vart við, at *"tað áttu at verðið gjørdar leiðreglur/vegleiðingar um, hvat grannskoðanin av landsroknskapinum inniber, t.d. um at váttast skal í samsvari við Búskaparskipan landsins"*.

Løgtingsgrannskoðararnir hava ásett reglur um samsvar við Búskaparskipan landsins.

Vísandi til §12, stk. 4 í grannskoðanarlógini hava løgtingsgrannskoðararnir ásett, at tá ið roknskapir hjá landsumsitingini, landsstovnum o.ø. verða grannskoðaðir, skal grannskoðarin kanna eftir og vátta, at roknskapurin er í samsvari við innrapporteraðu tølini í landsroknskapinum.

Landsgrannskoðanin veit ikki, um nakrir týðandi munir nú eru millum Búskaparskipan landsins og egnar búskaparskipanir, eins og var í málinum hjá Strandfaraskipum landsins tá.

Ein gjøgnumgongd av grannskoðaðu roknskapunum 2016 vísti, at hjá onkrum stovnum vóru smærri munir ímillum tølini í Búskaparskipan landsins og í grannskoðaða roknskapinum.

Munur var í úrslitinum hjá Tekniska skúla í Tórshavn, tí at í grannskoðaða roknskapinum var ein játtan á 800 t.kr. tikin við. Veruliga meirnýtslan var tí 1.007 t.kr. og ikki 207 t.kr. Kringvarpið hevði 394 t.kr. í minniinntøku í lýsingarinntøkum, men grannskoðaði roknskapurin vísti 0 kr., tí at hann ikki fevndi um talgilding av bandasavninum og lýsingarinntøkurnar. Somuleiðis hevði útbyggingin av Landssjúkrahúsinum 57 t.kr. í minninýtslu, men grannskoðaði roknskapurin vísti 0 kr., tí at hann ikki fevndi um viðlíkahaldið av sjúkrahúsinum.

Í øðrum roknskapum eru smærri munir av ókendum orsøkum. Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið hevði t.d. 41 t.kr. í meirnýtslu, men grannskoðaði roknskapurin vísti 53 t.kr. Tórshavnar privata vistarheim hevði 173 t.kr. í meirnýtslu, men grannskoðaði roknskapurin vísti 14 t.kr.

Áður hava stovnar gjørt avsetingar o.a. og hava tí eftirbókingar til annars endaliga landsroknskapin.

Tað er týdningarmikið at hava tey røttu tølini í landsroknskapinum.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er av týdningi at hava í huga, at tað eru tølini, sum standa í landsroknskapinum, sum eru og skulu vera tey røttu tølini. Tað er bæði viðvíkjandi avstemmanum við m.a. egnar búskaparskipanir, sum meginregluliga ikki skulu hava nakran mun, men eisini í sambandi við nýtslu av roknskapartølum sum heild.

Játtanar- og roknskapartøl, sum ikki samsvara við tølini í landsroknskapinum, eiga ikki at koma fyri. Heldur ikki skulu stovnar brúka uppsetingar o.a. við tølum, sum kunnu geva eina skeiva mynd av veruleikanum; tey kunnu m.a. føra til óheimilaða meirnýtslu.

Landsgrannskoðanin heldur, at Fíggjarmálaráðið eigur at tryggja sær, at tøl, sum verða latin landsroknskapinum, eru røtt, og at nýtsla av játtanar- og roknskapartølum eru í samsvari við tølini, sum eru í landsroknskapinum. Tað kundi verðið gjørt við at áseta krøv um mannagongdir, uppseting o.a.

1.3 Lønarútreiðslur, yvirtíð og flextímasaldur

Løgtingsgrannskoðararnir hava í fleiri ár umrøtt, at almennir stovnar ikki halda reglurnar um m.a. tíðarskráseting, og í seinasta uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 62/2017) átalaðu løgtingsgrannskoðararnir hvassliga, at aðalráð ikki altíð fylgja lógum, kunngerðum, rundskrivum og reglugerðum. Víst varð m.a. á, at nógv starvsfólk skyldaðu ella áttu nógvar lønartímar til góðar, uttan at tað sást í landsroknskapinum. Úrslitið var, at samsvar var ikki ímillum roknskapin og veruligu nýtsluna.

Í uppskotinum til samtyktar vónaðu løgtingsgrannskoðararnir, at rundskrivið um at tíðaravmarka lønir, sum kom í gildi í januar 2017, fór at bøta um støðuna. Rundskrivið er síðani dagført í desember 2017.

Meginreglan í rundskrivinum er, at tímasaldur skulu tíðaravmarkast, tá ið starvsfólk eigur fleiri enn 40 tímar á ella skyldar fleiri enn 30 tímar. Sama er galdandi fyri uppsagnarløn, tá ið starvfólk eru fríttstillað í uppsagnartíðini.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at hóast ásetingarnar í rundskrivinum eru framvegis nógvar tímasaldur, sum ikki eru tíðaravmarkaðar, og tí kann roknskapurin enn ikki sigast at vera rættur.

1.4 Konteringar

Sambært roknskaparkunngerðini skal roknskaparverkið tryggja eina munadygga búskaparfyrisiting við at skráseta upplýsingar, sum skulu verða nýttar til búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit við virkseminum á øllum stigum í landsfyrisitingini.

Roknskaparverkið skal vera skipað soleiðis, at neyðugar upplýsingar kunnu útvegast at nýta til innanhýsis roknskapareftirlit, framløgu av tíðarskeiðsroknskapum og at gera landsroknskapin.

Tað er eitt grundleggjandi krav sambært rundskrivinum um roknskaparreglugerðir, at stovnar kontera sambært Kontuskipan landsins og eftir konteringarleiðbeiningini, ið hoyrir til.

Í sambandi við eftirlit á stovnum kannar Landsgrannskoðanin við stakroyndum keyp, sølu, konteringar o.a. Landsgrannskoðanin heldur, at tað kemur ov ofta fyri, at stovnar bóka skeivt, við tí úrslitið at roknskapurin hjá nøkrum stovnum er gruggutur.

Landsgrannskoðanin hevur víst á nógvar skeivar konteringar, m.a. at upphæddir verða bókaðar á skeiva standardkontu, upphæddir, ið eiga at verða bókaðar sum rakstur, verða bókaðar í fíggjarstøðuni, og inntøkur verða mótbókaðar á útreiðslukontum.

Skeivar konteringar gera, at roknskapurin er ikki rættur.

Skeivar konteringar gera, at roknskapurin er ikki rættur, og at gjøgnumskygnið í roknskapinum verður ikki nóg gott.

1.5 Trygg handfaring av upplýsingum

Landsstýrismaðurin í vinnumálum ásetti í rundskrivi 22. desember 2004, at leiðslurnar á øllum ábyrgdarøkjum í landsfyrisitingini høvdu ábyrgd av, fyri 1. februar 2006, at seta í verk KT trygd, sum er neyvari greinað í rundskrivinum.

Eitt ára tíðarfreistin at lúka hesar treytirnar vísti seg at vera høpisleys at halda. Okkara grannskoðan hevur eisini víst, at flestu stovnar luku ikki krøvini. Vinnumálaráðið sendi í juni 2007 eitt dagført rundskriv út, har tíðarfreistin varð longd til 1. apríl 2010.

Rundskrivið ásetir, at KT trygdin er grundað á ISE/ISO 17799 og ISE/ISO 27001 standardin. Somuleiðis verður mælt til at nýta DS 484 til at seta í verk standardin. Leiðslurnar í landsfyrisitingini skulu gera eina ítøkiliga váðameting fyri egið ábyrgdarøki í sambandi við verksetan av standardinum.

At útseta freistina hevði ikki í sjálvum sær við sær, at KT trygdin bleiv betri. KT trygd snýr seg í høvuðsheitum um trúnað, rættleika og viðgerð av upplýsingum, umframt atgongd til upplýsingar og telduskipanir. Endamálið við rundskrivinum er at gera nýtsluna av kunningartøkni í landsfyrisitingini trygga.

Í fleiri ársfrágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin víst á, at alt ov nógvir stovnar hava ikki gjørt váðameting, tíansheldur verksett KT trygd í tráð við rundskrivið.

Landsgrannskoðanin heldur, at ov nógvir stovnar og aðalráð taka ikki hetta týðandi mál í álvara. Vandi er tí fyri, at upplýsingar hjá almennum stovnum verða ikki handfarnir rætt, umframt at leiðslurnar ikki varnast møguliga misnýtslu av upplýsingum, ella at møgulig misnýtsla ikki verður fyribyrgd.

Landsgrannskoðanin hevur seinastu tíðina lagt til merkis, at framstig eru hend, við tað at leiðslurnar á stovnunum eru meira tilvitaðar um, at hava KT trygdina í lagi.

Landsgrannskoðanin er eisini kunnug við, at arbeitt verður við nýggjum KT rundskrivi.

2 Løgmansfyrisitingin

2.1 Felagsfyrisitingin í Tinganesi (LG 2017/202-0111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað felagsfyrisitingina í Tinganesi. Felagsfyrisitingin røkir móttøkuna og ber el- og oljuútreiðslur og útreiðslur til smærri viðlíkahald fyri stjórnarráðini, ið halda til í Tinganesi. Eisini umsitur felagsfyrisitingin matstovuna.

Vit kannaðu, um lønirnar vóru rættar, við at samanhalda setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar.

Starvsfólk kunnu hava flexsaldu +30/-15 tímar. Í september 2017 lógu tímasaldurnar munandi oman fyri tað loyvda. Sambært Løgmansskrivstovuni eru viðurskiftini síðani komin í rættlag.

Matstovan

Uppgávan at reka matstovuna varð boðin út á sumri 2017, og sáttmáli varð gjørdur við privata fyritøku at galda til 31. juli 2020. Kostnaðurin er í tveimum, eitt fast mánaðarligt gjald, umframt 30 kr. fyri hvønn verð.

Sáttmáli er gjørdur um at reka matstovu.

Felagsfyrisitingin rindar mánaðarliga gjaldið og millumroknar síðani við tey, sum eru partur av skipanini. Býtislykilin verður roknaður lutfalsliga eftir starvsfólkatalinum hjá aðalráðunum.

Sambært rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um starvsfólkamatstovur skal raksturin av starvsfólkamatstovu verða skipaður við innanvirkis roknskapi. Roknskapurin fyri matstovuna hjá Felagsfyrisitingini er skipaður soleiðis, at útreiðslurnar verða mótroknaðar inntøkunum. Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært kontuvegleiðingini skulu inntøkur skrásetast á st.kt. 21, og útreiðslur á st.kt. 14.

Løgmansskrivstovan hevur boðað frá, at inntøkurnar eru skrásettar á st.kt. 21 síðani 1. januar 2018.

2.2 Endurgjald til brotsverksoffur (LG 2017/202-0141)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit játtanina Endurgjald til brotsverksoffur. Løgmansskrivstovan umsitur játtanina, sum er 300 t.kr. Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at eingin innheinting var sett í verk at krevja peningin frá teimum, sum hava framt brotsverkini. Sambært Løgmansskrivstovuni hevði uppgávan verið forsømd síðani 2011, tá ið málsøkið bleiv yvirtikið.

Innkrevjing er sett í verk at krevja endurgjøld fyri brotsverk.

Ábyrgdin, at krevja peningin inn, er flutt fleiri ferðir millum stjórnarráð, og roynt hevur verið at leggja uppgávuna til TAKS ella til Gjaldstovuna. Higartil eru royndirnar endaðar

við viðgerð av heimildum til innheintingaramboð o.a. Í desember 2016 sendi Løgmansskrivstovan krøvini frá 2013 út. Krøvini fyri 2011 og 2012 fóru eftir ætlan at verða send út fyrst í 2017.

Í august 2018 hevur Løgmansskrivstovan kunnað um, at innkrevjingin nú er komin í fasta legu.

2.3 Føroya kærustovnur (LG 2017/202-0141)

Kjarnuuppgávan hjá Føroya Kærustovni er at vera skrivstova hjá 11 nevndum, harav 9 eru kærunevndir. Á stovninum starvast 10 fólk, tey flestu løgfrøðingar.

Stovnurin skrásetir innkomnar kærur og sendir tær til ummælis og hoyringar hjá avvarðandi mynduleikum o.ø. Kærustovnurin ger løgfrøðiligt upprit við tilmæli til niðurstøðu, sendir tilfarið til nevndarlimirnar og avgreiðir avgerðir til kærarar og myndugleikar.

KT viðurskifti

Kærustovnurin er limur í Landsneti. Stovnurin hevur gjørt SLA við KT Landsins í 2013 og brúkar trygdarpolitikkin hjá KT Landsins. Stovnurin hevur gjørt dátuflokkingar eftir leistinum hjá Landsneti.

Kærustovnurin hevur fingið gjørt eina trygdarskoðan, har grannskoðarin hevði eitt høgt raðfest tilmæli um at flyta allar viðkvæmar upplýsingar av fíluservaranum og leggja tær í t.d. journalskipanina, har loggur er á. Sambært stjóranum er tilmælið grundað á, at tað ber ikki til at eftirkanna, hvør hevur latið skjøl í fíluservaranum upp. Stjórin vónar, at viðkvomu upplýsingarnar verða fluttar í journalskipanina í ár.

Kærustovnurin viðger og varðveitir persónsupplýsingar bæði talgilt og fysiskt. Starvsfólkini hava atgongd til allar nevndaravgerðirnar, tó er atgongd til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina og Høvuðsbarnaverndarnevndina avmarkað.

Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja ásetingunum í trygdarkunngerðini.

Sambært § 4, stk. 2 í trygdarkunngerðini[5] skal dátuábyrgdarin gera váðameting í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum fyri at fáa greiðu á sannlíkindunum fyri broti á trygdarreglurnar og avleiðingarnar av tí. Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja ásetingunum í kunngerðini og at áseta reglur um, hvør hevur atgongd til upplýsingarnar.

Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin frá 2012 verður dagførd í 2018.

Stovnurin ætlar at dagføra roknskaparreglugerðina, sum er frá 2012, í ár.

Landsstýrismaðurin hevur ásett gjøld fyri kærur til Vinnukærunevndina, ávikavist 4 t.kr. fyri kæruviðgerðir og 2 t. fyri viðurskifti, ið ikki hava samband við tað aktuella ella framtíðar vinnuvirksemi hjá kærara. Kærustovnurin fær eisini ávikavist 50 t.kr. og 150 t.kr. um árið í umsitingargjaldi fyri at virka sum skrivstova hjá kærunevndunum hjá Barsilsskipanini og Arbeiðisloysisskipanini.

Kærustovnurin hevur eina peningastovnskontu við atknýttum VISA-korti. Vit stemmaðu peningastovnskontuna av við Búskaparskipan landsins og høvdu einki at finnast at.

Í høvuðsheitum vóru ferðauppgerðirnar, sum vit kannaðu, rættar. Stovnurin tekur undir við okkara tilmæli um at leggja ferðaskrá við uppgerðunum. Landsgrannskoðanin mælti til at leggja skjalprógv við øllum keypum til umboðan, og stovnurin hevur tikið tilmælið til eftirtektar.

[5] K. nr. 28/2003 “um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum”.

Lønir og nevndarsamsýningar

Stovnurin brúkar starvsfólkapolitikkin hjá tí almenna, og starvsfólk skráseta arbeiðstíð. Við stakroyndum kannaðu vit lønirnar við at samanhalda setanarskriv, prógv o.a. við galdandi sáttmálar. Vit høvdu einki at finnast at.

Vit kannaðu nakrar nevndarsamsýningar fyri 2017, herundir um nevndarlimir vóru tilnevndir, og um teir fingu rætta samsýning. Vit høvdu í høvuðsheitum einki at finnast at.

Viðmerkingar frá Løgmansskrivstovuni

Løgmansskrivstovan hevur í august 2018 boðað frá, at Kærustovnurin fer at fylgja teimum tilmælum, sum Landsgrannskoðanin er komin við.

2.4 Dátueftirlitið (LG 2017/202-0142)

Dátueftirlitið hevur virkað síðani 2002, tá ið persónsupplýsingarlógin[6] varð sett í gildi. Uppgávurnar hjá stovninum eru lýstar nærri í § 37 í lógini.

Dátueftirlitið er óheftur fyrisitingarmyndugleiki, skipaður við einum ráði, sum landsstýrismaðurin setir, og við avgreiðsluskrivstovu. Tríggir limir eru í ráðnum, og formaðurin skal vera løgfrøðingur. Avgerðir hjá Dátueftirlitinum eru fyrisitingarliga endaligar og kunnu einans kærast til dómsvaldið.

Roknskaparviðurskifti

Seinastu árini hevur árliga játtanin verið 2 mió.kr., harav størsti parturin er til lønir. Roknskapartøl 2014 til 2017:

t.kr.

Heiti	2014	2015	2016	2017
Lønir v.m.	1.477	1.554	1.446	1.438
Keyp av vørum og tænastum	314	274	318	287
Keyp av útbúnaði, netto	19	31	23	29
Innanh.flytingar ml. almennar stovn. (útr.)	10	8	10	10
Tilsamans	**1.820**	**1.867**	**1.797**	**1.764**

Roknskaparreglugerðin er frá 2014 og er góðkend av løgmansstjóranum. Viðheft reglugerðini er heimildarváttan til gjaldkort til stjóran, váttað av stjóranum sjálvum.

KT viðurskifti

Samanumtikið tryggjar Dátueftirlitið KT skipanirnar við, at stovnurin fær árliga ISAE váttan frá veitarum.

Landsgrannskoðanin mælti til at gera mannagongdir, ið tryggja, at váðameting og KT trygdarpolitikkur verða integreraðir partar av innaneftirlitinum. Innaneftirlitið skal tryggja, at stovnurin dagførir mannagongdir og politikkar so hvørt; t.d. tá ið hann tekur nýggjar skipanir í nýtslu, ella tá aðrar broytingar eru, ið ávirka váðamyndina, sum stovnurin virkar í. Dømi um broytingar er skjalaskráin, ið varð tikin í nýtslu í 2013.

Dátueftirlitið er ikki við í Landsneti. Dáturnar liggja í skipanum á Elektron og í læstum skápum á stovninum. Dátueftirlitið hevur tvær heimasíður, ið verða hýstar uttanhýsis.

Eitt grannskoðaravirki gjørdi eina váðameting fyri Dátueftirlitið í 2009. Sama ár gjørdi stovnurin eina trygdarhandbók, sum umrøður elektroniska, fysiska og fyriskipanarliga trygd og KT trygdarpolitikk.

[6] Ll.nr. 73/2001 “um viðgerð av persónsupplýsingum”.

Í 2009 hevur Dátueftirlitið gjørt skrivliga útveitingar- og trygdaravtalu við P/f Elektron, har m.a. er ásett, at trygdarábyrgdarhavandi hjá báðum pørtum gjøgnumganga avtaluna regluliga og í minsta lagi eina ferð um árið. Sambært § 5 í trygdarkunngerðini kann Dátueftirlitið krevja trygdarskoðan av nýtsluni av upplýsingakervinum.

Spurt, um avtalan verður gjøgnumgingin árliga, og um Dátueftirlitið hevði umhugsað eina trygdarskoðan av upplýsingarkervinum, svaraði Dátueftirlitið, at stovnurin fær ISAE 3402-váttan frá veitaranum árliga, og at stjórin sær tað sum regluliga trygdarskoðan, ið gevur eina betri vernd enn vanlig endurskoðan av avtaluni.

Landsgrannskoðanin ivast í, um ISAE 3402-váttan frá veitaranum kann koma ístaðin fyri gjøgnumgongd av avtaluni millum Elektron og Dátueftirlitið. Sambært Dátueftirlitinum hava tey somu skjøl um útveiting av KT, trygdarpolitikki, váðameting o.ø., sum stovnurin hevði í 2009. Stovnurin vísir á, at ongar broytingar ella hendingar hava verið, sum áttu at havt elvt til aðra fyriskipan enn hana, Dátueftirlitið hevur.

Landsgrannskoðanin er ikki samd við Dátueftirlitinum, vísandi til at stovnurin hevur fingið nýggja skjalaskrá í 2013, umframt at bøtt er um fysisku trygdina við royk- og eldvarnarum. Stovnurin átti at tikið støðu til váðamyndina av nýggjum.

Dátueftirlitið hevur bíðað við at skifta KT útbúnaðin út og at dagføra netið og skipanina, tí eingin tænasta verður veitt til verandi útbúnað eftir 2020. Stovnurin arbeiðir við at endurskoða KT viðurskiftini.

Dátueftirlitið er farið í holt við at nútímansgera KT trygdarpolitikk, roknskaparreglugerð o.a.

Dátueftirlitið er farið í holt við at nútímansgera trygdarskjøl, váttanir, KT trygdarpolitikk og roknskaparreglugerð. Løgmaður hevur kunnað um, at Løgmansskrivstovan fer at fylgja málinum upp í hesum árinum fyri at vita, um arbeiðið hjá Dátueftirlitinum er komið á mál.

Lønir

Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnsleiðslan skipar fyri hóskandi skráseting av arbeiðstíð fyri at tryggja, at lønarútgjaldingarnar eru rættar.

Sambært stjóranum er skrásetingin hóskandi, tí stovnurin er so lítil, at formlig skráseting av arbeiðstíð er ikki skynsom. Dátueftirlitið skrásetir frítíð og sjúkufráveru hjá starvsfólkunum eina ferð um árið.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at lønarútreiðslur eru størsti parturin av útreiðslunum hjá stovninum, og at tað hevur stóran týdning, at upphæddirnar, stovnurin rindar, eru rættar. Vit mæltu til, at tíðarskrásetingin verður hóskandi skipað, og vístu á, at tað t.d. hevði borið til at knýtt stovnin í tíðarskrásetingarskipanina hjá Løgmansskrivstovuni.

Løgmaður er ikki samdur við Dátueftirlitinum, at óheftni hjá stovninum kann verða hótt av at brúka tøkniligar skipanir saman við Løgmansskrivstovuni ella øðrum almennum stovnum. Løgmansskrivstovan hevur eisini víst Dátueftirlitinum á, at um stovnurin verður partur av KT Landsins, stendur skipanin TotalView teimum í boði at brúka.

Ferðaútreiðslur

Dátueftirlitið hevur ikki hildið reglurnar um mest loyvdu upphædd fyri gisting á hotelli í Danmark. Sambært stovninum hevur ikki altíð borið til at fáa hotellkamar fyri mest loyvdu upphæddina, og fjarstøðan er onkuntíð so long, at leiðslan góðkennir hægri upphæddir.

Fylgja ikki vegleiðingini um ferðauppgerðir.

Vit mæltu til, at stovnurin fylgir vegleiðingini frá Fíggjarmálaráðnum um ferðauppgerðir fyri tænastuferðir uttanlands; eisini mæltu vit til at leggja ferðaskrá, program e.l. við uppgerðunum, soleiðis at tað m.a. ber til at kanna, um kostur, goldin av øðrum, átti at verðið drigin frá dagpeningunum.

3 Fíggjarmál

3.1 Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (LG 2014/100-0001)

Í 2013 setti Fíggjarmálaráðið í gildi K. nr. 95/2013 "um at lata inn roknskapar-upplýsingar um alment virksemi til búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit". Endamálið við kunngerðini var at fáa til vega upplýsingar um alment virksemi, sum ikki er við í fíggjarlógini, men er fevnt av almennu roknskaparlógini.

Landsroknskapurin fevnir um næstan allar landsstovnar og alment virksemi, sum landið varðar av. Somuleiðis er við gjaldføri o.ø. hjá landinum.

Fleiri stovnar og grunnar eru ikki við í fíggjarlóg og landsroknskapi.

Í nógv ár hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir gjørt vart við, at fleiri stovnar og grunnar eru ikki við í fíggjarlógini og landsroknskapinum. Skiftandi landsstýrismenn hava greitt frá um hesar stovnar og grunnar, uttan tó at komið er á mál við at greiða ivamálini um játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftini.

Talan er um týðandi alment virksemi, sum ikki er við í landsroknskapinum, og sum heldur ikki verður lagt fyri Løgtingið. Í frágreiðing okkara frá mai 2014 "um leiklutin hjá landinum í partafeløgum, grunnum og øðrum virkiseindum" eru viðurskiftini nærri viðgjørd. Dømi um tílíkar almennar stovnar eru Føroya Realkreditstovnur og Arbeiðs-marknaðareftirlønargrunnurin, sum hava einar 2 mia.kr. í eginogn.

Í august 2016 kunnaði landsstýrismaðurin aftur um, at tað framvegis varð arbeitt við, hvussu samlaði almenni roknskapurin skuldi gerast upp.

Arbeitt verður framhaldandi við, hvussu almenni roknskapurin skal síggja út.

Í svari til løgmann í sambandi við Lm.nr. 37/2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað *"framhaldandi og áhaldandi verður arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fer sostatt fram í stigum. Bústaðir og Búnaðargrunnurin eru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt verður við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýti til landsroknskapin."*

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir partinum "Eksternir grunnar". Ætlanin var, at eginpeningurin í Bústøðum, Búnaðargrunninum, Gransk-ingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframa í framtíðini verður tikin við í landsroknskapinum undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t."

Sambært landsstýrismanninum var eftir at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kundu verða tikin við í landsroknskapin.

Alsamt meira virksemi verður lagt í partafeløg o.a.

Seinastu árini er alsamt meira virksemi hjá landinum lagt í virkiseindir, sum eru skildar frá landsfyrisitingini, t.d. í partafeløg. Flestu almennu reglur og fyriskipanir galda ikki almennu partafeløgini. Feløgini eru heldur ikki partur av fíggjarlóg ella roknskapum, sum verða lagdir fyri Løgtingið. Vit kunnu tí siga, at landsroknskapurin í minni mun

avspeglar veruliga virksemið, váðar o.a. hjá landinum, umframt at tílíkt virksemi í stóran mun ikki skal fylgja øðrum almennum reglum.

Í 2016 segði Fíggjarmálaráðið seg vera samt við Landsgrannskoðanini um vandan, ið kann standast av, at ov nógv virksemi verður lagt í almenn partafeløg uttan fyri fíggjarlóg, har ikki sama gjøgnumskygni, almenn stýring og almennar reglur eru galdandi.

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum 2015 (Lm. nr. 41/2016) hildu løgtingsgrannskoðararnir tað vera týdningarmikið, at allir stovnar, grunnar, feløg o.o., sum koma undir § 2, stk. 2 í lógini um landsins almenna roknskaparhald, vórðu tiknir við í landsroknskapin. Løgtingsgrannskoðararnir funnust hvassliga at, at tveir stovnar, sum áður hava verið í landsroknskapinum, ikki vóru við í roknskapinum 2015.

Mánaðarliga innlatingin hjá Búnaðargrunninum og Húsalánsgrunninum er komin í rættlag.

Í september 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at mánaðarliga innlatingin av roknskapartølum frá Búnaðargrunninum og Húsalánsgrunninum (Bústaðir) er komin í rættlag.

Fíggjarmálaráðið arbeiddi fram ímóti, at eginpeningurin í eksternu grunnunum fór at verða tikin við í landsroknskapinum fyri 2017 undir ”Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.”

Sambært landsstýrismanninum arbeiddi ráðið áhaldandi fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Húsalánsgrunnurin og Búnaðargrunnurin vóru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt varð við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýtið til landsroknskapin.

Landsstýrismaðurin hevur í 2018 greitt frá, at tað verður framhaldandi arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fer fram í stigum, og miðað verður ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 verður eginpeningurin í eksternu grunnunum tikin við undir ”Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.” Arbeitt verður framvegis við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, sum ætlanin er at leggja fyri Løgtingið í hesari tingsetuni.

3.2 Veðhalds- og eftirlønarskyldur

Eftirlønarskyldur landskassans[7]

Gjaldstovan hevur seinastu árini skrásett allar tænastumannaeftirlønarskyldurnar og fekk fyri nøkrum árum síðani aktuar at meta um, hvat tað hevði kostað, hevði landið keypt seg leyst frá skyldunum. Skyldan hjá landskassanum verður roknað av nýggjum 3. hvørt ár.

Í landsroknskapinum 2015 varð kunnað um, at nettoskylda landskassans var mett til um 3,3 mia.kr.

Tænastumannaeftirlønarskyldurnar vórðu roknaðar aftur fyri roknskapin 2016. Síðani skyldurnar seinast vórðu roknaðar, var talið av tænastumonnum í starvi lækkað. Rentan var lækkað nógv, og livialdurin var hækkaður nógv. Skyldan viðvíkjandi løgtingsmonnum og landsstýrismonnum var hækkað lutfalsliga mest.

Tænastumannaeftirlønarskyldurnar eru slakar 5 mió.kr.

Sambært landsroknskapinum 2017 var samlaða eftirlønarskyldan hjá landskassanum í 2016 slakar 5 mia.kr.

[7] Kelda: síða 240 í Landsroknskapinum 2017

Veðhaldsskylda vegna tryggingaravtalur hjá Føroya Lívstrygging

Sambært § 3 í Ll. nr. 105/1999 "um umskipan av Føroya Lívstrygging" er landskassa-ábyrgdin framvegis galdandi fyri tær tryggingaravtalur, sum Føroya Lívstrygging hevði, tá ið lógin kom í gildi. Roknskaparreglurnar vórðu broyttar við virknaði fyri roknskaparárið 2012, so heimild ikki longur er at innrokna landskassaveðhaldið í roknskapin. Avleiðingin av tí var, at eginognin hjá P/f LÍV lívs- og pensjónstryggingar-felag, hvørs skyldur landskassin veðheldur fyri, gjørdist negativ.

Sambært ársfrásøgnini fyri 2017 er eginognin negativ við 1.039 mió.kr. Roknaðu skyldurnar eru umleið 3.093 mió.kr., og íløguognirnar eru 2.046 mió.kr.

Í tíðarskeiðinum fram til 2070 verður veðhaldið effektivt, so hvørt skyldurnar fella til gjaldingar. Sambært P/f LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag er landskassaveðhaldið at rokna sum ein simpul kautión mótvegis tryggingartakarunum. Sambært § 3, stk. 2 í Ll. nr. 53/2015 hevur landsstýrismaðurin fingið heimild til at rinda til felagið, tá ið felagnum tørvar pening at halda verandi tryggingaravtalur. Sambært stk. 3 kann landsstýrismaðurin rinda felagnum fyrr, um árligu 10 ára framskrivingarnar av gjald-førismetingum hjá felagnum vísa, at inngjald eftir stk. 2 kann gerast tyngjandi fyri gjaldføri landskassans.

Landsstýrismaðurin fingið heimild at rinda til Lív, tá ið felagnum tørvar pening at halda tryggingaravtalur.

Veðhaldsskylda vegna P/f Eystur- og Sandoyartunlar

Sambært ársfrásøgnini 2017 hevur partafelagið tikið 2,7 mia.kr. í láni. Sambært § 5 í Ll. nr. 30/2014 verða 400 mió.kr. settar í partapeningi í felagið tíðarskeiðið fram til 2024. Til og við 2017 eru 80 mió.kr. goldnar felagnum.

Sambært lógini hevur landsstýrismaðurin heimild at hækka partapeningin ella at veita felagnum trygd fyri minstuferðslu í Eysturoyartunlinum og Sandoyartunlinum. Felagið kann tiltransportera hesa játtan og trygd fyri minstuferðslu sum trygd í sambandi við fígging av verkætlanum felagsins. Harafturat kann felagið tiltransportera møguligan rakstrarstuðul uppá í mesta lagi 10 mió.kr. um árið, sum landsstýrismaðurin eftir umsókn kann veita felagnum, tá ið Sandoyartunnilin er tikin í nýtslu.

Landsstýrismaðurin heimild at hækka partapening, veita trygd fyri minstu-ferðslu og veita rakstrarstuðul.

3.3 Eftirløn hjá fólkaskúlalærarum (LG 2017/203-0181)

Endurrindan frá statinum í 2017

Undir hesa skipan koma tænastumenn, sum hava verið settir í føroyska skúlaverk-inum, og tey, sum hava verið sett við eftirlønarrætti sum tænastumenn í fólkaskúlanum. Eftirlønirnar verða veittar eftir somu reglum sum hjá teimum, ið fáa tænastumanna-eftirløn.

Ll. nr. 32/1971 er galdandi fyri tænastumenn, sum eru eftirløntir eftir 30. juni 1997. Teir, sum eru eftirløntir fyri 30. juni 1997, eru eftirløntir eftir danskari lóg.

Staturin endurrindar 80% av útreiðslunum til tænastumenn v.fl. í fólkaskúlanum, sum eru farnir frá áðrenn 1. januar 1988, herundir eftirsitandi, sum hava rætt til eftirlønina. Harafturat endurrindar staturin 80% av tí parti av eftirlønunum, sum rættur varð vunnin til inntil 31. desember 1987.

Gjaldstovan sendir Moderniseringsstyrelsen krav um endurgjald fyri læraraeftirlønir eina ferð um mánaðin. Eina ferð um árið ger Gjaldstovan upp, hvat staturin skal endurrinda. Í uppgerðini fyri 2017 eru upphæddirnar hesar:

Ár	Endurgjaldskrav fra Gjaldstovuni	Endurgjaldskrav smb. eftirlønarlistunum	Ov litið goldið
2017	27.675.407 kr.	27.675.835 kr.	428 kr.

Gjaldstovan hevur greitt frá, hví munurin er íkomin.

Sum part av grannskoðanini kannaði Landsgrannskoðanin nøkur eftirlønarmál. Við støði í lógum, avtalum og grannskoðanarleiðbeining hava vit kannað, um:

- eftirlønarmóttakararnir á teimum báðum yvirlitinum uppfylla ásetingarnar,
- útgoldnu eftirlønarupphæddirnar geva rætt til endurgjald, og
- um endurgjaldskrøvini eru rætt roknað.

Niðurstøðan er, at eftirlønarmóttakararnir høvdu rætt til eftirløn, og at landsstýrið hevði rætt til endurgjald frá statinum fyri útgoldnu eftirlønarupphæddirnar. Landsgrannskoðanin kom fram á smávegis feilir, sum Gjaldstovan rættar frameftir.

Í frágreiðing okkara fyri 2015 umrøddu vit útrokningina av býtislyklinum. Landsgrannskoðanin setti spurnartekin við, hvussu reglan í § 6, stk. 2 í avtaluni ímillum statin og Føroya landsstýri *"om deling mellem staten og Færøernes landsstyre af udgifter til pension ....."* frá februar 1981 skuldi skiljast.

Fíggjarmálaráðið hevur heitt á Gjaldstovuna um at broyta útrokningarháttin frá 1. juni 2017 soleiðis, at eftirlønaraldurin áðrenn 31. desember 1987 bleiv rundaður niður til næsta heila ár. Eftirsíðani er Gjaldstovan vorðin varug við, at rættast hevði verið sambært avtaluni millum statin og landsstýri eisini at rundað eftirlønaraldurin, ið er vunnin eftir 1987, niður til næsta heila ár.

Gjaldstovan hevur broytt útrokningarháttin frá juni 2017, soleiðis at eftirlønaraldurin bæði áðrenn og eftir 31. desember 1987 verður rundaður niður til næsta heila ár.

3.4 Reglur um matstovur (LG 2014/203-0111)

Í februar 2006 umrøddu vit ymiskar starvsfólkaútreiðslur, m.a. um stovnar og aðalráð rindaðu ískoyti til rakstur av matstovu. Fýra stovnar svaraðu tá, at teir rindaðu ískoyti.

Í 2010 staðfestu vit, at enn vóru ongar reglur gjørdar. Løgmansskrivstovan heitti í 2010 og 2011 á Fíggjarmálaráðið um at gera reglur fyri matstovuvirksemi.

Rundskriv um starvsfólkamatstovur sett í gildi.

1. januar 2018 varð rundskriv um starvsfólkamatstovur sett í gildi.

3.5 Gjaldstovan (LG 2016/203-0151)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av roknskapinum hjá Gjaldstovuni og KT Landsins. Roknskaparreglugerðin var góðkend av Fíggjarmálaráðnum í 2001 og enn ikki dagførd. Gjaldstovan hevði gjørt uppskot til nýggja roknskaparreglugerð eftir nýggjum leisti, sum stovnurin sjálvur hevði gjørt, og sum eftir ætlan skuldi gerast til eitt roknskaparrundskriv fyri landsumsitingina.

Í august 2017 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at ráðið fór at gjøgnumganga uppskotið til dagført roknskaparrundskriv og uppskotið til dagførda roknskaparreglugerð saman við Gjaldstovuni, soleiðis at tey kundu verða sett í gildi og góðkend á heysti 2017.

Roknskaparrundskrivið er ikki dagført enn.

Sambært landsstýrismanninum er enn ikki komið á mál við arbeiðinum at gera eitt dagført roknskaparrundskriv og somuleiðis dagførda roknskaparreglugerð fyri stovnin. Vónandi verður komið á mál innan árslok 2018.

3.6 TAKS (LG 2016/203-0151)

Kassaeftirlit hjá Tolleftirlitinum

Í 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti hjá Tolleftirlitinum á Eystaru bryggju í Tórshavn og á flogvøllinum. Vit høvdu nøkur tilmæli um standard-kassaskjøl og mannagongdir, soleiðis at inntøkur verða bókaðar á rættar inntøku-kontur í Búskaparskipanini, og um at gera ófráboðað kassaeftirlit.

3.7 Kervisgrannskoðan

3.7.1 Kervisgrannskoðan hjá TAKS

Grundarlagið undir samstarvinum millum TAKS og P/f Elektron hevur í mong ár verið ein sáttmáli frá juni 1999, við seinni rættingum og uppískoytum. Kervisgrannskoðarin hevur áður gjørt vart við, at tørvur var á einum nýggjum sáttmála. Í desember 2017 varð nýggjur sáttmáli um rakstur, menning og viðlíkahald (SLA) gjørdur, sum byggir á ISO 27001 standardin frá 2013, eins og krøvini til trygdarviðurskiftini eru útgreinað á nøktandi hátt. Grannskoðanin av 2017 tekur útgangsstøði í gamla sáttmálanum, tí hesin var galdandi meginpartin av 2017. Viðurskifti í nýggja sáttmálanum verða tó eisini umrødd.

Nýggjur sáttmáli um rakstur, menning og viðlíkahald.

Frágreiðingar um kervisgrannskoðan

Fyri árið 2017 hevur TAKS útflýggjað Landsgrannskoðanini avrit av trimum frá-greiðingum. Tær eru:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri TAKS í 2017,
- Frágreiðing 2017, grannskoðan av almennum KT eftirlitsskipanum á Elektron fyri TAKS, og
- ISAE 3402-váttan um almennar KT eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri árið 2017 í mun til SLA-avtalu við TAKS.

Um viðurskifti eru, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisgrannskoðarin ítøkilig tilmæli.

Við árslok 2017 hevði kervisgrannskoðanin tilsamans 10 óloyst tilmæli; av teimum høvdu 6 miðal raðfesting og 4 lága raðfesting. Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini árini 2013 til 2017:

10 óloyst tilmæli.

Óavgreidd tilmæli við árslok	2013	2014	2015	2016	2017
Høg raðfesting	2	2	0	0	0
Miðal raðfesting	6	2	6	5	6
Lág raðfesting	3	3	1	1	4
Tilsamans	**11**	**7**	**7**	**6**	**10**
Av hesum eldri enn eitt ár	8	7	1	6	5

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at *"tænastusáttmálin sum heild er nøktandi og verður fylgdur á trygdargóðan hátt av Elektron. Ávísir veikleikar av týdningi eru kortini staðfestir. Av týðandi veikleikum kann í fyrsta lagi nevnast, at skjalfestingin av týðandi skipanum hjá TAKS framvegis ikki er fullfíggjað og talgild, soleiðis at til ber at dagføra hana á hóskandi hátt. Tilmæli hava verið opin hesum viðvíkjandi í fleiri ár. Kortini er staðfest, at TAKS hevur arbeitt við hesum máli í árinum, og at skipanir eisini í 2017 eru blivnar skjalfestar. Eitt tilmæli varð lokað í árinum í hesum sambandi, soleiðis at tað nú eru fýra tilmæli opin, ið snúgva seg um skjalfesting av skipanum. Vit meta tað vera nøktandi, at gongd er í málinum, men at hetta arbeiðið framhaldandi eigur at raðfestast høgt av pørtunum."*

Skjalfestingin av skipanum hjá TAKS ikki fullfíggjað og talgild.

Arbeiðið at skjalfesta er í gongd; eitt tilmæli er lokað í árinum.

Í oktober 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at TAKS áhaldandi arbeiddi við at loysa grannskoðanartilmælini. Ein ætlan var gjørd fyri at skjalfesta skipanirnar. Ein triðingur

av arbeiðinum var gjørdur, og væntast skuldi, at tað fór at taka tvey til trý ár afturat at gera arbeiðið liðugt. Í august 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann fór at fylgja málinum neyvt, og at hann annars var nøgdur við, at støðug gongd var í málinum at avgreiða tilmælini frá kervisgrannskoðaranum.

Grannskoðan av skipanum hjá TAKS

Í mai 2004 gjørdu TAKS, Elektron, grannskoðarin hjá Elektron og innanhýsis kervisgrannskoðarin hjá Elektron avtalu um kervisgrannskoðan av skipanunum hjá TAKS, sum eru hjá Elektron.

Sambært avtaluni skal kervisgrannskoðarin skoða eina brúkaraskipan um árið. Í 2017 varð Skattauppgerðarskráin skoðað, og umframt hana eru higartil Húsaleiguskipanin, eTollur og Innkrevjingarskipanin skoðaðar.

Skattauppgerðarskráin skoðað í 2017; 3 tilmæli.

Grannskoðanin av Skattauppgerðarskránni vísti, at trygdar- og eftirlitsstøðið í skipanini sum heild er nøktandi við atliti at skipanareftirliti, og at skipanin sum heild lýkur krøvini um rættleika, fullfíggjan og stundvísi. Grannskoðarin gav trý tilmæli, eitt høgt raðfest og tvey lágt raðfest. Sum heild heldur grannskoðarin, at trygdar- og eftirlitsstøðið í skipanini er hóskandi, men nevndu veikleikarnir eiga at verða bøttir. TAKS hevur ábyrgdina av hesum tilmælunum, og tí eru tey ikki við í yvirlitinum yvir tilmælir omanfyri, sum Elektron hevur ábyrgd av.

Grannskoðarin leggur afturat, at grannskoðanin var avmarkað í vavi á nøkrum økjum, eftir avmarkingum sum TAKS hevði ásett. Tískil kann hugsast, at onnur viðurskifti ella veikleikar vildu verðið staðfest, um grannskoðanin var meira umfatandi.

3.7.2 Kervisgrannskoðan hjá Gjaldstovuni

Avtalað at grannskoða innanhýsis KT viðurskifti og KT stýring í mun til tænastuveitingar til stovnarnar.

Kervisgrannskoðarin hevur gjørt avtalu við leiðsluna á Gjaldstovuni um at grannskoða innanhýsis KT viðurskifti og KT stýring hjá Gjaldstovuni í mun til tænastuveitingar til stovnarnar, sum nýta skipanirnar hjá Gjaldstovuni (Búskaparskipan landsins), eins og tað verður gjørt fyri Elektron, sum er høvuðsveitari hjá Gjaldstovuni. Fyri árið 2017 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tríggjar frágreiðingar um KT viðurskiftini á Gjaldstovuni:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðanini, Kervisgrannskoðanararbeiði fyri Føroya Gjaldstovu í 2017,
- Frágreiðing 2017, grannskoðan av almennum KT eftirlitsskipanum á Elektron fyri Føroya Gjaldstovu, og
- ISAE 3402-váttan um almennar KT eftirlitsskipanir hjá P/f Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar 2017 til 31. desember 2017 í mun til SLA avtalu við Gjaldstovuna.

Úrslitið av kervisgrannskoðanini var 9 tilmæli; 4 við miðal raðfesting og 5 við lágari raðfesting. Tvey tilmæli vórðu lokað í 2017, men trý nýggj vórðu givin.

Trygdar- og eftirlitsstigið er nøktandi, undantikið viðmerktu veikleikar.

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at Gjaldstovan framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av KT umhvørvi sínum á flestu økjum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini. Sum heild er niðurstøðan, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT eftirlitsskipanirnar hjá Gjaldstovuni, við atliti at veitingini av Búskaparskipan landsins, er nøktandi, undantikið viðmerktu veikleikar.

3.7.3 Kervisgrannskoðan hjá KT Landsins

Kervisgrannskoðarin hjá Elektron hevur í 2017 grannskoðað generellu KT kontrollarnar í sambandi við, at Elektron veitir tænastur til KT Landsins og kundar tess. Kervisgrannskoðarin hevur eisini grannskoðað KT kontrollarnar v.m. í sambandi við KT tænastur, sum Formula veitir KT Landsins. Grannskoðanin er framd sambært SLA avtalum ímillum partarnar.

P/f Elektron

Fyri 2017 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tríggjar frágreiðingar um KT viðurskiftini ímillum KT Landsins og Elektron:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri KT Landsins í 2017,
- Frágreiðing 2017, grannskoðan av almennum KT eftirlitsskipanum á Elektron fyri KT Landsins, og
- ISAE 3402-váttan um almennar KT eftirlitsskipanir hjá KT Landsins fyri árið 2017.

Úrslitið av kervisgrannskoðanini er, at átta nýggir veikleikar eru staðfestir, sum hava givið orsøk til nýggj tilmæli. Seks teirra hava lága raðfesting, og tvey hava miðal raðfesting. Trý av teimum átta tilmælunum eru lokað í árinum. Harumframt vóru tvey eldri tilmæli opin við ársbyrjan; annað av teimum er lokað í árinum. Við árslok 2017 eru sostatt seks tilmæli opin, trý miðal raðfest og trý lágt raðfest.

Kervisgrannskoðarin heldur, at tá ið sæð verður burtur frá nevndu manglum og veikleikum, er trygdar- og eftirlitsstigið kring skipanir og dátur, sum KT Landsins nýtir hjá Elektron, yvirhøvur nøktandi. Kervisgrannskoðarin heldur eisini, at Elektron hevur hildið krøvini í SLA-avtaluni í tíðarskeiðnum burtursæð frá einstøkum viðurskiftum, sum eru fevnd av tilmælunum.

Burtursæð frá nevndu manglum, er trygdar- og eftirlitsstigið nøktandi.

P/f Formula

Formula og KT Landsins hava gjørt nýggja SLA-avtalu galdandi frá 1. september 2016, sum ásetir tænastustøðið fyri veitingina. Kervisgrannskoðarin hevur fyri árið 2017 gjørt tvær frágreiðingar um KT viðurskiftini millum KT Landsins og Formula:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri KT Landsins hjá Formula í 2017, og
- ISAE 3402-váttan frá óheftum grannskoðara um almennar KT eftirlitsskipanir í tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins fyri árið 2017.

Við árslok 2017 hevði kervisgrannskoðanin tilsamans 9 óloyst tilmæli, av teimum høvdu tvey høga raðfesting, 6 miðal raðfesting og eitt lága raðfesting. Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini frá 2014 til 2017:

Óavgreidd tilmæli við árslok	2014	2015	2016	2017
Høg raðfesting	3	0	2	2
Miðal raðfesting	10	7	9	6
Lág raðfesting	6	6	6	1
Tilsamans	**19**	**13**	**17**	**9**
Av hesum eldri enn eitt ár	19	13	9	5

Kervisgrannskoðarin sigur m.a., at *"grannskoðanin av almennu KT eftirlitsskipanunum hjá Formula í mun til SLA-avtaluna við KT Landsins vísti, at Formula hevur arbeitt miðvíst við at betra um trygdina á fleiri týðandi økjum, og hevur loyst fleiri grannskoðanartilmæli í árinum, og sett gongd á arbeiðið at loysa onnur. 12 tilmæli eru lokað í árinum. Sostatt eru einans fimm av teimum eldru tilmælunum framvegis opin, og henda gongdin má sigast at vera nøktandi."*

12 tilmæli eru lokað í árinum.

Í ársfrágreiðingini vísir kervisgrannskoðarin eisini á serligan eftirlitsveikleika, sum Formula skjótast gjørligt eigur at betra. Sambært kervisgrannskoðaranum hevur leiðslan á Formula tikið avgerð um at loysa málið.

Serligur eftirlitsveikleiki, men eftirlits- og trygdarstigið er annars nøktandi.

Samanumtikið er niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum, at eftirlits- og trygdarstigið kring skipanir og dátur, sum KT Landsins nýtir hjá Formula, eru nøktandi við undantaki av nevndu veikleikum. Formula hevur hildið krøvini í SLA-avtaluni tíðarskeiðinum.

KT eftirlitsskipanir á KT Landsins

Avtalað at grannskoða innanhýsis KT viðurskifti og KT stýringar í tænastuveitingum til stovnarnar.

Kervisgrannskoðarin og leiðslan á Gjaldstovuni hava avtalað, at kervisgrannskoðarin skal grannskoða innanhýsis KT viðurskifti og KT stýringar á tænastuveitingunum, sum KT Landsins veitir stovnunum, ið nýta Landsnet. Grannskoðanin skal verða gjørd á sama hátt, sum grannskoðanin av høvuðsveitarunum hjá KT Landsins, Elektron og Formula. Endamálið við tí er m.a. at tryggja, at grundleggjandi og týðandi viðurskifti viðvíkjandi almennum KT eftirliti eru í samsvari við trygdarásetingarnar hjá KT Landsins, umframt at meta um, hvørt nøktandi trygdar- og eftirlitsstig eru sett í verk.

Úrslitið av grannskoðanini er, at sjey manglar og veikleikar eru staðfestir, tveir við miðal raðfesting og fimm við lágari raðfesting. Síðani grannskoðanina fyri 2016 er eitt nýtt tilmæli givið, og fimm eru avgreidd.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er m.a., at KT Landsins framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av sínum KT umhvørvi á flestu økjum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini. Grannskoðanin hevur víst, at KT Landsins hevur loyst fleiri av tilmælunum, ið vórðu givin stovnunum til seinastu grannskoðan.

Serligur eftirlitsveikleiki hjá Formula, sum KT Landsins eigur at tryggja sær verður betraður.

Í frágreiðing sínari vísir kervisgrannskoðarin eisini á serliga eftirlitsveikleikan hjá Formula, ið er nevndur omanfyri. KT Landsins umsitur ikki hesi viðurskifti, men stovnurin hevur ábyrgd av sínum veitingum, og eigur tí at hava neyvt eftirlit við dygdini hjá undirveitarum í týðandi tættum av tænastuveitingunum. KT Landsins eigur tí at tryggja sær, at Formula setir tær betringar í verk, sum fyritøkan hevur lovað at fremja.

Trygdar- og eftirlitsstigið er annars nøktandi.

Samanumtikið er niðurstøðan, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT eftirlitsskipanirnar við atliti at veitingini av Landsneti, er nøktandi, tó við undantaki av nevndu veikleikunum.

3.8 Hagstova Føroya (LG 2015/203-0152)

Fleiri roknskaparviðurskifti ikki nøktandi.

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri undanfarnum ársfrágreiðingum víst á roknskaparviðurskifti hjá Hagstovuni, sum ikki hava verið nøktandi. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2005.

Hagstovan hevði ikki fullfíggjað ognaryvirlit, men bert yvirlit yvir teldur og telefonir. Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir mælt til, at ognaryvirlit verður gjørt og dagført regluliga.

Fleiri starvsfólk høvdu stórar tímasaldur. Landsgrannskoðanin mælti til, at Hagstovan ásetti reglur um tímasaldur í roknskaparreglugerðini, og at stovnurin skuldi lýsa lønarumsitingina í reglugerðini, herímillum hvussu arbeiðstíð, frítíð, sjúka o.a. vórðu skrásett.

Landsgrannskoðanin mælti eisini til at áseta mannagongdir í roknskaparreglugerðini um at krevja ómaksgjøld og at avskriva skuld.

Í august 2017 vísti landsstýrismaðurin á, at roknskaparkunngerðin partvíst var broytt, við tað at broytingarnar viðvíkjandi lønarútreiðslum, tíðaravmarkingum og tíðarskrásetingum vóru komnar í gildi. Fíggjarmálaráðið skuldi eisini gera rundskriv um arbeiðstíð. Sambært landsstýrismanninum fór Fíggjarmálaráðið at heita á Hagstovuna um at dagføra roknskaparreglugerðina, eisini við teimum dagføringum Landsgrannskoðanin mælti til, so skjótt sum roknskaparrundskrivið var dagført, og rundskriv um arbeiðstíð var gjørt.

Í 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at nú tøkniliga menningin av ognaryvirlitum í Búskaparskipan landsins er framd, fer Fíggjarmálaráðið at heita á Hagstovuna og hinar stovnarnar undir Fíggjarmálaráðnum um at dagføra ognaryvirlitini.

Sambært landsstýrismanninum hevur Hagstovan gjørt uppskot til roknskaparreglugerð, og Fíggjarmálaráðið fer í næstum at góðkenna reglugerðina. So skjótt sum roknskaparrundskrivið er dagført, og rundskriv um arbeiðstíð er gjørt, fer Fíggjarmálaráðið at heita á Hagstovuna um at dagføra roknskaparreglugerðina, í tann mun broyttar ásetingar eru.

3.9 Landsbanki Føroya (LG 2017/203-0151)

Landsbankin varð endurstovnaður 1. januar 2017 við Ll.nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð". Í fíggjarlógini er bankin skipaður við játtan undir fíggjarmálum. Bankin er tó sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini sambært § 1, stk. 2 í lógini um Landsbankan.

Landsbankin er endurstovnaður 1. januar 2017.

Endamál Landsbankans er at vera almennur fíggjarstovnur og greiningarstovnur, ið virkar fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum. Sambært lógini eru uppgávurnar hjá bankanum at fyrisita gjaldføris- og skuldarviðurskifti landsins, at gera fíggjarligar váðagreiningar umframt at savna og viðgera hagtøl innan fyri sítt virkisøki.

Landsbankin hevur eina nevnd við 7 limum og 7 varalimum, sum landsstýrismaðurin velur fyri trý ár í senn. Nevndarlimirnir skulu samanlagt fevna um nøkur førleikaøki, sum eru ásett í lógini. Nevndin setir stjóra og loysir hann úr starvi.

Reglur um virksemi

Sambært lógini skal nevndin gera reglur fyri virksemið hjá nevnd og stjóra. Hon skal m.a. gera neyvari ásetingar um umsiting av landsins gjaldføri, skuld og lántøku, og nevndin skal gera eina íløgustrategi fyri plasering av gjaldføri.

Í § 17 er ásett, at bankin *"verður stovnaður við 20 mió.kr. í fæi"*. Fæið kann nýtast at javna inntøkur og útreiðslur í mun til virksemið, og fæið er uttanhýsis partur av landsroknskapinum.

Nevndin skal gera nærri reglur um, hvat fæið kann brúkast til. Stjórin í Landsbankanum hevur greitt frá, at nærri reglur um stovningarfæið eru ikki gjørdar. Landsgrannskoðanin mælti til at fáa greiðu á, hvat stovningarfæið kann nýtast til, og at gera ásetingar um tað.

Tilmæli viðvíkjandi stovnsfænum, 20 mió.kr.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tá ið uppskotið til lógina um Landsbankan varð lagt fram, var ein áseting um, at Landsbankin kundi veita kommunum lán. Í so fall var neyðugt at hava eitt fæ sum "buffara". Ásetingin um heimildina at veita kommununum lán varð tó tikin burtur í samtyktu lógini. So leingi sum endamálið við fænum ikki er greiðari ásett í lógini, verða ásetingar ikki gjørdar, og fæið stendur órørt.

Landsbankin hevur ymiskar upplýsingar á heimasíðu sínari, m.a. um íløgustrategi, skuldarstrategi, starvsskipan, innlánspolitikk og mesta innistandandi í føroyskum peningastovnum.

Landsgrannskoðanin hevur ikki tikið støðu til sjálvt innihaldið í ymisku ásetingunum frá nevndini, men heldur, at tær eiga at verða meira formliga skipaðar, t.d. eins og rundskriv frá ráðnum. Eisini skal vera greitt, hvørjar ásetingar eru galdandi. Tað er grundleggjandi, at tað sjónliga sæst, at nevndin hevur góðkent skjalið, herundir dagfesting, nær tað er galdandi frá, hvat skjalið snýr seg um o.s.fr.

Tilmæli um ásetingar frá nevndini.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Landsbankin tekur undir við, at ymisku ásetingarnar frá nevndini eiga at vera formliga betur skipaðar, og Landsbankin fer at seta ásetingarnar meira formliga upp. Eingin ivi skal tó vera um, at umsitingin í Landsbankanum hevur allar neyðugar heimildir frá nevndini til dagliga virksemið hjá bankanum.

Roknskaparviðurskifti

Játtanin til raksturin av Landsbankanum er undir høvuðskontu 3.15.1.20. Í 2017 vóru roknskapartølini hesi:

t.kr.

Heiti	Játtan	Rokn-skapur	Munur
Lønir v.m.	6.800	3.993	2.807
Keyp av vørum og tænastum	1.900	1.809	91
Keyp av útbúnaði	200	720	-520
Leiga, viðlíkahald og skattur	0	805	-805
Søla av vørum og tænastum	-1.000	-1.265	265
Aðrar flytingarinntøkur	-7.900	0	-7.900
Innanhýsis flytingar millum alm. stovnar (útr.)	0	97	-97
Innanhýsis flytingar millum alm. stovnar (innt.)	0	-6.159	6.159
Tilsamans	**0**	**0**	**0**

Landsbankin verður fíggjaður av gjaldføri landsins.

Í §§ 17-20 í lógini um Landsbankan eru reglur um fíggjarlig viðurskifti hjá bankanum. Landsbankin hevur rakstrarjáttan í fíggjarlógini. Fyri røkt av gjaldføri og skuld landsins fær bankin 4 ‰ av landsins minstagjaldføri.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, *at "upphæddin verður flutt av játtanini fyri rentuinntøkur landsins. Við at fastleggja inntøkur stovnins við lóg kemur Landsbankin at vera óheftur. Landsbankin kann eisini krevja gjøld frá teimum almennu eindunum, ið nýta hann til ognar- og skuldarumsiting og til ráðgeving".*

Stjórin kunnaði um, at bankin hevur inntøkur sambært avtalu við AMEG um umsiting av ogn hjá grunninum umframt alla fyrisiting. Gjaldið er ásett út frá arbeiðsbyrðu, og at tað ikki skal vera kappingaravlagandi. Eisini hevur Landsbankin "innlán" frá m.ø. Framtak og Vinnusjúkugrunninum. Tey gjøldini fevna um samskifti við almennu eindirnar, bókingar og rokning av rentu.

Í § 18, stk. 3 er ásett, at bankin kann hava inntøkufíggjað virksemi. Stjórin í Landsbankanum metir, at umsiting av AMEG, Búskapargrunninum og innlánum hjá øðrum almennum eindum, sum ikki hoyra beinleiðis til landskassan, er inntøkufíggjað virksemi. Uppgávan at umsita ogn og skuld hjá landskassanum og at vera greiningarstovnur kemur undir vanligt virksemi. Stjórin vísir á viðmerkingarnar til lógaruppskotið, um at bankin kann krevja gjøld frá teimum almennu eindunum, ið nýta hann til ognar- og skuldarumsiting og til ráðgeving.

Tilmæli um inntøkufíggjað virksemi.

Inntøkufíggjaða virksemið er ikki skilt frá vanliga virkseminum hjá Landsbankanum. Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Landsbankin fer frameftir at fylgja ásetingum um og uppseting av inntøkufíggjaðum virksemi, sum Landsgrannskoðanin mælti til.

Minstagjaldføri landsins í 2017 varð ásett til 2.475 mió.kr.; 4‰ av upphæddini svara til 9,9 mió.kr. Inntøkurnar fyri røkt av gjaldføri og skuld landsins vóru 6,2 mió.kr.; t.e. 3,7 mió.kr. minni enn ásett.

Sambært avtalu við AMEG fær Landsbankin samsýning, svarandi til 0,025% av virðisbrævaognunum ultimo hvønn ársfjórðing. Í 2017 vóru inntøkurnar 1,3 mió.kr.

Tilmæli um at kanna, at gjøldini svara til veruliga kostnaðin.

Í 2018 hevur nevndin samtykt innlánspolitikk viðvíkjandi umsiting av fíggjarognum hjá almennum grunnum og stovnum. Árliga umsitingargjaldið er ásett at vera 0,1% av miðalsaldu. Landsgrannskoðanin mælti til at kanna, um gjøldini svara til veruliga kostnaðin og reglur um prísáseting.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsbankin fer at eftirmeta, um gjaldið í innlánspolitikkinum svarar til veruliga kostnaðin og reglur um prísáseting.

Landsbankin hevði 319 t.kr. í skuldarum 30. apríl 2018. Áognin var ikki gjaldfallin.

Landsbankin er undantikin skattum og avgjøldum.

Í § 20 er ásett, at Landsbankin, sum almennur stovnur, er undantikin øllum skattum og avgjøldum. Landsgrannskoðanin spurdi, hvussu hendan ásetingin skal skiljast og fyrisitast, t.d. viðvíkjandi øðrum avgjøldum enn mvg.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í § 20 í landsbankalógini er ásett, at Landsbankin er undantikin øllum skattum og avgjøldum og er ein sjálvstøðugur stovnur. Hesi viðurskifti kunnu kanska virka ógreið, men mannagongdin fyri skatt og avgjøld hjá Landsbankanum er hin sama sum hjá almennum stovnum. Landsbankin rindar MVG og avgjøld og skrásetir tað eins og aðrir almennir stovnar. Landsbankin rindar heldur ikki partafelagsskatt.

Landsbankin hevur ikki gjørt roknskaparreglugerð, men bankin fylgir mannagongdunum, sum vóru galdandi fyri Fígging Landsins (Gjaldstovuna). Sambært Landsbankanum eru tey í holt við at gera roknskaparreglugerð.

Landsbankin nýtir kekklistar sum part av grundarlagnum at góðkenna roknskapirnar, og stjórin góðkennir mánaðarroknskapirnar. Landsbankin sendir frágreiðing, m.a. um avstemmanir, til Landsgrannskoðanina hvønn mánað. Mánaðarroknskapirnir í 2017 eru góðkendir rættstundis.

Landsbankin fer at gera roknskapar-reglugerðir og mannagongdir.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsbankin samanumtikið fylgir mannagongdunum hjá landinum. Landsbankin er tó farin undir at gera roknskaparreglugerð og skriva mannagongdir um m.a. journalisering, heimaarbeiðspláss, starvsfólkapolitikk og tíðarskráseting.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað ferðauppgerðir. Vit høvdu bert smávegis viðmerkingar.

Í mai 2018 er skrivlig avtala gjørd um leigu av 300 fermetrum í Albert Hall. Leigumálið er galdandi frá 1. mai 2017. Fíggjarmálaráðið ásetir leiguna, sum í 2018 er 180 t.kr. við el og hita. Bankin hevur í 2017 rindað 95 t.kr. til felagsfyrisitingina í Albert Hall fyri partin hjá bankanum av matstovurakstrinum.

Lønarumsiting

6 fólk starvast hjá Landsbankanum, og lønirnar verða goldnar út umvegis almennu lønarskipanina. Landsbankin fylgir almennu setanarreglunum, og stjórin váttar allar broytingar av lønum. Starvsfólkini skráseta arbeiðstíðir.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað lønarmál við støði í útgjaldingum fyri august 2017. Vit høvdu einki at finnast at.

KT viðurskifti

Landsbankin hevur ikki KT skipanir, sum eru týdningamiklar fyri landið. Skipanirnar eru tó týdningarmiklar fyri stovnin. Umframt standardskipanirnar, TotalView, 360 og Office, nýtir bankin eina skipan til íløgurøkt, nevnd PandaConnect, sum er ein donsk skipan, ið Landsbankin hevur keypt lisensir til. Bankin fær grannskoðanarváttan um skipanina hvørt ár.

Bókingarnar fara ikki sjálvvirkandi yvir í Búskaparskipan landsins, sjálvt um kontustrongur er frá PandaConnect skipanini. PandaConnect og Búskaparskipanin verða stemmaðar av.

Landsbankin hevur ikki formligt loyvi til porteføljiskipanina.

Landsbankin hevur bert rætt til at spyrja í PandaConnect skipanini. Bankin hevði ikki formligt loyvi til skipanina, men hevur heitt á Gjaldstovuna um at fáa loyvi.

Teldurnar eru knýttar í Landsnet og eru undir trygdartiltøkunum hjá Landsneti. Landsbankin hevur tænastusáttmála (SLA) við KT Landsins. Bankin hevur biðið um at sleppa við í trygdarpakkan hjá KT Landsins, men er ikki við enn. Landsbankin hevur ikki gjørt dátuflokking, váðameting ella KT trygdarpolitikk.

Fyri at tryggja sær, at bert starvsfólk hjá bankanum hava atgongd til skipanirnar, kannar stjórin nøvnini á mánaðarligu rokningunum frá KT Landsins. Stjórin hevur einsamallur atgongd til starvsfólkamál. Tvey starvsfólk umframt stjóran hava atgongd til dátur hjá Fíggjarligum støðufesti.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Landsbankin hevur gjørt avtalu við KT Landsins, eisini tá umræður fakservarar. Hesir síðstu eru nú eisini dátuflokkaðir. Landsbankin arbeiðir framvegis við at fáa allan trygdarpakkan hjá KT Landsins settan í verk.

3.10 Talgildu Føroyar (LG 2017/203-0111)

Talgildu Føroyar arbeiða við at menna eitt talgilt undirstøðu-kervi.

Talgildu Føroyar er verkætlan, sum arbeiðir við at menna eitt talgilt undirstøðukervi í Føroyum. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur havt ábyrgd av verkætlanini síðani mars 2016. Sambært fíggjarlógini eru høvuðsátøkini við verkætlanini:

- at menna ein talgildan samleika, so allir borgarar kunnu eyðmerkja seg trygt, tá ið teir brúka talgildar tænastur,
- at seta á stovn ein standardiseraðan og tryggan pall, sum dátur verða samskiftar um,
- at styrkja um grunddáturnar (fólk, virki, ognir og kort) og gera tær opnar og ókeypis, og
- at menna felags portalar og tænastur.

Í desember 2015 varð Ll.nr. 168/2015 “um at keypa tænastuveitingar og tøkni til verkætlanina Talgildu Føroyar” sett í gildi. Útreiðslurnar kundu í mesta lagi verða 10 mió.kr. Lógin fór úr gildi við árslok 2016.

Verklagslóg sett í gildi í 2017; útreiðsl-urnar eru mettar til 150 mió.kr.

Verklagslógin, Ll. nr. 77/2017 “um Talgildu Føroyar”, varð sett í gildi í mai 2017. Í viðmerkingunum til lógina er upplýst, at útreiðslurnar til verkætlanina samanlagt eru mettar til 150 mió.kr., harav landið kemur at rinda 90 mió.kr. Fíggjarmálaráðið mælir til henda fíggingarleist:

t.kr.

	2016	2017	2018	2019	2020	Tils.
Landið	10.000	20.000	20.000	20.000	20.000	90.000
Ymiskir samstarvsfelagar	0	6.375	4.375	4.375	4.375	19.500
Peningastovnar	0	2.250	4.250	4.250	4.250	15.000
Kommunur	0	0	8.500	8.500	8.500	25.500
Tilsamans	**10.000**	**28.625**	**37.125**	**37.125**	**37.125**	**150.000**

Aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum er programmeigari. Umsitingin er flutt til Gjaldstovuna. Stjórin á Gjaldstovuni er formaður í programmstýrisbólkinum, og hann hevur ábyrgd av at skipa og leiða verkætlanina.

Stjórin fyri Talgildu Føroyar hevur dagligu leiðsluna. Verkætlanin er býtt í fýra partsverkætlanir, hvør við sínum verkætlanarleiðara, og partsverkætlanirnar eru: Heldin, Samleikin, Tænastuportalur og Grundardátur.

Ein yvirskipað kostnaðarætlan er gjørd fyri einstøku partsverkætlanirnar og samlaðu verkætlanina. Kostnaðarætlanin sæst í heildarætlanini og í verklagslógini.

Stovnurin er farin í holt við at menna nýggjar skipanir í sambandi við, at verkætlanin verður framd. Bara Heldin er sett í verk.

Roknskapartøl og játtan 2015 til 2017:

t.kr.

	2015	2016	2017
Lønir	6	251	3.761
Keyp av vørum og tænastum	2.785	4.556	3.364
Keyp av útbúnaði	718	385	8.979
Leiga, viðlíkah. og skattur	36	56	921
Innanhýsis flytingar ml. almennar stovnar (útr.)	424	659	1.602
Tilsamans	**3.969**	**5.907**	**18.627**
Játtan	4.000	10.000	20.000

Roknskaparreglugerðin hjá Gjaldstovuni frá 2001 fatar eisini um Talgildu Føroyar. Sambært Gjaldstovuni verður nýggj roknskaparreglugerð liðug í 2018. Ognirnar hjá Talgildu Føroyum eru skrásettar í ognaryvirliti hjá Gjaldstovuni.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað roknskaparskjøl fyri 2017. Einki var at finnast at. Vit kannaðu starvsfólkamál hjá stovninum við stakroyndum í sambandi við grannskoðan av Gjaldstovuni í 2016.

Teldurnar hjá stovninum eru knýttar í Landsnet, og tær eru undir trygdartiltøkunum hjá Landsneti. Stjórin á Gjaldstovuni skal í hvørjum einstøkum føri góðkenna, um starvsfólk skulu hava atgongd til stovnsnetið heimaníframá. Atgongdin er váðamett, og sambandið verður bronglað gjøgnum Direct Access.

3.11 Avgjald av kapitaleftirlønum (LG 2017/220-0521)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina hjá TAKS av avgjaldi av kapitaleftirlønum. Játtanin er á høvuðskontu 20.52.1.13. Endamálið var at kanna, um TAKS hevur eitt virkið innaneftirlit.

Inntøkur av avgjaldi av útgoldnum kapitaleftirlønum sambært §§ 1B og 1C í rentutryggingarlógini hava seinastu 6 árini verið:

t.kr.

Heiti	2012	2013	2014[8]	2015	2016	2017
Ógreinað	0	40	393	205	-3	263
Avgjøld av kapitaleftirløn	72.330	47.415	48.618	38.912	54.669	39.360
55% skattur (útgjald í úrtíð)	8.711	6.443	7.445	4.985	2.511	3.543
	81.041	**53.898**	**56.456**	**44.102**	**57.177**	**43.166**

Í 2012 vórðu serliga nógvar kapitaleftirlønir goldnar út, og inntøkurnar vóru tí hægri enn bæði áðrenn og aftaná 2012. Orsøkin er helst, at eftirlønarskipanin varð broytt soleiðis, at tað ikki longur ber til at rinda bruttoupphæddir inn á kapitaleftirlønarkontu, tí inngjøldini verða forskattað.

Í 2012 vórðu nógvar kapitaleftirlønir goldnar út.

[8] Frá 2015 fer alt avgjaldið í landskassan.

Síðani tíðarskeið 8/2017 hevur stjórin viðmerkt í mánaðarroknskapirnar, at játtanin í 2017 fór ikki at halda, t.v.s. at inntøkurnar fóru at verða minni enn tær 58 mió.kr., sum vóru játtaðar.

Lógargrundarlag o.a.

Ásetingarnar um avgjald av kapitaleftirlønum eru í Ll. nr. 51/1971[9]. Inntøkurnar stava frá leysgivnum kapitaleftirlønartryggingum og frá eftirlønarskipanum í peningastovnum, sum verða útgoldnar í einum. Tryggingarfeløg, peningastovnar, eftirlønarkassar v.m. hava sambært § 7 skyldu til at rokna út og halda aftur avgjaldið og at gjalda tað til landskassan innan 4 vikur.

Sambært § 7 í lógini skulu 35% rindast í avgjaldi, tá ið goldið verður eftir §§ 1B og 1C. Verður kapitaleftirløn goldin út í úrtíð, skulu 55% rindast, tó undantikið við andlát ella viðvarandi óarbeiðsføri; tá er avgjaldið 35%. Einki avgjald skal roknast, tá ið eingin skattligur frádráttur var við inngjald.

Umsitingin hjá TAKS

Tá ið eftirløn skal rindast út, kannar TAKS, um ognaruppgerðin vísir, at persónur eigur kapitaleftirløn, og um talan er um andlát ella óarbeiðsføri. Eru ivamál um støddina á avgjaldinum hjá eftirlønarmóttakarum, yngri enn 60 ár, verða tey loyst í samráði millum veitaran og TAKS.

Eftirlønarsamansparingar í peningastovnum kunnu, sambært lógini, eisini brúkast til at gera íløgur í børsskrásett virðisbrøv.

Um hjún verða sundurlisin ella skild, kann ein eftirlønarsamansparing gerast partur av felags búgvi, og kann verða býtt og flutt ímillum eftirlønarsamansparingar og eftirlønarveitarar, uttan rindan av avgjaldi til landskassan.

Greiður skilnaður er ímillum skattaðan og óskattaðan pening.

Í § 7 er ásett, at tryggjast skal, at tað er greiður skilnaður millum eftirlønarkontur, har inngoldið er av óskattaðum peningi, og har goldið er av skattaðum peningi. Flytingar millum eftirlønarkontur skulu gerast samsvarandi hesi grein, og TAKS skal hava fráboðan í hvørjum einstøkum føri.

Spurdur, um stovnurin fær fráboðan um flytingar, hevur TAKS svarað, at tey ansa eftir, at bland ikki kemur í skattaðar og óskattaðar samansparingar, men tað hava ikki verið nógvar fráboðanir í seinastuni.

Kanning av inngjøldum

Umsitingin virkar væl, tá ið talan er um at tryggja at inngjøldini eru røtt.

TAKS hevur onga vissu fyri, at øll sum skulu rinda, rindað.

Við stakroyndum kannaðu vit inngjøldini, og høvdu bert smávegis viðmerkingar. Samanumtikið virkar umsitingin væl, tá ið talan er um at tryggja, at tað, sum er goldið, er rætt. Tá ið stjórin góðkennir mánaðarroknskapin, váttar hann mótvegis Fíggjarmálaráðnum, at allar inntøkur eru við, og at roknskapurin er rættur og álítandi. Landsgrannskoðanin vísti á, at TAKS onga vissu hevur fyri, at øll, sum skulu rinda avgjald, hava rindað landskassanum avgjøldini.

Komið er ikki á mál við grannskoðaraváttan.

Landsgrannskoðanin hevur áður umrøtt spurningin, um at grannskoðarin hjá eftirlønarveitarum árliga kundi váttað, at mannagongdir og bókhald eru hóskandi skipað við atliti at útrokning og avrokning av avgjøldunum. Sambært TAKS hava tey í longri tíð ynskt at fingið tað í lóggávuna, men komið er ikki á mál.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at hann ætlar at fáa hetta inn í lógina næstu ferð, rentutryggingarlógin verður broytt.

[9] um skatt av rentutryggingum v.m. (Rentutryggingarlógin).

3.12 Innheinting av barnapeningi (LG 2017/203-0151)

Almannaverkið rindar barnapening í forskoti til persónar, sum uppihalda barni og stovnurin krevur upphæddina frá teimum, ið skulu rinda. TAKS røkir innheintingina sambært lógini um barnagjald.

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað innheintingina av barnapeningi veittum í forskoti fyri at kunna okkum um, hvussu innheintingin virkar, og um áognin í landsroknskapinum er verulig.

Treytin fyri at fáa útgjald er, at persónur, sum er álagdur at rinda, ikki hevur rindað til tíðina. Barnagjaldið skal vera álagt gjaldskylduga[10] eftir lóggávuni um rættarstøðuna hjá børnum, og tað svarar til vanliga gjaldið sambært Ll. nr. 107/1999[11]. Í 2017 var mánaðarliga gjaldið 1.083 kr.

Almannaverkið hevur gjørt avtalu við TAKS um at senda krøvini til innheintingar beinanvegin, forskotsgjøldini eru goldin út. TAKS hevur umsiting, ið burturav tekur sær av at heinta inn barnapening, og um tann innheintingin er nyttuleys, verða krøvini skrásett í IK-skipanini.

Roknskaparviðurskifti

Játtanin er á høvuðskontu 12.21.3.04 og er ein nettojáttan við einari undirkontu til útgjøld og einari til inngjøld, sum stjórin Almannaverkinum hevur ræðisrættin á. Roknskapartøl fyri raksturin 2010 til 2017:

t.kr.

Heiti	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017
Útgjøld	13.714	13.274	13.057	12.697	11.990	11.781	11.217	11.057
Inngjøld	-11.327	-11.607	-11.087	-10.863	-12.019	-11.214	-10.506	-10.075
Munur	**2.387**	**1.667**	**1.970**	**1.834**	**-29**	**566**	**711**	**982**

Skipanin "Barnapeningur veittur í forskoti" er flestu árini ein nettoútreiðsla hjá landskassanum, tó at roknskapurin 2014 vísti eina nettoinntøku.

Almannaverkið skrásetir útgjøld, og TAKS skrásetir inngjøld. Almannaverkið bókar útreiðslurnar, tá ið stovnurin rindar peningin út. TAKS bókar ikki inntøkurnar, fyrr enn krøvini eru rindað. Mannagongdin er lýst í roknskaparmeginreglunum, sum Gjaldstovan hevur lýst á heimasíðu sínari.

Inntøkurnar verða ikki bókaðar, fyrr enn tær eru goldnar.

Eftirstøðan av barnapeningi sæst ikki beinleiðis í landsroknskapinum, men er partur av notu nr. 4 "Skatta-, toll- o.t. skuldarar". Sambært Búskaparskipan landsins er eftirstøðan 2010 til 2017:

t.kr.

Ár	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017
Upphædd	30.832	32.783	35.117	36.567	35.950	35.864	36.457	37.114

Munur er millum áognina í landsroknskapinum og áognina í IK-skipanini. Tað eru krøv, ið gjaldsavtalur eru gjørdar um, og krøv, sum ikki eru latin til pantingar. Eftirstøðan í IK-skipanini hjá TAKS 2010 til 2017 var:

t.kr.

Ár	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017
Upphædd	12.951	13.814	14.870	15.904	17.773	17.403	17.314	16.952

TAKS avsetir ímóti tapi í landsroknskapinum, tá ið útlit ikki eru til, at krøv verða goldin, ella at trygd ikki fæst fyri teimum. Avsetta upphæddin verður bókað í fíggjarstøðuni sum "Avseting av virðisleysum krøvum".

[10] av Ríkisumboðnum ella øðrum samsvarandi útlendskum myndugleika.
[11] um áseting og javning av almannaveitingum.

Frá 2010 til 2016 eru avsetingarnar:

t.kr.

Ár	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016
Upphædd	6.969	9.483	9.346	5.326	6.976	6.377	6.074

Orsøkin, til at avsetta upphæddin minkar, er sambært TAKS, at tey hava ruddað upp í skuldarunum.

Heimildir at heinta inn barnapening

Barnapeningur verður heintaður inn sambært Lov nr. 150 af 24. april 1963[12]. Heimildir at heinta inn krøv uttan fyri Føroyar, eru sambært:

1. Bekendtgørelse nr. 433 af 17. december 1965 "om inddrivelse af underholds-bidrag i henhold til den af De Forenede Nationer vedtagne konvention af 20. juni 1956",
2. Bekendtgørelse nr. 434 af 14. december 1965 "om anerkendelse og fuldbyrdelse af afgørelser om underholdsbidrag i henhold til Haagerkonven-tionen af 15. april 1958 om underholdspligt over for børn", og
3. Bekendtgørelse nr. 269 af 28. juni 1963 "om inddrivelse af underholdsbidrag i henhold til konvention af 23. marts 1962 mellem Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige".

Eingin innheinting er sett í verk uttan fyri Norðurlond.

TAKS hevur ikki sett nakra innheinting í verk uttan fyri Norðurlond, tí tað er ov kostnaðarmikið. TAKS sendir fráboðan til skuldarar, tá ið stovnurin fær mál frá Almannaverkinum. Óvist er, um fráboðanirnar yvirhøvur koma fram, og ofta gongur long tíð, áðrenn einstøk brøv koma retur.

TAKS hevur skyldu at taka ímóti krøvum frá Almannaverkinum.

Spurdur, um TAKS hevur skyldu til at taka ímóti krøvum, sum álíkavæl ikki verða heintað inn, svaraði landsstýrismaðurin, at TAKS hevur ábyrgd av innheintingini, og tí skyldu til at taka ímóti krøvunum.

Heimildir eftir lógini um barnapening

Sambært § 9 í Ll. nr. 71/1996[13] skal umsókn um forskotsvísa útgjalding latast Almannaverkinum, sum rindar gjaldið. Í § 10 eru reglur um innheinting.

Í § 10, stk. 1 er ásett, at tá eitt gjald verður útgoldið forskotsvíst, ígongur tað almenna í rættin til at innheinta gjaldið. Sambært stk. 2 er hesin rætturin undir vanligari 20 ára fyrning. Innheintað verður eftir lóg um innheinting av uppihaldsgjøldum við teimum broytingum, at:

1. TAKS pantar eftir reglunum um innkrevjing av skattum og avgjøldum,
2. eftirhildið verður í lønum á sama hátt sum lønarafturhald eftir § 136, stk. 1 í skattalógini, og
3. avgerð kann ikki takast um avsiting fyri gjøld, sum viðvíkja einum tíðarskeiði, sum er meira enn eitt ár framman fyri tað tíðarskeiðið, tá forskotsvísa útgjaldingin er farin fram.

Í stk. 3 er ásett, at tá ið gjald er útgoldið forskotsvíst, yvirtekur landskassin fyri eina upphædd, sum svarar til skyldug gjøld, rættin hjá tí gjaldskylduga til útgjald av ov nógv goldnum skatti við endurgjaldi og rentum.

§ 11 ásetir m.a., at tað almenna skal royna at heinta inn frá gjaldskylduga alla upphæddina, sum sambært resolutiónini eigur at verða rindað.

§ 12 ásetir, at ein gjaldskyldugur, ið rindar tí almenna eina upphædd fyri forskotsvíst útgoldin gjøld, kann krevja, at upphæddin fyrst verður nýtt til fullnað fyri tann partin av gjøldunum, har avgerð er tikin um avsiting.

[12] "om inddrivelse af underholdsbidrag", som ændret ved lov nr. 280 af 8. juni 1977.
[13] "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl."

Innheinting í Føroyum og í Norðurlondum

TAKS roynir at gera gjaldsavtalur so sjálvvirkandi sum gjørligt. TAKS umsitur avtalur við 107 persónar (desember 2017), sum rinda. Flestu teirra eru í Føroyum. Um skuldari ikki rindar sjálvboðin ella ikki hevur gjørt avtalu við TAKS, heintar TAKS krøvini eftir reglunum í lóg um innheinting av uppihaldsgjøldum.

TAKS hevur avtalur við 107 persónar um at gjalda.

Flytir persónur, sum skyldar barnapening, av landinum, biður TAKS viðkomandi um at gera avtalu um at gjalda. Eydnast tað ikki, sendir TAKS kravið til innheintingar hjá viðkomandi myndugleika í Danmark, Grønlandi, Íslandi, Noregi, Svøríki ella Finnlandi. Um persónar, sum búgva í hinum Norðurlondunum, fáa A-inntøku í Føroyum, verður trekt fyri eftirstøðu.

TAKS ger ikki meira við málini, tá ið krøv eru send til Norðurlond, enn at bóka innheintaðar upphæddir, sum londini senda aftur til Føroyar. Síðani 2015 er eingin peningur komin frá Udbetaling Danmark, tí tað hava verið trupulleikar við donsku KT skipanunum. Sambært TAKS finst einki samlað yvirlit yvir krøvini fyri hvørt land.

Einki samlað yvirlit er yvir skuldina fyri hvørt landið.

Innheinting uttan fyri Norðurlond

TAKS hevur ikki heintað barnapening inn uttan fyri Norðurlond, tó at tað er møguligt sambært konventiónum. Sambært TAKS er tað trupult at fylgja skuldarum uttanlands. Eisini er tað kostnaðarmikið at senda krøv út um Norðurlond; og tá ið tað verður gjørt, skal upphæddin vera oman fyri 100 t.kr.

Spurdur, um ásetingin um tær 100 t.kr. er ein fyrisitingarlig avgerð, hevur landsstýrismaðurin svarað, at talan er um eina metta minstuupphædd út frá kostnaðum, sum kunnu standast av, at seta innheintingina í verk. Landsstýrismaðurin heldur tó, at tað er betri at gera eina meting í hvørjum einstøkum máli enn at brúka eina minstuuppædd.

Slakir 40 persónar, búsettir uttan fyri Norðurlond, skylda tilsamans 2,7 mió.kr. við árslok 2017. Harav skylda 7 persónar meira enn 100 t.kr. hvør. TAKS hevur ikki sett innheinting í verk fyri tey krøvini.

Landsstýrismaðurin hevur víst á, at tað er ein spurningur, hvussu nógva orku TAKS skal brúka til hesi málini, tá ið stórur partur av skuldarunum ikki er at finna; men landsstýrismaðurin heldur samstundis, at tað neyvan er skilagott ongantíð at innheinta nakað uttan fyri Norðurlond. Ein ítøkilig meting eigur at verða gjørd í hvørjum føri, soleiðis at útreiðslurnar eru skynsamar í mun til, hvussu nógva skuld roknast kann við at fáa inn.

Eftirgeving av skuld

Sambært § 13, stk. 1 í lógini um barnagjald skal Almannaverkið eftirgeva forskotsvís útgoldin gjøld, sum ikki eru afturgoldin av tí gjaldskylduga, tá ið einki gjald er útgoldið síðsta árið, ella tá ið tann gjaldskyldugi hevur verið innsettur á stovni undir Kriminalforsorgini.

Ein fyritreyt fyri at eftirgeva eftir stk. 1 er, at gjaldskyldugi ikki er førur fyri at rinda.

Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi, at TAKS einki yvirlit hevur yvir, hvussu nógv er eftirgivið sambært § 13.

Sambært TAKS gjørdu tey eitt átak í 2007 at rudda upp í skuldarunum og niðurskrivaðu tann partin, sum TAKS metti ikki var møguligur at heinta inn.

Avskriving og avseting móti tapi

Sambært almennu roknskaparmeginreglunum verða krøv avskrivað, tá ið tey hava mist rættargildi ella eru strikað. Sambært lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar eru krøvini undir vanligari 20 ára fyrning, og TAKS fremur innheintingina sambært lóg

um innheinting av uppihaldsgjøldum. TAKS avskrivar ikki upphæddir, sum eru komnar til innheintingar.

Tað er Almannaverkið sum kann avskriva skuld.

Skal eitt krav avskrivast ella niðurskrivast, sendir TAKS Almannaverkinum tað at avgreiða. TAKS hevði ikki yvirlit yvir tey krøvini. Sambært landsstýrismanninum er TAKS nú farið undir at skráseta, hvussu nógv er sent Almannaverkinum at av- ella niðurskrivað.

TAKS hevur kunnað um, at tey panta alt, sum er í vanda fyri at fyrna. TAKS hevur ikki avsett vegna skuld hjá nøkrum persóni, ið býr uttanlands.

Krøv eru í SE-skipanini[14] hjá TAKS, sum ikki kunnu heintast inn, tí bústaðurin er ófullfíggjaður. Sambært landsstýrismanninum eru málini send Almannaverkinum aftur.

Krøv eftir barnapeningi liggja ofta aftarlaga í dekningsraðfylgini. TAKS hevur ikki yvirlit yvir, hvussu stórur partur av áognini er sendur til pantingar, men vísti á, at tá ið skuldin í IK-skipanini er 17,3 mió.kr., merkir tað, at tann upphæddin er send til pantingar ella innheintingar.

Ivasamt um TAKS hevði heimild at avskriva.

Í 2007 gjørdi TAKS eitt átak at rudda upp í skuldarunum og niðurskrivaði ein part av áognini. Ivasamt er, um stovnurin hevði heimild at avskriva, og tí er sannlíkt, at áognin hjá landskassanum átti at verið størri, enn hon er. TAKS heldur, at ein triðingur av skuldini kundi verðið avskrivaður, tí TAKS fær ongantíð peningin inn.

Sambært landsstýrismanninum skal fíggjarstøðan í landsroknskapinum vera so rættvísandi sum gjørligt. Í hesum føri er talan um persónar, sum eingi gjaldsevni hava og fara tí helst ikki at kunna rinda. Eru als eingi útlit fyri, at skuldin verður afturgoldin, eigur hon at verða avskrivað roknskaparliga.

3.13 Ómaksgjøld (LG 2014/203-0151)

Í 2015 spurdi Landsgrannskoðanin, hvørja heimild TAKS hevði at áseta ómaksgjøldini, sum vóru umrødd í rundskrivi nr. 1/2014, og hvar innheintingar- og pantiheimildirnar fyri ómaksgjøldini vóru ásettar.

TAKS svaraði, at heimildin at áseta gjøldini var at finna í rættarpraksis, og vísti á, at ómaksgjøld í trongari merking ikki vóru fevnd av hugtakinum “skattur” í § 43 í grundlógini og § 41 í stýrisskipanarlógini og kundu tí áleggjast uttan at hava heimild í lóg.

TAKS vísti til hægstarættardóm U1993.757H (sonevnda Gebyrmálið) og U1983.871H (Vedrørende hjemmelsgrundlaget for kommunes opkrævning af beløb til dækning af barns deltagelse i skoletur). TAKS hevði ikki nakra siðvenju at áleggja gjøld uttan við lóg ella heimild í lóg. Øll onnur gjøld hava verið lýst í kunngerð ella í lóg, t.d. K. nr. 14/2010[15] og K. nr. 39/2010[16].

Landsgrannskoðanin var samd við TAKS, at ómaksgjøld o.t. eru ikki “skattir”, sum kunnu tulkast at vera fevndir av ávikavist § 43 í grundlógini ella § 41 í stýriskipanarlógini, og at tað merkir, at ómaksgjaldið sjálvt ikki nýtist at vera ásett beinleiðis í lóg. Um gjaldið ikki er ein skattur, kundi heimildin at krevja tað latast (delegerast) til fyrisitingina at áseta fyrisitingarliga. Tað kravdi tó, at fyrisitingin fekk ta heimildina í lóg, ella í serligum førum siðvenju.

[14] Serviceskipanin.
[15] “um tænastugjøld uttan fyri avgreiðslutíð”.
[16] “um tænastugjøld í samband við tolling og umtolling”.

Samanumtikið helt Landsgrannskoðanin, at tað tyktist ov ógreitt, hvussu TAKS kom til ta niðurstøðu, at stovnurin av sínum eintingum kundi áleggja ómaksgjøld fyri ikki at nýta Vinnugluggan. Landsgrannskoðanin vísti á, at:

- tað var ikki ásett í lóg, at vinnukundar skulu brúka Vinnugluggan,
- tað var ikki siðvenja hjá stovninum at áleggja ómaksgjøld á brúkarar,
- talan var um "revsing" ella gjald fyri ikki at nýta skipanina, og at
- talan var ikki um eina sjálvbodna skipan (uttan gjald).

Í 2015 svaraði landsstýrismaðurin ikki beinleiðis spurningi frá Landsgrannskoðanini, men vísti á, at hann ætlaði at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta meirvirðisgjaldslógina soleiðis, at fyritøkur fingu álagt at nýta Vinnugluggan til at lata inn MVG-uppgerðir og til at gjalda MVG.

Landsstýrismaðurin kunnaði um, at vegna vantandi pantiheimild pantaði TAKS ikki longur fyri tílík gjøld.

Í august 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið arbeiddi við uppskoti um broyting í meirvirðisgjaldslógini at leggja fyri Løgtingið. Í uppskotinum skuldu fyritøkur fáa álagt at nýta Vinnugluggan til at lata inn MVG-uppgerðir og til at gjalda MVG. Heimild fyri ómaksgjøldum skuldi verða partur av hesari lógarbroyting.

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum 2015 (Lm. nr. 41/2016) átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at TAKS hevði kravt inn pening við, í minsta lagi, ivasamari heimild. Landsstýrismaðurin hevði boðað frá, at hann ætlaði at broyta lógina, so fyritøkum verður álagt at nýta Vinnugluggan. Tá má landsstýrið eisini taka støðu til, hvat skal henda við teimum inngjøldum, sum eru kravd inn við ivasamari heimild.

Í 2018 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at við Ll. nr. 62/2018 "um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald" er komin áseting í § 35 um, at fyritøkur meginregluliga skulu nýta Vinnugluggan, og heimild er fingin til at áleggja ómaksgjøld fyri ikki at nýta Vinnugluggan.

Fyritøkur skulu meginregluliga brúka Vinnugluggan.

3.14 Bundin eftirløn av B-inntøkum (LG 2016/220-0521)

Í seinastu ársfrágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin bundna eftirløn av B-inntøkum.

Eftirlønarlógin kom í gildi 1. januar 2014 og álegði øllum persónum at rinda til egna eftirløn. Fyrsta árið varð gjaldið 1% av bæði av A- og B-inntøkum og skuldi sambært lógini hækka eitt prosent um árið til 2029, tá tað verður 15%. Lógin ásetir, at 40% skulu rindast í skatti av øllum eftirlønargjaldingum.

Eftirlønargjald av A-inntøkum verður sjálvvirkjað tikið av lønunum og flutt á eftirlønarkontur hjá skattgjaldarum, og samstundis verður skatturin fluttur landskassanum.

Tey, ið hava B-inntøku skulu gera vart við eftirlønaruppsparingina á sjálvuppgávuni. Síðani verða eftirlønin og skatturin roknað sum partur av árligu skattauppgerðini. Rokning verður send teimum, og tá ið rokningin er goldin, verður eftirlønin flutt á persónliga eftirlønarkontu, og skatturin í landskassan.

Verða eftirlønargjøldini og eftirlønarskatturin ikki goldin til tíðina, hevur TAKS heimild at panta.

Persónar við ongari eftirlønarkontu

Fleiri persónar, sum verða kravdir eftir eftirlønargjaldi, hava ikki eftirlønarkontu. Tær upphæddirnar verða skrásettar á eina depotkontu í bókhaldinum hjá TAKS og verða

Fleiri mangla eftirlønarkontu.

bókaðar á aðra stuttfreistaða skuld í landsroknskapinum. Við árslok 2017 var upphæddin 2,9 mió.kr. netto.

Persónar við B-inntøku fáa hvørt ár skriv um, hvussu nógv skal rindast í eftirløn og í skatti. Í skrivinum verður upplýst, at sáttmáli skal gerast við ein eftirlønarveitara, og kontunummar latast TAKS.

TAKS hevur eina skipan, sum dagliga lesur í skattaskipanunum, um nýggjar eftirlønarkontur eru stovnaðar. Er ein eftirlønarkonta stovnað hjá einum persóni við depotkontu, verður upphæddin á depotkontuni sjálvvirkjað flutt til ta kontuna.

Skipanin við depotkontu virkar sum ætlað.

Í 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at metingin hjá Fíggjarmálaráðnum er, at skipanin við fyribils depotkontum virkar sum ætlað.

3.15 Negativt meirvirðisgjald (LG 2016/220-0522)

Í seinastu ársfrágreiðing umrøddu vit umsitingina av negativum meirvirðisgjaldi.

Landsgrannskoðanin kundi ikki samanbera umsitingina við innanhýsis reglurnar, tí reglurnar vóru ikki dagførdar og lýstu ikki arbeiðsgongdina.

Leiðreglurnar eru nú dagførdar.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum greitt frá, at TAKS hevur tikið viðmerkingarnar um leiðreglurnar fyri útgjaldseftirlitið til eftirtektar og hevur dagført tær í juli 2018.

Í 2012 sjálvvirkjaði TAKS innlatingina av meirvirðisgjaldsuppgerðum um Vinnugluggan. Sambært TAKS var úrslitið av "null inntøppingarætlanini" ikki nóg gott til, at nøkur orka varð flutt til eftirlit við MVG´num.

0-inntøpping ikki sligið ígjøgnum enn.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at átakið "null inntøpping" er ikki gamalt, tí tað byrjaði á sumri 2016 og hevur ikki sligið fult ígjøgnum enn. Vónandi kann økta nýtslan av Vinnuglugganum hava við sær, at arbeiðsorka kann verða flutt frá inntøpping til økt eftirlit. Landsstýrismaðurin leggur afturat, at samanumtikið hevur TAKS vístá, at við størri arbeiðsorku fæst eitt enn betri eftirlit.

Innaneftirlit og eftirlitspolitikkur

Sum liður í innaneftirlitinum brúkti leiðslan á TAKS talgilda kekklistaskipan at stýra afturvendandi rutinuuppgávum innan tær freistir, hon ásetir.

Saman við eftirlitinum við játtanini er kekklistaskipanin ein týðandi partur av innaneftirlitinum hjá TAKS. Ein annar eins týðandi partur av innaneftirlitinum eru tey tiltøk, sum leiðslan og starvsfólk seta í verk og fremja fyri at røkka málinum, um at raksturin er málsøkin og effektivur, at roknskapurin er rættur og álítandi, og at lógir og reglur verða hildnar.

Leiðslan hevði ikki nágreinað, hvørji eftirlit skuldu gerast, ella hvussu hon vildi hava eftirlitini framd og skjalprógvað, fyri at tryggja sær, at tað, sum TAKS rindaði út, var rætt, og at roknskapurin tí kundi sigast at vera rættur.

Deildarleiðarin setti mál fyri eftirlitini, sum vanliga vóru tey somu, sum árið fyri. TAKS kannaði umleið 4% av øllum negativum MVG-uppgerðum, fyri tað mesta íløgur, sum á einstøkum uppgerðum gjørdu, at avgjaldstilsvarið varð negativt. Landsgrannskoðanin ivaðist í, um kanningarhátturin var nøktandi út frá týdningi og váða.

TAKS vísti á, at tey høvdu ikki og komu ongantíð at hava møguleika at kanna øll útgjøld, tí var tað altíð ein raðfesting.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað, at TAKS ikki hevði møguleika at kanna allar útgjaldingar, kundi ikki forða fyri, at leiðslan hevði greiðari ásetingar um, hvussu hon vildi hava eftirlitini framd og skjalprógvað, fyri at tryggjað sær, at tað, sum TAKS rindaði út, var so rætt sum gjørligt.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært TAKS verður hugt eftir stødd og vinnugrein og samanborið við undanfarnar uppgerðir og ár, tá ið útgjøld verða kannað. Í hvørjum einstøkum føri verður støða tikin til, hvat skal kannast og ikki.

27 feløg fáa 80% av negativa MVGnum.

Sambært TAKS er orka ikki til útgangandi eftirlit við øllum, men stakroyndir verða gjørdar, og tí verður tað eitt tilval og eitt frával. Upplýst verður, at 2. ársfjórðing 2017 stóðu 27 feløg fyri 80% av negativa mvg'num, og tilsamans høvdu 883 feløg negativt mvg. Av teimum 27 feløgunum stóðu fýra alifeløg fyri 38,6% av útgjaldinum og 7 kommunur fyri 12%. Feløgini høvdu í miðal ein umsetning á 123,9 mió.kr. Nakað av óvissu er um útrokningina, tí feløg geva ikki altíð mvg-fría sølu upp.

Landsstýrismaðurin vísir á, at sambært TAKS kann eftirlitsarbeiðið møguliga betrast, men tað verður ongantíð møguligt fult og heilt at forða fyri sviki og at fanga ella steðga øllum. TAKS hevur tikið viðmerkingarnar um leiðreglurnar til eftirtektar og hevur dagført tær í juli 2018.

Onnur eftirlit

TAKS brúkti ikki nógva tíð at kanna dagligu útgjaldslistarnar og fann sjáldan feilir har. Stovnurin hevði einki eftirlit við positivum MVG-uppgerðum, tá ið tær vórðu latnar inn og goldnar, men MVG-roknskapir kundu verða kannaðir seinni í sambandi við roknskapareftirlit.

Negativar uppgerðir lógu í útgjaldsskipanini í 3 vikur. Sambært lógini kann TAKS steðga við at gjalda út, um TAKS, vegna viðurskiftini hjá virki, ikki kann hava eftirlit við uppgerðini. Sambært vegleiðingini hjá TAKS skuldu allar MVG-uppgerðir, sum vórðu steðgaðar, hava eina málsviðgerð. TAKS hevur ikki ásett skrivliga, hvussu tann viðgerðin skal vera.

Sjálvvirkandi eftirlitið forðaði fyri at virki, sum ikki høvdu latið allar sínar uppgerðir inn, fingu negativt MVG útgoldið. Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at TAKS hevði ikki skrivligar reglur um, hvussu leingi tey kundu steðga einum útgjaldi.

Áseting um stoppkotu er tikin við í leiðreglurnar.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at nú leiðreglurnar fyri útgjaldseftirlitið eru endurskoðaðar, er ásetingin um nýtslu av stoppkotu tikin við.

3.16 Notat um keyp av vørum og tænastum (LG 2016/405-0008)

Frágreiðingin um keyp av vørum og tænastum er á heimasíðuni hjá LG.

Í juni 2017 lat Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um keyp av vørum og tænastum hjá landinum. Kanningin tók støði í roknskaparárunum 2013 til 2016. Frágreiðingin er at finna á heimasíðuni hjá Landsgrannskoðanini.

Samanumtikið vísti kanningin, at almennir stovnar høvdu kunnleika til rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum um keyp av vørum og tænastum. Aktiviteturin á Keypsportalinum hevði tó ikki verið tann stóri, síðani rundskrivið varð sett í gildi. Einans 15 keyp, størri enn 800 t.kr. u/MVG, vóru lýst á Keypsportalinum.

Fyri at kanna, um fleiri keyp áttu at verðið boðin út, gjøgnumgingu vit øll keyp oman fyri 800 t.kr., sum vóru bókað á standardkontu 14, 15 og 16. Úrslitið var, at um 17 onnur keyp helst kundu verðið boðin út afturat. Talið skal tó takast við fyrivarni, tí í summum førum var ringt at meta um, um keypið var fevnt av rundskrivinum, ella um

tað hóskaði seg at verða boðið út. Tað er eisini møguligt, at vit í sambandi við gjøgnumgongdina hava valt keyp frá, sum kortini áttu at verðið boðin út. Aftur-meldingarnar frá stovnum vístu, at tað í nøkrum førum kann vera trupult at bjóða keyp út á Keypsportalinum vegna umstøður, slag av vøru, ella í hvønn mun keypið er tongt at veitingum, sum eru veittar frammanundan.

Keypshátturin, at biðja um tilboð frá minst tveimum veitarum, var lættari hjá stovnunum at handfara. Tó vísti kanningin, at í meira enn helvtini av keypunum, vit spurdu um, var ikki biðið um tilboð frá minst tveimum veitarum. Í flestu førum hildu stovnar seg hava haldgóðar orsøkir til ikki at biðja um tilboð frá fleiri veitarum. Landsgrannskoðanin helt ikki, at tað var nøktandi, at ásetingarnar í rundskrivinum ikki vórðu hildnar.

Tað krevur bæði tíð og kostar pening at gera útboðstilfar, og tá kundu tey, sum umsita Keypsportalin verið ein virkin sparringspartnari hjá stovnum, ið ikki megna uppgávuna. Skulu tey, sum umsita Keypsportalin, vera væl ílatin til hesa uppgávuna, krevst, at stovnar boða frá aftur, soleiðis at ein serkunnleiki verður bygdur upp um alment innkeyp.

Eingin kennir ábyrgd av Keypsportalinum.

Tað tyktist, sum tað var eingin, sum veruliga kendi ábyrgd av Keypsportalinum. Um tað almenna veruliga ætlar at skapa ein dynamiskan Keypsportal, har privata vinnan og tað almenna skulu møtast, krevst, at onkur fær ábyrgdina.

Nógvir stovnar halda ikki ásetingarnar.

Tað má eisini fáast betri greiða á, hvørjar vørur kunnu vera undantiknar. Tað vóru nógvar vørur og tænastur, sum lógu á markinum til ikki at egna seg til at verða bjóðaðar út, og sum ikki eru nevndar í undantakslistanum í rundskrivinum. Tað kann vera ein trupulleiki, tí kanningin hjá Landsgrannskoðanini vísti, at nógvir stovnar og ráð ikki halda ásetingarnar í rundskrivinum.

4 Fiskivinnumál

4.1 Fiskimálaráðið (LG 2016/205-0111)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Fiskimálaráðnum. Vit mæltu til at dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2011. Sambært landsstýrismanninum er reglugerðin ikki dagførd enn.

Roknskaparreglu-gerðin er ikki dagførd.

Vit avtalaðu við Fiskimálaráðið, at ráðið skuldi, har tað bar til, savna lønarskjølini, sum kunnu sanna, at lønirnar eru rættar. Skjølini vóru spjadd í umsitingini. Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fiskimálaráðið hevur enn ikki savnað øll lønarskjølini saman.

Í 2017 áttu fleiri starvsfólk nógvar tímar til góðar. Sambært landsstýrismanninum vóru avtalur gjørdar við nøkur um at fáa burtur saldu teirra í tímaroknskapinum.

Í 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at enn manglar at gera avtalur við onkur starvsfólk. Fiskimálaráðið fer at leggja eina ætlan fyri tey starvsfólkini, ið ásetir, at málini stigvíst verða avgreidd innan eitt ávíst tíðarskeið.

Enn manglar at gera avtalur við nøkur starvsfólk um tímasaldur.

4.2 Eftirlit við uppboðssølu (LG 2017/205-0111)

Í desember 2016 samtykti Løgtingið í Ll. nr. 150/2016[17] at bjóða part av fiskirættindum út á uppboðssølu. Við heimild í lógini varð lýst K. nr. 10/2017[18].

Rættindini vórðu boðin út á opnari uppboðssølu og á afturlatnari uppboðssølu. Fiskamarknaður Føroya stóð fyri opnu uppboðssøluni.

Afturlatnu uppboðssølurnar, sum vórðu skipaðar av Vørn, vóru í 4 umførum:

- 24. august 2017, 1.107 tons av botnfiski í russiska partinum av Barentshavinum, 614 tons av botnfiski í norska partinum av Barentshavinum og 5.447 tons av makreli í føroyskum og altjóða sjógvi,
- 31. august 2017, 9.000 tons av norðhavssild og 9.000 tons av svartkjafti,
- 14. september 2017, 9.000 tons av norðhavssild og 9.000 tons av svartkjafti, og
- 21. september 2017, 8.500 tons av norðhavssild og 9.297 tons av svartkjafti.

Grannskoðanarvirkið Numo hevði eftirlit við afturlatnu uppboðssølunum, og Landsgrannskoðanin var hjástødd. Landsgrannskoðanin hevur fingið váttanir frá Numo fyri

[17] "um serstakar treytir fyri fiskiskap eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017".
[18] "um uppboðssølu av makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017".

øll eftirlitini, har niðurstøðan er, at: *"Tað er okkara fatan, at uppboðssølan fór fram, samsvarandi kunngerð 101/2017, umframt tilhoyrandi reglugerð hjá VØRN".*

4.3 Fiskiveiðieftirlitið (LG 2017/205-0342)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Vørn. Stovnurin virkar sambært Ll. nr. 28/1994 "um vinnuligan fiskiskap", har tað er ásett, at Fiskiveiðieftirlitið hevur dagliga eftirlitið við føroyskum fiskiførum, sum royna undir Føroyum ella aðra-staðni, og við útlendskum fiskiførum, sum royna undir Føroyum.

Frá 1. januar 2018 virkar Fiskiveiðieftirlitið eftir Ll. nr. 161/2017 "um fyrisiting av sjófeingi".

Fiskiveiðieftirlitið hevur m.a. eftirlit við og skráseting av fiskidøgum og kvotum. Harafturat hevur stovnurin eftirlit við upp- og umskiping av frystum fiski og avreiðingum hjá føroyskum skipum í útlenskum havnum.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerðin hjá stovninum er partur av góðsku- og trygdarhandbókini og er góðkend av Fiskimálaráðnum.

Roknskapir 2013 til 2017:

t.kr.

Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
Lønir v.m.	22.954	23.736	23.303	24.493	25.004
Keyp av vørum og tænastum	4.988	4.659	4.850	5.150	4.796
Keyp av útbúnaði, netto	532	1.823	1.878	832	970
Leiga, viðlíkahald og skattur	1.122	1.317	1.023	1.246	1.161
Avskrivingar o.a.	60	-51	0	0	-8
Søla av vørum og tænastum	-2.239	-2.604	-1.694	-826	-890
Skattur og avgjøld	0	0	0	0	-514
Kravd gjøld, bøtur o.a.	-14	738	-9	-3	-24
Innanh.flyt.millum.alm.stovn.(innt.)	0	0	0	-40	0
Tilsamans	**27.402**	**29.618**	**29.350**	**30.852**	**30.496**

Halda játtanina, men kunnu ikki manna øll skipini fulla tíð.

Stovnurin heldur seg til játtanina í fíggjarlógini, men fær ikki játtan at manna øll skipini fulla tíð. Tað inniber, at Tjaldið er bert í sigling helvtina av tíðini.

Inntøkur

Í góðsku- og trygdarhandbókini eru reglur um inntøkur, m.a. er ásett gjald, 6 t.kr. um tíman, fyri at sleipa skip. Prísásetingar eru fyri at sigla við næmingum, veiðidagbøkur, umbýti av fiskidøgum, árligum gjaldi frá Tryggingarfelagnum Føroyar og fyri sektir. Í 2017 vóru inntøkur fyri at selja dagbøkur og fiskidagar o.a. tilsamans 890 t.kr. Inntøkurnar fyri uppboðssølugjald av afturlatnari uppboðssølu vóru 514 t.kr. Keyparar rinda 0,75% av keypsupphæddini sambært K. nr. 101/2017.

Keyp

Í góðsku- og trygdarhandbókini eru reglur um at heinta inn tilboð frá meira enn einum veitara. Stovnurin hevur biðið báðar veitararnar um tilboð upp á oljuveiting og hevur gjørt avtalu fyri tvey ár við annan teirra. Fiskiveiðieftirlitið biður eisini um tilboð upp á keyp av m.a. telduútgerð.

Biðja ikki um tilboð uppá keyp av provianti.

Seinastu árini hevur stovnurin ikki biðið um tilboð upp á keyp av provianti, men hevur keypt frá einum veitara, sum kann lata skipunum vøruna, hvar og nær tað skal vera.

Fiskiveiðieftirlitið hevur goldið 1.141 t.kr. í húsaleigu í 2017 fyri skrivstovu- og goymslu-høli.

Lønir
Við støði í lønarútgjaldingum fyri september 2017 kannaði Landsgrannskoðanin við stakroyndum, um lønirnar vóru rættar við at samanhalda setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit høvdu einki at finnast at.

Starvsfólkini í umsitingini skráseta arbeiðstíðina, t.v.s., at tey skráseta komu, fráveru, feriu o.a., men ikki hvat arbeiðstíðin verður brúkt til. Fiskiveiðieftirlitið hevur skrivligar reglur um, nær dagliga arbeiðstíðin er. Eingin áseting er um, hvussu nógvar tímar starvsfólk kunnu eiga til góðar ella skylda, men meginreglan er +37/-15 tímar.

Í januar 2018 áttu trý av teimum 16 starvsfólkunum væl meira enn 37 tímar til góðar, og tvey skyldaðu meira enn 15 tímar. Stovnurin hevur í serligum førum loyvt starvsfólkum at skylda fleiri tímar, men eingir tímar eru avskrivaðir. Av tí at arbeiðsbyrðan til tíðir er so stór, eiga nøkur starvsfólk nógvar tímar til góðar. Stovnurin hevur fingið nógv nýggj arbeiðsøki seinastu árini, men fíggjarligi parturin er ikki øktur í mun til arbeiðsbyrðuna.

Kassi og peningastovnskontur
Fiskiveiðieftirlitið hevur ongan kassa við reiðum peningi. Stovnurin hevur eina peningastovnskontu, sum verður gjørd upp og stemmað av mánaðarliga. Kassauppgerðin við árslok 2017 stemmaði við peningastovnskontuna. Sambært stovninum koma til tíðir stórar upphæddir inn, t.d. sum trygd fyri keypum á uppboðssølu, og ansa tey eftir, at tær upphæddirnar ikki standa á kontuni yvir longri tíð. Landsgrannskoðanin mælti til, at kassahámarkið verður hildið.

Ognaryvirlit
Skipini og 4 bilar eru skrásett í landsroknskapinum. Innbúgv, teldur o.a. eru ikki skrásett. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra ognaryvirlitið. Stovnurin hevur sett sær sum mál at fáa gjørt eitt fullfíggjað ognaryvirlit í 2018.

Ognaryvirlitið ikki fullfíggjað.

KT viðurskifti
Váðameting
Grannskoðanarvirkið Januar hevur í 2014 gjørt eina váðameting fyri Fiskiveiðieftirlitið. Stovnurin hevur nógvar dátur, sum hava týdning fyri stovnin sjálvan og fyri samfelagið sum heild. Dáturnar verða goymdar á servarum, sum verða speglaðir til tveir aðrar servarar á øðrum staði. Persónsupplýsingar skrásetir stovnurin bert í sambandi við starvssetanir. Avmarking er, við at einans tvey fólk hava atgongd til persónsupplýsingar.

Síðani váðametingin varð gjørd, eru gjørdar munandi ábøtur viðvíkjandi trygdini. Landsgrannskoðanin hevur mælt til at endurskoða váðametingina.

Landsgrannskoðanin mælti til at endurskoða váðametingina.

Trygdarpolitikkur
Leiðslan heldur skipanina lúka treytirnar í rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum “um at seta í verk KT trygd”. Fiskiveiðieftirlitið hevur gjørt reglur fyri KT politikk, sum eru við í góðsku- og trygdarhandbókini.

Øll starvsfólkini hava atgongd heimaníframá til egnan teldupost við exchange servara. Stjórin, fulltrúar, samskiparin og eftirlitsfólkini hava harafturat atgongd til stovnsnetið umvegis VPN samband. Sambært Fiskiveiðieftirlitinum verða mannagongdir eisini gjørdar um heimaarbeiðspláss, tá ið váðametingin verður endurskoðað.

Journalisering
Fiskiveiðieftirlitið brúkar journalskipanina 360. Mannagongdir um journalisering eru í góðsku- og trygdarhandbókini.

4.4 Effektivar veðhaldsútreiðslur (LG 2017/205-0345)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskontu 5.34.5.07 "Effektivar veðhaldsútreiðslur, fiskivinna". Endamálið var at gera eina støðulýsing av vinnulánum, sum landið veðhelt fyri í 80'unum og fyrst í 90'unum. Í hesum føri er talan um lánibólkarnar: Veðhaldsútlegg og Globallán, ið hoyra til hesa høvuðskontuna.

Stóru veðhaldsútreiðslurnar hava sín uppruna í 80'unum, tá ið landið veitti studning, stuðulslán og veðhald. Sambært frágreiðingini um 80-árini, sum §19-nevndin gjørdi um aldarskiftið, byrjaðu effektivu veðhaldsútreiðslurnar at vaksa í 1987, og vórðu effektivu veðhaldsútreiðslurnar, sum stava frá 80'unum, uppgjørdar til áleið 1,6 mia.kr.

Ábyrgdarbýtið

Í dag er Fiskimálaráðið ánari av høvuðskontuni. Sambært ráðnum er uppgávan m.a. at taka sær av fyrispurningum um at flyta trygdir, strika veð, avskriva avsetta skuld og annars at viðgera ivamál, ið kunnu stinga seg upp.

Gjaldstovan tekur sær av lánsbókhaldinum, og TAKS krevur inn. Í 1997 varð ábyrgdin av innkrevjingini av vinnulánum flutt frá Fíggjar- og Búskapardeildini til Gjaldstovuna, og varð hon flutt til TAKS í 1998, um sama mundi sum almenna innkrevjingin og pantifútarnir vórðu flutt frá Gjaldstovuni til TAKS.

Okkum kunnugt, finst eingin skrivlig avtala viðvíkjandi ábyrgdarbýtinum, annað enn ein roknskaparleiðbeining, sum greinar arbeiðs-/ábyrgdarbýtið millum stovnar, TAKS og Gjaldstovuna í sambandi við umsiting av lánum o.t.

Tá ið TAKS yvirtók innkrevjingina, vóru tað ávís starvsfólk, ið høvdu vinnulánini um hendi. TAKS hevur ikki pantiheimild fyri hesi lánini, og tey eru heldur ikki skrásett í innheintingarskipanini hjá TAKS, tí hava pantifútarnir ikki gjørt nógv við innheintingina.

Spurdur, um stovnurin ætlaði at útvega innheintingarheimild, svaraði TAKS, at brúk er fyri greiðari heimild fyri at kunna gera nakað við vinnulánini. Vanliga eru heimildirnar í avvarandi lógum. Í hesum førinum eru lógirnar ikki til longur. Um politiski mynduleikin vil hava broytingar á økinum, krevst lógarheimild.

Fiskimálaráðið hevur ongar ætlanir um at útvega TAKS pantiheimild.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at "*Fiskimálaráðið hevur ongar ítøkiligar ætlanir um at útvega TAKS pantiheimild. TAKS hevur ikki vent sær til Fiskimálaráðið við trupulleikanum. Um TAKS metir, at ein pantiheimild kann betra innheintingina, vil Fiskimálaráðið stuðla TAKS í at finna eina loysn*".

Upprunalig lánsskjøl

Sambært roknskaparleiðbeining frá 2002 skal Gjaldstovan goyma lánsskjøl. Gjaldstovan, Fiskimálaráðið og TAKS hava upprunaskjøl viðvíkjandi lánunum. Harumframt hevur advokaturin hjá TAKS í hesum máli eisini nøkur upprunaskjøl. Sambært TAKS finst einki fullfíggjað yvirlit yvir støðuna, og helst eru ikki øll upprunaskjøl til. TAKS ætlar at gera nakað við at fáa yvirlit.

Gongdin seinastu árini

Við árslok 2017 var eftirstøðan 104,7 mió.kr. fyri veðhaldsútlegg og 5,9 mió.kr. fyri Globallán, tilsamans góðar 110 mió.kr. Sambært saldulistum er talan um 79 lán. Onkrir skuldarar eru skrásettir fyri fleiri enn eitt lán. Sambært Gjaldstovuni er bert goldið inn á eitt lán seinastu fimm árini, tilsamans slakar 277 t.kr.

Í 2014 fór TAKS við hjálp frá advokati ígjøgnum saldolistan fyri at rudda upp í eftirstøðum. Úrslitið var, at fleiri vinnulán vórðu fult avskrivað, tí feløgini vóru strikað í partafelagsskránni. Í 2014 vórðu 20,2 mió.kr. avskrivaðar, og í 2017 vórðu 18,4 mió.kr. avskrivaðar.

Sambært TAKS ætla tey at fáa greiði á restini av vinnulánunum, og fer stovnurin at seta fýra fólk at gjøgnumganga lánini. Ætlanin er at samla alt tilfar, sum tey kunnu finna um tey einstøku lánini, og senda rykkjarar til tey, har lánini ikki eru fyrnað, og síðani at avskriva tað, sum er fyrnað. TAKS segði í desember 2017, at arbeiðið skuldi verða liðugt innan 3 mánaðir.

Okkum kunnugt er einki skipað eftirlit við at halda lív í krøvunum. TAKS veit ikki at siga, hvørji krøv eru fyrnað, ella hvørji eru tætt at fyrningarfreistini. Afturat hesum eru nøkur partsreiðarí, sum ikki eru blivin individualiserað. Landsgrannskoðanin spurdi, um TAKS hevði ætlanir um at finna partsreiðararnar. TAKS vísti til uppruddingararbeiðið, sum verður sett í gongd.

Fiskimálaráðið veit ikki hvørji krøv eru fyrnað, ella hvørji eru tætt at fyrningar-freistini.

5 Mentamál

5.1 Nám (LG 2017/207-0231)

Nám verður umskipað.

Ll. nr. 53/2014 “um at útvega undirvísingarmiðlar o.a.” er sett í gildi í mai 2014. Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Mentamálaráðið arbeiðir við at umskipa Nám við atliti at bygnaðarbroytingum í ráðnum, har Nám skal átaka sær øktar uppgávur sum fakligur og námsfrøðiligur menningardepil. Tí er kunngerðin um virksemi á Námi ikki gjørd enn.

Arbeiðið at skipa eftirútbúgvingina í síni heild, sum byrjaði í 2013, er ikki liðugt. Sambært landsstýrismanninum er tað arbeiðið eisini tongt at bygnaðarbroytingunum og broyttu uppgávunum hjá Námi.

Í august 2017 vóru enn stórar flexsaldur hjá starvsfólkunum, sum bygnaðarliga vórðu flutt til Nám. Sambært landsstýrismanninum verður framvegis arbeitt við at finna loysn á flexsaldunum, ið eru tongdar at stórum arbeiðsbyrðum í prøvtøkutíðarskeiðnum og at gera prøvtøkutilfar.

5.2 Prøvtøkur (LG 2017/207-0231)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Prøvtøkur, høvuðskonta 7.23.1.31. Í 2016 lat Mentamálaráðið Prøvstovuni ábyrgdina av at skipa prøvtøkurnar, sum ráðið hevur endaliga ábyrgd av. Á stovninum starvast 6 fólk, og harafturat eru millum 600 og 800 fólk knýtt at arbeiðinum at gera uppgávur og at vera prøvdómarar.

KT viðurskifti

Váðametingin hjá Mentamálaráðnum fevnir eisini um Prøvstovuna. Telduskipanirnar eru á Landsneti og eru umfataðar av nýtslu- og trygdarreglunum hjá KT Landsins. Prøvstovan eftirmetir árliga KT sáttmálarnar við tí fyri eyga, at fáa betri tænastu og bíligari rakstur, uttan at trygdin verður sett til viks.

Prøvtøkutilfarið er flokkað at vera serliga kritiskir upplýsingar sambært rundskrivinum um KT trygd. Upplýsingarnar verða goymdar partvíst á drevi í telduskipanini, sum øll starvsfólkini hava atgongd til, tá ið tey eru knýtt at netinum á Prøvstovuni og partvíst á einari teldu, sum ikki hevur atgongd til alnetið. Stovnurin leggur munnligar prøvtøkur til rættis á hesari telduni. Bert tvey starvsfólk hava atgongd til telduna.

Prøvstovan skrásetir prøvtølini fyri Fólkaskúlan í umsitingarskipanini Kervi og goymir onkuntíð prøvtøl frá Miðnámi. Annars hava einstøku skúlarnir ábyrgd av at skráseta síni prøvtøl rætt og at goyma tey á rættan hátt.

Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin hjá Námi er eisini galdandi fyri Prófstovuna. Stovnurin ger innanhýsis fíggjarætlan fyri einstøku arbeiðsøkini, og leiðslan kannar, at fíggjarætlanirnar verða hildnar. Roknskapartøl fyri árini 2013 til 2017:

t.kr.

Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
Lønir v.m.	6.990	7.107	7.500	6.962	8.157
Keyp av vørum og tænastum	2.662	2.222	2.258	2.267	2.604
Keyp av útbúnaði, netto o.a.	42	25	122	324	225
Søla av vørum og tænastum	-118	-115	-25	-6	-3
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr)	79	210	70	994	1.484
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt)	0	-240	-122	-13	0
Tilsamans	**9.655**	**9.209**	**9.803**	**10.528**	**12.467**

Játtanin verður brúkt til lønir og amboð til at skipa fyri prófvtøkum, gerð av uppgávum og til útreiðslur í sambandi við prófdøming, so sum ferðaútreiðslur umframt útreiðslur til OECD-kanningar og til landsroyndir í skúlaverkinum.

Lønir og samsýningar

Vit kannaðu við stakroyndum um lønir og samsýningar vóru rættar hjá starvsfólkum í føstum starvi og hjá leyst atknýttum prófdómarum. Starvsfólk í føstum starvi skráseta arbeiðstíð.

Samsýningar skulu rindast beinleiðis til starvsfólk.

Prófstovan rindar rættindahavarum samsýningar fyri upphavsrætt til tilfar, ið stovnurin brúkar til prófvtøkur. Í onkrum føri hevur Prófstovan rindað samsýningina til hjálparfelagsskap, heldur enn til rættindahavaran. Í øðrum føri hevur stovnurin rindað samsýning fyri prófdøming til almennan stovn, har prófdómarin er í starvi.

Landsgrannskoðanin ivast í, um Prófstovan kann rinda fyri keyp av rættindum ella løn fyri prófdøming til onnur enn tey, sum stovnurin hevur keypt tænastu frá ella havt í starvi. Mentamálaráðið hevur boðað frá, at tey frameftir fara at rinda samsýning til rættindahavarar og løn til prófdómarar.

Prófstovan hevur ikki hildið ásetingarnar í roknskaparreglugerðini um +/-30 tímar flexsaldu, men hevur eftirsíðan gjørt avtalur við tey starvsfólk, sum áttu tímar á, um at avspáka teir.

Viðurskifti hjá tænastumonnum ógreið.

Sambært Mentamálaráðnum verða mál um langtíðarsjúkrameldingar og sjúkrafarloyvi hjá tænastumonnum viðgjørd í hvørjum einstøkum føri. Mentamálaráðið hevur vent sær til Fíggjarmálaráðið um kunngerðina frá 1964[19], og sambært Fíggjarmálaráðnum letur tað seg ikki gera at fyrisita sambært kunngerðini, og tí er Fíggjarmálaráðið farið í holt við at gera nýggja reglugerð.

Mentamálráðið ivast eisini í, hvussu kunngerðin frá 1. juni 1964 samsvarar við persónsupplýsingarlógina, ið setur strong krøv til viðgerð av viðkvæmum heilsuupplýsingum.

Ferðauppgerðir

Ferðauppgerðir eru ikki nøktandi.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum ferðaútreiðslur og umboðanarútreiðslur og mælti Prófstovuni til at fylgja reglunum í roknskaparreglugerðini og vegleiðingini frá Fíggjarmálaráðnum um ferðaútreiðslur. Vit mæltu til at leggja ferðaskrá, fundarskrá e.l. við, soleiðis at til ber at sanna, at uppgerðirnar eru rættar. Eisini mæltu vit til at bóka ferðauppgerðirnar á rættar kontur og at skjalfesta umboðanarútreiðslurnar, sum ásett í roknskaparreglugerðini.

[19] Kunngerð nr. 44 frá 22. mai 1964 “Reglugerð um viðurskifti tænastumanna vegna sjúku”.

5.3 Fólkaskúlin (LG 2017/207-0232)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað læraraløgnir í fólkaskúlanum. Í 2017 er játtanin til Fólkaskúlan 311,7 mió.kr., harav meginparturin er til løgnir. Sambært fíggjarlógini er talan um 685 fulltíðarstørv.

Fólkaskúlin virkar eftir Ll. nr. 125/1997 "um fólkaskúlan", og sambært § 32, stk. 2 skipar landsstýrismaðurin í mentamálum talið av lærarum í skúlunum.

Roknskapartøl fyri árini 2013 til 2017:

t.kr.

Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
Løgnir v.m.	277.069	288.228	293.147	301.627	327.312
Keyp av vørum og tænastum	1.194	414	1.151	1.078	1.809
Keyp av útbúnaði, netto	280	0	0	0	0
Tilskot til útlandið o.a.	0	180	0	0	0
Tilskot til einstaklingar	22	0	0	2	9
Stuðul til annað virksemi	1.230	887	1.201	886	1.099
Inn. flyt. millum alm. stovn. (útr)	809	536	501	695	1.115
Inn. flyt. millum alm. stovn. (innt)	0	0	0	0	-19.228
Tilsamans	**280.604**	**290.245**	**296.000**	**304.288**	**312.116**

Skúlarnir lata Mentamálaráðnum næmingatal, og stýrisdeildin í Mentamálaráðnum tillutar tímar til skúlarnar og umsitur forskipan til løgnarkoyringarnar. Løgnardepilin á Gjaldstovuni rindar løgnirnar út.

Vit kannaðu við stakroyndum nakrar løgnir í Skúlanum við Streymin fyri at staðfesta, um løgnirnar vóru rættar, og um almenni setanarpolitikkurin verður hildin.

Vit kannaðu málsviðgerð av setanum, og um løgnirnar vóru rættar. Eisini kannaðu vit, hvussu starvsfólkamál verða viðgjørd og skrásett. Í eldru setanunum sóu vit bert prógv, undirskrivaðar setanarsáttmálar og í onkrum føri tilboð um setan. Nýggju setanunum hava vit í høvuðsheitum einki at finnast at.

Stakroyndirnar vístu, at løgnirnar verða goldnar út eftir røttum sáttmála og røttum løgnarflokki. Lærararnir hava virksemisætlan, og afturat henni eru ávísar uppgávur í skúlatíðini nágreinaðar í skjali. Okkara gjøgnumgongd av virksemisætlanunum vísti, at tær í høvuðsheitum vóru rættar.

Vit kannaðu eisini nakrar vikarløgnir. Vit høvdu sum heild einki at finnast at sjálvum løgnunum, men vístu á, at tað er óheppið, at sami persónur skrásetti og leysgav vikarløgnir.

Óheppið, at sami persónur skrásetir og leysgevur.

Sambært Mentamálaráðnum hevur fyrisitingin viðgjørt málið saman við Gjaldstovuni og Elektron. Frá 1. august 2018 er mannagongdin broytt. Endamálið er at tryggja, at tað í teimum skúlum, har meira enn eitt fólk er í leiðsluni, ella talan er um skúlastjóra og skrivara, verður uppgávan tvíbýtt, so at skrivari ella varastjóri skráseta, og skúlastjórin leysgevur.

Í smærru skúlunum, har bara eitt fólk er í leiðsluni, verður neyðugt at starvsfólk á løgnarstovuni í Mentamálaráðnum leysgevur.

Sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya lærarafelag hevur lærari rætt til frí við løn, tá ið børn hansara eru sjúk. Talan er tó um í mesta lagi 2 dagar hvørja ferð, og í mesta lagi 10 dagar um árið. Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja ásetingunum í sáttmálanum.

5.4 Miðnám á Kambsdali (LG 2016/207-0233)

Í seinastu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á, at tónleikaútgerðin var ikki við í ognaryvirlitinum hjá miðnámsskúlanum á Kambsdali. Sambært skúlanum var ætlanin at skráseta útgerðina í 2017.

Ognaryvirlit er gjørt.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært Miðnámi á Kambsdali hevur skúlin gjørt yvirlit yvir tónleikaútgerðina.

5.5 Fab Lab (LG 2017/207-0233)

Fab Lab er talgildur verkstaður við Miðnám á Kambsdali. Í 2017 er ein rakstrarjáttan sum er *"ætlað til at seta á stovn talgildan verkstað í Eysturoy, eitt Fab Lab (Fabrication Laboratory) í samstarvi við Miðnám á Kambsdali og aðrar áhugapartar, sum partur av politikki um kreativar vinnur."*

Miðnám á Kambsdali umsitur verkætlanina og eitt starvsfólk er knýtt at henni.

Fab Lab hevur fingið 400 t.kr. í stuðli frá sjálvsognarstovninum Føroya Handilsskúla, 100 t.kr. frá Fuglafjarðar Kommunu og 100 t.kr. frá Eysturkommunu. Bakkafrost, Frammherji, Luna, Tavan, KJ Hydraulik og Petur Larsen hava eisini játtað verkætlanini tilsamans 400 t.kr. í stuðli. Ein av fyritøkunum hevur tó enn ikki goldið tær 50 t.kr., ið hon hevur játtað.

Verkætlan við privatum og kommunalum stuðli.

477 t.kr. í stuðli frá privatum fyritøkum og sjálvsognarstovnum eru inntøkuførdar í 2017. Hinar 323 t.kr. eru støðlaðar. Kommunur og privatar fyritøkur hava sett pengar í verkætlanina, tí at verkstaðurin er opin fyri øllum at brúka. Brúkararnir gjalda fyri tilfarið, ið teir brúka.

Játtan og roknskapur 2017:

kr.

Heiti	Játtan 2017	Roknskapur 2017
Lønir v.m.	300.000	354.138
Keyp av vørum og tænastum	0	172.301
Keyp av útbúnaði, netto	0	461.196
Rakstrarinntøkur	0	-477.221
Flytingar frá kommunum til landið	0	-200.000
Tilsamans	**300.000**	**310.414**

Miðnám á Kambsdali hevur eingi játtanarskriv frá fyritøkunum um stuðul, men skúlaleiðslan hevur í verkætlanartilgongdini gjørt stuðlunum greitt, at privatu stuðulsjáttanirnar gjalda útgerð og aðrar byrjunarútreiðslur, meðan játtanin í fíggjarlógini verður brúkt til lønir.

Inntøkuførdi stuðulin svarar til upphæddina, sum varð brúkt, út yvir játtanina í fíggjarlógini og flytingina frá kommunum. Atlit er ikki tikið at, hvørjar útreiðslur eiga at verða goldnar av ávikavist almennum og privatum stuðli, men heldur til, at roknskapartølini neyvt skulu passa til játtanina í fíggjarlógini.

Vit vístu á, at stovnurin eigur at halda seg til reglurnar í Roknskaparvegleiðingini um fremmanda fígging av almennum virksemi og íløgum.

Keypið er fyri tað mesta keyp av talgildum dreyibonki og undirvísingartilfari. Vit kannaðu keypið og høvdu einki at finnast at.

Ognarrætturin til verkætlanina er skrásettur á støðisogn hjá Mentamálaráðnum, tó at útbúnaðurin er goldin Fab Lab við stuðli frá privatum fyritøkum. Upphæddin, ið er støðlað, er beinleiðis tongd at Fab Lab.

5.6 Tekniski skúli í Klaksvík, løgujáttan (LG 2016/207-0233)

Verklagslógin, Ll. nr. 77/2012, kom í gildi í juni 2012. Lógin fór úr gildi aftur 1. januar 2017. Sambært lógini kundi byggikostnaðurin í mesta lagi vera 36 mió.kr. Sambært Búskaparskipan landsins eru 36,6 mió.kr. brúktar árini 2012 til 2016.

Farið varð undir at byggja á vári 2014. Í fíggjarlógini 2016 stóð, at bygningurin eftir ætlan skuldi standa liðugur áðrenn árslok 2015. Í fíggjarlógini 2017 stóð, at bygningurin var liðugur um árskiftið 2016/2017.

Í ársfrágreiðingini fyri 2016 umrøddu vit grannskoðanina av løgujáttanini til Tekniska skúla í Klaksvík. Landsgrannskoðanin skuldi taka málið uppaftur við Landsverk, áðrenn ein endalig frágreiðing varð gjørd um grannskoðanina. Enn hava vit ikki útvegað okkum nøktandi upplýsingar til at gera frágreiðingina lidna, og fara vit tí at venda aftur til grannskoðanina seinni.

Veðrættur ikki lýstur.

Sambært verklagslógini skal Mentamálaráðið lýsa veðrætt í skúlanum. Í seinastu frágreiðing umrøddu vit, at veðrættur ikki var lýstur í skúlanum. Í august 2018 hevur Mentamálaráðið boðað frá, at ráðið er farið undir at fyrireika veðsetingina.

5.7 Skúladepil við Marknagil, løgujáttan (LG 2016/405-0009)

Ein samandráttur av frágreiðing um játtanar- og útreiðslugongdina í sambandi við verkætlanina at byggja Skúladepilin við Marknagil (nú Glasir) var við í ársfrágreiðingini 2016. Vísandi til § 18 í grannskoðanarlógini lótu løgtingsgrannskoðararnir í mai 2017 Løgtinginum frágreiðingina saman við sínum viðmerkingum.

Riggar illa við fleiri ábyrgdarhavarum.

Løgtingsgrannskoðararnir vístu í viðmerkingunum á, at fleiri viðurskifti høvdu ikki verið nøktandi. Samskifti millum tey, sum varða av Skúladeplinum, hevði ikki verið nøktandi, og tað hevði riggað illa við fleiri ábyrgdarhavarum. Ein generellur trupulleiki fyri byggiverkætlanir er, at tær gerast dýrari enn ætlað. Løgtingið hevur áður viðgjørt hesi viðurskifti, m.a. í Lm. nr. 84/2013, sum løgtingsgrannskoðararnir løgdu fyri Løgtingið í 2013.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2016, Lm.nr. 62/2017, vístu løgtingsgrannskoðararnir eisini á, at tað hevði riggað illa við fleiri ábyrgdarhavarum, og at talan var um eitt fløkt ábyrgdarbýti, sum hevði við sær iva um, hvør veruliga hevði ábyrgd av hvørjum. Kommandolinjan hevði ikki verið nøktandi og hevði í besta føri havt við sær veikleikar.

Løgtingsgrannskoðararnir hildu at kunningin, sum var latin Løgtinginum, hevði verið ov sein og hevði ikki altíð verið dagført.

5.8 Glasir (LG 2017/207-0233)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Glasi. Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at fíggjarumsitingin virkar væl, og er komin væl áleiðis at samansjóða roknskaparøkini.

Roknskapartøl 2017 fyri høvuðskontu 7.23.3.05, undirkontu 31 “Glasir”:

t.kr.

Heiti	2017
Lønir v.m.	107.937
Keyp av vørum og tænastum	13.627
Keyp av útbúnaði, netto o.a.	2.691
Leiga, viðlíkahald og skattur	3.135
Avskrivingar o.a.	-24
Ymsar rakstrarútreiðslur	-293
Søla av vørum og tænastum	-8.275
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr)	21
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt)	-1.874
Flyting frá kommununum til landið	-1.954
Tilsamans	**114.991**

Útbúgvingarnar á Glasi eru skipaðar sambært lógum. Eitt depilsráð virkar m.a. fyri, at Glasir í størst møguligan mun bjóðar út yrkisfakligar grund-, eftir- og víðariútbúgvingar, ið eru viðkomandi fyri vinnuna. Eisini hevur ráðið yvirskipaðu ábyrgdina av inntøkufíggjaða virkseminum hjá Glasi.

Sambært § 6, stk. 2 í lógini ger Depilsráðið starvsskipan, ið landsstýrismaðurin skal góðkenna. Sambært Mentamálaráðnum hevur ráðið gjørt viðmerkingar til uppskot frá Depilsráðnum um starvsskipan og sent tað aftur til Depilsráðið.

Ætlanin er, at Skeiðsdepilin skal verða partur av Glasi, tá ið fíggjarligu viðurskiftini viðvíkjandi sjálvsognarstovnunum eru fingin í rættlag. Eisini er ætlanin at fáa loyvi at flyta ónýttan pening yvir ár.

Sambært viðmerkingum í fíggjarlógini 2017 verða sjálvsognarstovnarnir Tekniski skúlin í Tórshavn og Føroya Handilsskúli væntandi tiknir av.

Roknskaparviðurskifti

Glasir hevur gjørt uppskot til roknskaparreglugerð, sum er sent Mentamálaráðnum. Reglugerðin er ikki góðkend.

Vísandi til K. nr. 7/2011 “um inntøkufíggjað virksemi”, heldur Landsgrannskoðanin, at viðgerðin hjá Glasi av inntøkufíggjaða virkseminum ikki tykist at vera í samsvari við reglurnar. Sambært landsstýrismanninum fer Mentamálaráðið at heita á Glasir um at fyrihalda seg til játtanarskipanina og tryggja, at handfaringin av nevnda virksemi fer fram sambært galdandi reglum.

Inntøkufíggjað virksemi skal handfarast sambært reglunum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at bókingarhátturin er ikki í samsvari við almennu roknskaparreglurnar, tá ið Glasir bókar inntøkur og útreiðslur av sølu av lutum í fíggjarstøðuni. Mentamálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina og fer at heita á Glasir um at fylgja reglunum um roknskaparhald.

Í avtalu ímillum stýrini fyri Tekniska skúla í Tórshavn og Føroya Handilsskúla øðrumegin og Mentamálaráðið hinumegin verður sagt, at landsstýrismaðurin fer at royna at útvega sær heimild til at føra upphæddirnar frá inntøkufíggjaða virkseminum yvir um fíggjarár.

Landsgrannskoðanin dugir ikki at síggja annað enn, at nevnda virksemi hjá Glasi kemur undir rakstrarjáttan. Sambært § 19 í játtanarlógini kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva, at “inntøkufíggjað virksemi” kann verða framt, og sambært § 18 í kunngerð um rakstrarjáttan skal virksemið verða greitt í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið.

Skúlin er ikki samdur við Landsgrannskoðanina, at nevnda virksemi kemur undir rakstrarjáttan og vísir til, at málið er til viðgerar hjá Mentamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at Mentamálaráðið ætlar ikki at leypa frá avtaluni, ið varð gjørd 4. mars 2015, og at ráðið framvegis miðar eftir at landsstýrismaðurin fer at fáa heimild at flyta møguligt avlop á inntøkufíggjaðum virksemi yvir ár, og eru tey í samskifti við Fíggjarmálaráðið um tað.

Partur av ársroknskapinum 2016 hjá Tekniska skúla var eginrakstur, sum fataði um: Skeiðsdepilin, útleigan, kantinuna í Smiðjugerði og Felagsútreiðslur eginrakstur. Hallið av eginrakstrinum 2016 var 52 t.kr. og í 2015 var hallið 35 t.kr.

Glasir hevur víst á, at stovnurin hevur loyvi at flyta avlop ella hall av eginrakstri yvir um ár. Tey vísa til avtalu ímillum stýrið fyri sjálvsognarstovnarnar og Mentamálaráðið frá 4. mars 2015. Sambært Mentamálaráðnum verður frameftir ikki skilt ímillum eginrakstur og inntøkufíggjað virksemið.

Bygningar

Í Búskaparskipan landsins eru ognirnar: Læknahúsini í Hoyvík, Gamla hús í Hoyvík, Høvuðsbygningurin, Nýggj hús og hjallurin skrásettar. Lonirnar í Hoydølum, sum Mentamálaráðið hevur keypt í 2016 eru ikki skrásettar.

Sambært Mentamálaráðnum er tað eitt mistak, at lonirnar ikki eru skrásettar, og verður tað rættað, tá ið skrásetingin av ognum verður dagført í sambandi við at Glasir flyta inn í nýggja bygningin.

Ognaryvirlit

Føroya Handilsskúli og Tekniski Skúli í Tórshavn hava dagført ognaryvirlit pr. 31. desember 2016. Deildin hjá Glasi í Hoydølum hevur einki ognaryvirlit. Í september 2010 greiddi skúlin frá, at miðað varð eftir, at ognaryvirlit skuldi fyriliggja áðrenn jól tað árið.

Vantandi ognaryvirlit.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er átaluvert, at skúlin, hóast hann upplýsti í 2010, at hann fór at gera ognaryvirlit, enn ikki hevur nakað yvirlit yvir ognirnar.

Glasir er samt við Landsgrannskoðanini, men tey hava ikki havt arbeiðsorku til at gera yvirlitið, tí øll orkan er farin til lønarumsitingina, síðani nýggjur lønarsáttmáli kom í 2013. Stovnurin hevur gjørt avtalu við Gjaldstovuna og Mentamálaráðið um at gera yvirlit yvir innbúgv og maskinur við virði oman fyri 50 t.kr., fyri tær ognir, ið verða keyptar til nýggja skúlabygningin. Gamalt innbúgv og gamlar maskinur, ið tey taka við sær, verða eisini tikin við í yvirlitið.

Peningastovnskontur o.a.

Glasir hevur 6 peningastovnskontur, ið eru skrásettar í Búskaparskipan landsins. Konturnar verða stemmaðar av hvønn mánaða. Vit mæltu til, at avstemmingarnar verða skjalfestar.

Umsitingin av gjaldkortum var ikki í samsvari við reglurnar. Mentamálaráðið hevur boðað frá, at ráðið fer at biðja Glasir tryggja, at umsitingin av gjaldkortum er í samsvari við rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum um nýtslu av gjaldkorti og kredittkorti. Ráðið fer eisini at viðgera málið í sambandi við góðkenning av roknskaparreglugerðini.

Tryggingar

Sambært Glasi hevur stovnurin tryggjað ognirnar sambært rundskrivinum um tryggingarviðurskifti landsins.

Inntøkur

Glasir krevur gjøld fyri hægri útbúgvingar. Sambært landsstýrismanninum er heimild fyri at taka gjøld í § 10 í lógini um stuttar framhaldsútbúgvingar. Mentamálaráðið hevur ikki ásett nærri reglur um gjøld, men fer at taka málið upp við Glasir.

Landsgrannskoðanin vísti á, at Fíggjarmálaráðið kann geva loyvi til inntøkufíggjað virksemi, og at tað sambært játtanarreglunum skal skrásetast á serliga undirkontu í Búskaparskipan landsins. Sambært Glasi er talan um langa siðvenju við inntøkufíggjaðum virksemi. Landsgrannskoðanin mælti til, at inntøkufíggjað virksemi verður viðgjørt sambært játtanarreglunum.

Glasir hevur eisini inntøkur av at leiga skúlaheimið út, sølu av tilfari o.a. Tekniski Skúlin í Tórshavn hevur síðani 2008 havt avtalu við smápartafelag um leigu av Skúlaheiminum um summari fyri 5 t.kr. um dagin, íroknað hita og el. Avtalan kann sigast upp við 2 mánaða varningi til ein 1. september.

Sjálvsognarstovnurin fær leiguinntøkurnar. Glasir fær 48 t.kr. av húsaleiguni, umframt 29 t.kr. fyri el og olju, tilsamans 77 t.kr. Glasir fær gjaldið, sum næmingar rinda fyri húsaleigu og mat, t.e. 800 kr. um vikuna.

Vit mæla til skrivligar reglur um húsaleigu.

Landsgrannskoðanin mælti til at áseta skrivligar reglur um húsaleigu v.m.

Keyp

Sambært Glasi bjóða tey størri keyp út á keypsportalinum. Stovnurin hevur gjørt avtalu við fyritøku um at koyra starvsfólk ímillum skúlarnar á Glasi fyri fastan takst pr. túr. Eisini hevur stovnurin gjørt 3 ára samstarvssáttmála við ferðaskrivstovu um veiting av ferðatænastum.

Vit hava við stakroyndum kannað nøkur keyp.

Sambært Glasi bóðu tey um tilboð á keyp av fartelefonum fyri 330 t.kr. í 2016, og um prísir frá fleiri veitarum viðvíkjandi keypi av jakkum til starvsfólkini fyri 218 t.kr.

Glasir hevur ikki skrivligar mannagongdir um, hvørjar útreiðslur stovnurin rindar í sambandi við starvsfólkakostnað og gávur. Í 2016 rindaði stovnurin góðar 400 t.kr. fyri umboðan, harav innanhýsis umboðan var 340 t.kr., t.d. jólapakkar, jólaborðhald, felags arbeiðsdag, og stuðul til starvsfólkaútferð. Eisini hevur Glasir rindað stuðul til nátaveitslu, fløtuveitslu, gongutúrar og ymiskar gávur.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Glasir ásetir skrivliga, hvørjar starvsfólkaútreiðslur og gávur stovnurin rindar. Mentamálaráðið tekur undir við tilmælinum.

Tað er ikki altíð greitt, hvat endamál er við ferðum uttanlands, ella hvørjir persónar hava verið við t.d. á matstovum. Eisini eru uppgerðir gjørdar fleiri mánaðar eftir, at starvsfólk hevur ferðast. Vit mæltu til, at ein stutt frágreiðing verður løgd við bókingunum.

Leiðslan rindar útreiðslur við gjaldkortum, ið áttu ella eins væl kundu verðið ávístar um Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin mælti til, at keyp, har tað er møguligt, verða avgreidd um verkgongdarskipanina.

Lønir

Lønarútreiðslur eru størsti útreiðsluposturin hjá Glasi, og tí er týdningarmikið, at leiðslan tryggjar sær, at lønarútgjaldingarnar eru rættar. Tað kann m.a. verða gjørt við at hava hóskandi tíðarskráseting, tryggar góðkenningarmannagongdir og neyvar ásetingar um arbeiðstíðir.

Grundarlagið undir lønunum hjá teimum, ið undirvísa eru lønarsáttmálar og virksemisætlanir. Eftir sáttmálanum hjá Tekniska Lærara Felagnum er arbeiðstíðin 2080 arbeiðstímar um árið íroknað feriu og aðrar frídagar, tað svarar til 1790 arbeiðstímar. Hjá lærarum, ið eru settir sambært YF-sáttmálanum, er ásett í virksemisætlanunum, hvussu nógvar tímar hvør lærari undirvísir, og hvussu nógva tíð hvør lærari kann nýta til aðrar uppgávur.

Eitt fult ársverk er 1.750 tímar. Tímar, sum lærarar hava fingið í virksemisætlanina til umsiting o.a. verða ikki skjalprógvaðir á annan hátt. Síðani skipanin sambært YF sáttmálanum kom í gildi í 2013, eru tímarnir hjá teimum lærarunum skrásettir í einum rokniarki. Arbeiðstíð hjá øðrum starvsfólkum verður ikki skrásett.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað kann tykjast ótrygt at nýta rokniark sum grundarlag undir stórum parti av lønarútreiðslunum hjá stovninum. Rokniark kann ikki sammetast við eina skipan sum t.d. eina forskipan til útrokning av einstøku útgjaldingunum. Leiðslan er samd við Landsgrannskoðanina, og vísti á, at skúlin hevði alla tíðina ynskt eina forskipan.

Vit mæltu til at styrkja lønarumsitingina.

Landsstýrismaðurin tekur undir við Landsgrannskoðanini, at tað kann vera ein veikleiki fyri lønarumsitingina, at starvsfólk einsamalt avgreiðir lønirnar hjá so stórum parti av undirvísarum og ongan avloysara hevur. Mentamálaráðið fer at heita á Glasir um at styrkja lønarumsitingina.

Sambært Glasi hava læraraløninrnar avgjørt hóskandi tíðarskráseting í fráveruskipanini, har tað verður fylgt neyvt við, at tímarnir verða lisnir.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað hevur týdning, at øll arbeiðstíðin verður hóskandi skrásett, bæði undirvísingartímar og aðrir tímar, og at góðkenningarmannagongdir eru fyri alla arbeiðstíðina hjá øllum starvsfólkum.

Sambært landsstýrismanninum tekur ráðið undir við Landsgrannskoðanini at tað er týdningarmikið, at arbeiðstíðin verður hóskandi skrásett, Mentamálaráðið hevur tí heitt á skúlan um at tryggja eina hóskandi skráseting. Hartil ferð Mentamálaráðið at kanna, um miðnámsskúlarnir kunnu nýta Skúlaforskipanina.

Stakroyndir av lønum

Vit valdu nøkur lønarmál út fyri at kanna, um lønirnar eru rættar. Sambært Glasi hava nógvir lærarar meira enn fult ársverk, serliga lærarar, ið undirvísa í lærugreinum, har trupult er at fáa lærarar.

Tíðarskrásetingin er ikki sambært reglunum.

Vit staðfestu, at tíðarskrásetingin ikki er sambært almennu reglunum. T.d. at tímar hjá undirvísarum til umsiting o.a. vóru ikki skjalprógvaðir. Tímar, ið eru goldnir út, afturat brøki á 1,3 eru ikki skjalprógvaðir. Starvsfólk við leiðsluábyrgd skráseta ikki aðrar tímar enn fráverutímar ella undirvísingartímar. Onnur starvsfólk, t.d. í umsitingini og kantinuni skráseta ikki arbeiðstíð.

Húsaleiga v.m.

Glasir hevði tvey leigumál í Smiðjugerði, Tórshavn, við privatar fyritøkur á ávikavist 35 t.kr. og 45 t.kr. um mánaðin.

Í 2012 gjørdi Mentamálaráðið leigusáttmála um lonir í Hoydølum, har árliga leigan var slakar 1,8 mió.kr. Sáttmálin var broyting av leigusáttmála frá 2010.

Í 2010 vórðu 2,8 mió.kr. brúktar til lonirnar av løgujáttanini “Studentaskúlin í Hoydølum”. Frá 2010 til 2016 rindaði Studentaskúlin 9,8 mió.kr. í leigu fyri lonirnar.

Í 2016 rindaði Mentamálaráðið 3,2 mió.kr. av løgujáttanini fyri lonirnar. Frá 2010 til 2016 hava Mentamálaráðið og Studentaskúlin goldið tilsamans 15,7 mió.kr. fyri lonirnar í Hoydølum.

Frá 2012 er kostnaðurin 1.627 kr./m^2 fyri leigu av 1.093 m^2. Sambært landsstýrismanninum var leiguprísurin í 2010: 1.377 kr./m^2, *"og var tann prísurin fyri ein einkultan bygning, sum brunatekniskt m.a. hevði hurðar beinleiðis út í tún úr øllum skúlastovum fyri at lempa brunakrøvini, men har funktiónskrøvini til inniklima v.m. vóru høg. Stuttu leigumálinum viðføra eisini hægri leigugjald."*

Mentamálaráðið royndi í 2012 at staðseta nýggju skúlastovurnar fyri seg, fyri at halda kostnaðinum niðri. Tað vildu byggi- og friðingarmyndugleikarnir ikki, og tí var neyðugt at byggja upp á bygningin frá 2010, hóast bygningurin ikki var gjørdur til tað. Fyri at fáa byggiloyvi til 2. hædd, var neyðugt at lúka nógv hægri byggiteknisk- og brunateknisk krøv, og m.a. tað avspeglast í leigukostnaðinum uppá 1.627 kr./m^2.

Spurt, hvat tað merkir, at tað í leigusáttmálanum stendur, at *"hervið fellur reetableringskostnaðurin uppá 1.307 t.kr."*, svaraði Mentamálaráðið, at tann kostnaðurin verður goldin, tá ið arbeiðið er gjørt, væntandi í 2019.

Í eykajáttanarlóg fyri september 2016 hevur Løgtingið játtað 3.180 t.kr. til at keypa lonirnar, og í avtaluni 29. desember 2016 um yvirtøku av lonunum er m.a. avtalað, at kostnaðurin fyri at taka lonirnar niður skal vera 1.455 t.kr. í 2018.

Sambært landsstýrismanninum er kostnaðarhækkingin grundað á dagføring og prísregulering fyri góð 2 ára leinging, og m.a. óvissu um, hvagar skal flytast, og at trappur og plattar eisini skulu takast niður. Prísurin er eisini úrslit av samráðingum, har upprunauppskotið frá veitaranum var 1.555 t.kr.

Kassaeftirlit

I februar 2018 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti hjá Glasi í Hoydølum. Skúlin hevur tveir forskotskassar skrásettar í Búskaparskipan landsins. Vit stemmaðu kassarnar av við Búskaparskipanina. Einki var at finnast at.

Glasir hevur 6 peningastovnskontur, ið eru skrásettar í Búskaparskipan landsins. Vit samanbóru saldurnar í peningastovnunum við saldurnar í Búskaparskipanini. Vit høvdu okkurt tilmæli og onkrar spurningar, sum vit hava fingið svar uppá.

5.9 Frítíðarundirvísing (LG 2014/207-0235)

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri ár umrøtt reglurnar um frítíðarundirvísing. Í august 2015 greiddi landsstýrismaðurin frá, at kunngerðirnar vórðu ikki dagførdar, tí Mentamálaráðið helt, at neyðugt var at dagføra lógina, Ll. nr. 70/1983 "um frítíðarundirvísing v.m."

Kunngerðir framvegis ikki dagførdar.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at greining av einari komandi vaksnamannaútbúgving fór møguliga at verða grundarlag undir einari lógarbroyting.

Í august 2018 eru kunngerðirnar sambært landsstýrismanninum enn ikki gjørdar.

5.10 Fróðskaparsetur Føroya, løgujáttan (LG 2017/207-0236)

Játtan og nýtsla til universitetskampus

Í 2016 og 2017 og til juni 2018 eru 12,1 mió.kr. brúktar til universitetskampus. Sambært Landsverki fer umbyggingin av Sjóvinnuhúsinum at kosta um 12,5 mió.kr., og 13 mió.kr. eru settar av til umvælingina, harav ein partur er leiga til Tórshavnar havn.

Verklagslóg er ikki gjørd.

Sambært játtanarskipanini skal løguverkætlan ikki setast í verk, fyrr enn játtan er fingin til vega. Avvarðandi myndugleiki skal hava góðkent verkætlanina og samlaðu løguupphæddina, sum skal fata um allar útreiðslur, fyri at løgan eftir ætlan kann takast í nýtslu, herundir innbúgv, størri útgerð og uttanumøki. Løgur, 10 mió.kr. ella størri, skulu gerast við grundarlagi í verklagslóg. Vit hava í august 2018 biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

Í 2016 vórðu játtaðar 8 mió.kr. til, at Fróðskaparsetur Føroya skuldi yvirtaka Venjingarskúlan, soleiðis at stovnurin kundi brúka allan bygningin. Játtanin var eisini ætlað til fyrireikingararbeiði at skipa universitetskampus á Frælsinum. 600 t.kr. vórðu brúktar; 453 t.kr. til lønir til Landsverk og 147 t.kr. til ráðgeving frá øðrum, ferðing o.a. Í eykajáttanarlógini fyri september 2016, varð samtykt at lækka játtanina úr 8 mió.kr. í 1,5 mió.kr. Mett varð, at 6,5 mió.kr. av samlaðu løgujáttanini til kampus á Fróðskaparsetrinum ikki fóru at verða nýttar í 2016.

Umbygging av Sjóvinnuhúsinum.

Í 2017 vórðu játtaðar 8 mió.kr., ætlaðar til útreiðslur í sambandi við universitetskampus. Peningurin er nýttur til innrætting av Sjóvinnuhúsinum hjá Tórshavnar havn til nýtslu hjá Fróðskaparsetrinum.

Landsverk hevur í 2017 gjørt sáttmála við fyritøku, um at veita heildarráðgeving í sambandi við at umbyggja Sjóvinnuhúsið til universitetskampus. Sambært sáttmálanum skuldi umbyggingin kosta 14,4 mió.kr., og sambært høvuðsarbeiðstøkuni skuldi Fróðskaparsetrið rinda 10,5 mió.kr.

Í 2017 hevur Fróðskaparsetur Føroya gjørt sáttmála við Tórshavnar havn um leigu av parti av Sjóvinnuhúsinum, matrikul 970e, á Vestaru bryggju í Tórshavn. Landsverk hevur góðkent leigusáttmálan.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Sambært Landsverki eru flestu arbeiðstøkurnar bjóðaðar út sambært licitatiónslógini og umvegis iBinder. Landsgrannskoðanin hevur kannað størru veitingarnar, um:

- skrivligar avtalur eru gjørdar fyri arbeiðstøkurnar,
- kostnaðurin svarar til tilboðini, og
- skrivligar avtalur eru gjørdar um eyka- og meir/minniveitingar.

Vit samanbóru útgjaldingarnar í Búskaparskipan landsins við avtalaða kostnaðin. Vit høvdu nakrar spurningar, sum vit fingu svaraðar.

Landsverk bað ikki um tilboð frá fleiri veitarum, tá ið stovnurin keypti lásaskipan til bygningin fyri 240 t.kr., tí sambært Landsverki var bert ein veitari í Føroyum, sum trygt kundi veita hesa skipan.

Sambært byggimálsfrágreiðing skulu øll rokningsarbeiði og meirveitingar í sambandi við møguligar broytingar staðfestast á einum avtaluseðli fyri hvørt arbeiði, har m.a. avrokningarháttur verður avtalaður frammanundan. Byggileiðslan skrivar avtaluseðlar.

Avtalan við heildarráðgevan var slakar 1,5 mió.kr. umframt eykaavtala fyri 22 t.kr. Afturat tí hevur ráðgevin fingið 204 t.kr. fyri ráðgeving um innrætting av Sjóvinnuhúsinum, sum Mentamálaráðið hevur tikið avgerð um. Vit hava í august 2018 spurt landsstýrismannin, hvat tað er fyri.

Til tvær meirveitingar, bókaðar í 2017, ávikavist 13,7 t.kr. og 18,5 t.kr., er avtaluseðil gjørdur í 2018. Sambært Landsverki varð arbeiðið gjørt í 2017.

Sambært tíðarætlanini hjá heildarráðgevanum skuldi umbyggingin verða liðug 1. februar 2018. Verkætlanin varð liðug í mai, tí tað blivu nógv eykaarbeiði.

Í arbeiðstakarasáttmálunum eru ásetingar um, at dagbøtur verða goldnar, um seinkingar, ið arbeiðstakarin hevur ábyrgdina av, koma fyri. Sambært Landsverki eru dagbøtur ikki kravdar.

Í august 2018 hevur Mentamálaráðið kunnað um, at ráðið hevur vent sær til Landsverk at fáa greiði á ivamálunum, áðrenn spurningarnir kunnu verða svaraðir.

5.11 Granskingarráð Føroya (LG 2014/207-0236)

Framvegis ógreiða um óbrúkta játtan.

Í frágreiðingum seinastu árini hevur Landsgrannskoðanin umrøtt roknskaparreglugerðina hjá Granskingarráð Føroya og Granskingargrunninum. Reglugerðin, sum er frá 2012, var send Mentamálaráðnum, men varð ikki góðkend, tí ógreiða var, hvørt avlop av óbrúktari játtan hjá grunninum skuldi fella aftur til landskassan.

Í grannskoðanarprotokollini hjá Granskingargrunninum stóð, at *"í januar 2012 ger stjórin greitt, at til annað svar fyriliggur, verður hildið fram við verandi praksis."* Grannskoðarin mælti enn eina ferð til, at leiðslan skundaði undir at fáa svar frá Mentamálaráðnum.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 37/2016) hildu løgtingsgrannskoðararnir, at tað var ikki nøktandi, at so long tíð gekk, uttan at prinsipiellu spurningarnir frá grunninum vórðu svaraðir og mæltu landsstýrismanninum til skjótast at taka stig til at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið síðani seinastu frágreiðing m.a. hevði kannað, hvussu Mentanargrunnur landsins umsitur sína játtan, og at ráðið fór saman við Fíggjarmálaráðnum at koma til endaliga niðurstøðu í 2017.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at eingin niðurstøða er gjørd enn.

5.12 ES-granskingarskrá (LG 2017/207-0236)

Løgtingsgrannskoðararnir heittu á Landsgrannskoðaran um at kanna gjaldið fyri ES-granskingarskrá og gera eitt notat, sum kundi lýsa málið, so teir kundu taka støðu til, hvat ella um nakað skuldi gerast við málið.

Í mars 2018 lat Landsgrannskoðarin løgtingsgrannskoðarunum notat um ES-granskingarpengar. Notatið í sínari heild kann lesast á heimasíðuni hjá Landsgrannskoðanini.

Samanumtøka hjá Landsgrannskoðanini
Horizon 2020 er framhald og víðari menning av evropeiska granskingarsamstarvinum, sum Føroyar á fyrsta sinni í 2010 gjørdu við ES um atlimaskap í granskingarskránni FP7. Samstarvið er galdandi fyri tíðarskeiðið 2014 til 2020.

Í fíggjarlógini 2017 vórðu 10,5 mió.kr. játtaðar til ES-granskingarskrá. Útreiðslurnar vóru 11,6 mió.kr. og meirnýtslan tí 1,1 mió.kr. Játtanin er ein stuðulsjáttan og er bygd á eina meting av roknskapartølum og búskaparligum útlitum.

Samanumtikið var niðurstøðan hjá Landsgrannskoðanini, at landsstýrið er bundið av sáttmálanum um granskingarsamstarvið. Eingin treyt er í sáttmálanum um, at játtan skal vera tøk til endamálið. Landsstýrið má tí halda sínar skyldur og rinda upphæddina innan síðstu gjaldsfreist.

Landsstýrið er bundið av millumtjóða samstarvi.

Játtanarskipanin krevur materiella og fíggjarliga heimild, áðrenn útreiðslur verða hildnar. Er neyðugt við eykajáttan, hevur landsstýrismaðurin ábyrgd av, at umsókn um eykajáttan sum skjótast verður løgd fyri Løgtingið – eisini um meirútreiðslan er grundað á t.d. lógarbundnar útreiðslur ella sáttmála frá eldri árum. Eykajáttanin er ikki treytað av nýggjum útreiðslum í árinum, men fevnir eisini um meirútreiðslur av gjørdum avtalum í eldri árum. Landsgrannskoðanin heldur tí, at landsstýrismaðurin altíð hevur skyldu at nýta allar møguleikar í játtanarskipanini fyri at útvega sær nøktandi heimild skjótast møguligt. Skyldan er ikki treytað av, hvussu vánirnar annars kunnu vera fyri at fáa eykajáttanina.

Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir vístu á, at talan er um ein millumtjóða sáttmála, og landsstýrismaðurin hevði skyldu at rinda ásetta gjaldið innan síðstu gjaldsfreist.

Játtanarskipanin ásetir, at fíggjarlógin skal vera grundað á veruleikakendar vónir og so hollar ætlanir, sum til ber. Løgtingsgrannskoðararnir eru ikki sannførdir um, at Mentamálaráðið legði nóg stóra orku í at útvega nøktandi upplýsingar at meta um játtanina, áðrenn fíggjarlógin fyri 2017 varð samtykt.

Í seinasta lagi í februar 2017, tá ið fyrra rokningin fyri limagjaldið var komin, er vitan til skjals um, at játtanin var ov lítil. Landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina av, at tiltøk verða sett í verk, soleiðis at játtanir verða hildnar. Ber tað ikki til, skal verða søkt um eykajáttan, og tað gjørdi landsstýrismaðurin, tá ið hann í apríl 2017 bað um eykajáttan.

Løgtingsgrannskoðararnir hildu, at langa viðgerðartíðin hjá Fíggjarnevndini skapti óneyðugar trupulleikar, m.a. við tí avleiðing, at landsstýrismaðurin ikki fekk játtan rættstundis til luttøkugjaldið.

Long viðgerðartíð hjá Fíggjarnevndini.

Í februar 2017 kundi landsstýrismaðurin í mentamálum staðfesta, at játtanin fór at verða ov tepur, 6. apríl varð umbøn um eykajáttan latin Fíggjarmálaráðnum, 15. mai legði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum uppskot til eykajáttanarlóg fyri Løgtingið, og 3. juli legði Fíggjarnevndin sítt álit fram. Løgtingsgrannskoðararnir undrast á, at Fíggjarnevndin mælti frá eykajáttan, havandi í huga at restlimagjaldið fall til gjaldingar 30. juli.

5.13 Málráðið (LG 2017/207-0241)

Málráðið er skipað sambært Ll. nr. 59/2012. Endamálið við ráðnum er at røkja, menna og verja føroyska málið, at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum, umframt at áseta føroyska stavseting.

Málráðið er skipað sum umboðsráð við 11 limum, ið sita í fýra ár, og við einari starvsnevnd við 5 limum. Verandi ráð er valt frá 1. juli 2017 til 30. juni 2021. Starvsnevndarlimirnir eru eisini limir í umboðsráðnum. Á Málstovuni starvast skrivari og ein málfrøðingur.

Í §§ 5-8 í lógini eru ásetingar um uppgávur og samstarv fyri Málráðið.

Síðani 2017 hevur lógin eisini fata um teknmál. Sambært §§ 5 og 6 skal ráðið í samvinnu við yrkisbólkar menna gott føroyskt yrkismál og teknmál, og skal savna og skráseta føroyskt teknmál. Sambært Málráðnum hava starvsfólkini á Málstovuni ikki førleikar at ráðgeva um teknmál, sum nú er.

Landsgrannskoðanin spurdi, um Mentamálaráðið ætlar at útvega neyðugu førleikarnar. Landsstýrismaðurin vísti til § 9, stk. 3 í lógini, har tað er ásett, at skrivstovan hjá Málráðnum er mannað við fólkum, ið kunnu útvega ella vísa á hollan kunnleika til føroyskt teknmál. Lógarbroytingin leggur sostatt ikki upp til at starvsfólk við hesum kunnleika verða sett, og í løtuni eru ongar ítøkiligar ætlanir um at útvega hesar førleikar á skrivstovuni.

Sambært § 3, stk. 3 kann landsstýrismaðurin áseta neyvari reglur um at tilnevna Málráðið, og sambært § 4, stk. 2 ásetir landsstýrismaðurin starvsskipan og nærri reglur um virksemið hjá Málráðnum og starvsnevndini í samráði við Málráðið.

Landsgrannskoðanin fekk avrit av uppskotum til starvsskipanir fyri Málráðið og starvsnevndina. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at tá ið smærri tillagingar eru gjørdar í uppskotunum, verða starvsskipanirnar væntandi góðkendar.

Lønir

Vit kannaðu, at lýsing, umsókn, prógv, setanarskriv o.a. vóru í lønarmálunum. Eisini kannaðu vit, um lønirnar eru sambært ásetingum.

Fyri ta eldru setanina hava vit bert sæð undirskrivaðan setanarsáttmála. Nýggjaru setanini var einki at finnast at.

Starvsfólkini høvdu ikki skrásett arbeiðstímar. Spurt, hvussu tey tryggja, at lønirnar eru rættar, herundir at starvsfólk arbeiða ásettu tímar og halda feriu innan galdandi sáttmálar, svaraði Málráðið, at stovnurin fer undir at føra tímadagbók.

Ferðaútreiðslur

Feilir vóru í ferðauppgerð.

Vit kannaðu nakrar ferðauppgerðir. Í einari ferðauppgerð vóru feilir, m.a. hevði stovnurin endurgoldið starvsfólki fyri útreiðslur, sum stovnurin frammanundan hevði goldið fyri. Viðurskiftini eru síðani rættað. Hinar uppgerðirnar vóru stórtsæð rættar, men manglaðu t.d. ferðaskrá, so dagatal, máltíðir o.a. kundu sannast.

Kassi og peningastovnskontur

Málráðið hevur havt ein forskotskassa, sum nú er tikin av.

Tíðliga í 2017 mælti Landsgrannskoðanin til at dagføra tær 3 peningastovnskonturnar hjá stovninum og at skráseta seinastu kontuna í Búskaparskipan landsins; tað er ikki gjørt.

Peningastovnskonta ikki skrásett í BSL.

Mentamálaráðið hevur boðað frá, at av misgáum er seinasta kontan ikki skrásett í Búskaparskipan landsins. Málráðið fer at taka tað upp til viðgerðar beinanvegin.

Skrivstovukostnaður

Málstovan heldur til í hølum hjá Fróðskaparsetri Føroya og hevur atgongd til hentleikar hjá Føroyamálsdeildini. Stovnurin rindar 48 t.kr. í leigu um árið, íroknað el og hita. Sambært Málráðnum finst eingin sáttmáli um leigu ella gjald fyri el og olju.

KT viðurskifti

Málráðið hevur ikki dátugrunn til spurningar o.a. Skrivarin avgreiðir spurningarnar og goymir teir á telduni. Allir spurningar, bæði svaraðir og ósvaraðir, verða lagdir fyri starvsnevndina. Er talan t.d. um nýggj orð, verður Móðurmálsorðabókin fráboðað.

Málráðið hevur greitt frá, at stovnurin er við í trygdaravritsskipanini hjá Fróðskaparsetrinum. Umframt at verða goymd á teldu, verða spurningar og svar goymd í pappírsformi.

5.14 Tjóðpallur Føroya (LG 2015/207-0242)

Í mars 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið fór at tryggja, at roknskaparhaldið á Tjóðpallinum bleiv nøktandi skipað við mannagongdum sambært roknskaparkunngerðini.

Sambært landsstýrismanninum fór Mentamálaráðið at tryggja, at greiðar ásetingar fóru at verða í reglugerðini um prísásetingar. Í juni 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálaráðið í juli fekk uppskot til reglugerð, og at tað verður avgreitt í næstum.

Í september 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Tjóðpallinum. Vit stemmaðu kassan og peningastovnskontuna av við Búskaparskipan landsins. Einki var at finnast at.

5.15 Mentanargrunnur landsins (LG 2015/207-0242)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Mentanargrunninum. Vanligar mannagongdir vóru ásettar í lóg, kunngerð og starvsskipan fyri grunnin. Aðrar mannagongdir vóru ikki niðurskrivaðar. Har lóg ella kunngerð ikki ásetti nærri boð, var tað ein kvalifiserað meting hjá nevndini, ið ásetti, hvør skuldi hava stuðul, og hvat ein hóskandi upphædd var.

Landsgrannskoðanin helt, at tað kundi vera ein vansi fyri umsitingina, ella t.d. fyri eina nýggja nevnd, at ongar skrivligar mannagongdir vóru, og mælti til at lýsa mannagongdirnar í t.d. roknskaparreglugerðini.

Grunnurin sendi í januar 2016 eina roknskaparreglugerð til Mentamálaráðið at góðkenna.

Roknskaparreglugerðin er ikki nøktandi.

Í august 2018 hevur Landsstýrismaðurin greitt frá, at Mentamálaráðið hevur heitt á Mentanargrunnin um at eftirhyggja og dagføra uppskotið til roknskaparreglugerð og senda tað aftur til ráðið at góðkenna.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at so leingi tað er ásett í skattalógini, at stuðul er A-inntøka, átti stuðulin at verða ávístur um skattaskipanina. Var ætlanin, at stuðulin ikki skal vera A-inntøka, mugu reglurnar broytast.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 37/2016) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til beinanvegin at fáa tað í rættlag.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at *"Mentamálaráðið hevur arbeitt saman við nýggju leiðslu grunsins at fáa greiðu á øllum teimum spurningum, ið Landsgrannskoðanin hevur víst á. Fundur hevur eisini verið við TAKS um útgjaldsmannagongdina. Enn er ikki komið heilt á mál."*

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2016 hildu løgtingsgrannskoðararnir tað ikki vera nøktandi og mæltu enn eina ferð landsstýrismanninum til beinanvegin at fáa tað í rættlag.

5.16 Søvn landsins (LG 2014/207-0243)

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at *"eftir avgerð løgmans er Søvn landsins skilt sundur í 3 stovnar: Tjóðsavn Føroya, Føroya Landsskjalasavn og Føroya Landsbókasavn. Broytingin er sett í verk frá 1. august 2017. Í ólavsøkurøðu løgmans*

2017 verður í løglistanum upplýst, at uppskot til løgtingslóg um musealt virksemi, sum kemur í staðin fyri lógirnar um Føroya Fornminnissavn og Føroya Náttúrugripasavn, verður ætlandi lagt fyri Løgtingið hesa tingsetuna. Eisini verður uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Landsskjalasavn, sum serliga snýr seg um varðveiting av talgildum savnindum og ymiskar dagføringar, lagt fyri Løgtingið hesa tingsetuna."

Í oktober 2013 ásannaði landsstýrismaðurin, at hølisviðurskiftini hjá Søvnum landsins vóru ikki nøktandi, og arbeitt varð við at finna loysnir. Í fyrsta umfari varð roynt at útvega starvshøli, soleiðis at málini í samanleggingartilgongdini kundu verða rokkin skjótast gjørligt. Í øðrum lagi varð arbeitt við at nøkta tørvin á goymslu- og framsýningarhølum.

Í august 2017 upplýsti landsstýrismaðurin, at spurningurin viðvíkjandi hølisviðurskiftunum á savnsøkinum var ikki loystur.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 37/2016) vóru løgtingsgrannskoðararnir ónøgdir við, at lógir og kunngerðir enn ikki vóru dagførdar, hóast løgtingsgrannskoðararnir áður høvdu gjørt vart við málið.

Enn eru ikki allar lógir og kunngerðir gjørdar.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at lógin um Føroya Landsskjalasavn frá 1992 varð broytt við Ll. nr. 63/2018. Við broytingini fevnir lógin eisini um varðveiting av talgildum savnindum, og lógin er dagførd í mun til ásetingarnar í persónsupplýsingarlógini. Á savnsøkinum verður síðsta hond løgd á uppskot til lóg um savnsvirksemi landsins, og tað verður eftir ætlan lagt fyri Løgtingið í heyst.

Landsstýrismaðurin upplýsir, at ein arbeiðsbólkur arbeiðir við bókasavnslógini m.a. í sambandi við setursbókasavn. Mentamálaráðið fer at dagføra lóggávuna á fornminnafriðingarøkinum. Dagføringarnar verða eftir ætlan lagdar fyri Løgtingið í aðru tingsetu.

Landsstýrismaðurin hevur eisini kunnað um, at Tjóðsavnið flytir í Hoydalar, nú Glasir er flutt í nýggja skúlabygningin í Marknagili.

5.17 Kirkjugrunnurin (LG 2014/207-0245)

Í fleiri ár hevur Landsgrannskoðanin vísst á, at sambært Ll. nr. 60/2007 "um fólkakirkjuna í Føroyum" ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini, og sambært Ll. nr. 61/2007 "um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar" ásetir landsstýrismaðurin reglur fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir.

Kunngerðirnar eru ikki gjørdar enn.

Í september 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var at gera kunngerðirnar í 2015, og í august 2017 upplýsti landsstýrismaðurin, at enn verður arbeitt við kunngerðunum.

Í uppskoti til samtyktar at góðkenna landsroknskapin 2016 vóru løgtingsgrannskoðararnir ónøgdir við, at kunngerðirnar enn ikki vóru gjørdar, hóast meira enn 10 ár vóru liðin, síðani lógirnar komu í gildi.

Í august 2018 ásannar Mentamálaráðið, at gott hevði verið, um kunngerðir vórðu gjørdar; men av tí at virksemið er í hampiliga tryggari legu, hevur Mentamálaráðið fyri ein part valt at raðfesta annað virksemi fremri, og lutvíst hava viðurskifti, ið ráðið ikki var harri yvir, kravt stóran part av teirri avmarkaðu orku, ið er til meira yvirskipaða málsviðgerð viðvíkjandi kirkjuøkinum. Tí er arbeiðið ikki gjørt enn.

6 Heilsu- og innlendismál

6.1 Heilsu- og innlendismálaráðið (LG 2016/211-0111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Heilsu- og innlendismálaráðið bíðaði við dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2013, til Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið høvdu dagført reglurnar.

Roknskaparreglu-gerðin er ikki dagført.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at roknskaparreglugerðin er ikki dagført, men Heilsu- og innlendismálaráðið hevur dagført yvirlitið yvir atgongdir til rokningarverkgongd og web-løn. Afturat tí hevur ráðið gjørt ískoytisskjal viðvíkjandi sjúklingatryggingini.

Tímasaldurnar í teimum lønarmálum, vit grannskoðaðu, lógu ímillum +56/-42 tímar. Ráðið umhugsaði at orða í roknskaparreglugerðini, at frávikini ikki kundu standa leingi óavgreidd.

Í august 2018 hevur Heilsu- og innlendismálaráðið greitt frá, at mannagongd viðvíkjandi tímasaldum er sett í starvsfólkahandbókina. Ásannandi, at reglan um +/- saldur av og á er trupul at halda hjá øllum starvsfólkum orsakað av stórari arbeiðsbyrði, verður neyðugt at tillaga reglurnar. Móti ársenda verður roynt at minka um tímar og gamlar serstakar frívikur. Ráðið fylgir annars reglunum um avsetingar av skyldugum tímum og hevur skrásett skyldurnar í roknskapinum.

Roynt verður at minka tímasaldur.

6.2 Fólkaheilsuráðið (LG 2016/211-0201)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin, at Heilsu- og innlendismálaráðið hevði fingið eitt dagført uppskot til roknskaparreglugerð frá Fólkaheilsuráðnum.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at roknskaparreglugerðin er ikki góðkend enn. Ráðið ætlar at viðgera reglugerðina saman við Fólkaheilsuráðnum og fáa málið avgreitt.

Roknskaparreglu-gerðin er ikki dagført.

Sambært § 4 í lógini um Fólkaheilsuráð skal landsstýrismaðurin áseta starvsskipan fyri stovnin eftir tilmæli frá ráðnum.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsu- og innlendismálaráðið og Fólkaheilsuráðið arbeiða við at orða starvsskipan fyri stovnin.

KT viðurskifti

Landsgrannskoðanin mælti til at gera váðameting sambært rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum. Í august 2016 boðaði Fólkaheilsuráðið frá, at tey fóru at gera váðameting.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsu- og innlendismálaráðið hevur fingið avrit av avtalu frá 1. mars 2018 ímillum Fólkaheilsuráðið og Gjaldstovuna um trygdarpakkan.

6.3 Læknakanningar av børnum (LG 2014/211-0201)

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri ár gjørt vart við vantandi heilsukanningar av skúlabørnum.

Í juli 2015 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Heilsutrygd hevði sent kommunulæknunum og kommunulæknaviðtalunum vegleiðandi tilfar frá Sundhedsstyrelsen umframt kunning um lógarbroytingina í 2014[20] fyri at fáa fleiri børn og ung at taka av tilboðnum um heilsukanning.

Í august 2016 vísti landsstýrismaðurin á, at tølini tykjast at økjast eitt sindur, men enn var ikki komið á mál.

Í august 2017 greiddi Heilsu- og innlendismálaráðið frá, at allir skúlar høvdu fingið postkort at kunna næmingar í 1. og 9. flokki um heilsukanningar. Ráðið helt, at átøkini høvdu gjørt mun. Í talvuni síggjast, hvussu nógv børn, við ávikavist við inn- og útskúling, tóku av tilboðnum árini 2014 til 2017.

	2014	2015	2016	2017
Læknakanning 1. flokkur	56	139	379	177
Læknakanning 9. flokkur	2	15	82	18

Trupult at fáa økta undirtøku fyri heilsukanning.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í 2017 varð Gigni lagt til Heilsutrygd at umsita, og eru tað nú heilsufrøðingarnir, sum Gigni hevur á skúlunum, sum kunna næmingarnar um tilboðið um heilsukanningina. Hóast hesi átøkini tykist trupult at økja undirtøkuna at taka av tilboðnum.

1. august 2018 kom lógarbroyting[21] í gildi, sum heimilar heilsufrøðingum at gera fyribyrgjandi heilsukanningina við inn- og útskúling. Í § 2a er ásett, at: *"Børn og ung í undirvísingarskyldugum aldri skulu fáa tilboð um tvær heilsukanningar hjá antin heilsufrøðingi ella kommunulækna. Tann fyrra kanningin skal verða bjóðað við byrjan av skúlatíð barnsins. Tann seinna kanningin skal verða bjóðað tí unga stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar."*

Sambært landsstýrismanninum skipar Gigni í heyst fyri skeiði, sum skal førleikamenna heilsufrøðingarnar til at gera kanningarnar.

6.4 Heilsutrygd (LG 2015/211-0202)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av Heilsutrygd. Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsutrygd ætlar at broyta roknskaparreglugerðina, nú Gigni er lagt til Heilsutrygd.

Í mai 2016 vóru stórar +/- tímasaldur hjá fleiri starvsfólkum. Landsgrannskoðanin vísti á, at tá ið so nógv fólk áttu tilgóðar ella skyldaðu tímar, kundi roknskapurin ikki sigast at vera rættur.

[20] Ll.nr. 9/2014.
[21] (Løgtingslóg nr. 63 frá 17. mai 2005 um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 30. apríl 2018)

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsutrygd hevur strammað upp fyri at fáa tímasaldurnar at vera innanfyri reglurnar um flextíð, og at saldurnar nú eru munandi minni, enn tær vóru.

Kærumál

Sambært Heilsutrygd fekk ein persónur viðhald frá kærunevndini í almanna- og heilsumálum, at hann ikki skuldi gjalda til Heilsutrygd, tí hann rindaði til norska Folketrygd. Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at nýggjar upplýsingar vóru komnar fram, ið høvdu gjørt, at Heilsutrygd hevði biðið kærunevndina um at taka málið upp til nýggja viðgerð.

Kæra frá persóni sum rindar til norska Folketrygd.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at *"Heilsutrygd hevur heitt á kærunevndina í almanna- og heilsumálum at taka málið upp til nýggja viðgerð, men kærunevndin sýtti fyri uppafturtøku.*

Heilsutrygd hevur sent kæraranum avgerð í málinum. Tó skal viðmerkjast, at fleiri onnur mál eru um heilsutrygdargjald hjá føroyingum, sum rinda til norska Folketrygd. Hesi mál eru ikki endað enn, men Heilsutrygd fer at senda teimum avgerð í næstum."

Heilsutrygd sent kærara avgerð.

Í 2013 eru 1.533 t.kr. settar av til basisgjald til kommunulæknar, ið áður var fryst fast. Sambært skrivi 14. februar 2014 frá Heilsutrygd til Gjaldstovuna var talan um eina hóttandi útreiðslu, ið stovnurin mátti seta av til.

Í juli 2016 greiddi Heilsutrygd frá, at stilling av basisgjaldi til kommunulæknar var í fastari legu til apríl 2011. Tá vóru Kommunulæknafelag Føroya øðrumegin og Heilsutrygd og Heilsumálaráðið hinumegin ósamd um eina serliga stilling av gjaldinum.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hóast eingin endalig semja var gjørd millum Fíggjarmálaráðið og Kommunulæknafelag Føroya um stilling av basisgjaldinum, so var stillingin komin í fasta legu aftur. Ósemja var tó framvegis um eina upphædd, sum stavaði heilt afturí frá 2011. Til semja var funnin, var talan um eina hóttandi útreiðslu.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at eftir sáttmálasamráðingar ímillum Kommunulæknafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið varð semja undirskrivað í mai 2018. Nýggja semjan endaði ósemjuna um basisgjaldið. Avsetingin, sum varð gjørd til basisgjaldið, skal tí afturførast, og verður tað gjørt í 2018.

6.5 Gigni, heilsufrøði til børn og ung (LG 2016/211-0213)

Samanumtikið helt Landsgrannskoðanin í 2017, at roknskapurin hjá Gigni hevði verið merktur av feilum og vánaligari umsiting. Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum tók í november 2017 avgerð um, at Gigni bygnaðarliga fór at verða skipað saman við Heilsutrygd.

6.6 Elveiting, umsiting (LG 2017/211-0321)

Umhvørvisstovan umsitur lógina um elveiting. Í 2016 og 2017 varð játtanin hækkað til serliga orkugoymslukanning í Vestmannaøkinum.

Endamálið við arbeiðinum hjá stovninum er sambært elveitingarlógini[22], saman við SEV, at leggja til rættis og meta um framtíðar tørv á at byggja út ravmagnsframleiðsluverk og -net.

[22] § 11, stk. 3 Í Ll. nr. 59/2007

Endamálið við elveitingareftirlitinum er at tryggja, at elveiting í Føroyum verður løgd til rættis við fyriliti fyri veitingartrygd, samfelagsbúskapi og umhvørvi, og at fremja virkisfýsni í sambandi við framleiðslu av ravmagni, og nýtslu av varandi orkukeldum. Eisini er aðalendamál, at prísurin á ravmagni ikki verður hægri enn neyðugt, og at prísirnir framhaldandi skulu verða eins fyri brúkarar, uttan mun til hvar í Føroyum teir búgva.

Landsgrannskoðanin vísti á vanda fyri ógegni.

Landsgrannskoðanin vísti á, at soleiðis sum deildin Orka hjá Umhvørvisstovuni og Elveiting eru skipað, kann vandi vera fyri, at skilnaður ikki er ímillum, nær starvsfólk hava uppgávuna sum eftirlit, og nær tey t.d. samarbeiða við elveitarar um virkisfýsni í sambandi við framleiðslu av ravmagni og nýtslu av varandi orkukeldum. Ivi kann verða, um tað er heppið, at uppgávurnar liggja á somu deild og partvíst hjá somu starvsfólkum.

Umhvørvisstovan hevur víst á, at arbeiðið á orkudeildini er bæði eftirlit og menning av virkseminum á elveitingarøkinum. Játtanin sambært elveitingarlógini hevur tí øll árini, síðani elveitingareftirlitið varð lagt saman við orkudeildina á Jarðfeingi, verðið nýtt til bæði hesi endamál.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann heldur, *"at tað er viðkomandi, at Landsgrannskoðanin spyr, um tað kann vera ein bági, at elveitingareftirlit og samarbeiði við elveitarar verður útint av somu starvsfólkum. Orkupolitikkur verður ofta sagdur at skula taka trý høvuðsatlit: veitingartrygd, umhvørvi og búskap. Hesi atlit leggur elveitingarlógin eisini upp til. Avbjóðingin er so at velja eina hóskandi javnvág. Tann avbjóðingin er til staðar uttan mun til, hvør umsitur lógina. Hvørt sundurskiljing av umsitingini minkar avbjóðingina, er ilt at meta um. Ein fyrimunur við at hava umsitingina saman, er fakliga umhvørvið. Umhvørvið er lítið og verður tað býtt sundur, kann tað hava neiliga ávirkan á fakligu umsitingina."*

Roknskaparviðurskifti

Kostnaðurin av umsitingini seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
Avgjøld fyri loyvi, løggild. og loyvisbrøv	1.768	1.915	1.799	2.322	3.291

Allar fyritøkur, ið hava fingið framleiðsluloyvi, skulu rinda gjald til fígging av útreiðslunum til umsitingina av elveitingarlógini[23]. Almennar og privatar fyritøkur og kommunur rinda fyri kostnaðin, ið Umhvørvisstovan hevur í tí einstaka málinum[24].

Fimm fólk starvast á deildini Orka, harav tvey burturav verða lønt av Elveiting. Elfeløgini rindaðu tilsamans 3,3 mió.kr. í 2017, harav lønir eru 1,5 mió.kr.

Í 2016 rindaði Elveiting 2/43 av felagsútreiðslum, 322 t.kr., fyri el, hita, KT o.a.; eisini rindaði Elveiting 152 t.kr. av teimum 380 t.kr., tað kostaði at umbyggja hølir.

Sambært Umhvørvisstovuni stóðst meginparturin av umbyggingini av, at orkudeildin varð flutt til Umhvørvisstovuna, og tá ið tvey fólk á orkudeildini fáa løn frá Elveiting, skal Elveiting gjalda sín part, t.e. 2/5 av samlaðu umbyggingini í 2016, sum svarar til 152 t.kr.

Í august 2018 hevur Heilsu- og innlendismálaráðið víst á, at tá ið felags rakstur og umsitingarfólk fevna um fleiri høvuðskontur, eigur tað at verða gjørt upp soleiðis, sum tað er lýst í kontuskipanini undir høvuðsslagi 7. Heilsu- og innlendismálaráðið fer at fylgja við, at mannagongdirnar verða styrktar.

[23] Sambært K.nr. 121/2008 "um gjald fyri umsitingina av elveitingarlógini".
[24] Sambært K.nr. 102/2012 "um gjøld hjá Umhvørvisstovuni fyri umsiting og eftirlit sambært lóggávuni á umhvørvisøkinum".

Keyp og útbjóðing

Elveiting hevur ikki biðið um tilboð frá fleiri, tá ið stovnurin hevur keypt tænastur, t.d. tænastuveiting 62 t.kr, pumpukraftverk 616 t.kr. og goymslukanning 595 t.kr.

Umhvørvisstovan velur vanliga ráðgevar eftir uppgávuslagi, og í summum førum fer rokningin upp um 50 t.kr. Sambært Umhvørvisstovuni bað Elveiting um tilboð frá trimum veitarum til pumpukraftverk í Vestmanna. Tann, sum fekk arbeiðið, bjóðaði 534 t.kr., og tá ið arbeiðið var farið í gongd, vísti tað seg, at partar av dátugrundarlagnum vóru ófullfíggjaðir, tí bleiv prísurin 616 t.kr. Umhvørvisstovan samstarvaði við Dansk Energi um goymslukanningarnar.

Vísandi til reglurnar um at bjóða keyp av vørum og tænastum hjá tí almenna út ímillum fleiri veitarar og til rundskrivið um at taka búskaparlig atlit mælti Landsgrannskoðanin til, at størri keyp verða boðin út.

Landsgrannskoðanin mælir til at bjóða keyp út alment.

Heilsu- og innlendismálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina og fer at taka málið til viðgerðar saman við Umhvørvisstovuni.

Flyting ímillum høvuðskontur

Á einum útgjaldi á 50 t.kr. er viðmerkt, at upphæddin skuldi gjaldast av Orku, men skal nú vegna sparingar gjaldast av Elveiting. Vit vístu á, at tað er ikki heimild at rinda fyri rokning av aðrari høvuðskontu enn kontuni, útreiðslan hoyrir til.

Ikki heimild at flyta ímillum høvuðs-kontur.

Heilsu- og innlendismálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina og fer at taka málið upp við Umhvørvisstovuna. Umhvørvisstovan hevur greitt frá, at fíggjarstýringin á stovninum fer at verða raðfest hægri.

6.7 Ferð á Grøna orku (LG 2017/211-0321)

Játtanin í 2017 er 2 mió.kr. og er ætlað til serlig tiltøk og verkætlanir innan umhvørvi og orku. Orkudeildin hjá Umhvørvisstovuni umsitur játtanina.

500 t.kr. eru settar av til at keypa orkudepilin á Kambsdali. Fróðskaparsetrið fer frameftir at reka og nýta orkudepilin, sum er skrásettur at vera ogn hjá Miðnámi á Kambsdali.

Umhvørvisstovan hevur framt allar bókingarnar fyri 2016 í tíðarskeiðunum 12 og 13, tí stovnurin fekk ræðisrættin á játtanini í desember 2016. M.a. keypti stovnurin seinast í árinum ein bil, eitt sólselluanlegg, orkuloysn til Dugna við Áir, tvey borihol, heima-síðugerð og umbókaði lønir og útreiðslur til biogassverk.

Sambært tekstinum í fíggjarlógini 2016 verður *"ein miðvís ætlan fyri útbygging, umlegging, framleiðslu og nýtslu av varandi orkukeldum raðfest"*.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin vístá, at tað stendur í viðmerkingunum til høvuðskontuna, at: *"Ein miðvís ætlan fyri útbygging, umlegging, framleiðslu og nýtslu av varandi orkukeldum er raðfest."* Landsstýrismaðurin leggur afturat, at tað kundi staðið í hesari viðmerking, at tað er Heilsu- og innlendismálaráðið, ið skal gera ætlanina.

Gjald fyri tænastur, ið ikki eru latnar

Í 2016 rindaði Ferð á grøna orku slakar 160 t.kr. til fyritøku fyri borihol til Búnaðardepilin og til Fiskaaling við Áir. Boriholið til Búnaðardepilin er borað í januar/februar 2017. Eftirlitsdagin í mai 2018 var boriholið til Fiskaaling við Áir enn ikki borað.

Stovnurin rindar fyri keyp, sum ikki er latið.

Í september 2016 fekk Umhvørvisstovan tilboð frá veitaranum um borihol til Búnaðardepilin í Kollafirði, Fiskaaling við Áir og smoltstøð á Hellunum. Veitarin bjóðaði tvey alternativ, t.v.s. trý borihol fyri ávikavist 79.800 kr. og 44.750 kr. fyri hvørt holið.

Boriholini til Fiskaaling og smoltstøðina á Hellunum vórðu av ongum, og Umhvørvisstovan eigur eina royndarboring á hjá veitaranum. Stovnurin hevur ikki tikið støðu til, hvar holið skal borast.

Sambært Umhvørvisstovuni eru boriholini, ið eru goldin av "Ferð á grøna orku", ogn hjá landinum, og fer stovnurin at bóka tey á støðisogn hjá Gjaldstovuni.

Landsgrannskoðanin vísti á, at roknskapirnir 2016 og 2017 hjá Ferð á grøna orku eru skeivir, tá ið 160 t.kr. eru útreiðsluførdar, uttan at nøkur vøra ella tænasta er fingin afturfyri[25]. Eisini undrast vit á, at ein stovnur skal rinda so langt forút fyri eina tænastu.

Landsgrannskoðanin gjørdi vart við, at um ein stovnur av onkrari góðari orsøk rindar forút fyri arbeiði, skal tað vísast greitt í roknskapinum[26]. Umhvørvisstovan vísti á, at stovnurin frameftir fer at bóka forútgjaldingarnar á kontu 0375-0300, ið sambært Gjaldstovuni skal brúkast til endamálið.

Umhvørvisstovan hevur ikki svarað spurninginum frá Landsgrannskoðanini, hvussu hon hevur tryggjað sær, at landið fær latingarnar, goldið er fyri.

Stovnurin hevur eisini goldið einari fyritøku 150 t.kr. í 2017 fyri kunningartilfar um orkuskifti, sum sambært Umhvørvisstovuni er gjørt í 2018.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Umhvørvisstovan hevur greitt frá, at talan var um fortreytir, sum ikki hildu. Heilsu- og innlendismálaráðið hevur biðið Umhvørvisstovuna um at fáa upphæddina afturgoldna, um vøran ikki er latin. Sambært Umhvørvisstovuni varð arbeiðið við kunningartilfari seinkað, og stovnurin hevur boðað frá, at tað frameftir ikki fer at verða goldið frammanundan fyri slíkar veitingar.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur víst Umhvørvisstovuni á, at útreiðslur og inntøkur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, skulu verða skrásettar, tá ið tær eru latnar, samsvarandi reglunum, eins og Umhvørvisstovan er biðin um at fáa hesi viðurskifti á beint.

Keyp og útbjóðing

Í 2016 og 2017 hevur ein KT fyritøka gjørt heimasíðu til "Ferð á grøna orku". Heimasíðan ber navnið Orkuskiftið og er skipað samstarv millum elfelagið SEV og deildina Orka á Umhvørvisstovuni.

Keyp ikki bjóða út almant.

Spurd, hvussu arbeiðið varð boðið út, svaraði Umhvørvisstovan, at arbeiðið varð gjørt í samráði við SEV, og at portalurin er ætlaður at fremja skifti frá olju til varandi orku. Arbeiðið varð ikki boðið út.

Stovnurin bað heldur ikki um tilboð, tá ið hann keypti tænastuna "Frágreiðing um hitapumpur" fyri 50 t.kr.

Biogassverkætlan

Sambært Umhvørvisstovuni er fíggjarliga greiningin av biogassverki gjørd, eftir at samstarv varð tikið upp við Salmon Protein, og valdu partarnir í felag ein veitara til ta uppgávuna. Arbeiðið varð ikki boðið út. Heldur ikki varð biðið um tilboð, tá ið "Ferð á grøna orku" rindaði 535 t.kr. fyri keyp av tænastum til Biogassverkætlanina, m.a. 319 t.kr. til ráðgevarafyritøku.

[25] Sí § 13, stk. 2 í roknskaparkunngerðini.
[26] Sí § 13, stk. 4 í roknskaparkunngerðini.

Stovnurin hevur rindað 198 t.kr. til útlendskan veitara. Sambært Umhvørvisstovuni byrjaði Biogassverkætlanin í 2010, og varð næstan alt arbeiðið gjørt innanhýsis fyrstu 5 árini við ávísari ráðgeving frá veitaranum. Stovnurin hevur ongantíð boðið arbeiðsuppgávurnar út.

Sambært uppgerð frá Umhvørvisstovuni hevur stovnurin goldið 945 t.kr. til Biogassverkætlanina í 2016 og 2017.

Vit spurdu landsstýrismannin, hvussu samlaða peningaupphæddin, ið landið hevur lagt í biogassverkætlanina er skrásett í landsroknskapinum, og um upphæddin er at rokna sum stuðul til privata fyritøku.

Í august 2018 svaraði landsstýrismaðurin, at sambært Umhvørvisstovuni er kostnaðurin skrásettur á vanligan hátt, men hevur ikki fingið serstaka eyðmerking. Støða varð tikin heilt seint í tilgongdini um ognarskap til biogassverkið, og tá vóru flestu útreiðslurnar longu hildnar. Tí er avgjørt ikki talan um stuðul til privata fyritøku.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at hugskotið við biogassverki røkkur langt aftur í tíðina. Fleiri hava umrøtt møguleikan, men mett hevur ikki verið, at grundarlag hevur verið fyri verkinum. Fyri nøkrum árum síðani varð so ein varislig roynd gjørd at meta eitt sindur meira ítøkiliga um tað. Úrslitið vísti, at tað fíggjarliga kundi verða ein avbjóðing, men tá samstundis varð hildið, at eitt slíkt verk kundi verða gagnligt á ymiskan hátt, varð hildið á við kanningunum. Av tí at fíggjarligu útlitini vóru nakað ivasom, var torført at fáa áhugað at leggja orku og pening í kanningarnar, sum máttu gerast.

Landsstýrismaðurin vísir á, at tá ið eitt biogassverk kundi nøkta fleiri samfelagsgagnlig mál (orka, umhvørvi og vinna), varð hildið, at tað almenna átti at fáa staðfest, hvørt tað kundi bera til ella ikki. Um hetta ikki varð gjørt, er ivasamt, um ella nær eitt biogassverk hevði sæð dagsins ljós. Tíbetur eru útlit fyri tí nú. Peningurin og orkan, ið eru brúkt frá almennari síðu, kunnu síggjast sum neyðug íløga, fyri at hetta samfelagsgagnliga verkið innan 1 til 2 ár fer undir sítt virksemi.

Sólselluanlegg

Landið hevur rindað fyri sólselluanlegg, sett upp hjá privatum.

Í desember 2016 rindaði "Ferð á grøna orku" 176 t.kr. fyri sólselluanlegg, sum varð sett upp hjá privatari fyritøku. Í desember 2017 rindaði stovnurin 100 t.kr. fyri at seta anleggið upp. Hvørki keypið ella uppsetingin av anlegginum eru boðin út alment.

Spurd, nær anleggið varð latið, svaraði Umhvørvisstovan, at *"anleggið varð goldið, tá tað var latið okkum. Tannlæknastovan avgreiddi tollin av sólpanelunum og anlegginum. Umhvørvisstovan hevur hjálagt avrit av tollrokningunum."*

Landsgrannskoðanin hevur fingið avrit av nøkrum tollrokningum, sum eru stílaðar til privatu fyritøkuna, men tær vísa ikki til fakturan, ið Umhvørvisstovan hevur goldið til útlendsku fyritøkuna.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsu- og innlendismálaráðið undrast á, at tollrokningar ikki vísa til somu fakturar, ið eru goldnir, og fer tí at biðja Umhvørvisstovuna um at fáa viðurskiftini hesum viðvíkjandi í rættlag.

Í juni 2018 hevur Umhvørvisstovan greitt frá, at tað yvirskipað kann sigast, at í fleiri ár hevur stórur tørvur verið á at gera royndir við sólorku í Føroyum. Privata fyritøkan, ið hevur sólselluanleggið, hevur síðani 2008 verið partur av royndarverkætlanum hjá Umhvørvisstovuni við jarðhita. Eigararnir hava altíð víst stóran áhuga fyri grønari orku, og samstarvið hevur verið fyrimyndarligt í jarðhitaverkætlanini, har tey rindaðu sín part av verkætlanini. Tá ið fyritøkan eisini vísti áhuga fyri sólorkuverkætlanini og vildi gjalda sín part, var tað natúrligt at víðka samstarvið.

Orka skal fylgja við framleiðsluni og deila royndirnar í almenna rúminum, meðan privata fyritøkan eigur elframleiðsluna. Eftir ráðum frá Dansk Energi samráddist Orka við útlendska fyritøku um at lata anleggið, til tey fingu eitt nøktandi produkt. Sambært Umhvørvisstovuni hevur stovnurin goldið 243 t.kr. fyri sólselluverkætlanina og privata fyritøkan hevur goldið 71 t.kr.

Ákontugjald fyri orkuloysn til Dugna við Áir

Í desember 2016 hevur Ferð á grøna orku goldið 420 t.kr. sum ákontugjald fyri orkuloysn til Dugna við Áir.

Landsgrannskoðanin spurdi, hvat goldið er fyri, og nær orkuloysnin er latin. Umhvørvisstovan greiddi frá, at: *"Talan er um orkurenovering av einum bygningi hjá landinum, nevniliga Dugni við Áir, sum í sambandi við umvælingina hevði møguleika at skifta oljufýr út við jarðhitaskipan. Orka og Landsverk gjørdu verkætlan, har Ferð á grøna orku rindaði fyri orkuskipanina. Arbeiðið varð gjørt 2016/2017. Landsverk stóð fyri at bjóða orkuverkætlanina út, og P/f Demich vann. Yvirvakingarskipanin verður eisini førd í støðisogn hjá Gjaldstovuni."*

Veitarin hevur latið orkuloysn til skúlan hjá Dugna við Áir fyri 567 t.kr., harav Ferð á grøna orku hevur rindað 420 t.kr., og Landsverk 147 t.kr. av kontuni "Umvæling av almennum bygningum"; afturat tí rindaði Landsverk m.a. slakar 24 t.kr. fyri projekttilfar. Landsverk hevur avhendað jarðhitaskipanina til Dugna við Áir 3. februar 2017.

Í 2017 rindaði Ferð á grøna orku 78 t.kr. fyri "Yvirvakingarskipan við Áir", viðmerkt *"mátiútgerð til Dugna".* Spurd, hvør eigur skipanina, svaraði Umhvørvisstovan, at orkudeildin eigur ta skipanina.

Landsgrannskoðanin heldur, at Umhvørvisstovan átti at havt greiðar reglur um, hvørjar útreiðslur játtanin "Ferð á grøna orku" skal nýtast til, og at tað gruggar landsroknskapin, tá ið útreiðslur til at umbyggja ein bygning hjá landinum verða spjaddar á fleiri játtanir.

Tað gruggar, at úreiðslur verða spjaddar á fleiri játtanir.

Landsstýrismaðurin tekur undir við, at tað gruggar landsroknskapin, tá ið útreiðslur verða spjaddar á fleiri játtanir, og harmast um, at tað er gjørt soleiðis. Heilsu- og innlendismálaráðið fer at fylgja við, at mannagongdirnar á hesum økjum verða styrktar frameftir. Eingin játtan er longur til kontuna Ferð á grøna orku.

Keyp av útbúnaði

Í 2016 keypti stovnurin ein el-bil fyri 318 t.kr. Sambært Umhvørvisstovuni er talan um ein royndarbil, keyptur sum liður í at "branda" grøna orku, og biðið er ikki um tilboð frá fleiri veitarum. Ferð á grøna orku hevur goldið góðar 50 t.kr. fyri at seta eina løðistøð upp til el-bilar, meðan SEV hevur goldið fyri sjálva støðina. Sambært Umhvørvisstovuni eigur SEV støðina.

Reglurnar um at bjóða keyp út

Umhvørvisstovan veit, at stovnurin eigur at fylgja reglunum um alment útboð, men við atliti at slagi av verkætlan o.ø. hildu tey seg til aðra framferð. Stovnurin leggur afturat, at tey eru rættiliga vís í, at eitt útboð neyvan hevði gjørt stóran mun í prísi.

6.8 Umhvørvisstovan (LG 2017/211-0374)

Í seinastu ársfrágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á fleiri viðurskifti hjá Umhvørvisstovuni, ið ikki vóru nøktandi. Í 2017 hava vit tikið afturíaftur nøkur.

Roknskaparviðurskifti

Í 2017 kunnaði Umhvørvisstovan um, at tey fóru at dagføra og umskriva roknskaparreglugerðina, ið var frá 2014, so hon kundi gerast eitt virkið amboð í bókhalds- og roknskapararbeiðinum. Reglugerðin er ikki dagført.

Roknskaparreglugerðin er enn ikki dagført.

Vit vístu á, at roknskapurin fyri inntøkufíggjaða virksemið var ikki í samsvari við játtanar- og roknskaparreglurnar; m.a. hevði Umhvørvisstovan flutt avlop/hall av inntøkufíggjaða virkseminum til fíggjarstøðuna. Viðgerðin av roknskapinum er tann sama í 2017.

Spurd, um stovnurin hevur eftirlit, sum t.d. eina kontrollarafunktión, svaraði Umhvørvisstovan, at stjórin góðkennir roknskapin, og at deildarleiðarin á Matrikul ger eitt stórt arbeiði í sambandi við roknskapin.

Tilmælið hjá Landsgrannskoðanini um at fylgja roknskaparreglunum stendur við, og vit hava mælt Umhvørvisstovuni til at leggja skjalprógv við øllum bókingum. Eisini mælti Landsgrannskoðanin til, at leiðslan við innanhýsis mannagongdum tryggjar, at eftirlitsumhvørvið á roknskaparøkinum verður styrkt við virknum innaneftirliti, og at eftirlitini verða skjalfest.

Í juni 2018 hevur Umhvørvisstovan greitt frá, at Talgildu Føroyar fara at hava stóra ávirkan á virksemið hjá stovninum, og at tað setir krøv til menning og dagføring av skipanum og mannagongdum. Umhvørvisstovan skal taka sær av rakstrinum, so hvørt talgildingin verður verksett. Tað setir eisini krøv á roknskaparliga økinum.

Higartil hevur Umhvørvisstovan ikki hildið tað verið neyðugt at hava egna fíggjarleiðslu og hevur tí heldur lagt herðslu á fakøkini. Bókhalds- og roknskaparøkið er ikki nóg høgt raðfest, hóast ábøtur eru gjørdar.

Umhvørvisstovan ætlar at raðfesta fíggjarstýringina hægri og at seta ferð á dagføringina av roknskaparreglugerðini. Eisini fer Umhvørvisstovan at skipa eitt starv, sum skal hava dagligu fíggjarligu stýringina í tøttum samstarvi við stjóran. Stovnurin fer at rætta manglarnar viðvíkjandi inntøkufíggjaða virkseminum, tá ið mannagongdir eru gjørdar fyri tað í nýggju roknskaparreglugerðini.

Umhvørvisstovan ætlar at raðfesta fíggjarstýringina hægri.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er eitt stig rætta vegin, at Umhvørvisstovan fer at raðfesta roknskaparøkið hægri. Eitt virkið innaneftirlit er ein fyritreyt fyri, at stjórin kann vátta, at roknskapurin er rættur. Innaneftirlit er eitt tað týdningarmesta amboðið, sum ein leiðsla hevur til at røkka sínum málum. Tað er grundleggjandi neyðugt, at leiðslan átekur sær at hava umsjón við, at innaneftirlitið virkar.

Tað er neyðugt at tryggja, at innaneftirlitið virkar.

Heilsu- og innlendismálaráðið heldur tað verða gott, at Umhvørvisstovan fer at raðfesta fíggjarstýringina hægri, og heldur, at tey viðurskifti, ið Landsgrannskoðanin vísir á, soleiðis eiga at koma á beint.

Konteringar

Sambært rundskrivinum um roknskaparreglugerðir er tað eitt grundleggjandi krav, at stovnur konterar sambært Kontuskipan landsins og eftir konteringarleiðbeiningini, ið hoyrir til. Skeivar konteringar gera, at roknskapurin er ikki rættur, og at gjøgnumskygnið í roknskapinum verður ikki nóg gott.

Skeivar konteringar gera, at roknskapurin er ikki rættur.

Landsgrannskoðanin vísti á nógvar skeivar konteringar. Inntøkur skulu ikki mótbókast útreiðslum. Landsgrannskoðanin heldur, at um stovnurin letur stuðul, skulu upphæddirnar bókast sum stuðul, t.d. undir høvuðsslagi 5 “Flytingarútreiðslur”.

Umhvørvisstovan tekur viðmerkingarnar frá Landsgrannskoðanini til eftirtektar.

Ferðakostnaður og starvsfólkakostnaður

Vit mæla til at gera tænastuferðir upp sambært reglunum.

Tað gongur upp til eitt ár, til starvsfólk gera tænastuferðir innanlands upp. Vit mæltu til at gera upp oftari, t.d. eina ferð um mánaðan, sum reglurnar frá Fíggjarmálaráðnum “um endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum” frá 28. mars 2007 áseta.

Umhvørvisstovan heldur, at talan er um so smáar upphæddir, at tað als ikki er proportionalt at fylgja tilmælinum hjá Landsgrannskoðanini og gera upp eina ferð um mánaðin.

Sambært landsstýrismanninum hevur Heilsu- og innlendismálaráðið givið Umhvørvisstovuni boð um at skipa mannagongd soleiðis, at ásettar reglur verða fylgdar.

Skrásetingar á verkætlanarroknskapum

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2013 vísti Landsgrannskoðanin á, at skrásetingarnar á verkætlanunum vóru ikki nóg neyvar, og at tað forðaði gjøgnumskygni, at roknskapirnir fyri hvørja verkætlan ikki vóru fullfíggjaðir í Búskaparskipan landsins.

Landsstýrismaðurin í innlendismálum segði tá, at Umhvørvisstovan helt, at bókingarnar av verkætlanunum vóru í lagi, men at stovnurin tó fór at endurskoða mannagongdirnar, so skrásetingarnar av flytingunum vórðu neyvari og meira nágreinaðar. Landsstýrismaðurin upplýsti eisini, at mannagongdirnar fóru at verða staðfestar í dagførdu roknskaparreglugerðini.

Skrásetingarnar á inntøkufíggjaða virkseminum enn ikki komnar uppá pláss.

Landsgrannskoðanin staðfesti í 2017, at roknskapurin framvegis ikki var rættur, og at tað gruggaði roknskapin, tá ið mótbókað varð á útreiðslukontum, og bókað varð skeivt í fíggjarstøðuni. Vit mæltu til, at Umhvørvisstovan legði roknskapin til rættis sambært ásetingunum í játtanar- og roknskaparreglunum.

Umhvørvisstovan kunnaði um, at stovnurin hevði hildið fram við siðbundnum roknskaparhátti, sum stovnarnir, sum áður umsótu málsøkini, høvdu uppbygt, og at talan er um virksemi, sum illa hóskar inn í vanliga raksturin.

Í august 2018 hevur Heilsu- og innlendismálaráðið kunnað um, at Umhvørvisstovan hevur broytt nakrar mannagongdir og fer frameftir at styrkja fíggjarstýringina.

Kassaeftirlit hjá Skógrøktini

Í november 2017 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Gróðurstøðini í Hoydølum. Vit mæltu til, at kassin verður gjørdur upp regluliga og bókaður so hvørt í Búskaparskipan landsins.

Sambært Umhvørvisstovuni verður arbeitt við at leggja mannagongdirnar á Gróðurstøðini í fasta legu, herundir handfaringina av kassaskipanini.

7 Almannamál

7.1 Almannamálaráðið (LG 2016/212-0111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin, at Almannamálaráðið bíðaði við at dagføra roknskaparreglugerðina frá 2013, til Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið høvdu dagført reglurnar. Sambært Almannamálaráðnum er reglugerðin ikki dagførd.

Roknskaparreglu-gerðin ikki dagførd.

7.2 Almannaverkið (LG 2017/212-0211)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað fyrisitingini á Almannaverkinum. Almannaverkið veitir sosiala ráðgeving, leiðbeining til einstaklingar, tænastur til borgarar við serligum tørvi og rindar fíggjarligar veitingar. Stovnurin er skipaður við fyrisiting, HR- og stjóraskrivstovu, viðskiftadepli og tveimum trivnaðardeplum, og umsitur eina røð av lógum innan almannaøkið.

Roknskapartøl seinastu 5 árini fyri høvuðskontu 12.21.1.02, undirkontu 20:

t.kr.

Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
Lønir	34.178	37.251	37.572	41.703	43.054
Keyp av vørum og tænastum	6.951	8.660	6.669	7.776	7.747
Keyp av útbúnaði	562	947	824	2.037	2.659
Leiga, viðlíkahald, skattur o.a.	3.852	3.642	3.549	4.130	3.828
Søla av vørum og tænastum	-	-	-	-32	-193
Innanh. flyt. ml. alm. stovnar (netto)	-1.163	-8.979	-6.897	-9.530	-11.109
Flyting frá kommunum til landið	-	-	-250	-	-
Tilsamans	**44.380**	**41.521**	**41.467**	**46.084**	**45.986**
Nettojáttan	44.079	41.387	41.331	45.765	45.444

Almannaverkið hevur havt meirnýtslu øll árini, men játtanin á høvuðskontuni hevur hildið. Almannaverkið fær endurgjald fyri fyrisitingarútreiðslur frá m.ø. Trivnaðartænastum; tann upphæddin er bókað sum "Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar, inntøkur".

Fyrisitingargjald frá Trivnaðartænastum

Trivnaðartænastur rinda Almannaverkinum endurgjald fyri fyrisitingarútreiðslur o.a.:

t.kr.

	2014	2015	2016	2017
Fyrisitingargjald o.a.	4.374	4.519	9.189	10.302

Í fyrisitingarbygninginum húsast stovnar við trimum ymiskum játtanum, t.e. Almannaverkið, Trivnaðardepilin og Endurmenning. Allar fyrisitingarútreiðslurnar verða bókaðar á játtanina hjá Almannaverkinum á høvuðskontu 12.21.1.02.

Sambært Almannaverkinum er ikki samsvar millum fíggjarlógina og bygnaðarliga býtið á stovninum, og tí verða millumrokningar gjørdar. Almannaverkið hevur sett ynski fram um at broyta uppsetingina í fíggjarlógini, men tað er ikki gingið á møti.

Almannaverkið roknar fyrisitingargjaldið út eftir einum býtislykli, sum sambært stovninum er ein samanrenning av ymiskum viðurskiftum við útgangsstøði í 2012 og eftir, hvar útreiðslurnar í gamla Nærverkinum vórðu bókaðar. Reguleringar eru gjørdar seinni. Almannaverkið heldur, at býtislykilin gevur eina rættvísandi mynd av veruligu útreiðslunum. Býtislykilin verður javnaður hvørt ár, tá ið samráðingar eru millum Almannaverkið og Trivnaðartænastur um býtið av útreiðslunum.

Umráðandi, at býtið av útreiðslunum er gjøgnumskygt.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er umráðandi, at býtið av útreiðslunum er gjøgnumskygt, og mælti Almannaverkinum til at skjalfesta neyvt, hvussu tey eru komin til býtislykilin.

Almannamálaráðið hevur givið Almannaverkinum boð um, at frameftir skal stovnurin skjalfesta, hvussu komið er fram til býtislykilin.

Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin hjá stovninum er frá 2010. Almannaverkið hevur bíðað við at gera nýggja roknskaparreglugerð, tí Gjaldstovan hevur arbeitt við at gera nýtt roknskaparrundskriv. Almannaverkið heldur, at galdandi vegleiðing hóskar ikki til ein samansettan stovn, sum Almannaverkið.

Í august 2018 hevur Almannamálaráðið boðað frá, at meginparturin av arbeiðinum við at dagføra roknskaparreglugerðina er komið undir land. Almannaverkið væntar at írestandi arbeiðið verður liðugt í oktober 2018.

Starvsfólk kanna lønir og aðrar útreiðslur og gjøgnumganga kekklista, áðrenn stjórin góðkennir mánaðarroknskapir mótvegis Almannamálaráðnum.

Ferðauppgerðir ikki nøktandi útfyltar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað nakrar uppgerðir fyri ferðir uttanlands. Í tveimum førum vóru uppgerðirnar ikki nøktandi útfyltar. Sambært Almannaverkinum hava tey í november 2017 gjørt vegleiðing um ferðauppgerðir og átak, fyri at uppgerðirnar verða rætt útfyltar.

Almannaverkið rindar húsaleigu fyri 4 leigumál. Landsgrannskoðanin hevur kannað, at goldna leigan er sambært leigusáttmálunum. Einki var at finnast at.

Keyp av vørum og tænastum

Sambært Almannaverkinum halda tey seg til rundskrivið “um keyp av vørum og tænastum”. Keyp, størri enn 500 t.kr., verða boðin út á Keypsportalinum, og annars verður biðið um tilboð frá minst tveimum veitarum. Størri keyp verða viðgjørd á leiðslufundum.

Biðið var ikki um tilboð uppá diskar.

Boðaði ikki Keyps-portalinum frá.

Almannaverkið hevur keypt 2 diskar til móttøkuna fyri slakar 80 t.kr. Stovnurin bað ikki um tilboð, tí útleigarin av bygninginum hevði sett sum treyt, at ávísur snikkari gjørdi diskarnar, og at arbeiðið harumframt hevði skund. Landsgrannskoðanin vísti á, at um diskarnir eru ogn hjá Almannaverkinum, frítaka nevndu orsøkir ikki stovnin at biðja um tilboð.

Almannaverkið er ikki samt við okkum. Stovnurin vísir á, at diskarnir eru ikki at rokna sum leysafæ, og at tað er skilagott at fylgja ásetingunum frá útleigara í sambandi við, at hølir verða broytt, fyri at útleigarin ikki skal seta krøv um, at hølini skulu setast í upprunastand. Sambært Almannaverkinum teknaði veitarin diskin, og um stovnurin skuldi biðið um tilboð, máttu møguligir tilboðsgevarar fingið somu treytir, t.v.s. at tað hevði verðið neyðugt at biðið onkran tekna diskarnar, og tað hevði dýrkað keypið munandi.

Landsstýrismaðurin hevur víst á at sambært punkt 6 í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum er heimild fyri at lata vera við at bjóða keyp út, um mett verður, at kostnaðurin av útbjóðing verður ov stórur í mun til væntaða sparing. Sambært landsstýrismanninum boðaði Almannaverkið tíverri ikki keypsportalinum frá, sum rundskrivið ásetur.

Matstova
Almannaverkið hevur egna matstovu. Í 2016 svaraðu gjøldini fyri at keypa mat til kostnaðin av at reka matarskipanina.

Í 2017 eru útreiðslurnar til keyp av vørum til matstovuna 134 t.kr. størri enn inntøkurnar. Sambært Almannaverkinum er orsøkin m.a., at ávísir byrjunartrupulleikar vóru í sambandi við flytingina, at matstovan hevði ikki verið mannað, og at maturin tí varð keyptur uttaníframá.

Lønir
Landsgrannskoðanin kannaði nøkur starvsfólkamál, við støði í lønarútgjaldingini mars 2017. Einki var at finnast at.

Almannaverkið brúkar reglurnar hjá Fíggjarmálaráðnum, tá ið stovnurin setir fólk í starv. Samanumtikið mælti Landsgrannskoðanin til, at øll viðkomandi skjøl verða goymd í starvsfólkamálum, t.e. lýsing, umsókn, prógv, setanarbræv, umflokkingar og onnur skjøl sum skjalfesta setanar- og lønarviðurskiftini.

Stovnurin ger vanliga ikki fráfaringaravtalur, men tað er komið fyri. Ein avtala varð gjørd í 2016. Almannaverkið heldur, at um tað eru trupul mál, kann tað verða bíligari fyri stovnin at gera fráfaringaravtalu.

Fleiri starvsfólk høvdu størri tímasaldur enn loyvt.

Starvsfólkini skráseta arbeiðstíðina í TotalView og kunnu eiga ella skylda upp til 20 tímar. Uppgerðin við ársenda 2017 vísti, at 40 av 115 starvsfólkum høvdu størri saldur, enn innanhýsis reglurnar áseta. Landsgrannskoðanin helt tað vera í meira lagi.

Almannaverkið hevur kunnað um, at tímasaldurnar eru minkaðar nógv síðani, og at tað javnan verður heitt á leiðararnar um at halda eyga við teimum.

Peningastovnskontur
Almannaverkið hevur tvær peningastovnskontur, sum fyri tað mesta verða brúktar til lógarbundin útgjøld um VFS-skipanina[27]. Sambært Almannaverkinum minka útgjøldini av peningastovnskontunum, so hvørt sum útgjøld verða flutt yvir í KT-heildarskipanina. Ætlanin var, at tíðliga í 2018 skuldu øll útgjøld um nýggju skipanina, og harvið um útgjaldsskipanina hjá Gjaldstovuni.

Ognaryvirlit
Almannaverkið hevði ikki dagført yvirlit yvir ognir, og ognirnar vóru ikki skrásettar í Búskaparskipan landsins. Almannaverkið hevur samskift við Gjaldstovuna um at fáa ognirnar skrásettar í Búskaparskipan landsins og hevur sett fram ynski um, at tey kunnu skráseta ognirnar sjálvi. Síðani eftirlitið hevur Almannaverkið boðað frá, at tey hava gjørt yvirlit yvir ognirnar.

Journal
Almannaverkið hevur útgreinaðan journalplan og reglur um, hvat skal skrásetast. Stovnurin journaliserar fyrisitingarligt samskifti í journalskipanini 360 og borgara-journalir í ScanJour. ScanJour verður tikin úr nýtslu, og Almannaverkið fer at nýta KT-heildarskipanina í staðin.

[27] Viðskiftafólkaskipanin.

KT viðurskifti

KT-heildarskipanin væntandi latin í 2018.

Fyri stuttum tók Almannaverkið KT-heildarskipanina, sum hevur stóran týdning fyri stovnin og landið sum heild, í nýtslu. KT-heildarskipanin verður væntandi latin Almannaverkinum í 2018. Skipanin skal avgreiða veitingarnar, sum Almannaverkið umsitur. VFS-skipanin er harvið um at verða útfasað og fer í eina tíð at virka sum søguligur dátugrunnur. Allar dáturnar skulu flytast í nýggju skipanina. Almannaverkið eigur skipanina, ið er ment til stovnin.

Almannaverkið nýtir eisini aðrar KT skipanir, m.a. 360, ScanJour, Sharepoint, Búskaparskipan landsins og TotalView. Teldurnar hava samband við alnetið gjøgnum KT Landsins. Felagsskipanirnar í KT Landsins og KT-heildarskipanini fylgja trygdartiltøkunum hjá KT Landsins. Ambætararnir standa á Elektron, og Føroya Tele umsitur infrakervið.

Dáturnar eru sambært stovninum klassifiseraðar eftir leisti frá Gjaldstovuni. Almannaverkið hevur gjøgnumgingið og klassifiserað yvirlit yvir servarar frá Landsneti. Landsgrannskoðanin mælti til at leggja dagføringina av klassifiseringunum í fasta legu.

Almannaverkið hevur gjørt váðameting av øllum skipanunum, men er ikki komið á mál við uppgávuni at lýsa, hvussu váðarnir skulu handfarast. Landsgrannskoðanin mælti til, at váðametingin verður gjørd liðug, og at dagføringin verður løgd í fasta legu.

Stovnurin hevur KT trygdarpolitikk og KT handbók. KT handbókin liggur á intranetinum. Stovnurin fer at taka eina Sharepoint loysn í nýtslu, har starvsfólk skulu kvitta fyri, at tey hava lisið KT trygdarpolitikkin.

Allar gerðir verða loggaðar.

Persónsupplýsingar verða viðgjørdar í KT-heildarskipanini, og øll starvsfólk hava, sum útgangsstøði, atgongd til allar upplýsingar í skipanini. Leiðslan hevur kunnað starvsfólkini um, at allar gerðir verða loggaðar, og at starvsfólk hava ikki loyvi at finna fram upplýsingar, sum ikki eru neyðugar fyri teirra arbeiði.

Sambært landsstýrismanninum verða formligar mannagongdir um, hvussu stakroyndir skulu takast av, hvør hyggur eftir hvørjum upplýsingum, væntandi innbygdar í KT-heildarskipanina.

Sambært Almannaverkinum verður fylgt upp, at starvsfólk, sum ikki longur eru í starvi, verða strikaði sum brúkarar.

Almannaverkið hevur ikki roynt at endurskapa dátur frá trygdaravritum av KT-heildarskipanini í síni heild, men bert av einstøkum fílum. Almannaverkið hevur ikki formligar mannagongdir um tilbúgving. Stovnurin hevur havt eina einstaka hending, sum varð avgreidd og skjalfest.

Mæla til at gera mannagongd um tilbúgving.

Landsgrannskoðanin mælti til, at mannagongd verður gjørd um tilbúgving. Sambært Almannaverkinum er arbeiðið við tilbúgving nú sett á skrá.

Almannaverkið kunnaði um, at tey halda seg til rundskrivið um burturbeining av telduútbúnaði. Samanumtikið sigur Almannaverkið seg í stóran mun liva upp til ásetingarnar í ISO 27001 KT standardinum.

7.3 Stuðulsjáttanir, § 12 Almannamál (LG 2017/212-0211)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina av stuðulsjáttanunum. Endamálið var at kanna, hvussu Almannamálaráðið umsitur játtanirnar, og um ásetingar um eftirlit og grannskoðan verða hildnar.

16 stuðulsmóttakarar skuldu lata inn grannskoðaðan roknskap áðrenn 1. apríl, men bert 6 høvdu latið roknskap inn rættstundis. Almannamálaráðið hevði í juni 2017 ikki fingið allar roknskapirnar, og onkur var enn fyribilsroknskapur.

Ikki øll lata inn roknskap til tíðina.

Landsgrannskoðanin fekk avrit av flestu roknskapunum. Vit halda, at tað er ikki nøktandi, at ásettu tíðarfreistirnar ikki verða hildnar.

Almannamálaráðið er samt við Landsgrannskoðanini, at stuðuslmóttakarar lata roknskapin ov seint inn. Ráðið hevur átalað teir fyri ikki at halda tíðarfreistina, og nógvir hava svarað, at neyðug stig verða tikin, soleiðis at freistin verður hildin frá komandi ári.

Almannamálaráðið hevur gjørt reglugerðir fyri flestu stuðulsjáttanirnar. Reglugerðirnar hava nærum somu ásetingar um fíggjarætlan, roknskap, grannskoðan og hagtøl. Stuðulsmóttakarar skulu lata ráðnum fíggjarætlan fyri komandi tvey fíggjarár, samstundis sum ársroknskapurin fyri undanfarna ár verður latin inn.

Roknskapirnir luku ikki krøvini um “at innihalda frágreiðing um virksemi”, sum eru ásett í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan. Almannamálaráðið heldur, at vegleiðing manglar frá Fíggjarmálaráðnum um, hvat skal standa í frágreiðingini. Fleiri av feløgunum gera ársfrágreiðing, og notur í roknskapinum vísa ofta, hvat stuðulin verður nýttur til.

Roknskapirnir lúka ikki sett krøv.

Almannamálaráðið tekur tó viðmerkingina frá Landsgrannskoðanini til eftirtektar og fer at heita á feløgini um at syrgja fyri, at roknskapir framhaldandi skulu innihalda serstaka frágreiðing um, hvussu stuðulin verður nýttur.

Sambært kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan skal roknskapurin, um ikki aðrar reglur eru galdandi, grannskoðast av góðkendum grannskoðara og grannskoðanin skal verða framd sambært reglunum í § 22, stk. 2, nr. 1-7. Tann ásetingin merkir m.a., at roknskapurin skal grannskoðast sambært góðum grannskoðanarsiði, at grannskoðarin skal føra grannskoðanarprotokoll, og at roknskapurin fær eina átekning, sum vísir, at roknskapurin er grannskoðaður sambært reglunum í kunngerðini.

Tað er ikki í samsvari við ásettu reglurnar, at fleiri av roknskapunum ikki vóru grannskoðaðir, tó at grannskoðarin hevði gjørt víðkaða gjøgnumgongd ella hevði hjálpt við at seta roknskapin upp.

Í ongum føri vísti átekningin, at roknskapurin var grannskoðaður sambært reglunum í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan. Í flestu førum verður víst til góðan roknskaparsið, samsvarandi ársroknskaparlógini e.l.

Eingin roknskapur hevði átekning um at roknskapurin var grannskoðaður eftir kunngerðini.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at sambært § 22, stk. 2, nr. 6 í kunngerðini skal grannskoðaði roknskapurin fáa eina átekning, sum vísir, at hann er grannskoðaður sambært reglunum í kunngerðini.

Almannamálaráðið tekur til eftirtektar, at tað ikki er nøktandi at vísa til aðrar reglur og fer at seta feløgum krav um, at roknskapirnir skulu grannskoðast samsvarandi kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Í reglugerðunum er eisini ásett, at stuðulsmóttakarin skal veita Almannamálaráðnum hagtøl. Ráðið hevur fingið hagtøl frá teimum flestu, men eingin almenn frágreiðing er

Eingin almenn frágreiðing um hagtøl.

gjørd um hagtølini. Sambært ráðnum áliggur tað ikki nøkur skylda at framleiða almennar hagtalsfrágreiðingar. Almannamálaráðið metir tí, at tað hevur týdning, at hagtøl verða fingin til vega á hvørjum ári, og at frágreiðingar verða gjørdar fyri útvald ár.

Almannamálaráðið fer at seta øllum feløgum krøv um grannskoðan sambært kunngerðini.

Í august 2017 tekur Almannamálaráðið til eftirtektar, at tað ikki er nøktandi at grannskoða roknskap sambært roknskaparlógini, altjóða standardum e.t. og fer at seta øllum feløgum krav um, at roknskapirnir skulu grannskoðast samsvarandi kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

7.4 Barnapeningur veittur í forskoti (LG 2015/212-0213)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av barnapeningi, m.a. innheinting av barnagjøldum móttikin av órøttum. Í august 2016 var eftirstøðan 445 t.kr. Almannaverkið krevur eftirstøðuna inn, og tey roknaðu við, at meginparturin fór ikki at verða goldin.

Innheintingin kundi virka betur.

Landsstýrismaðurin ásannaði, at innheintingin kundi virka betur. Almannaverkið var farið at endurskoða mannagongdirnar og samskifti við TAKS og Almannamálaráðið um møguleikan, at TAKS heintar inn krøvini. Til tað krevst lógarbroyting.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 41/2016) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at endurskoða lógina um barnagjald, soleiðis at innkrevjingin virkar betur.

Heimild átti at verðið veitt TAKS at heinta inn.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at hóast tað var óvist, hvussu nógv veruliga kundi krevjast inn, helt Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verða veitt TAKS at fremja innheintingina, tá ið ikki bar til at fáa gjaldsavtalu við gjaldskylduga.

Fyrireikingar vóru farnar í gongd til møguligar lógarbroytingar. Sambært landsstýrismanninum varð arbeiðið gjørt í samráð við TAKS og Almannaverkið.

7.5 Einkjubarnastyrkur (LG 2014/212-0213)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av umsitingini av játtanini til einkjubarnastyrk.

Ásetingarnar um einkjubarnastyrk eru í §§ 15-19 í Ll. nr. 71/1996 og fevna um gjøld til børn, hvørs faðirskapur ikki er staðfestur og til børn, har annað ella bæði foreldrini ikki eru á lívi. Landsstýrismaðurin hevur heimild at áseta nærri reglur um fyrisitingina av lógini. Landsstýrismaðurin hevði ikki ásett nærri reglur, tí tørvur hevði ikki verið at áseta tær.

Sambært § 21, stk. 2 í lógini skal barnagjald, sum umsøkjari hevur móttikið av órøttum, gjaldast aftur. Tað framgongur ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja gjaldið aftur.

Almannaverkið átti at styrkt um eftirlitið.

Landsgrannskoðanin vísti á, at við hesum í huga átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skal forða fyri, at barnagjald verður móttikið av órøttum.

Viðvíkjandi reglum um innkrevjing av útgjøldum, helt Almannamálaráðið tað vera neyðugt at umrøða málið nærri saman við TAKS og Almannaverkinum.

7.6 Barnaískoyti (LG 2015/212-0213)

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at ivi er um innheintingarheimildirnar hjá Almannaverkinum. Sambært § 21, stk. 2 í Ll. nr. 71/1996[28] skal tann, sum hevur móttikið barnaískoyti móti betri vitan, gjalda upphæddina aftur. Tað framgongur ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja peningin aftur.

Í uppskoti til samtyktar (Lm. nr. 41/2016) mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at fylgja málinum upp.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hóast tað er óvist, hvussu nógv gjøld, ið eru móttikin av órøttum og ímóti betri vitan, veruliga kunnu krevjast inn, metti Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verðið veitt TAKS at fremja innheintingina, tá ið tað ikki bar til at fáa í lag gjaldsavtalu við gjaldskylduga.

Heimild átti at verðið veitt TAKS at heinta inn.

Fyrireikingar vóru farnar í gongd til møguligar lógarbroytingar. Sambært landsstýrismanninum varð arbeiðið gjørt í samráði við TAKS og Almannaverkið.

Í august 2018 hevur Almannamálaráðið greitt frá, at fundur hevur verið um málið ímillum TAKS, Almannaverkið og Almannamálaráðið. Eingin niðurstøða er gjørd enn, tí talan er m.a. um fíggjarlig, teknisk og løgfrøðilig atlit, sum støða skal takast til.

7.7 Kassaeftirlit á eindum undir barnavernd (LG 2016/212-0213)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin ófráboðað kassaeftirlit av forskotskassum hjá eindum undir Barnaheiminum. Landsgrannskoðanin hevði stemmað kassarnar av við Búskaparskipan landsins, og kassamunir vóru í øllum kassunum.

Í august 2017 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almannaverkið fór at taka neyðug stig til at rætta mannagongdirnar.

Í august 2018 hevur Almannamálaráðið boðað frá, at Almannaverkið hevur reglulig átøk at minka um kassamunir. Mannagongdir fyri umsiting av kassunum verða endurskoðaðar í sambandi við dagføring av roknskaparreglugerðini.

Reglulig átøk fyri at minka um kassamunir.

7.8 Dagpeningur vegna sjúku v.m. (LG 2014/212-0214)

Í seinastu frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av dagpeningaskipanini.

Almannaverkið skrásetir krøvini, sum skulu krevjast inn frá arbeiðsgevarum fyri tveir teir fyrstu sjúkradagarnar hjá løntakarum, í KT-heildarskipanini. Sambært § 20 í dagpeningalógini skal TAKS krevja peningin inn, og TAKS hevur heimild at panta eftir reglunum í skattalógini. TAKS skrásetti eftirstøðuna í landsroknskapin saman við øðrum krøvum. Mannagongdin gjørdi, at Almannaverkið ikki hevði yvirlit yvir útistandandi pening.

Almannaverkið ætlaði at gera mannagongdir fyri, hvussu inntøkur skrásettar í Búskaparskipan landsins verða stemmaðar av ímóti teimum krøvum, sum eru send TAKS. Almannaverkið ætlaði eisini at gera mannagongdir fyri avskrivað krøv soleiðis, at samsvar var ímillum TAKS og Almannaverkið.

[28] um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.

Í august 2017 segði landsstýrismaðurin, at Almannaverkið og TAKS høvdu havt fund í juni, har tey høvdu avtalað eina mannagongd viðvíkjandi avstemman av krøvum, sum eru send TAKS.

Í august 2018 hevur Almannamálaráðið boðað frá, at einki er hent í málinum síðani fundin við TAKS í juni 2017.

7.9 Kassaeftirlit á verkstøðum og verkhúsum (LG 2016/212-0216)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin nøkur ófráboðað kassaeftirlit á verkstøðum og verkhúsum undir Almannaverkinum.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Almannaverkið fór at taka neyðug stig til at rætta uppá mannagongdirnar fyri at minka um møguligar kassamunir í sambandi við umsitingina av forskotskassum og øðrum kassum, har ímillum bóking og uppgerð av kassunum, og nær reiður peningur verður settur í banka.

Almannaverkið hevur gjørt nýggjar skrivligar mannagongdir viðvíkjandi umsiting av forskotskassum á verkstøðum, galdandi frá 1. mai 2018.

Gávukontan er nú strikað.

Um tilmælið frá Landsgrannskoðanini um at strika gávukontu í fíggjarstøðuni, tí hon er landsroknskapinum óviðkomandi, segði landsstýrismaðurin, at Almannaverkið ikki var komið á mál hesum viðvíkjandi. Málið fór at verða tikið uppaftur, soleiðis at kontan varð strikað í fíggjarstøðuni.

Sambært Almannamálaráðnum er gávukontan strikað í fíggjarstøðuni í januar 2018.

7.10 Almannaverkið, Trivnaðartænastan (LG 2016/212-216)

Í seinastu frágreiðing greiddi Landsgrannskoðanin frá grannskoðan av Trivnaðareind 4 hjá Almannaverkinum. Trivnaðartænasturnar virka yvirskipað við heimild í forsorgarlógini. Arbeiðið er lagt til rættis við kunngerðum, rundskrivum og vegleiðingum.

Sambýli og bústovnar

Forsorgarlógin er broytt gjøgnum tíðirnar. Í 2013 varð heimildin at skipa bústovnar sambært § 16 broytt, og § 27 um bú- og viðgerðarstovnar varð sett í lógina. § 27 heimilar at veita persónum við ávísum brekum ella víðfevndum sosialum trupulleikum tilboð á bú- og viðgerðarstovnum og á stovnslíknandi fyriskipanum. Um einki nøktandi tilboð kann veitast í Føroyum, kann persónur fáa tilboð uttanlands.

Í § 32 er heimild at veita persónum, ið bera ávís brek ella hava víðfevndar sosialar trupulleikar, vardan bústað, eisini nevnd sambýli.

Sambært § 16, stk. 2 í forsorgarlógini ásetir landsstýrismaðurin "*nærri reglur um trygdarfyriskipanir á nevndu stovnum og skyldu at veita hesi tilboð til persónar,*

1. *sum sambært rættarúrskurði skulu sinniskannast,*
2. *sum sambært rættarúrskurði ella dómi skulu setast í vardan bústað ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settir í vardan bústað, ella*
3. *sum treyt fyri ákæruafturtøku ella royndarleysgeving verða settir í vardan bústað, ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settir í vardan bústað."*

Eingin kunngerð var lýst sambært § 16, stk. 2.

Átrokandi at gera reglur.

Almannaverkið helt tað vera átrokandi, at reglur vórðu gjørdar viðvíkjandi trygdarfyriskipanum í vardum bústøðum og viðvíkjandi skyldu at veita tilboð til persónar, sum verða dømdir at vera undir eftirliti av Almannaverkinum ella at verða settir í vardan bústað.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Almannamálaráðið var í holt við at gera nýggja lóggávu um almannahjálp, tænastur, rættartrygd og tvingsil. Landsstýrismaðurin ætlaði at leggja lógaruppskotið fyri Løgtingið í tingsetuni, og at lóggávan skuldi fáa virknað frá 1. januar 2019.

Sambært landsstýrismanninum var endamálið við nýggju lóggávuni m.a. at tryggja rættindini hjá borgarum, sum bera brek. Í sambandi við nýggju lóggávuna fóru kunngerðir, heimilaðar í verandi forsorgarlóg, at verða endurskoðaðar, eins og nýggjar kunngerðir skuldu orðast.

Í august 2018 hevur Almannamálaráðið greitt frá, at nýggj lóggáva er í løtuni til hoyringar, og lógaruppskotið verður væntandi lagt fyri Løgtingið seinni í ár. Tá ið lógin er samtykt, verður farið undir arbeiðið við at endurskoða kunngerðir og orða nýggjar kunngerðir.

Skipan av bústovnum

Áðrenn 2013 vórðu bústovnar skipaðir eftir kunngerð, sum hevði heimild í § 16, stk. 2 og 3 í forsorgarlógini. Í 2013 varð § 16 orðað av nýggjum, og § 27 sett í lógina. Landsstýrismaðurin skuldi sambært stk. 5 áseta nærri reglur um virksemi, upptøku og gjald, og um treytir fyri at veita tilboð uttanlands. Eingin kunngerð var lýst. Almannaverkið helt tað vera átrokandi, at reglur vórðu ásettar.

Kunngerðin frá 2005 um bústovnar hevði heimild í tágaldandi reglum í § 16, stk. 2 í lóg "um skipan av bústovnum". Íbúgvarnir á bústovnunum bera víttfevnandi brek, og sambært Almannaverkinum fylgir stovnurin kunngerðini, tó at hon treingir til dagføringar.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at umskipanin av bústovnum til sambýli hekk ikki saman við broytingum í forsorgarlógini, men saman við at løgtingslóg um uppihald á stovni varð sett úr gildi. Broytingar eru síðani gjørdar í forsorgarlógini. Sambært landsstýrismanninum vórðu verandi kunngerðir ikki dagførdar, men nýggjar kunngerðir fóru at verða settar í gildi samstundis, sum nýggj lóggáva varð sett í gildi.

Nýggj lóggáva til hoyringar.

Nýggj lóggáva er til hoyringar. Tá ið lógin er samtykt, verður farið undir arbeiðið at endurskoða kunngerðir og orða nýggjar kunngerðir.

Sambýli/vardir bústaðir

Sambýli vóru eisini skipað eftir kunngerð frá 2005, sum hevði heimild í tágaldandi § 32, stk. 2 í lógini og eftir rundskrivi "um skipan av sambýlum" frá 1. januar 2009. Eftir at kunngerðin kom í gildi, er § 32 í forsorgarlógini umskipað, soleiðis at heitið í dag er vardir bústaðir.

Umskipanin hevði eisini við sær, at heimildin hjá landsstýrismanninum at áseta reglur um upptøku, leigurættindi, virksemi og gjøld er í § 32, stk. 3. Enn er eingin nýggj kunngerð lýst, og kunngerðin frá 2005 og rundskrivið frá 2009 hava enn gildi.

Munandi bygnaðarbroytingar eru framdar í Almannaverkinum, og eisini er ábyrgdarbýtið broytt, síðani reglurnar komu í gildi. Sambýlini eru komin undir leiðslu av Almannaverkinum, men ábyrgdin av eftirlitinum og kærumyndugleikin eru ikki formliga ásett í kunngerð ella rundskrivi.

Nærverkið, sum ikki er til longur sum stovnur, er nevnt fleiri ferðir í rundskrivinum. Nærverkið skuldi hava eftirlit við sambýlum og skipa fyri grannskoðan av felagskontum

í minsta lagi eina ferð um árið. Einstaka húsfólkið hevði rætt til innlit í felags fíggjarviðurskiftini hjá sambýli og kundi kæra um tey til Nærverkið. Í broytta bygnaðinum var ikki leiðari á hvørjum sambýli.

Reglur um eftirlønarskyldu ásettar í nýggju lóggávuni.

Í august 2017 ásannaði Almannamálaráðið, at tað vóru ikki nóg nágreiniligar ásetingar um eftirlitsskyldu í verandi regluverki, og at kunngerðirnar vóru ikki dagførdar samsvarandi samanleggingunum av stovnum o.ø. Sambært landsstýrismanninum fóru reglur um eftirlit at verða settar í nýggju lóggávuna, soleiðis at tað bleiv greitt, hvør hevði eftirlitsskylduna, og hvat eftirlitið skuldi fevna um. Kærumøguleikar fóru eisini at verða í nýggju lóggávuni.

Landsstýrismaðurin skuldi góðkenna nýstovnað sambýli og stovn, ið varð umskipaður til sambýli. Spurt, nær stovnarnir í eind 4 vóru góðkendir, svaraði Almannaverkið, at sambýli o.l. vórðu góðkend antin við reglugerð ella við virksemislýsing, sum landsstýrismaðurin skuldi góðkenna.

Sambært Almannaverkinum høvdu fleiri sambýli í eind 4 onga reglugerð. Almannamálaráðið hevði góðkent virksemisætlan fyri Íslandsveg og reglugerð fyri Bóndaheyg. Stoffalág hevði góðkenda virksemisætlan, umframt at uppskot til reglugerð var gjørt og skuldi sendast ráðnum at góðkenna. Almannamálaráðið hevði ábyrgd av, at reglugerðir vórðu gjørdar fyri øll sambýlini.

Í august 2018 hevur Almannamálaráðið greitt frá, at Almannaverkið hevur sent ráðnum uppskot til reglugerðir fyri trý sambýli undir eind 4 í Vágum.

Felagskonta

Felagskontan skal sambært rundskrivi brúkast til fastar útreiðslur, størri rokningar v.m. Fýra av fimm stovnum í eind 4 høvdu felags peningastovnskontur, sum búfólk rindaðu inn á. Peningurin varð brúktur til gerandiskeyp hjá sambýlunum.

Í august 2017 segði landsstýrismaðurin, at hann var samdur við Landsgrannskoðanina, at rundskrivið í fleiri førum var ógreitt, og at átrokandi var at dagføra tað.

Sambært Almannamálaráðnum verður farið undir at endurskoða og orða nýggjar kunngerðir, tá ið nýggj lóggáva er komin í gildi.

Stovnarnir skulu føra roknskap fyri alla nýtslu av felagskontunum. Vit vístu á, at tað var ymiskt, hvussu felagskonturnar vórðu umsitnar, og ikki allir roknskapir vóru komnir aftur frá grannskoðarunum, heldur ikki fyri undanfarna ár. Umsitingin av og eftirlitið við felagskontunum hevði ikki verið nøktandi. Almannaverkið arbeiddi saman við Gjaldstovuni við at fáa umsitingina av felagskontunum inn í Búskaparskipan landsins.

Felagskassar verða nú umsitnir í Búskaparskipan andsins.

Í august 2018 hevur Almannamálaráðið kunnað um, at allir felagskassar verða nú umsitnir umvegis Búskaparskipan landsins.

Roknskaparreglugerð

Almannaverkið kunnaði um, at arbeitt hevði verið við at fáa eina felags roknskaparreglugerð fyri alt virksemið hjá Almannaverkinum. Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Almannaverkið hevði bíðað við at gera endaligt uppskot til roknskaparreglugerð, til nýggja roknskaparrundskrivið hjá Fíggjarmálaráðnum var sett í gildi.

Sambært Almannamálaráðnum er meginparturin av arbeiðinum við at dagføra roknskaparreglugerðina komið undir land.

Ognaryvirlit

Eingin stovnur hevði ognaryvirlit, men síðani vit vóru á vitjan, hava stovnarnir tikið stig til at gera yvirlit. Bilarnar hjá tveimum stovnum í eind 4 vóru ikki merktir. Sambært

Almannaverkinum ynsktu tey ikki at stigmatisera búfólkini, sum kunnu vera niður í 14 ára aldur. Sambært landsstýrismanninum fóru allar ognir hjá Almannaverkinum at verða skrásettar í næstum, og Almannaverkið fór at søkja Akstovuna um undantak at merkja bilarnar.

Í august 2018 hevur Almannamálaráðið kunnað um, at Almannaverkið hevur søkt Akstovuna um undantak fyri merking. Av tí at tað vóru fleiri umsóknir av hesum slag frá Almannaverkinum, boðaði Akstovan í februar 2018 frá, at stovnurin hevði biðið Fíggjarmálaráðið um vegleiðing í mun til rundskrivið. Almannaverkið bíðar framvegis eftir svari frá Akstovuni.

Almannaverkið hevur gjørt eitt fullfíggjað ognaryvirlit yvir bygningar og akfør. Í juni 2018 eru skrásetingarskjøl send til Gjaldstovuna at skráseta.

Lønargrannskoðan, eind 4

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur lønarmál hjá eind 4 fyri at sanna, um útgoldnu lønirnar vóru rættar, og at almenni setanarpolitikkurin var fylgdur.

Plantímar og meirtímar

Trivnaðartænastan brúkti VaktPlan at skráseta arbeiðsvaktir, feriur, avspákingar v.m. Flestu starvsfólkini arbeiddu tað, tey áttu at arbeiða yvir eina rullandi vaktætlan. Nøkur starvsfólk høvdu arbeitt meira, enn vaktætlanin álegði, og Almannaverkið rindaði meirtímarnar sambært avtalu við einstaka starvsfólkið.

Almannaverkið miðaði eftir at halda reglurnar um hvílutíð. Í ávísum førum vóru uppgávurnar tó so samansettar, at bert ávís starvsfólk kundu og vildu átaka sær tær. Stovnurin arbeiddi áhaldandi við at loysa avbjóðingina.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at málið, um at tryggja at reglurnar um hvílutíð, meirtíð og úrtíð vórðu hildnar, fór at verða tikið upp við eindarleiðslurnar.

Almannaverkið var samt við Landsgrannskoðanina, at meirtíð er tann tíðin, sum ein parttíðarsettur arbeiðir meira enn egnan brøk og upp til fulla tíð, og at fulltíðarsett starvsfólk, sum arbeiða meira enn fulla tíð, høvdu rætt til yvirtíð, eisini um tey sjálvboðin arbeiddu meira. Tað var gomul siðvenja ella skipan millum starvsfólk og arbeiðsgevara, at sama tímaløn varð goldin fyri vanligar tímar og yvirtímar. Landsgrannskoðanin ivaðist í, um siðvenjan var í tráð við galdandi sáttmálar.

Fulltíðarsett starvsfólk arbeiða meira uttan at fáa yvirtíð.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at einki var hent í málinum, síðani Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum í 2011 greiddi frá, at tað var ikki heilt í tráð við ásetingarnar í sáttmálunum, men tað var ein fyrimunur fyri bæði arbeiðsgevara og lønmóttakara. Almannamálaráðið skuldi taka málið upp við Fíggjarmálaráðið.

Í august 2018 hevur Almannamálaráðið víst á, at talan er um gamla siðvenju. Samband hevur verið ímillum Fíggjarmálaráðið, Almannamálaráðið og Almannaverkið, men málið er ikki komið uppá pláss.

Málið um rættin til yvirtíð ikki loyst enn.

Eftirløn

Landsgrannskoðanin vísti á, at umsitingin av eftirlønargjaldi av meirtíð, yvirtíð og tímaløn varð ógreið. Sambært Almannaverkinum varð eftirlønin útgoldin ymiskt, tí sáttmálarnir vóru ymiskir.

Okkara stakroyndir vístu, at mánaðarløntu starvsfólkini vanliga ikki rindaðu bundið eftirlønargjald av eykatímum, men tá ið somu starvsfólk tóku vaktir á øðrum stovnum fyri tímaløn, rindaðu tey bundið eftirlønargjald av tímaløninni.

Tá ið Almannaverkið rindaði yvirtíð til fastlønt saman við føstu lønini, rindaðu starvsfólk ikki bundna eftirløn av yvirtíðini. Varð yvirtíðin goldin fyri seg, varð bundna eftirlønargjaldið afturhildið av lønini. Sambært Almannaverkinum kundi eingin løn gjaldast út, uttan at eftirløn varð goldin, antin sambært sáttmála ella sambært lógini um bundna eftirløn.

Í august 2018 hevur Almannamálaráðið kunnað um, at Almannaverkið hevur spurt seg fyri á Gjaldstovuni, hví lógarkravda eftirlønargjaldið bara við hvørt verður kravt, og hevur fingið upplýst, at tað er tí, at skipanin sjálvvirkandi eftirkannar, um tað verður rindað eitt eftirlønargjald, sum í minsta lagi svarar til bundna eftirlønargjaldið.

Um leysir tímar, yvirtímar o.a. verður útgoldið saman við vanligu mánaðarlønini, so er tað sáttmálaásetta eftirlønargjaldið so mikið stórur partur, at tað er rúm fyri, at leysir tímar o.a. fara við, uttan at tað er neyðugt at krevja bundið eftirlønargjald fyri hesar tímar.

Um leysir tímar, yvirtímar o.a. hinvegin verða útgoldnir fyri seg í serstakari lønarkoyring, so verður bundið eftirlønargjald rindað sjálvvirkandi í lønarskipanini á Gjaldstovuni.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Almannaverkið eftirkannaði starvsfólkamálini og møguliga dagførdi tey. Í minsta lagi átti Almannaverkið at havt skjalprógv fyri, at starvsfólk hava ta útbúgving, ið er fyritreyt fyri starvinum. Sambært Almannaverkinum fóru fysisku arkivini at verða gjøgnumgingin, og málini løgd í talgildu skipanirnar.

Eingin orka til at gjøgnumganga øll mál.

Í august 2018 hevur Almannamálaráðið greitt frá, at innskanningin av fysisku málunum er komin væl áleiðis. Skjalprógv fyri útbúgvingum verða skrásett í øllum nýggjum starvsfólkamálum. Higartil hevur Almannaverkið ikki havt orku til at gjøgnumganga øll gomul mál.

7.11 Vanlig forsorg (LG 2014/212-0217)

Síðani nítiárini hava skiftandi landsstýrismenn í almannamálum boðað frá, at teir arbeiddu við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggávan fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti.

Fyrsta stigið í broytingunum var skipanin við hjálparráðum frá 2010. Annað stigið var lógin um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum kom í gildi í 2013. Tá vantaði at endurskoða ásetingarnar um fyribils og varandi hjálp, um tilboð til børn, sum bera brek, og um tilboð til eldri og vaksin við serligum tørvi.

Í oktober 2013 ásannaði landsstýrismaðurin, at forsorgarlóggávan átti ikki at vera savnað í einari einstakari lóg, og broytti tí upprunaligu verkætlanina. Yvirskipað var ætlanin at gera nýggja lóggávu um uppihaldsveitingar og nýggja lóggávu um tænastur. Tær skuldu, sum frá leið, avloysa verandi forsorgarlóg.

Í apríl 2015 setti landsstýrismaðurin ein arbeiðsbólk at orða tænastupolitikk, sum skuldi vera grundarsteinurin undir nýggjari tænastulóg. Lógin skuldi betra innihaldið í tænastunum og rættartrygdina hjá borgarum við serligum avbjóðingum, ið hava tørv á tænastum. Miðað varð eftir at náa á mál í august 2015, men arbeiðið steðgaði, tá ið val varð skrivað út.

Í juni 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at miðað varð eftir at fáa tænastupolitikkin lidnan á sumri 2016. Gekst sum ætlað, fór landsstýrismaðurin at leggja fram uppskot um nýggja tænastulóg fyri Løgtingið tíðliga í 2017. Tænastulógin skuldi eftir ætlan

verða ein nýggj høvuðslóg, sum kom í staðin fyri ásetingarnar í forsorgarlógini um tænastur, sum t.d. stuðulsfólkaskipanin og bútilboð.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at tilmæli um tænastupolitikk hevði verið til aðalorðaskifti í Tinginum. Arbeiðsætlan fyri lógaruppskotið var gjørd.

Í august 2018 hevur Almannamálaráðið boðað frá, at nýggj lóggáva er til hoyringar, og lógaruppskotið verður væntandi lagt fyri Løgtingið seinni í ár.

7.12 Arbeiðsfremjandi tiltøk (LG 2017/212-0217)

Vit hava grannskoðað "Arbeiðsfremjandi tiltøk" á høvuðskontu 12.21.7.02. Vit kannaðu, hvussu Almannaverkið grundgevur og skjalprógvar avgerðir, og um útgjøldini eru røtt.

Heimild at veita lønarískoyti er í Ll. nr. 63/2012 "um arbeiðsfremjandi tiltøk". Endamálið við lógini er at stuðla undir eitt virkið arbeiðslív hjá persónum, sum hava ella kunnu fáa trupulleikar við at varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

Tillagað starv §§ 21-23

Eftir at lógin kom í gildi, verða ikki fleiri "vard størv" játtað eftir §18 í forsorgarlógini. Verandi størv halda tó fram sambært gomlu reglunum. Eftir nýggju lógini verða málini viðgjørd undir heitinum "tillagað starv". Í 2017 høvdu 186 borgarar hesa fyriskipan, av teimum vóru 171 enn í skipanini.

Treytirnar fyri at fáa lønarískoyti til tillagað starv eru ásettar í § 21, stk. 1-6 í lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk. Almannaverkið metir, um treytirnar eru loknar, og skal samsvarandi tí gera avtalu við arbeiðsgevara um løn, arbeiðstíð, arbeiðsuppgávur, lønarískoyti og møgulig serlig atlit í hesum sambandi.

Málsgrannskoðan

Við stakroyndum kannaðu vit nøkur mál, um treytirnar í § 21 og annars aðrar treytir í §§ 22-23 vóru loknar. Vit gjøgnumgingu málsviðgerðirnar og útgjøldini. Í einum máli kannaðu vit bert útgjaldspartin.

Landsgrannskoðanin hevði ongar týðandi viðmerkingar til málsviðgerðirnar. Eingin arbeiðstíð var avtalað í málunum. Almannaverkið ásannar, at tann parturin hevur haltað, serliga við gomlu sáttmálunum, men tað verður broytt frameftir.

Í nøkrum málum var eingin formlig frágreiðing frá arbeiðsgevara um, hvørjar broytingar vóru farnar fram. Almannaverkið hevur greitt frá, at tað er ein stór avbjóðing og ein eyka arbeiðsbyrða fyri arbeiðsgevaran at skula liva upp til ov stór formlig krøv, og tí samskiftir Almannaverkið heldur við arbeiðsgevarar um støðuna hjá borgarunum og um, hvussu arbeiðið skal skipast.

Eftirlitið var ikki nóg neyvt.

Nakrir feilir vóru í útgjøldum, serliga eru tað feilir í rokningum frá arbeiðsgevarum. Landsgrannskoðanin heldur, at eftirlitið hevur ikki verið nóg neyvt. Sambært Almannaverkinum er nýggj mannagongd sett í verk 1. januar 2018, og fer lønarískoytið at verða goldið út, eftir at arbeiðsgevarin hevur goldið lønina. Tað hevur við sær, at lønarískoytið verður javnað mánaðarliga. Almannaverkið heldur, at hendan skipanin minkar um vandan fyri, at líknandi feilir henda.

Avklárandi fyriskipan

Sambært § 9, stk. 4 er avklárandi fyriskipan[29] ein fyritreyt fyri at seta fyriskipan sambært § 9, stk. 1, nr. 1, 2 ella 3 í verk, t.v.s., tá fær ein ikki tillagað starv.

[29] Avklárandi fyriskipan er arbeiðsroynd á einum arbeiðsplássi ella eitt skúlatiltak.

Í einum føri hevði Almannaverkið játtað bæði avklárandi skipan og tillagað starv. Avklárandi fyriskipanin varð játtað fyri at meta um arbeiðsevnini, til tess at Almannaverkið kundi áseta brøkin í tillagaða starvinum.

Sambært viðmerkingunum til lógina er endamálið m.a. at fáa greiði á, hvat arbeiði ein persónur megnar, fyri at Almannaverkið kann taka støð til, um viðkomandi:

- kann átaka sær arbeiði uttan fyriskipanir,
- kann fara í arbeiðsvenjing ella undir yrkisútbúgving innan arbeiðsøkið,
- kann fara í gongd við ávísa ástøðiliga útbúgving, ella
- hevur tørv á øðrum fyriskipanum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at § 9 er ætlað til at útvega borgarum neyðugar førleikar til at koma í arbeiði, heldur enn at áseta lønarískoyti.

Almannaverkið hevur tulkað orðingina *"hevur tørv á øðrum fyriskipanum"* soleiðis, at talan eisini kann verða um tillagað starv ella møguliga fyritíðarpensjón. Um hesin møguleikin ikki verður nýttur, fara fleiri arbeiðsgevarar sambært Almannaverkinum at sýta fyri at taka persón í tillagað starv, tí vandi er fyri at persónurin ikki megnar at arbeiða avtalaða brøkin, og at kostnaðurin tískil gerst ov høgur fyri arbeiðsgevaran.

Ivasamt um tað er rætt at brúka avklárandi fyriskipan til at áseta lønarískoyti.

Landsgrannskoðanin skilir grundgevingarnar hjá Almannaverkinum, og at stovnurin hevur tørv á amboðum at áseta lønarískoyti. Landsgrannskoðanin ivast tó í, um tað er rætt at brúka avklárandi fyriskipan til at áseta lønarískoyti. Um avklárandi fyriskipan verður brúkt til at áseta lønarískoyti, so er avgerðin um, hvørja fyriskipan viðkomandi skal hava, tikin, áðrenn avklárandi fyriskipan er roynd.

Landsstýrismaðurin heldur, at umsitingin er nøktandi.

Landsstýrismaðurin heldur at galdandi lógaráseting í § 9, stk. 1, nr. 5 (og § 9, stk. 4) er nøktandi, soleiðis sum hon verður umsitin.

Lønarískoyti til frítíðarløn og lønargjøld

Áðrenn lógarbroytingina 1. januar 2018 var ásetingin í § 22, stk. 1, at lønarískoyti sambært § 21 í mesta lagi kundi vera hægsta dagpeningaveiting, frítíðarløn ikki íroknað, og fevndi tað ikki um eftirlønargjald.

Sambært okkara stakroyndum er lønarískoyti eisini rindað fyri frítíðarløn og lønargjøld, t.d. ALS og barsilsgjald.

Almannaverkið hevur boðað frá, at sambært galdandi lóggávu verða øll gjøld, sum arbeiðsgevari rindar, eisini rindað av Almannaverkinum, t.v.s. arbeiðsmarknaðargjøld, frítíðarløn og frítíðarískoyti. Lønarískoyti verður ikki latið fyri eftirløn, tí tann avmarkingin er beinleiðis ásett í lógini.

Landsgrannskoðanin ivast í, um § 22, stk.1 í lógini, sum var galdandi áðrenn broytingina 1. januar 2018, heimilar at rinda lønarískoyti til frítíðarløn og lønargjøld.

Heimildin er nú greið.

Landsstýrismaðurin hevur svarað, at skipanin við tillagaðum størvum, sum var galdandi til 1. januar 2018, var umsitingarliga tung, bæði fyri arbeiðsgevara og Almannaverkið. Lógin var heldur ikki greið í mun til heimildina hjá Almannaverkinum at rinda frítíðarløn og lønargjøld av lønarískoytinum. M.a. tað var orsøk til, at lógin varð broytt við gildi frá 1. januar 2018, og sostatt er galdandi heimild nú greið.

Avtalað løn sambært § 24

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur mál viðvíkjandi løn, sum arbeiðstakari kann avtala við fyritíðarpensjónistar, og sum er lægri enn sáttmálalønin.

Avtalað løn er ein serlig arbeiðsfyriskipan, ætlað fyritíðarpensjónistum á vanliga arbeiðsmarknaðinum, tá ið mett verður, at restarbeiðsevnini ikki standa mát við vanligu

treytirnar á arbeiðsmarknaðinum. Talan er ikki um útreiðslu fyri landskassan, tí arbeiðsgevarin rindar alla lønina.

Skipanin heimilar at áseta løn, ið er lægri enn sáttmálaásett løn, treytað av at talan er um fyrifallandi arbeiði í mesta lagi 15 tímar um vikuna. Avtalan skal gerast í samráði við viðkomandi fakfelag, herundir arbeiðstreytir og arbeiðstíð. Almannaverkið skal vátta, at persónurin er fyritíðarpensjónistur.

Almannaverkið nágreinar ikki uppgávurnar skrivliga, og í flestu førum eru bert vikutímatal og tíðarskeið ásett. Sambært KT-heildarskipanini var eingin avtala gjørd í samráði við fakfelag. Landsgrannskoðanin mælti til, at uppgávurnar verða betur nágreinaðar, og at avtalurnar verða gjørdar í samráði við avvarandi fakfeløg, sum ásett í reglunum.

Sambært Almannaverkinum kann tað vera torført at nágreina uppgávurnar, tí arbeiðsgevarar eru ikki altíð heilt greiðir yvir, hvat teir hava tørv á. Almannaverkið er farið undir at fáa uppgávurnar nágreinaðar betur í ymisku sáttmálunum, herundir avtalað løn.

Tá ið um avtalur við fakfeløg ræður, er leikluturin hjá Almannaverkinum at vegleiða arbeiðsgevarar um innihaldið í skipanini og um, at teir skulu seta seg í samband við avvarandi fakfelag.

Spurt, hvussu Almannaverkið tryggjar, at arbeiðið er fyrifallandi, svaraði stovnurin, at tey vegleiða og ráðgeva arbeiðsgevarum um fyritreytirnar fyri hesari áseting. Tað kann vera torført at nágreina, hvørjar uppgávur talan er um, og tað kann vera ymiskt frá arbeiðsplássi til arbeiðspláss, hvørjar uppgávur fólk verða sett at røkja. Meginreglan er, at tá ið arbeiðsgevari ikki annars hevði sett fólk í starv, so er talan um fyrifallandi uppgávur. Almannaverkið leggur dent á atlitið at ásetingini um at geva fyritíðarpensjónistum størri lívsinnihald við at fáa tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

Ivi um heimild til royndartíð uttan løn.

Fýra av teimum málunum, Landsgrannskoðanin kannaði, snúðu seg um persónar í starvi í royndartíð, uttan løn. Landsgrannskoðanin ivast í, um heimild er fyri tí í fyriskipanini.

Sambært Almannaverkinum er royndartíðin komin í lag, tí bæði arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar siga seg hava tørv á einum tíðarskeiði at royna, um tað er ein fyriskipan, sum er gagnlig fyri báðar partar. Tað er arbeiðsgevarin, sum í samráði við avvarðandi fakfelag ger avtalu við løntakaran.

Almannamálaráðið vísir á, at í viðmerkingunum til § 24, stk. 3 stendur, at *"umframt avtalu um løn hevur arbeiðsgevari skyldu til eisini at gera avtalu við viðkomandi fyritíðarpensjónist um arbeiðstreytir annars, harundir arbeiðstíðina við tímatali o.ø."* Almannaverkið er ikki partur av avtaluni – avtalan er eitt millumverandi millum arbeiðsgevaran og fyritíðarpensjónistin í samráði við avvarðandi fakfelag. Almannaverkið skal vátta, at viðkomandi er fyritíðarpensjónistur. Almannaverkið hjálpir tó eisini fyritíðarpensjónistum at finna arbeiðsgevara og hjálpir til við samskiftinum ímillum arbeiðsgevara og pensjónist ella avvarðandi.

Viðvíkjandi spurninginum um heimild er leikluturin hjá Almannaverkinum at vátta, at viðkomandi er fyritíðarpensjónistur, og at veita ráð og vegleiðing. Almannaverkið tekur ikki støðu til ta løn, sum partarnir koma ásamt um.

Fakfeløg eiga at verða kunnað.

Tá ið ásett er í lógini, at avtala skal gerast í samráði við viðkomandi fakfelag, heldur Landsgrannskoðanin tað vera umráðandi, at fakfeløg verða kunnað í hvørjum einstøkum føri.

Landsstýrismaðurin er samdur við Landsgrannskoðanina, at tað hevur týdning, at fakfeløg verða kunnað í hvørjum einstøkum føri. Men lógin fyriheldur seg ikki til, hvør hevur ábyrgd av at kunna fakfelagið í sambandi við eina avtalu. Landsstýrismaðurin fer at taka málið upp við Almannaverkið, soleiðis at fakfeløgini á ein smidligan hátt verða kunnað um einstøku avtalurnar.

Yrkisútbúgving og arbeiðsvenjing

Sambært § 9, stk. 1 í lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk kann Almannaverkið veita stuðul til m.a. yrkisútbúgving og arbeiðsvenjing. Í § 14, stk. 1 er ásett, at stuðul kann veitast soleiðis:

1. Til yrkisútbúgving verður lønarískoyti veitt til løn til lærling.
2. Til persón í yrkisútbúgving, sum er forsyrgjari ella farin upp um vanligan útbúgvingaraldur, verður lønarískoyti veitt til minstuløn sambært sáttmála á viðkomandi arbeiðsøki.
3. Til arbeiðsvenjing verður lønarískoyti veitt til minstuløn sambært sáttmála á viðkomandi arbeiðsøki.

Til nr. 1 og 3 kann lønarískoyti vera upp til 80% av ásettu lønini alt eftir arbeiðstarninum hjá persóni, jb. § 14, stk. 2. Ískoytið kann tó vera 100%, um arbeiðsgevari økir sítt starvsfólkatal fyri at seta persón við umfatandi skerdum arbeiðsevnum, jb. stk. 3.

Lønarískoyti til nr. 2 fevnir harumframt um eina upphædd, sum svarar til munin ímillum lærlingaløn og minstuløn sambært sáttmála á viðkomandi arbeiðsøki, jb. stk. 4.

Málsgrannskoðan, yrkisútbúgving[30]

Til nærri grannskoðan valdu vit nøkur mál viðvíkjandi yrkisútbúgving og nøkur viðvíkjandi arbeiðsvenjing. Vit kannaðu m.a.:

- um persónurin hevði rætt til fyriskipanina sambært § 8,
- hvussu avgerð er tikin um val av fyriskipan sambært § 10,
- um persónurin hevur eina fyriskipanarætlan, og um hon er fylgd upp sambært § 11,
- um lønarískoytið er rætt ásett sambært § 14, og
- um sáttmáli er millum Almannaverkið og arbeiðsgevara sambært § 15.

Sum heild eru málini væl lýst. Landsgrannskoðanin mælti til, at metti arbeiðsførleikin verður ásettur av arbeiðsbúgvingarfundinum ella heimildarpersóni, og at tað verður skjalfest í málinum. Almannaverkið tekur undir við tilmælinum og sigur, at tað eisini verður gjørt í stóran mun. Sambært Almannaverkinum er strammað upp viðvíkjandi uppfylging og skjalfesting av uppfylgingum.

Spurt, svaraði Almannaverkið, at arbeiðsgevarar skulu tryggja, at lønirnar eru rættar, og stovnurin skal tryggja, at lønarískoytið er í samsvari við sáttmálan ímillum arbeiðsgevaran, borgaran og Almannaverkið.

Ikki samsvar við § 14 sum sigur, at grundarlag fyri ískoyti er lærlingaløn ella minstaløn.

Í einum máli var ivi um, hvørt starvið var rætt flokkað. Almannaverkið hevði ikki aðrar viðmerkingar enn, at avtalan var gjørd ímillum Yrkisdepilin og arbeiðsgevaran. Landsgrannskoðanin er samd í, at stovnurin ikki kann gera av, hvussu kommunur og Yrkisdepilin avtala lønarflokkingar. Landsgrannskoðanin heldur tó, at tað samsvarar ikki við § 14, sum greitt tilskilar, at grundarlagið fyri lønarískoytinum er lærlingaløn ella minstaløn sambært viðkomandi sáttmála.

Landsgrannskoðanin vísti á, at rindar arbeiðsgevari hægri løn, kann Almannaverkið bert rinda lønarískoyti, grundað á eina løn, sum viðkomandi hevur rætt til. Vit mæltu til, at Almannaverkið tryggjar sær, at lønin, sum lønarískoytið er grundað á, er sambært røttum sáttmála, flokki og stigi, áðrenn sáttmáli um lønarískoyti til yrkisútbúgving verður settur í verk.

[30] Góðkendar lærlingaútbúgvingar sambært Ll. nr. 94/1998 “um yrkisútbúgvingar”.

Aðrar viðmerkingar
Til persón, ið er farin upp um vanligan útbúgvingaraldur, heimilar lógin lønarískoyti upp til minstuløn á viðkomandi arbeiðsøki.

Tað er ikki nágreiniliga lýst, hvørki í lógini ella í viðmerkingunum, hvat ein vanligur útbúgvingaraldur er. Almannaverkið brúkar tí regluna í § 13, stk. 1, nr. 3 "um førleikagevandi útbúgving" sum tulkingargrundarlag, t.v.s., at persónar undir 25 ár fáa ikki lønarískoyti.

Sambært § 33, stk. 4 í Ll. nr. 94/1998 "um yrkisútbúgvingar" endurrindar landskassin arbeiðsplássinum 75% av lærlingaløninni, meðan lærlingurin tekur tilhoyrandi skúlagongd. Sambært viðmerkingunum til lógina skal arbeiðsgevarin ikki hava lønarískoyti fyri tann partin av lærlingaløninni, sum verður endurrindaður av Yrkisdeplinum.

Málsgrannskoðan, arbeiðsvenjing
Sambært viðmerkingunum til lógina er arbeiðsvenjing, tá ið avtala verður gjørd við arbeiðsgevara um, at persónur ígjøgnum arbeiði fær ment sín arbeiðsførleika við upplæring á arbeiðsplássi. Fyriskipanin kann vanliga ikki vara longur enn eitt ár.

Sum heild eru málini viðvíkjandi arbeiðsvenjing væl lýst, tó manglaði neyv áseting av arbeiðsførleika í onkrum máli, og í tveimum førum var lønarískoytið skeivt.

Vit mæltu til, at arbeiðsbúgvingarfundurin, sum játtar arbeiðsvenjingina, eisini skuldi áseta mettan arbeiðsførleika. Almannaverkið sigur at mannagongdin hevur verið nýtt higartil, men stovnurin hevur nú strammað upp við at upplýsa betur í avgerðarskrivum.

Mæla til neyvari eftirlit og at tryggja rætta løn.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til neyvari eftirlit við rokningum. Mælt verður eisini til at tryggja, at borgarin fær løn eftir røttum sáttmála, flokki og stigi, tá sáttmáli verður undirskrivaður millum Almannaverkið, arbeiðsgevaran og borgaran.

8 Uttanríkis- og vinnumál

8.1 Uttanríkis- og vinnumálaráðið (LG 2016/213-0111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin m.a. tímaskráseting hjá starvsfólkum í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Ráðið arbeiddi tá við at bøta um mannagongdina.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur í august 2018 boðað frá, at ráðið hevur arbeitt miðvíst fyri, at allar saldur eru innanfyri ásettu mørkini, umframt at feria verður greidd í feriuárinum.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2016 (Lm.nr. 62/2017) átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at stovnar ikki hildu reglurnar um ferðauppgerðir fyri tænastuferðir uttanlands.

Ferðauppgerðir fara at verða gjørdar talgilt.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísst á, at mannagongdin fyri ferðauppgerðir er broytt grundleggjandi, tí ferðauppgerðirnar eru vorðnar talgildar. Starvsfólk skulu sjálvi tøppa inn í skipanina og viðhefta útreiðsluskjøl. Áherðsla verður eisini løgd á, at starvsfólkini skulu viðhefta skránna fyri fundin v.m. Uttanríkis- og vinnumálaráðið er farið í holt við at dagføra roknskaparreglugerðina.

8.2 Kunngerðir o.a. til vinnufelagalógina (LG 2014/206-0111)

Í seinastu frágreiðingunum hava vit umrøtt "nýggju" vinnufelagalógina, Ll. nr. 73/2011 "um parta- og smápartafeløg", sum kom í gildi 1. januar 2012.

Hesar kunngerðir eru í gildi:

- K.nr. 109/2017 um lán o.a. til útlendsk móðurfeløg.
- K.nr. 107/2017 um útloysingarskyldu og útloysingarrætt tilboðsgevaranna í sambandi við eitt yvirtøkutilboð.
- K.nr. 106/2017 um treytir hjá kapitalfeløgum í sambandi við skráseting av umbýtiligum skuldarbrøvum í einari virðisbrævamiðstøð.
- K.nr. 18/2012 um skiftisskipanir í sambandi við gildiskomu av vinnufelagalógini.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at uppskot til kunngerð um fráboðan, skráseting, avgreiðslugjald og almannakunngerð v.m. hjá Skráseting Føroya (Fráboðanarkunngerðin), og uppskot til kunngerð um starvsfólkaumboð í parta- og smápartafeløgum eru gjørd, og hava verið til ummælis. Uppskotini verða løgd fyri landsstýrið í næstum, og kunngerðirnar verða síðani settar í gildi.

Í álitinum til Lm. nr. 42/2010 mælti Vinnunevndin til, at ein føroysk vegleiðing varð gjørd til lógina. Nevndin helt tað vera umráðandi at gera eina greiða vegleiðing til eina so

týðandi lóggávu sum hesa, ið ávirkar øll parta- og smápartafeløg, soleiðis at lætt og ómaksleyst var hjá øllum at skilja galdandi reglur. Vinnunevndin helt, at ein vegleiðing hevði lætt um hjá komandi íverksetarum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið upplýsti í 2015, at fyrimyndin til nýggju lógina var danska selskabsloven. Erhvervsstyrelsen hevði gjørt 32 vegleiðingar til donsku lógina; harav nakrar heilt drúgvar. Ráðið hevði tikið spurningin upp við Skráseting Føroya um at gera vegleiðingar til vinnufelagalógina.

Ráðið hevur ikki orku til at týða vegleiðingar.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevði ikki orku at fara undir arbeiðið at umseta vegleiðingarnar. Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at tað er ein røð av vegleiðingum til donsku selskabsloven, sum liggja á heimasíðuni hjá Erhvervsstyrelsen. Ráðið/Skráseting Føroya hava ikki orku til at umseta alt hetta rúgvismikla tilfarið.

Eigarapolitikkur landsins

Frágreiðing og tilmæli til eigarapolitikk loksins handað landsstýrismanninum.

Í august 2017 greiddi Uttanríkis- og vinnumálaráðið frá, at embætisbólkurin, sum gjørdi uppskot til eigarapolitikk landsins, var um at vera liðugur við arbeiði sítt, og at frágreiðing og tilmæli eftir ætlan fóru at verða handað landsstýrismanninum á heysti 2017.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum er embætisbólkurin liðugur við arbeiðið og hevur handað landsstýrismanninum frágreiðing og tilmæli. Frágreiðing og tilmæli verða løgd fyri Løgtingið nú í heyst.

8.3 Stuðulsjáttanir, § 13 Uttanríkis- og vinnumál (LG 2016/213-0111)

Landsstýrismaðurin greiddi í 2017 frá, at ráðið kannaði, hví upphæddin til IMO í 2015 var hægri enn hini árini, og hví eykarokning var komin viðvíkjandi NASCO.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at ráðið er ikki liðugt við eftirkanningarnar av millumtjóða limagjøldunum.

Rakstrarútreiðslur

Allur flytingarkostnaður, undantikin tann fyri NORA, var bókaður á stuðulsjáttanina. Landsgrannskoðanin vísti á, at útreiðslurnar av at flyta pening fyri limagjøldini er ein rakstrarútreiðsla, sum átti at verið hildin av ráðnum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur tað vera rætta mannagongd at bóka peningastovnskostnaðin á stuðulsjáttanina, tí meginreglan er, at útreiðslur skulu bókast “har tær hoyra heima”. Hetta er tað, sum stuðulsjáttanirnar kosta landinum, og tað eigur at vera gjøgnumskygt.

Játtanarslag

Sambært játtanarlógini verður rakstrarjáttan brúkt, tá ið endamálið við játtanini fyrst og fremst verður rokkið við virksemi, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslurnar í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur og tænastur.

Sambært fíggjarlógini fevna uttanríkismál undir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum um millumtjóða samstarv. Limaskapur í millumtjóða samstarvi kann tískil metast sum ein partur av virkseminum hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, og endamálið við játtanini verður rokkið við m.a. limaskapi í millumtjóða felagsskapum. Útreiðslurnar av at vera í millumtjóða samstarvi kunnu samanberast við aðrar rakstrarútreiðslur, tí tær standast av virkseminum hjá stovninum.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið boðað frá, at ráðið fer at taka málið upp við Fíggjarmálaráðið.

Stuðul til ferðavinnu

Kunngerðin um stuðul til ferðavinnufeløg, sum upprunaliga hevði heimild í lógini um Ferðaráð Føroya, var ikki galdandi fyri nýstovnaða partafelagið. Stuðulsumsitingin í partafelagnum var ikki undirløgd almennum reglum.

K. nr. 125/2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan er galdandi fyri játtanirnar, men umsitingin lá uttan fyri myndugleikan. Í Búskaparskipan landsins var stjórin á P/f Visit Faroe Islands stovnsleiðari og hevði heimild at gjalda út av høvuðskontu 13.38.5.05. "Marknaðarføra Føroyar" og 13.38.5.03. "Limagjald NATA". Stjórin var ikki í starvi hjá myndugleikanum og røkti tískil ikki eina myndugleikauppgávu.

Heimildin fyri at lata stuðulin var ikki greið. Av tí at umsitingin og avgerðin um at lata stuðul framvegis lá hjá P/f Visit Faroe Islands, og at stjórin í felagnum var skrásettur stovnsleiðari í Búskaparskipan landsins, var fyrisitingin og avgerðarheimildin delegerað til P/f Visit Faroe Islands innan fyri myndugleika.

Landsstýrismaðurin ivasama heimild at lata P/f Visit Faroe Islands umsita játtan.

Landsgrannskoðanin ivaðist í, um landsstýrismaðurin kundi fremja óskipaða delegatión av avgerðarheimildini til P/f Visit Faroe Islands. Felagið umsat stuðulin sambært kunngerð, har ásett var, at landsstýrismaðurin skuldi taka støðu til at lata stuðul; lógin, har kunngerðin var heimilað, er ikki í gildi longur. Eftir kanningunum hjá Landsgrannskoðanini at døma, tók P/f Visit Faroe Islands sjálvt avgerðina. Vit mæltu landsstýrismanninum til at kanna heimildirnar.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2016 átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at landsstýrismaðurin við ivasamari heimild hevði latið P/f Visit Faroe Islands umsita stuðulsjáttanirnar.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at Ferðaráðið og seinni P/f Visit Faroe Islands hevur umsitið tvær stuðulsjáttanir innan ferðavinnu. Játtanin til at marknaðarføra Føroyar sum ferðamannaland uttanlands, sum er ein "króna fyri krónu" stuðul, er tikin av í 2018 og er løgd til játtan til innlendis ferðavinnumenningardeildina hjá P/f Visit Faroe Islands.

Ráðið vísir á, at játtanin til marknaðarføring av Føroyum innanlands, sum er stuðul til økisferðavinnufeløg, verður tikin av í 2019 og verður løgd afturat játtanini til innlendis ferðavinnumenningardeildina hjá P/f Visit Faroe Islands. Kunngerð um stuðul til ferðavinnumenning við heimild í § 7, stk. 4 í Ll. nr. 62/2014 um P/F Visit Faroe Islands, er sett í gildi 4. juli 2018.

Játtan til marknaðarføring innanlands og uttanlands tikin av og í staðin løgd til innlendis ferðavinnudeildina hjá P/f Faroe Visit Islands.

Løgtingsgrannskoðararnir hildu tað ikki vera nøktandi, at freistin at lata inn ársroknskap hjá P/f Visit Faroe Islands var sett til 1. juni í avtaluni, hóast freistin í kunngerðini um stuðulsjáttan er 1. apríl.

Í august 2018 arbeiðir Uttanríkis- og vinnumálaráðið við at endurskoða sáttmálan við P/f Visit Faroe Islands. Í nýggja sáttmálanum verður freistin broytt til 1. apríl.

Ov nógv goldið út í stuðli

Í uppskotinum til samtyktar mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at áseta reglur um, hvat kann roknast við í grundarlagið at játta stuðul eftir, soleiðis at ivi ikki stingur seg upp um stuðulsgrundarlagið.

Í august 2017 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið helt ikki heimild vera at rinda pening út til eginavrik. P/f Visit Faroe Islands hevur í februar 2018 gjørt avtalu við stuðulsmóttakaran um afturgjald av ov nógv útgoldnum stuðli av krónu fyri krónu játtanini.

P/f Visit Faroe Islands kravt ov nógv útgoldnan stuðul aftur.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, ráðið helt ongan iva vera um, at talan var um krónu fyri krónu, og tí kundi eginavrik ikki roknast við sum útreiðsla.

Eftirmeting av stuðli

Í seinastu ársfrágreiðingini spurdu vit, hvussu Uttanríkis- og vinnumálaráðið eftirmetti stuðulsskipanir undir § 13 í fíggjarlógini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur í august 2018 svarað, at ráðið eftirmetir javnan stuðulsskipanirnar og tillagar skipanirnar, um mett verður, at tørvur er á tí. Stuðulsskipanin til ferðavinnu er eitt dømi um tað.

8.4 Jarðfeingi (LG 2017/213-0321)

Jarðfeingi fyrisitur kolvetnismál og jarðfrøði, og luttekur í granskingarverkætlanum, ið partvíst verða fíggjaðar uttanhýsis. Granskingarsamstarv er við ymiskar útlendskar stovnar og vinnulív og hevur higartil verið viðvíkjandi geofakligum evnum. Stovnurin umsitur eisini stuðulsjáttanirnar "Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi" og "Kolagrevstur" og rakstrarjáttanina "Marknaðarføring av landgrunninum til kolvetni."

Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerð ikki góðkend.

Roknskaparreglugerðin er ikki góðkend. Fyri tænastur, stovnurin ger fyri feløg og stovnar í Føroyum, er samsýningin tímaløn hjá starvsfólki +110%. Taksturin fyri granskingararbeiðið er 890 kr./tíman. Landsgrannskoðanin hevur mælt til at áseta í roknskaparreglugerðini, hvussu prísásetingin verður gjørd.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at ráðið hevur umrøtt málið við Jarðfeingi, og tekur Jarðfeingi undir við at seta takstirnar í roknskaparreglugerðina.

Triðingur av útreiðslunum fíggjaðar við øðrum enn játtan í fíggjarlóg.

Ein triðingur av samlaðu útreiðslunum hjá stovninum er fíggjaður av øðrum enn játtan í fíggjarlóg. Roknskapartøl seinastu 5 árini[31]:

t.kr.

Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
Rakstrarútreiðslur	14.715	16.050	15.415	15.726	17.018
Rakstrarinntøkur	-1.729	-1.673	-2.097	-1.411	-397
Flytingarútreiðslur	40	25	25	25	25
Skattir og flytingarinntøkur	-1.957	-3.817	-1.977	-5.764	-7.981
Flytingar millum alm. myndugleikar	-285	-301	-292	7	7
Tilsamans	**10.784**	**10.284**	**11.074**	**8.583**	**8.673**
Ikki inntøkuført – granskingarstyrkir, gávur o.t.	-2.585	-1.973	-3.230	-4.876	-6.227

Í 2016 og 2017 eru ávikavist 4,9 mió.kr. og 6,2 mió.kr. av inntøkunum til verkætlanir frá Sindri; tær inntøkurnar fíggjaðu 1,9 mió.kr. av lønunum hjá stovninum í 2017, sum tilsamans vóru 9,7 mió.kr. Harafturat kemur umsitingargjald. Starvsfólkini, ið arbeiða við verkætlanum, eru flest øll í føstum starvi.

Stórur munur í bæði inntøkum og útreiðslum, verður hugt eftir roknskapi í mun til fíggjarlóg.

Í 2016 og 2017 var stórur munur á í bæði inntøkum og útreiðslum, um hugt verður eftir roknskapartølum í mun til fíggjarlógirnar.

[31] Fyri málsøki 32 "Ráðevnisvinna"

t.kr.

Heiti	R2016	J2016	R2017	J2017
Rakstrarútreiðslur	15.726	12.219	17.018	12.624
Rakstrarinntøkur	-1.411	-975	-397	-975
Flytingarútreiðslur	25	0	25	0
Skattir og flytingarinntøkur	-5.764	-2.650	-7.981	-3.050
Flytingar millum alm. myndugleikar	7	0	7	0
Tilsamans	**8.583**	**8.594**	**8.673**	**8.599**

Sambært § 3 í játtanarlógini skal fíggjarlógin fevna um allar inntøkur og útreiðslur landsins og vera grundað á veruleikakendar vónir og so hollar ætlanir, sum til ber.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at Jarðfeingi fer frameftir at leggja seg eftir at gera neyvari fíggjarætlan, soleiðis at betri samsvar verður ímillum játtan og roknskap.

Avskriving

Jarðfeingi hevur avskrivað 139 t.kr., sum útlendskur keypari mátti rinda í meirvirðisgjaldi í heimlandinum eftir at hava keypt dátur frá stovninum.

Avskrivað 139 t.kr., sum útlendskur keypari mátti rinda í MVG í heimlandinum.

Spurt, um heimild at eftirgeva skuld ella at lata avsláttur, vísti Jarðfeingi til sølusáttmála á heimasíðuni hjá stovninum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur kunnað um, at orðingin í sølusáttmálanum leggur ikki upp til avsláttur í prísinum. Ráðið fer at mæla Jarðfeingi til at endurskoða ásetingina í sáttmálanum, tí sáttmálin má ikki vera forðing fyri kappingarførinum hjá Føroyum mótvegis øðrum oljuleitiøkjum.

Stuðul frá Sindri pengum

Í ársfrágreiðingini 2016 umrøddu vit m.a. stuðul, ið Jarðfeingi fekk frá kontuni Sindri pengar, ið er í § 20 í landsroknskapinum og stavar frá inngjøldum frá oljufeløgum. Sambært Búskaparskipan landsins hevur fíggjarstøðan á kontu 20.52.3.10 "Aðrar inntøkur" seinastu 5 árini verið:

t.kr.

StRk	Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
0881	Ikki inntøkuført – granskingarstyrkir, gávur o.t.	-26.790	-28.352	-27.585	-22.580	-16.352

Jarðfeingi var einasti umsøkjari til stuðulin 2016 og 2017. Tær verkætlanir, ið Jarðfeingi hevur fingið stuðul til í 2016 og 2017, eru:

kr.

Navn	Stuðul 2016	Støðlaður stuðul 2016	Stuðul 2017	Støðlaður stuðul 2017
4. útbj. Gosgrýtissøgan	1.068.000			
4. útbj. Kortlegging av móðurgrýti	875.000		295.310	
4. útbj. Endurmeting av Marjun	400.000	400.000	626.373	
4. útbj. Deep burials	350.000	72.885	150.000	
Fyrireik.av djúpari landboring 1./3	838.000	561.211		128.554
4. útbj. Seismisk kortlegging	1.370.600			
Virtual Data Room			411.255	
4. útbj. Reservoireginleikar			160.000	
4. útbj. Leitimið framleiðsla			979.000	
4. útbj. Úrslit samanskriving			996.000	
4. útbj. Offshore kjarnulýsing			65.000	
4. útbj. Greinir			619.600	382.860
4. útbj. Føroya Banki			1.925.960	1.925.960
Tilsamans	**4.901.600**	**1.034.096**	**6.228.498**	**2.437.374**

Sindri pengar eru viðgjørdir eftir reglunum um fremmanda fígging av almennum virksemi og íløgum[32], t.v.s., at játtaði stuðulin er bókaður í fíggjarstøðuni og inntøkuførdur, so hvørt hann er brúktur.

Roknskapur ikki nóg gjøgnumskygdur.

Rokningar frá Jarðfeingi fyri umsitingargjald eru bókaðar við pluss og minus á kontuni "Flytingar úr útlandinum annars". Tað ger, at roknskapurin er ikki nóg gjøgnumskygdur og er heldur ikki rættur.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið er samt við Landsgrannskoðanini, at umsitingargjald skal bókast sum vanlig flytingarinntøka hjá Jarðfeingi og sum útreiðsla á St.Rk. 1479 "Keyp av tænastuveitingum annars". Ráðið upplýsir, at Jarðfeingi tekur tað til eftirtektar.

Verkætlan 7120 FIEC[33]

Síðani 2014 hava pengar verið støðlaðir á FIEC verkætlanini:

t.kr.

Heiti	2014	2015	2016	2017
Stuttfreistað skuld	-490	-392	-349	-242

Útreiðslurnar til FIEC verkætlan í 2017 vóru 107 t.kr. og eru fíggjaðar av støðlaðum pengum.

FIEC ráðstevnan hevur til endamáls at fáa vitan um kolvetnisrelevanta jarðfrøði á føroyska landgrunninum lagda fram fyri almenninginum. Ráðstevnan er hildin 4 ferðir og varð fíggjað við leigu av básum, sponsorum og luttøkugjøldum. Tær tvær fyrstu ráðstevnurnar vórðu væl vitjaðar og góvu yvirskot, meðan hinar góvu undirskot, sum varð fíggjað av støðlaðum yvirskoti.

Tær 242 t.kr. í fíggjarstøðuni 2017 eru ætlaðar at fíggja komandi ráðstevnu um evnið. Um hesin peningur ikki var tøkur, so heldur Jarðfeingi, at tað er ivasamt, um stovnurin kundi átikið sær váðan at skipa fyri slíkari ráðstevnu, ið kann verða rættiliga kostnaðarmikil, um undirtøkan ikki er nøktandi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur ikki at flyting av játtan er í samsvari við játtanarskipanina.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at ráðið heldur ikki, at mannagongdin at flyta játtan til seinni fíggjarár er í samsvari við § 13[34] í játtanarskipanini, og leggur afturat, at játtan í fíggjarlógini umfatar eisini játtan til at hava inntøkur.

Stuðul frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Í apríl 2017 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið játtað 40 t.kr. til at gjalda løn fyri framløgu á FIEC ráðstevnuni í mai 2017 og 35 t.kr. til vísindafólk hjá Jarðfeingi at fyrireika tilfar.

Spurt, um pengarnir vórðu brúktir til FIEC ráðstevnuna, og um inntøkan ikki átti at verðið skrásett á FIEC verkætlanina, svaraði Jarðfeingi, at stovnurin skilir ímillum tað at skipa ráðstevnuna og tað at halda framløgur á somu ráðstevnu, og tí fatar Marjun verkætlanin um óhefta meting og framløgu, sum ikki er partur av FIEC.

Jarðfeingi greiddi frá, at stovnurin hevur altíð havt nakrar framløgur, meðan umboð fyri oljufeløg, veitarar og granskingarstovnar hava havt nakrar framløgur, men at tað varð broytt í 2017, tá ið framløgurnar vórðu hildnar af fólkum, sum høvdu gjørt arbeiði fyri Jarðfeingi.

[32] sambært Roknskaparvegleiðing frá 29. desember 1998, 1998-1.0-A frá Gjaldstovuni.
[33] Faroe Islands Exploration Conference
[34] § 13 ásetir, at ikki ber til at flyta játtan millum høvuðskontur ella flyta játtanir til seinni fíggjarár.

Endurgjøld

Jarðfeingi hevur goldið Norðurlandahúsinum 25 t.kr. í avlýsingargjaldi fyri tiltak, sum skuldi vera í húsinum 16. til 18. mai 2017. Vegna ov lítla undirtøku varð FIEC ráðstevnan í samráði við aðalráðið flutt til London. Jarðfeingi rindaði persónum 22 t.kr. í endurgjaldi fyri ferðaseðlar í sambandi við avlýsta tiltakið.

Jarðfeingi rinda persónum 22 t.kr. í endurgjaldi fyri avlýsingar.

Lønir

16 fólk starvast á Jarðfeingi. Í 2017 boðaði stjórin frá, at stovnurin fór burtur frá at stempla arbeiðstíð. Í uppskoti til samtyktar av landsroknskapinum 2016 vístu løgtingsgrannskoðararnir m.a. á, at teir vóru ósamdir við landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum um, at ásetingarnar um hóskandi tíðarskráseting eru ógreiðar. Eisini hildu teir, at tað kann als ikki góðtakast, at stovnur fer burtur frá at skráseta arbeiðstíð.

Løgtingsgrannskoðararnir góðtaka ikki at farið verður burtur frá tíðarskráseting.

Í mars 2018 greiddi stjórin frá, at starvsfólk skráseta feriur og sjúkudagar, men annars verður arbeiðstíðin ikki skrásett. Onkur starvsfólk skráseta tó arbeiðstíð í TotalView.

Landsgrannskoðanin vísti á, at umframt ásetingina í roknskaparkunngerðini um hóskandi tíðarskráseting er ásett í lønarsáttmálum, hvussu starvsfólk hjá landinum verða samsýnt. Landsgrannskoðanin heldur tí, at Jarðfeingi hevur skyldu til at tryggja, at teir tímarnir, ið stovnurin rindar løn fyri, eru arbeiddir.

Í apríl 2018 hevur Jarðfeingi gjørt vart við, at tað er ikki rætt, tá ið Landsgrannskoðanin sigur, at stovnurin ongar skrivligar reglur hevur um arbeiðstíð. Flestu starvsfólkini arbeiða við projektum, og sambært innanhýsis reglunum um arbeiðstíð/tíðarskráseting *"er ikki neyðugt hjá starvfólki at skráseta alla arbeiðstíð, til tess at skjalfesta samlaðu tíðarnýtsluna á stovninum, tá avrikið hjá hvørjum einstakum starvsfólki sæst aftur í projektstýringini."*

Jarðfeingi lýkur ikki krøvini um tíðarskráseting.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at í mars 2018 var parturin í projektstýringsmyndlinum hjá stovninum viðvíkjandi tímaskrásetingini ikki komin at virka. Tí heldur Landsgrannskoðanin, at Jarðfeingi lýkur ikki krøvini um hóskandi tíðarskráseting.

Projektstýringsmyndilin til tíðarskráseting virkar ikki.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið víst á, at tað eru fleiri hættir at tryggja, at avtalaðu vikutímarnir hjá starvsfólkunum verða nýttir til arbeiði á stovninum, m.a. við neyvari verkætlanarstýring ella á annan hátt. Tað hevur ikki verið krav um beinleiðis tíðarskráseting, men tað er tó broytt við K. nr. 110/2017 "um roknskaparverk landsins o.t." Í § 5, stk. 4 er ásett, at stovnsleiðarin skal skipa fyri, at hóskandi skráseting av arbeiðstíð, fráveru, frítíð o.til. er á stovninum, so lønarútreiðslurnar eru rættar.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at Jarðfeingi hevur ikki lokið treytirnar í § 5, stk. 4 í roknskaparkunngerðini.

KT viðurskifti

Jarðfeingi hevur gjørt eina váðameting, ið ikki er heilt liðug, og er í holt við at verkseta hana. Sambært stjóranum er dátusavnið tað mest kritiska. Dáturnar viðvíkjandi boringum liggja hjá KT Landsins. Savnið av lutum er í kjallaranum hjá Jarðfeingi.

Upplýsingarnar hjá Jarðfeingi eru viðkvæmar, men tey hava ongar viðkvæmar persónsupplýsingar. Stovnurin ætlar at taka av tilboðnum frá KT Landsins um at gera KT mannagongdir.

8.5 Marknaðarføring av landgrunninum (LG 2017/213-0321)

Jarðfeingi umsitur játtanina. Sambært fíggjarlógini er avtalað við Oljuvinnufelagið, at grunnurin til førleikamenning fíggjar marknaðarføringina av føroyska landgrunninum. Í

2016 var upphæddin 704 t.kr., og í 2017 fekk Jarðfeingi 950 t.kr. til marknaðarføring og 650 t.kr. til granskingarverkætlan.

Jarðfeingi hevur eisini fingið stuðul til marknaðarføring av førleikapengunum á høvuðskontu 20.52.3.10[35].

Jarðfeingi játtað áhugafelagi førleikapengar.

Í august 2017 søkti Jarðfeingi Uttanríkis- og vinnumálaráðið um førleikapengar til at stuðla FOÍB, sum er eitt áhugafelag við 2 starvsfólkum, sum gevur leypandi kunning um oljuvinnuna. Felagið varð fíggjað við peningi, sum oljufeløg rindaðu fyri at hava rættindi. Nú øll feløgini hava latið rættindini innaftur, hevur Jarðfeingi gjørt av at stuðla felagnum peningaliga.

Jarðfeingi mælti til, at FOÍB fekk 434 t.kr. um árið í 2018 og 2019, eftir at felagið fekk 541 t.kr. um árið í 2018, 2019 og 2020 í stuðli frá Faroe Petroleum, ið var ein partur av upprunaligu umsóknini. Uttanríkis- og vinnumálaráðið játtaði umsóknini.

Spurdur, um játtanin til FOÍB kundi metast sum stuðul, svaraði stjórin, at FOÍB ger eisini uppgávur fyri Jarðfeingi.

Jarðfeingi hevur endurrindað FOÍB fyri ferða- og gistingar-útreiðslur.

Jarðfeingi hevur eisini endurrindað 5 t.kr. fyri flogferðaseðlar og góðar 11 t.kr. fyri gistingar á hotelli í Aberdeen, svarandi til 2.787 kr. pr. nátt. Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært reglunum hjá tí almenna verður í mesta lagi rindað 1.257 kr. pr. nátt fyri hotell í Bretlandi. Landsgrannskoðanin mælti til, at Jarðfeingi greiðir frá orsøkini, soleiðis at tað sæst á bókingunum, hvat liggur til grund fyri útgjaldinum, um stovnurin av onkrari orsøk velur at rinda meira, enn reglurnar loyva.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið upplýst, at Jarðfeingi tekur undir við tilmælinum.

8.6 Djóralæknatænastur (LG 2017/213-0331)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskontu 13.33.1.04 “Djóralæknatænastur”, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan umsitur.

Endamálið við játtanini er at veita samsýning til privatar djóralæknar fyri vaktarhald uttan fyri vanliga arbeiðstíð, soleiðis at djóraeigarar kunnu fáa djóralæknahjálp alt samdøgrið. Í 2016 og 2017 hevur játtanin verið 650 t.kr. og nýtslan ávikavist 577 t.kr. og 598 t.kr.

Fleiri rokningar skeivar hjá veitara.

Grannskoðanin vísti, at fleiri rokningar vóru skeivar hjá øðrum veitaranum. Sambært Heilsufrøðiligu starvsstovuni hava tey fylgt við í nýtsluni mánaða fyri mánaða og hava sett seg í samband við fyritøkurnar, tá ið tað hava verið størri broytingar í upphæddum. Stovnurin hevur ikki kannað, um rættur satsur var nýttur, ella um tímatalið var rætt.

Ov illa útgreinaðar rokningar.

Landsgrannskoðanin heldur, at rokningarnar hava verið ov illa útgreinaðar, og at tað ger tað trupult at hava eftirlit við, at útgjøldini eru røtt. Tað er ikki nøktandi, at Heilsufrøðiliga starvsstovan hvønn mánaða váttar fyri Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, at roknskapirnir eru rættir, uttan at hava nøktandi eftirlit við, at útgjøldini eru røtt.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur kunnað um, at stovnurin fer at avtala við fyritøkurnar, hvussu viðurskiftini kunnu betrast, fyri at kunna hava betri eftirlit. Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur, at tey stig, sum umsitingin ætlar at taka, koma at bøta um umsitingina og at bøta um trygdina fyri, at feilir ikki koma fyri.

[35] Høvuðskontu 20.52.3.10 Aðrar inntøkur, undirkontu 11. Víddargjøld oljuvinna, støðla í fíggjarstøðuni sum “førleikapengar”.

8.7 Sjóvinnustýrið (LG 2015/213-0351)

Í august 2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at umsitingin hjá Sjóvinnustýrinum í Tórshavn var flutt í onnur høli, og at umsitingin í Vágum var fyribils flutt í onnur høli orsakað av soppi. Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at stovnurin húsaðist framvegis í fyribilshølum.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at Sjóvinnustýrið húsast nú í skrivstovuhølum í Tórshavn. Ætlanin er at byggja nýggj skrivstovuhøli til stovnin í Vágum. Verklagslóg er samtykt, og 5 mió.kr. eru játtaðar í 2018 og eftir ætlan 8,7 mió.kr. í 2019, tilsamans 13,7 mió.kr. Landsverk stendur fyri byggiverkætlanini, og eftir ætlan verður bygningurin klárur at flyta inn í á heysti 2019.

Verklagslóg til nýggjan bygning samtykt.

8.8 Vinnustovnurin (LG 2017/213-0371)

Vinnustovnurin er ein samanrenning av Fjarskiftis-, Kappingar-, Tryggingar-, og Posteftirlitinum, Skráseting Føroya og Útlendingastovuni.

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Vinnustovninum og hevur havt serligt atlit at, hvørjar útreiðslur eru rímiligar, tá ið talan er um útreiðslur, sum verða fíggjaðar av øðrum.

KT viðurskifti

Stovnurin er limur í Landsneti, og KT Landsins tekur sær av øllum trygdartiltøkum. Vinnustovnurin luttekur ikki í trygdarpakkanum hjá KT Landsins, tí stovnurin saman við KT Landsins metti, at egnar fyriskipanir og eftirlit eru nøktandi. Stovnurin fylgir ISO 27001 í stóran mun, men hevur onkrar avbjóðingar, t.d. við brongling. Vinnustovnurin fyrireikar seg til at yvirtaka útlendingamál, sum seta stór krøv til KT trygd í sambandi við persónsmál. Atgongdirnar til persónsmál eru stýrdar soleiðis, at einans starvsfólk, sum arbeiða við persónsmálum, hava atgongd til tey.

Stovnurin fylgir ISO 27001 í stóran mun.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Vinnustovnurin hevur ikki formligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at nýta egna búskaparskipan, men hevur í februar 2018 søkt um loyvi.

Einki formligt loyvi til egna búskaparskipan.

Flestu inntøkurnar hjá Vinnustovninum eru frá eftirlits- og umsjónaravgjøldum og hava seinastu 5 árini verið:

t.kr.

Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
Tryggingareftirlitið	-2.940	-2.919	-3.088	-3.173	-3.806
Felagsskrásetingin	-3.623	-3.983	-3.524	-4.051	-4.166
Fjarskiftiseftirlitið	-5.226	-5.658	-5.427	-5.891	-5.728
Posteftirlitið	-29	-44	-45	-63	-24
Tilsamans	**-11.818**	**-12.603**	**-12.083**	**-13.178**	**-13.724**

Tryggingarfeløgini rinda útreiðslurnar av Tryggingareftirlitinum. Kostnaðurin av Skrásetingini verður í høvuðsheitum fíggjaður við gjøldum. Virksemið hjá Fjarskiftiseftirlitinum verður fíggjað við rakstrar- og eftirlitsgjøldum. Í konsessiónini til Posta, eru ásettar nærri treytir, t.d. í § 18 um gjald fyri umsiting av Posteftirlitinum.

Flestu inntøkurnar frá eftirlits- og umsjónaravgjøldum.

Seinastu 5 árini hava størstu útreiðslurnar á standardkontu 14, keyp av vørum og tænastum, býttar á stovnar, verið:

t.kr.

StRk	Heiti	Trygg.	Fjarskift.	Kapping.	Skráset.	Post.	Útlend.	Tils.
1411	Ferð,útland	574	739	258	64	0	234	1.871
1420	Umboðan	239	339	85	172	0	137	971
1472	Grannsk.v.m.	2.069	2.390	46	2.654	0	0	7.160
1474	KT	492	2.237	315	1.546	22	533	5.146
1479	Tænastuveit.	1.260	1.919	349	882	2	1.023	5.436

Vinnustovnurin hevur ikki altíð biðið um tilboð frá fleiri, tá ið stovnurin hevur keypt vørur ella tænastur.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til at seta skrivligar reglur t.d. í starvsfólkahandbók um rindan av útreiðslum so sum starvsfólkarøkt. Stovnurin hevur m.a. rindað fyri starvsfólkaútferð og fyri jakkar og blusur til starvsfólk.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur, at tað kann verða trupult at gera reglur um starvsfólkarøkt, tí tað sum oftast er ein ítøkilig meting; men fyri afturvendandi tiltøk kundi tað verið skilagott at havt onkrar vegleiðandi ásetingar t.d. fyri starvsfólkaútferðir og jólaborðhald. Hinvegin má tað ikki verða ein forðing fyri, at onnur starvsfólkatiltøk kunnu gerast, um leiðslan heldur, at starvsfólk hava gjørt ein serligan innsats, ella um tørvur er á at arbeiða við samansjóðing.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísir á, at tað er ikki óvanligt at arbeiðsgevarar lata starvsfólki klæðir, tó at tað er mest kent innan privata vinnu. Seinnu árini hava fleiri almennir stovnar latið starvsfólki klæðir m.a. jakkar við logo hjá stovninum. Ráðið vísir eisini á, at tað er Fíggjarmálaráðið, sum ásetur leiðreglur fyri starvsfólkaøkið, og hvussu játtanir kunnu nýtast, og at ráðið er samt við Fíggjarmálaráðnum, at tað eigur at vera upp til stovnsleiðslurnar at skipa starvsfólkarøktina á sínum stovni, men at leiðslurnar mugu kenna sær hógv.

Stovnar, fíggjaðir við gjøldum

Kappingareftirlitið og Útlendingastovan verða fíggjað við játtan í fíggjarlóg, meðan raksturin av hinum stovnunum verður fíggjaður við gjøldum frá vinnufyritøkum. Frá 2013 til 2017 hava inntøkur og útreiðslur hjá Skráseting Føroya, Fjarskiftiseftirlitinum, Tryggingareftirlitinum og Posteftirlitinum verið:

t.kr.

Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
Útreiðslur	12.011	12.996	12.433	13.437	13.790
Inntøka	-12.071	-12.893	-12.330	-13.430	-14.013
Konsern eliminering	49	-93	-122	-152	202
Tilsamans	**-10**	**10**	**-19**	**-144**	**-21**

Fyritøkurnar, sum rinda, vita sambært Vinnustovninum, hvat eftirlitsstovnarnir takast við, m.a. tá ið mál eru, sum krevja nógva sakkøna hjálp, sum tá ið stovnurin skuldi gera frekvenskunngerð á fjarskiftisøkinum og solvens-, roknskapar- og leiðslukunngerð á tryggingarøkinum. Tað er komið fyri hendinga ferð, at fyritøka hevur hildið, at kostnaðurin er ov høgur.

Niðanfyri er yvirlit yvir størstu útreiðslupostarnar hjá teimum fýra stovnunum, sum eru fíggjaðir við gjøldum frá fyritøkum:

t.kr.

Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
Lønir v.m.	7.100	7.357	7.242	7.903	8.124
Keyp av vørum og tænastum	3.513	4.318	4.074	4.380	4.550
Keyp av útbúnaði, netto	741	465	544	412	366
Leiga, viðlíkahald og skattur	569	781	559	655	721
Tilsamans	**11.923**	**12.921**	**12.419**	**13.351**	**13.762**

Rakstrarkostnaðir hava seinastu 5 árini verið:

t.kr.

StRk	Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
1411	Ferð. og flutn., al. sett – uttanl.	159	362	268	280	311
1420	Umboðan	145	160	120	139	185
1472	Grannsk.-, roknsk.- og løgfr. tænast.	1.137	1.336	1.473	1.492	1.675
1474	Keyp av tænast. í.s.v. KT	662	974	887	876	898
1479	Keyp av tænastuveit. annars	749	764	702	946	903

Ferðaútreiðslur uttanlands

Ferðaútreiðslurnar hjá Fjarskiftiseftirlitinum vóru 145 t.kr. um árið frá 2014 til 2017. Orsøkin er m.a., at regulering av fjarskiftisveitarum er eitt sera komplekst øki, sum tøkniliga broytist skjótt. Tað finnast ikki skeiðsveitarar ella ráðstevnur í Føroyum innan økið, tí má vitan útvegast uttanlands.

Tryggingareftirlitið krevur eisini servitan á fleiri økjum, og neyðugt er í ávísan mun at luttaka á skeiðum og ráðstevnum, sum ikki finnast í Føroyum. Tryggingareftirlitið hevur seinnu árini havt avtalu við Ernst & Young í Danmark um ráðgeving. Harumframt hevur Tryggingareftirlitið avtalu við danskan serfrøðing um serkøna hjálp, tá ið ræður um eftirlits- og leiðsluviðurskifti. Flestu limirnir í Tryggingarráðnum eru serfrøðingar úr Danmark.

Grannskoðanar-, roknskapar- og løgfrøðiligar tænastur

Í 2015 vóru útreiðslurnar hjá Fjarskiftiseftirlitinum 700 t.kr., t.e. væl størri enn tær annars hava verið. Meginparturin er fyri serliga benchmark kanning av prísum hjá veitarum á fjarskiftisøkinum.

Í 2014 vóru útreiðslurnar hjá Skráseting Føroya serliga stórar, 881 t.kr., orsakað av kanningini av Eik-grunninum og kanning av sokallaða grannskoðaramálinum. Í 2016 vóru útreiðslurnar 667 t.kr., harav stórur partur var til serkøna hjálp til grannskoðara-eftirlit; útreiðslurnar eru víðarifaktureraðar til tey grannskoðarafeløg, sum eru kannað.

Hjá Tryggingareftirlitinum eru útreiðslurnar serliga øktar í 2015, tá ið tær vóru 429 t.kr. og í 2017, tá ið tær vóru 808 t.kr. Tað vóru serliga útreiðslur til serkøna hjálp til at gera eitt føroyskt livitíðarbenchmark, nýggjar kunngerðir o.a.

Húsaleiga

Vinnustovnurin leigar 834 m^2 á Skálatrøð í Havn. Leigusáttmálin er frá 2008 og varð longdur í 2011; í 2018 er hann longdur til 30. juni 2021. Leigan er 750 kr./m^2 um árið, ella 626 t.kr. tilsamans. Í sáttmálanum er ásett, at leigarin ger umvælingar og broytingar í innrætting eftir egnari ætlan, og hædd er tikin fyri tí í leigugjaldinum.

Fermetraprísurin fyri leiguna er lágur samanborið við onnur leigumál, men samlaða húsaleigan hevur seinastu nógvu árini verið væl hægri, tí Vinnustovnurin hevur rindað fyri umbyggingar og innrættingar. Frá 2010 til 2017 hevur stovnurin goldið 5 mió.kr. í húsaleigu og 5 mió.kr. í umvælingum.

Kostnaður av leigu og umvælingum seinastu 10 árini[36]:

t.kr.

Heiti	2008	2009	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017
Húsaleiga	703	609	591	787	713	572	588	586	674	699
Umvæl. og viðl.	1	0	1.270	2.066	207	48	656	0	97	590
Útl.stovan[37]				-168	-126	-22				
Tilsamans	**704**	**609**	**1.861**	**2.685**	**794**	**598**	**1.244**	**586**	**771**	**1.288**

[36] Vit hava ikki tikið tær 510 t.kr., sum FAS/Sjóvinnustýrið sambært Vinnustovninum hava goldið til 2015.
[37] Leigukostnaður, áðrenn Útlendingastovan varð flutt til Vinnustovnin.

Útreiðslurnar seinastu 10 árini hava verið 11,7 mió.kr. svarandi til 1.165 t.kr. um árið, sum gevur ein miðal kostnað pr. m^2 á 1.396 kr. um árið.

Spurdur, um hann heldur, at útreiðslurnar til høli eru rímiligar, svaraði Vinnustovnurin, at leigumálið er galdandi til medio 2021, tí skal alt tíðarskeiðið takast við. Hann roknar við, at 200 t.kr. verða nýttar til umvælingar í 2018 og 100 t.kr. í 2019, og sambært stovninum gevur tað ein kostnað á 1.134 kr./m^2 um árið.

Vinnustovnurin lutfallsliga lága húsaleigu, tí stovnurin rindar umvælingar.

Í juli 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið víst á, at raksturin av stovninum er lagdur til stjóran, sum metir um og tekur avgerð um, hvussu stovnurin verður rikin munabest, herundir tekur avgerð um hølisviðurskifti. Ráðið er kunnað um leistin, sum leigusáttmálin á Skálatrøð er gjørdur eftir og hevur sæð útrokningar, sum vísa, at tað loysti seg betur at leiga til lutfalsligan lágan m^2 prís og rinda umvælingar og umbyggingar sjálvur, enn at leiga til ein hægri m^2 prís og útleigarin átók sær umbygging.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísir á, at tað er Landsverk, ið er serkunnleiki á økinum og hevur góðkent sáttmálan. Ráðið vísir í tí sambandi til frágreiðing frá 2013 hjá Landsgrannskoðanini, har leiguleisturin á Vinnustovninum eisini er umrøddur, og at Landsgrannskoðanin hevði onga viðmerking til tað tá.

Húsaleiga og umvælingar, býttar á stovnar

1. apríl 1998 varð leigusáttmáli undirskrivaður millum eigaran og Vinnumálastýrið og góðkendur av Fíggjarmálastýrinum.

Í 1998 søkti Fjarskiftiseftirlitið Vinnumálaráðið um loyvi at fíggja partin hjá Fjarskiftiseftirlitinum og Kappingarráðnum, ávikavist 240 t.kr. og 60 t.kr., av rakstrarjáttanini vísandi til, at umbyggingarútreiðslurnar lógu innan fyri rakstrarkarmin.

Vinnumálaráðið svaraði, at málið hevði verið til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum, og at niðurstøðan var, at heimild var at fíggja umbyggingina yvir raksturin, og at ráðið loyvdi nevndu útbygging. Kærustovnurin var partur av felagsskapinum, og rindaði 100 t.kr.

Nøkur ár seinni varð leigumálið víðkað við 100 m^2. Fyri ta innrættingina rindaði Kappingarráðið 200 t.kr., tí luttók Kappingarráðið ikki í innrættingini í 2010/2011.

Leigumálið varð víðkað í 2006 til eisini at fata um 134 m^2 av niðastu hædd av gamla bygninginum, har Skráseting Føroya húsaðist til 2016. Skráseting Føroya luttók tí ikki í fíggingini av umbyggingini í nýggja bygninginum á 3. hædd í 2010 og 2011.

Í 2008 varð leigumálið víðkað til eisini at fevna um 2. hædd í gamla bygninginum, tá ið FAS byrjaði sína umsiting har. Niðasta hædd og 2. hædd vórðu framleigaðar til Sjóvinnustýrið og Skrásetingina. El-veitingareftirlitið flutti til Fjarskiftiseftirlitið í 2010, og tað flutti til Umhvørvisstovuna í 2015, tá ið nýggj samgonga varð skipað og málsøkjabýtið broytt.

Nýggi bygningurin var upprunaliga ein gamal óbjálvaður goymslubygningur við sera stórari orkunýtslu. Gólvini vóru skeiv og nógvar klagur vóru frá starvsfólkunum um trupulleikar av ymiskum slagi. Valið stóð tí ímillum at dagføra "nýggja" bygningin, ella at finna onnur hølir. Stovnurin fekk ymisk tilboð, sum antin ikki vóru hóskandi, ella var prísurin ógvuliga høgur. Eisini varð mett, at flytikostnaðurin kom at verða 4-600 t.kr.

Fjarskiftiseftirlitið og eigarin gjørdu tí eina avtalu um at dagføra og seta bygningin í stand og gera innrættingarnar av nýggjum. Eigarin rindaði fyri at bjálva bygningin uttan og innan og aðrar útreiðslur uttan. Fjarskiftiseftirlitið rindaði fyri innrættingina. Kostnaðarætlanin hjá Fjarskiftiseftirlitinum helt, tó vórðu eykaarbeiði fyri 100 t.kr. Tryggingareftirlitið rindaði 30%, Posteftirlitið rindaði ein lítlan part, meðan Fjarskiftiseftirlitið fíggjaði restina.

Í juni 2010 varð Skrásetingin flutt aftur til Fjarskiftiseftirlitið, og í 2013 varð Útlendingastovan løgd saman við Fjarskiftiseftirlitinum og flutti í hølini 1. januar 2014.

Flestu umbyggingarnar og umvælingarnar síðani 2014 vórðu gjørdar í sambandi við, at Útlendingastovan varð løgd til Vinnustovnin, og hevur Útlendingastovan tí rindað bróðurpartin av útreiðslunum síðani 2014.

Hølisútreiðslurnar verða, sum nevnt, býttar á ymisku stovnarnar. Seinastu 10 árini hava tær verið:

t.kr.

Stovnur	2008	2009	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	Tils.
Trygging.	10	68	511	725	157	125	320	128	141	201	2.386
Fjarskift.	607	437	1.066	1.603	480	330	339	320	332	347	5.861
Kapping.	0	0	61	49	0	38	40	38	38	38	302
Post.	0	0	41	118	16	5	0	0	0	0	180
Skráset.[38]	87	104	182	190	141	100	114	100	174	163	1.355
Útlend.	0	0	0	0	0	0	431	0	86	539	1.056
Tils.	**704**	**609**	**1.861**	**2.685**	**794**	**598**	**1.244**	**586**	**771**	**1.288**	**11.140**

Sambært Vinnustovninum er regluliga húsaleigan 2008 til 2018 (ialt 6.522 t.kr.) higartil lutað ímillum stovnarnar eftir fermetratalinum. Tá ið umbyggingin byrjaði í 2010 kunnaði Vinnustovnurin aðalstjóran og landsstýrismannin, áðrenn farið undir arbeiðið.

Frá 2010 til 2017 hevur Vinnustovnurin goldið 5 mió.kr. fyri umbyggingar, umvælingar og innrættingar av bygningi, sum privat felag eigur.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum vístu útrokningar, at valda loysnin var tann skilabesta búskaparliga.

Bóking av húsaleigu

Sambært kontuvegleiðingini skulu umvælingar á leigaðan bygning verða tiknar við á St.Rk. 1610, tí tær eru at meta sum partur av leigukostnaðinum.

Vinnustovnurin hevur bókað útreiðslurnar til umvæling av hølunum á St.Rk. 1651 "Umvæling.- og viðlíkahaldsútr., bygningar"[39]. Sambært Vinnustovninum hava tey bókað, sum tey hava gjørt, fyri betur at halda skil á, hvat er føst húsaleiga, og hvat er umbyggingar, men vísa á, at um tað er skeivt, so verður mannagongdin broytt.

Landsgrannskoðanin mælir til at bóka sambært kontuvegleiðingini, eisini fyri at vísa samlaða kostnaðin fyri hølini. Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur undir við tilmælinum hjá Landsgrannskoðanini.

Lønir

Lønarútreiðslurnar seinastu 5 árini, býttar ímillum stovnarnar:

t.kr.

Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
Tryggingareftirlitið	1.646	1.816	1.848	1.833	1.929
Fjarskiftiseftirlitið	3.241	3.310	3.350	3.694	3.849
Kappingarráðið	1.590	1.490	1.399	1.537	1.562
Felagsskráseting	2.214	2.231	2.044	2.376	2.346
Útlendingastovan	1.430	1.280	1.456	2.513	3.108
Tilsamans	**10.121**	**10.127**	**10.097**	**11.953**	**12.794**

Spurdur, hví gongdin í lønarútreiðslum hevur verið so ymisk, svaraði Vinnustovnurin m.a., at økt virksemi hevur verið hjá Tryggingareftirlitinum og Fjarskiftiseftirlitinum, og at Útlendingastovan er uppraðfest bæði viðvíkjandi integratión og fyrireiking av yvirtøku av útlendingaøkinum.

[38] Tær 510 t.kr., sum FAS/Sjóvinnustýrið sambært Vinnustovninum hava goldið til 2015, eru ikki við í hesum tølunum.
[39] Um tað vóru umvælingarútreiðslur til egin hølir, skuldu tær verðið skrásettar á St.Rk. 1651.

Flytisamsýning
Vinnustovnurin hevur endurrindað starvsfólki 28 t.kr. fyri flytiútreiðslur fyri starvsfólkið og familjuna, vísandi til § 27 í sáttmálanum ímillum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingarfelag Føroya.

Vinnustovnurin hevur rindað flytikostnað; tað er ikki eftir reglunum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er ivasamt, um tað er álagt stovnum at rinda fyri flytiútreiðslur, sambært orðaljóðinum í § 27 í BLF-sáttmálanum, sum sigur: *"Noyðist starvsfólk av arbeiðsávum at flyta í annan stað at búgva, verða flutningsútreiðslur av húski og húsbúnaði samsýnt tí eftir rokning".*

Sambært Vinnustovninum gjørdi stovnurin av, saman við starvsfólkinum, at flyta arbeiðs- og tænastustaðin til Føroyar, soleiðis at øll starvsfólkini kundu verða savnaði á einum staði, og av tí at talan er um broyting í verandi setanartreytum, rindaði Vinnustovnurin flytisamsýning í samsvari við § 27 í BLF-sáttmálanum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur greitt frá, at teimum kunnugt, hevur loysnin, við at leiga høli uttanlands til eitt av starvsfólkunum hjá Vinnustovninum, verið av privatum ávum og ikki eftir tænastuboðum frá Vinnustovninum. Ráðið er av somu áskoðan sum Landsgrannskoðanin, at henda flyting til Føroya neyvan er ein § 27 flyting.

8.9 Skráseting Føroya (LG 2017/213-371)

Sambært § 159 í ársroknskaparlógini hevur Skráseting Føroya skyldu til, í ávísan mun at gera kanningar av teimum ársfrásagnum, sum vinnufeløg lata inn.

Landsgrannskoðanin hevur spurt Skráseting Føroya, hvørjar mannagongdir stovnurin hevur í sambandi við at feløg lata ársfrásagnir inn og í sambandi við gjøgnumgongd av ársfrásagnum. Eisini kannaðu vit, hvussu viðgerðin fer fram, tá ið eitt felag hevur frávalt grannskoðan sambært § 135 í ársroknskaparlógini.

Talginding higartil ikki positivu ávirkanina sum vænta.

Talgilding hevur ikki fingið ta positivu ávirkan á tænastustøðið, sum Vinnustovnurin væntaði í 2013, tí at Skrásetingin hevur nýtt nógva arbeiðsorku at fáa skipanina XBRL at virka eftir ætlan. Tað hevur havt við sær, at aðrar uppgávur eru útsettar.

Skrivligu mannagongdirnar hjá Skrásetingini til roknskapareftirlit eru enn mangulfullar og verða tí heldur ikki brúktar í sambandi við eftirlitsarbeiðið. Sambært Skrásetingini verða mannagongdirnar gjørdar lidnar í ár. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur boðað frá, at ráðið fer at fylgja málinum upp.

Skrivligu mannagongdirnar til roknskapareftirlit eru enn mangulfullar.

Ársfrásagnir pr. 31. desember 2016 ella seinni skulu eisini latast inn í XBRL-fílu, sum er eitt serligt talgilt snið, ið m.a. ger tað lættari at samanbera ársfrásagnir.

Kanning av ársfrásagnum

100 ársfrágreiðingar kannaðar um árið frá 2012 til 2015.

Skrásetingin ger hvørt ár eina skipaða gjøgnumgongd av 100 tilvildarliga valdum ársfrásagnum. Árini 2012 til 2014 kannaði løggilt grannskoðanaravirkið ársfrásagnirnar, og Skrásetingin bað eitt annað grannskoðanaravirkið kanna nakrar ársfrásagnir, sum nevnda virkið hevði grannskoðað. Í 2015 kannaði Skrásetingin sjálv ársfrásagnirnar.

Endamálið við kanningunum var at staðfesta, um: *"ársfrásøgnin lýkur krøvini í ársroknskaparlógini, løgtingslóg um bókhald, vinnufelagalógini, lóg um vinnurekandi grunnar, lóg um vinnurekandi virkir og grannskoðaralógini. Er ársfrásøgnin gjørd eftir altjóða roknskaparásetingum jb. § 137, skal kannast um ársfrásøgnin er gjørd sambært hesum ásetingum (standardum)."*

Grannskoðanarvirkið gjørdi ein samandrátt av úrslitunum av sínum kanningum fyri hvørt árið sær og sigur í niðurstøðuni, at *"viðmerkingarnar til einstøku roknskapirnar fevna um alt frá ótýðandi formalia til grundleggjandi brek og feilir." Grannskoðarin ger vart við, at kanningin "bert í heilt fáum førum er egnað til at staðfesta møguligar feilupphæddir í ársfrásagnunum. Til tess krevjast fleiri uppfylgjandi upplýsingar í mun til ítøkiligu viðmerkingarnar."* Bert í heilt fáum førum hevði grannskoðanarvirkið ongar viðmerkingar til ársfrásagnirnar.

Kanningarnar hjá hinum grannskoðanarvirkinum, vísti, at meginparturin av ársfrásagnunum fingu meira ella minni álvarsligar viðmerkingar, og nøkur fingu boð um at gera nýggja ársfrásøgn.

Avleiðingar av viðmerkingunum

Skráseting Føroya arbeiðir fyribyrgjandi við at fáa feløgini at bøta um ársfrá-greiðingarnar.

Sambært § 161 í ársroknskaparlógini kann Skráseting Føroya taka ymisk stig mótvegis feløgum, hvørs ársfrásagnir ikki lúka allar treytir. Skráseting Føroya hevur valt ein fyribyrgjandi leist, har stovnurin luttekur á aðalfundum hjá grannskoðarunum, har stovnurin tekur manglarnar í innlatnu ársfrásagnunum upp undir einum og eisini vegleiðir um krøv o.a. Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum tekur ráðið undir við hesum leistinum.

Í november 2014 gjørdi Skrásetingin 56 feløg skrivliga varug við manglar í ársfrásagnum 2012. Skrásetingin metir skrivini sum vegleiðingar sambært ÁRL § 161, stk. 1, nr. 1 og ger ikki meira við tey málini. Í einstøkum førum hevur Skrásetingin tó vent sær beinleiðis til felag, um størri feilir ella manglar so sum ólóglig partaeigaralán.

Skrásetingin hevur ikki havt nóg stóra arbeiðsorku og roknskaparligan førleika, og hevur tí ikki sent feløgunum skriv um kanningarnar av ársfrásagnum 2013 og 2014. Stovnurin ætlar at taka grundleggjandi brek og feilir í ársfrásagnunum 2013 og 2014 við í sambandi við skipaða eftirlitið av ársfrásagnum 2017, sum ætlanin er at gera eftir summarfrítíðina 2018.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað kann vera torført at gera munagóða uppfylging og rættleiðing av ársfrásagnum, tá ið so long tíð gongur, frá tí at ársfrásagnirnar eru latnar inn, til kanningarúrslit hjá Skrásetingini eru greið.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina í, at tað neyvan ber til at føra eitt munagott eftirlit, um uppfylgingin ikki verður gjørd, stutt eftir niðurstøðan frá eftirlitinum fyriliggur, tí feløgini fáa ikki møguleika at rætta inn. Skrásetingin hevur verið í tí óhepnu støðu, at stovnurin í tíðarskeiðum ikki hevur havt neyðugar førleikar at fylgja málunum upp. Nú er bøtt um ta støðuna.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísti á, at í sambandi við at farið varð undir miðvíst arbeiðið at talgilda umsitingina (Talgildu Føroyar), var tað eitt ynski/krav frá stjórnarráðnum, at Skrásetingin fór undir miðvísa talgilding av sínum tænastum. Tað skuldi lætta um hjá vinnulívi og borgarum, tí at tey frameftir kunnu avgreiða síni viðurskifti á netinum sum t.d. at stovna feløg og lata inn ársfrásagnir.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur, at Skrásetingin sjálvsagt eigur at hava neyðuga arbeiðsorku at fremja lógarkravda eftirlitið, men viðurkennir, at játtanarhátturin møguliga eisini hevur verið ein forðing fyri tí, við tað at stovnurin er 100% inntøku-fíggjaður, og nógv arbeiðsorka og peningalig orka, er í hesum tíðarskeiðnum farin til talgildingararbeiðið.

Talgilding so krevjandi, at eftirlitið er viknað heldur enn styrknað.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið harmast um, at arbeiðið, sum í veruleikanum skuldi rationalisera umsitingina og frígeva orku, hevur verið so arbeiðskrevjandi, at orkan til eftirlit viknaði heldur enn at styrkna. Tá XBRL-innlatingin kemur at virka, ber til at gera eftirlitið meira automatiserað og harvið effektivari, umframt at orka verður frígivin til betri uppfylging.

Frával av grannskoðan

Síðani 1. januar 2009 kunnu smærri vinnufeløg, sum uppfylla ávísar treytir, frávelja grannskoðan. Í viðmerkingunum til lógarbroytingina stendur m.a., at tað kann lætta um byrðarnar hjá íverksetarum og smáum feløgum, og áhugin fyri hesum hevur verið vaksandi seinastu árini.

Í 2016 høvdu 1.273 feløg frávalt grannskoðan, og um helvtin av teimum ársfrásagnunum vóru heldur ikki settar upp av grannskoðara.

Skrásetingin kannar m.a., um einstøku feløgini hava frávalt grannskoðan, og um frávalið er skjalfest og fráboðað Skrásetingini á rættan hátt.

Í 2016 kom møguleikin at stovna íverksetarafeløg (ÍVF), t.e. feløg við lægri krøvum til stovnsfæ. 97 tílík feløg eru stovnað í 2017. Nógv bendir á, at fleiri velja at stovna íverksetarafelag heldur enn smápartafelag.

Sannlíkt at ársfrágreiðingar við frávaldum grannskoðara hava verri dygd.

Skrásetingin heldur tað vera sannlíkt, at góðskan á ársfrásagnum, sum ikki verða grannskoðaðar, er verri enn á teimum, ið verða grannskoðaðar. Einsæris eru tær frásagnirnar smáar, og tí er váðin helst lítil. Vert er tó at leggja til merkis, at fleiri feløg nú frávelja grannskoðan, og tí er samanlagdi váðin ikki heilt ótýðandi.

Samlaða talið av skrásettum feløgum og talið av teimum, ið hava frávalt grannskoðan:

Ár	Skrásett feløg tilsamans	Feløg, sum hava frávalt grannskoðan
2013	2.720	577
2016	2.795	1.268

Lutfalsliga nógvar viðmerkingar eru hjá feløgum, sum hava frávalt grannskoðan. Skrásetingin valdi at kanna 60 feløg; av teimum vóru viðmerkingar til 40 ársfrásagnir um júst tey viðurskifti, ið viðvíkja frávali.

Í niðurstøðuni hevur grannskoðanarvirkið ikki tikið støðu til, um einstaka felagið lýkur treytirnar í ÁRL § 135, stk. 2 um fíggjarjavna, nettosølu og tal av starvsfólkum. Viðmerkingarnar snúgva seg um, at feløg ikki hava váttað í leiðsluátekningini, at treytirnar eru uppfyltar, sum tey hava skyldu til sambært ÁRL § 9, stk. 4.

28 av teimum feløgum, sum í kanningunum 2012 til 2014 hava fingið viðmerkingar viðvíkjandi frávali av grannskoðan, hava framvegis frávalt grannskoðan[40].

Svenska ríkisgrannskoðanin mælir myndugleikunum til at seta grannskoðanarskyldu aftur í gildi.

Landsgrannskoðanin kann eisini vísa á, at svenska ríkisgrannskoðanin í 2017 gjørdi eina kanning av feløgum, ið høvdu valt grannskoðan frá, og kom til ta greiðu niðurstøðu at mæla myndugleikunum til at seta grannskoðanarskyldu aftur í gildi fyri øll feløg.[41] Í Svøríki hava reglurnar um frával av grannskoðara verið galdandi síðani 2010.

Ivasamt um sparingin at velja frá grannskoðan stendur mát við versnaðu góðskuna.

Ein av grundgevingunum fyri at slaka í krøvum til m.a. grannskoðan, hevur verið, at tað skal vera lættari og bíligari hjá feløgum at virka. Tað er ivasamt, um sparingin hjá smærru feløgunum av at frávelja grannskoðan stendur mát við versnaðu góðskuna av innlætnu ársfrásagnunum, tá ið kanningin hjá grannskoðanarvirkinum vísir, at tað vóru lutfalsliga nógvir feilir í ársfrásagnum, har feløg hava frávalt grannskoðan.

Í juli 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at Føroyar hava, á sama hátt sum onnur lond, arbeitt við at lætta um umsitingarligu byrðarnar hjá vinnuni. Eitt av tiltøkunum er at sleppa minni vinnufyritøkum undan kravinum um grannskoðan.

[40] November 2017
[41] RIS 2017:35 Avskaffandet av revisionsplikten för små aktiebolag.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísir á, at tey hava ov lítið av royndum til at staðfesta, um tað sama ger seg galdandi í Føroyum, sum í okkara grannalondum, har eftirlitið hevur víst á ónøgd við hesi feløg. Sambært ráðnum verður fylgt við gongdini, og um grannalondina fara at herða lóggávuna fyri hesi feløg, er sannlíkt at vit eisini herða krøvini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer at taka málið upp við Skrásetingina fyri at finna ein leist, har eftirlitið við hesum roknskapum og við íverksetarafeløgum verður styrkt. Samanumtikið heldur Uttanríkis- og vinnumálaráðið, at tær avbjóðingar, sum hava verið við eftirlitinum av ársfrásagnum, eru við at koma í rættlag.

8.10 Rúsdrekkasøla landsins (LG 2017/213-0373)

Kassa- og goymslueftirlit

Seinasta árið hevur Landsgrannskoðanin verið á ófráboðaðum kassa- og goymslueftirlitum á nøkrum deildum hjá Rúsdrekkasølu landsins. Vit stemmaðu dagligu søluna av við bókhaldið og peningastovnskonturnar; vit stemmaðu goymslurnar á sølustøðunum av við goymsluyvirlitið í høvuðsbókhaldinum. Um ársskiftið gjørdu vit eftirlitsteljingar av høvuðsgoymsluni á Hjalla. Samanumtikið stemmaðu kassarnir stórt sæð eftirlitsdagin, meðan nakrir munir vóru á goymslunum úti á deildunum.

Landsgrannskoðanin hevur eftirlit við kassum og goymslum.

Viðmerkingar frá seinastu frágreiðing

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit eisini grannskoðan av Rúsdrekkasølu landsins. Roknskaparreglugerðin hjá Rúsdrekkasøluni er frá 2007 og var ikki dagførd síðani.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at Rúsdrekkasølan arbeiðir við at dagføra roknskaparreglugerðina.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at Rúsdrekkasølan steingir tíðarskeiðini í búskaparskipanini Navision samstundis, sum stovnurin rapporterar til Búskaparskipan landsins. Stovnurin svaraði, at tey vóru sjáldan klár at rapportera og lata tíðarskeiðini aftur, tá ið Gjaldstovan lat aftur fyri bókingum í Búskaparskipan landsins ímillum 8. og 10. í mánaðinum. Stovnurin legði afturat, at alt, sum skuldi skrásetast, var ikki avgreitt um tað mundi.

Landsgrannskoðanin mælti til at steingja tíðarskeiðini í Navision samstundis sum BSL.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at tað er ein avbjóðing fyri fleiri stovnar, at Gjaldstovan letur mánaðarroknskapirnar aftur ov tíðliga. Rúsdrekkasølan hevur nógvar bókingar og hevur stóran tørv á at hava “rættar” mánaðir í bókhaldinum. Ein av stóru postunum er tolling og uppgerðirnar/rokningarnar frá TAKS koma somikið seint, at Gjaldstovan hevur latið aftur fyri bókingum, tá ið uppgerðirnar koma. Tí rapporterar Rúsdrekkasølan ein mánað afturút. Ráðið fer at umrøða nærri við Gjaldstovuna, hvørjir møguleikar eru fyri, at mánaðarroknskapirnir kunnu verða rættir hjá Gjaldstovuni og hjá Rúsdrekkasøluni.

8.11 Heilsufrøðiliga starvsstovan (LG 2017/213-0375)

Heilsufrøðiliga starvsstovan umsitur lógir og kunngerðir viðvíkjandi matvørum, djórasjúkum, djóravernd, djóralæknavirksemi og alivinnu.

KT viðurskifti

Upplýsingarnar í KT skipanunum hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni hava stóran týdning fyri samfelagið. Ein aliskipan er ment sambært kunngerðunum um sjúkufyribyrgjandi rakstur og um lúsateljing.

KT skipan stóran týdning fyri samfelagið.

Stovnurin hevur ikki yvirlit yvir trygdarhendingar, men leggur dagføringar av KT skipanum til rættis soleiðis, sum tað passar seg hjá teimum. Stovnurin hevur ikki tilbúgvingarætlan fyri KT trygdarhendingum, men hevur tilbúgvingarskipanir fyri virksemið hjá stovninum. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur ikki viðkvæmar persónsupplýsingar.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Dagførd roknskaparreglugerð send aðalráðnum til góðkenningar.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur fingið dagførda roknskaparreglugerð at góðkenna og er, sambært ráðnum, í samskifti við stovnin um ymiskar viðmerkingar, sum ráðið hevur til reglugerðina.

Landsgrannskoðanin mælti Heilsufrøðiligu starvsstovuni til at skjalfesta grundarlagið undir roknskapargóðkenningunum. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur mælt stovninum til at nágreina mannagongdir fyri avstemman og góðkenning av mánaðarroknskapunum betur.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur ásett í roknskaparreglugerðini, at keyp av størri lutum og tænastum skulu viðgerast í leiðslubólkinum. Einki størri keyp má gerast uttan við samtykki frá stjóranum, og skal stovnurin miða ímóti, at størri keyp byggja á tilboð.

Heilsufrøðiliga starvsstovan keypir sjáldan vørur ella tænastur, sum kosta meira enn 500 t.kr. Størri keyp eru ofta knýtt at vanligu latarunum, og stovnurin hevur nýtt Keypsportalin eina ferð.

Vit kannaðu um keyp frá nøkrum størri latarum vóru boðin út. Keyp av t.d. fjarskiftistænastum, tænastuveitingum í sambandi við ferðing og keyp av list vóru ikki boðin út. Arbeiði at umvæla bygningin hjá stovninum er boðið út ímillum tveir veitarar. Menningin av aliskipanini var ikki boðin út.

Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja reglunum um at bjóða størri keyp út á Keypsportalinum, at bjóða keyp út ímillum fleiri veitarar og at taka neyðug búskaparlig atlit.

Aliskipanin

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevði upprunaliga serstaka játtan til at gera og viðlíkahalda aliskipanina; tann menningin er sprottin úr einari royndarverkætlan, sum var ein farsóttarfrøðilig kanning og økiskoppseting móti ILA í Føroyum. Verkætlanin, sum byrjaði í 2005, varð framd í samstarvi millum Landsdjóralæknan, Heilsufrøðiligu starvsstovuna og útlendskar kanningarstovur.

Aliskipan kritiskan týdning fyri eftirlit í alivinnuni.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur greitt frá, at tá ið farið varð undir verkætlanina "Basan av fiskasjúkum", varð eisini farið undir at menna eina skipan, sum skuldi taka ímóti upplýsingum frá alarum. Henda skipan er vorðin so týðandi fyri eftirlitsarbeiðið í alivinnuni, at hon er vorðin kritisk. Skipanin er víðariment og útbygd til m.a. eisini at rapportera lúsatøl í aliringunum.

Eingin serstøk játtan til aliskinanina síðani 2012. Dagføringar goldnar yvir raksturin.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum hevur eingin serstøk játtan verið til økið síðani 2012. Eftir tað hava dagføringar verið gjørdar, tá ið Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur havt fíggjarligt rásarúm til tess. Hesar fortreytir gera tað trupult at dagføra skipanina á skynsaman hátt. Aliskipanin er ein av hornasteinunum undir alivinnuni og er so mikið týðandi fyri umsitingina og eftirlitið av alivinnuni, at skipanin ikki má gerast óvirkin ella hava feilir.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið er av teirri áskoðan, at hetta keypið kemur undir undantøkini í rundskrivi um keyp av vørum og tænastum frá juli 2016, petti 6 *"tó ikki, um veitingin er størri enn 500 tkr. u/MVG. Um veitingin er størri enn 500 tkr. u/MVG, og mett verður, at uppgávan ikki er egnað til útboð, eigur at verða biðið um undantak, sí eisini petti 6."*

Uttanríkis- og vinnumálaráðið fer at mæla Heilsufrøðiligu starvsstovuni til at biðja Fíggjarmálaráðið um undantak og tekur annars undir við, at farið verður undir samráðingar við fyritøkuna um lægri tímaprís.

Húsaleiga

Heilsufrøðiliga starvsstovan og Arbeiðseftirlitið fluttu í núverandi høli í 2015. Stovnurin flutti, tí Arbeiðseftirlitið tá var ein partur av stovninum. Húsaleigan er eina góða mió.kr. um árið, og fermetraprísurin er 856 kr. Í gomlu hølunum rindaðu tey 750 kr./m^2, tilsamans 676 t.kr. um árið, harav Heilsufrøðiliga starvsstovan rindaði 360 t.kr.

Í 2015 varð Arbeiðseftirlitið partur av samferðslumálum, og flutti í februar 2017 í høli hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum. Semja varð gjørd millum stovnarnar um, at Heilsufrøðiliga starvsstovan yvirtók leigumálið, og at Arbeiðseftirlitið rindaði húsaleigu til august 2017.

Landsgrannskoðanin vísti á, at meirútreiðslurnar hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni av húsaleigu vóru 645 t.kr. um árið í mun til 2013, og at spurningurin er, um stovnurin ikki rindar ov nógv í leigu, og um reglurnar um búskaparlig atlit verða fylgdar.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur greitt frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kunnaði ráðið um, at stovnurin ætlaði at finna betri hóskandi høli til samanlagda stovnin, og at umframt at fáa betri hølisumstøður, var endamálið at fáa stovnin betur samansjóðaðan eftir samanleggingina. Vinnumálaráðið setti tó sum treyt, at Landsverk skuldi góðkenna leigusáttmálan, og at leigukostnaðurin skuldi rúmast innan fyri játtanina.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum er virksemið hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni økt, sum avleiðing av góðu gongdini í búskapinum, ið m.a. stavar frá nýggjum marknaðum og nýggjum tilfeingi sum makreli og sild, umframt stóra vøksturin í alivinnuni. Í mun til 2013 eru 6-7 fólk fleiri í starvi á stovninum, umframt at aliumsitingin er flutt til Havnar. Ráðið heldur ikki, at tað gevur eina rættvísandi mynd einans at hyggja eftir øktum leigukostnaði. Økta starvsfólkatalið og samansjóðing av starvsfólki eiga at takast við, tá ið mett verður út frá einum skynsemissjónarmiði.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið harmast um, at politiska avgerðin um at flyta Arbeiðseftirlitið hevði við sær, at árliga húsaleigan hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni varð økt við 240 t.kr.

Húsaleigan fór upp, tá ið Arbeiðseftirlitið flutti.

Lønir, skráseting av arbeiðstíð v.m.

Arbeiðstíðin verður skrásett í TotalView. Stovnurin hevur reglur um +/- tímar og hevur orðað starvsfólkapolitikk. Vit høvdu viðmerkingar til nakrar tímasaldur, ið vit fingu frágreiðing um, og høvdu annars einki at finnast at.

Stovnurin letur starvsfólkunum jólagávur, rindar mat til jólaborðhald og rindar fyri summarútferð. Stovnurin tekur undir við tilmæli frá Landsgrannskoðanini um at gera reglur um starvsfólkaágóðar.

Oljunýtsla og umvæling av V.U.Hammershaimbsgøtu 11

Í oktober 2017 er samstarvssáttmáli gjørdur at galda millum Heilsufrøðiligu starvsstovuna og Landsverk um Orkutøk. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur ikki skrivað undir sáttmálan av tveimum orsøkum, t.e. at oljulatarin vil ikki býta rokningina sundur millum Heilsufrøðiligu starvsstovuna og Landsbókasavnið, og eisini heldur Heilsufrøðiliga starvsstovan tað vera ivasamt, um ætlanin at seta ventilatiónshitapumpu í bygningin er rætta loysnin.

HFS ikki skrivað undir sáttmála um orkutøk.

Landsverk roknar við orkusparing, tí at gomul vindeygu verða skift út við lágorkuvindeygu, og við at nýggjur kondenserandi ketil verður settur upp saman við einari ventilatiónshitapumpu. Í 2017 hevur Landsverk goldið 503 t.kr. av høvuðskontuni

Ivasamt um ventilatiónspumpa er rætta loysnin.

"Umvæling av almennum bygningum" til at umvæla bygningin í V.U.Hammershaimbsgøtu.

Avsláttur av oljuprísinum avroknaður LV við kreditnotu.

Oljunýtslan hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni er við í útboði hjá Landsverki í 2017 av oljulating til almennar stovnar. Oljufelagið letur sambært Heilsufrøðiligu starvsstovuni avsláttur av oljuprísinum við at senda kreditnotur til Landsverk, t.v.s. at stovnurin fær ikki avslátturin, men Landsverk. Oljulatingin til bygningin í V.U. Hammershaimbsgøtu verður faktureræd sambært sáttmálanum.

Hátturin at fakturera keyp ivasamur.

Landsgrannskoðanin helt tað vera ivasamt, um hesin háttur at fakturera keyp er í samsvari við játtanarreglurnar og almennu roknskaparreglurnar. Meginreglan um, at roknskapurin skal vera gjøgnumskygdur, og at inntøkur og útreiðslur skulu bókast, har tær verða havdar, er heldur ikki fylgd. Eftir okkara tykki átti sparingin at sæst sum minni kostnaður fyri olju hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Heilsufrøðiliga starvsstovan var samd við Landsgrannskoðanina.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur greitt frá, at Samferðslumálaráðið hevur saman við Landsverki arbeitt við verkætlan, nevnd Orkutøk. Endamálið við verkætlanini er at minka um orkunýtsluna og bøta um støðið á almennum bygningum. Fíggjarmálaráðið og samgongan hava tikið undir við átakinum, tí mett varð, at tað var í samsvari við rundskriv frá 19. september 2011 um eftirlit og at taka neyðug búskaparlig atlit, t.v.s. at tað verður hóskandi atborið fíggjarliga.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið sigur at avslátturin fer til stovnin, og meiravslátturin til LV.

Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum hevur Landsverk í kunningarskrivi 18. oktober 2017 kunnað um, at útboðið er framt, og at avgerðin, um at gera eitt samlað útboð, vísti seg at vera røtt. Ráðið leggur afturat, at í skrivinum verður eisini sagt, at *"fyri tín stovn er eingin broyting. Tit fáa eina rokning frá tykkara oljuveitara sum vanligt og tín stovnur kemur eisini framhaldandi at varðveita sín avsláttur".* Tað skilir Uttanríkis- og vinnumálaráðið soleiðis, at tað er meiravslátturin, sum verður fluttur til eina viðlíkahaldskontu hjá Landsverki, og at tað m.a. er hesin meiravsláttur, sum skal fíggja útskifting til grønari orkuloysnir og minka um orkutørvin.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er gott, at stovnar royna at fáa so bíliga olju til upphiting sum gjørligt, og at meira verður gjørt fyri at bøta um standin á almennum bygningum.

Landsgrannskoðanin mælir frá ætlaðu roknskaparligu viðgerðini.

Landsgrannskoðanin vil tó staðiliga mæla frá ætlaðu roknskaparligu viðgerðini av hesum átøkum, tí vit halda, at tað brýtur við grundmeginreglurnar í almenna roknskaparhaldinum og játtanarmeginreglurnar um, at útreiðslur og inntøkur skulu skrásetast soleiðis, at tær fylgja játtanarskipanini. Landsgrannskoðanin mælir til, at reglurnar í játtanarskipanini og roknskaparreglurnar verða fylgdar, og at peningurin verður játtaður, har hann verður brúktur, og útreiðslurnar verða skrásettar hareftir.

Íløgur fyri 950 t.kr. fyri at spara 43 t.kr. um árið.

Sambært Landsverki fer Heilsufrøðiliga starvsstovan at spara 89 t.kr. um árið í oljunýtslu og at hava eina meirnýtslu av el til hitapumpu á 41 t.kr. Tað gevur árliga sparing á 48 t.kr.; av tí fær Heilsufrøðiliga starvsstovan 43 t.kr. Fyri at náa nevndu sparing, skulu íløgur gerast í nýggja hitaskipan, ventilatiónshitapumpu og vindeygu fyri tilsamans 950 t.kr.

Í útrokningini vísir Landsverk á, at Heilsufrøðiliga starvsstovan fær størri upphædd, um prísirnir á ávikavist olju og el hækkað. Spurd, hvat hendir, um prísirnir lækka, svaraði Heilsufrøðiliga starvsstovan, at tað liggur uttan fyri ábyrgdina hjá stovninum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur boðað frá, at ráðið heldur, at Orkutøk er eitt skilagott tiltak og er í samsvari við samgonguskjalið.

Ráðið samt við Landsgrann-skoðanina um bókhaldsmegin-regluna.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið er tó samt við Landsgrannskoðanina, *"at hátturin, hetta átak bókhaldsmessiga er framt, ikki er í samsvari við bókhaldsmeginregluna um, at ein útreiðsla skal kunna fylgjast frá "vøggu til grøv"".* Tað ber ikki til at fylgja hesari útreiðslu frá vøggu til grøv í bókhaldinum hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, umframt at tað er ivasamt, um hátturin er í samsvari við játtanarskipanina.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur, at einasti mátin at fáa hetta at vera í samsvari við játtanarskipanina og bókhaldsmeginregluna er, at oljujáttanirnar verða fluttar til Landsverk, um ætlanin er at halda fram við Orkutøkum. Fíggjarmálaráðið hevur tikið undir við verkætlanini "Orkutøk" og sum varandi av landsins roknskapi má tað vera Fíggjarmálaráðið, sum tekur stig til at gera broytingar í verkætlanarleistinum.

Landsgrannskoðanin skilir ikki niðurstøðuna hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum um at flyta játtanina til oljukeyp til Landsverk, tí tað brýtur við grundleggjandi reglurnar í játtanarskipanini.

Í august 2018 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið víst á fleiri felagsloysnir innan almennu umsitingina, m.a. at Gjaldstovan umsitur landsins bókhald og rindar út øll útgjøld hjá landsins stovnum, KT Landsins er eitt annað dømi, har man, við fyrimuni, hevur valt at savna KT førleikar í eina felagseind, sum tænir øllum stovnum, sum eru við í Landsneti, m.a. rindar KT Landsins internetnýtsluna hjá stovnunum. Áðrenn hetta varð sett í verk, hevði hvør einstakur stovnur egið KT fólk og KT rakstur um hendi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið heldur "Orkutøk" vera eina skilagóða loysn og heldur, at tað, við fyrimuni, eigur at bera til at savna oljuútreiðslur og orkuábøtur hjá Landsverki, sum hevur førleika til at umsita hetta.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið vil annars vísa til Fíggjarmálaráðið í sambandi við meting um, hvørt "Orkutøk"-verkætlanin er í samsvari við játtanarreglurnar.

Landsgrannskoðanin kann vísa á, at landsins stovnar verða fíggjaðir við játtan í fíggjarlógini, og summir stovnar kunnu taka gjøld fyri sínar tænastur til at fíggja sítt virksemi, men alt virksemi skal vera innan fyri tað, sum verður játtað. Landsverk tekur t.d. gjøld fyri at vera byggiharri umframt at hava eina játtan til vanligan rakstur.

Orkutøk er nýggjur og óroyndur fíggingarleistur.

Tiltakið Orkutøk er ikki ein felagsloysn um veiting av vørum ella tænastum innan almennu umsitingina, men ein nýggjur fíggingarleistur til eina serstaka verkætlan. Verður Orkutøk veruleiki, gerst avleiðingin, at Landsverk fær ein part av avsláttrinum við at keypa stórt inn av olju, og at peningur, sum Løgtingið hevur játtað – í hesum føri til Heilsufrøðiligu starvsstovuna – endar sum inntøka hjá Landsverki, uttan at játtanarlig heimild er fyri tí.

Landsgrannskoðanin vil enn einaferð staðiliga mæla frá hesum fíggingarleisti, og mælir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum heldur til at brúka teir ríkiligu møguleikar, ið liggja í verandi skipan. Hesin háttur at skráseta almenna nýtslu brýtur við allar megin-reglur um gjøgnumskygni, sum nútímans samfeløg byggja á.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísir í svarinum til Landsgrannskoðanina á felagsloysnir hjá Gjaldstovuni og KT Landsins. Gjaldstovan varar av almenna bókhaldinum, og varar í høvuðsheitum av at veita ta tænastuna. Starvsfólk á Gjaldstovuni taka sær av bókingum av m.a. útgjøldum, og Gjaldstovan fær eina játtan í fíggjarlógini til tað virk-semi. Sama ger seg galdandi við KT Landsins, sum veitir summum landsstovnum KT infrastruktur á stovninum við egnum starvsfólki. Peningur verður játtaður til KT Landsins í fíggjarlógini.

Inntøkur

Inntøkurnar hjá Matvørudeildini eru heimilaðar í kunngerðum. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað inntøkurnar. Vit høvdu einki at finnast at.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað inntøkur. Einki at finnast at.

Heilsufrøðiliga starvsstovan nevnir í roknskaparreglugerðini, hvørji inntøkusløg stovnurin hevur. Landsgrannskoðanin ivast í, um frágreiðingin í reglugerðini er í samsvari við rundskrivið um roknskaparreglugerðir.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur kunnað um, at ráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at tað er ikki samsvar ímillum ásetingina í rundskrivinum og uppskotið til roknskaparreglugerð. Ráðið fer saman við Heilsufrøðiligu starvsstovuni at broyta ásetingina um inntøkur í samsvari við rundskrivið.

Søla millum deildir hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni

Heilsufrøðiliga starvsstovan heldur tað vera greiðast at skráseta allar inntøkur sum sølu, serliga nú privat kanningarstova kappast við stovnin.

HFS eliminerar ikki alla innanhýsis sølu.

Landsgrannskoðanin vísti á, at ov stórur umsetningur verður í landsroknskapinum, tá ið stovnurin bókar innanhýsis sølu og keyp, sum um talan var um sølu til onnur. Sambært kontuvegleiðingini skal innanvirkissøla og –keyp skrásetast á ávísa standardkontu fyri at eliminera innanhýsis umsetningin. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur kunnað um, at tað ber ikki til hjá teimum at bóka innanhýsis sølu og keyp, soleiðis at tann kontan kann vera nullstillað hvønn mánaða.

Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin finnur eina loysn, soleiðis at roknskapurin verður rættur, tá ið árið er av, t.d. við at regulera sølu og keyp við ársenda.

Ráðið fer at taka málið um eliminering upp við stovnin og Gjaldstovuna.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið er av teirri áskoðan, at skynsemissjónarmiðið eigur at viga tungt. Upphæddin, sum talan er um, er áleið 1 mió. kr. árliga av einari samlaðari sølu upp á 10,8 mió.kr. Tað er tí ein lutfalsliga týðandi upphædd. Ráðið fer at taka upp við Heilsufrøðiligu starvsstovuni og Gjaldstovuni, hvussu tey á ein skynsaman hátt kunnu fáa roknskapin rættari.

Fíggjarstøða

Skuldarabókhaldið hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni er í Búskaparskipan landsins. Stovnurin hevur ikki havt stór tap av skuldarum, og hava tey mett um hvørja einstaka upphædd, ið tey hava sett av. Í 2017 var samlaði frádrátturin fyri tap og avsetingar móti tapi 205 t.kr. Stovnurin avskrivaði 74 t.kr., sum var ágóði hjá einum partafelag, ið er strikað í 2017.

Kannað MVG skrásetingar. Einki at finnast at.

Inntøkurnar hjá Kanningarstovuni eru MVG-skyldugar, tí tær kunnu vera í kapping við privatar fyritøkur. Vit hava kannað nakrar skrásetingar av MVG og høvdu einki at finnast at.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur skrásett ognir og útbúnað í Búskaparskipan landsins, tó at nøkur nýggjari keyp ikki eru skrásett. Stovnurin hevur ikki dagført yvirlit yvir smærri ognir.

9 Samferðslumál

9.1 Landsins ognir (LG 2017/217-0111)

9.1.1 Landsins ognir, rakstrarjáttan 17.11.1.23

Játtanin á høvuðskontu 17.11.1.23 Landsins ognir hevur fýra undirkontur. Roknskapur og játtan 2017:

t.kr.

Heiti	Játtan	Roknskapur	Frávik
20. Oljugoymslur o.a.	-1.200	-1.200	0
21. Húsaleiga og íbúðargjald	55	45	10
22. Leiga av økjum, uppisitaraavgjald o.a.	17	16	1
23. Yvirtiknar ognir	220	328	-108
Tilsamans	**-908**	**-811**	**-97**

Vit grannskoðaðu undirkontu 21 og 23.

Leiga av økjum, uppisitaraavgjald o.a.

Játtanin hevur í fleiri ár verið 17 t.kr. Onkrar smávegis inntøkur eru bókaðar á undirkontuna. Allar útreiðslurnar eru til leigu av lendi frá Hamrahaga í Vági. Sambært sáttmálanum skal leigugjaldið prístalsviðgerast 1. januar hvørt ár.

Leiga fyri lendi ikki regulerað.

Landsverk hevur rindað somu leiguupphædd síðani 1997. Landsverk veit ikki at siga, hví leigan ikki er regulerað.

Yvirtiknar ognir

Talan er um ognir, sum landsstýrið yvirtók frá dønum, eftir at virksemið hjá Færøernes Kommando bleiv niðurlagað.

Roknskapartøl fyri 2014 til 2017:

t.kr.

Heiti	2014	2015	2016	2017
Lønir v.m.	332	334	509	773
Keyp av vørum og tænastum	2.033	1.759	1.397	1.067
Keyp av útbúnaði, netto	0	15	140	3
Leiga, viðlíkahald og skattur	69	278	-60	1.411
Søla av vørum og tænastum	-2.108	-1.850	-2.127	-2.834
Bygging og løguframleiðsla	0	0	0	-100
Innanh. flyt. millum almennar stovnar (útr)	0	0	54	9
Tilsamans	**325**	**535**	**-87**	**328**
Játtan	**800**	**800**	**220**	**220**

Játtanin fer til viðlíkahald av hernaðarstøðunum í Mjørkadali og á Sornfelli og løn til umsjónarfólk.

Ognirnar í Mjørkadali verða leigaðar út til m.a. Kriminalforsorgina og Arbeiðs- og brunaeftirlitið. Inntøkurnar frá Sornfelli eru fyri rakstur av samskiftisútgerð, ið stovnar og fyritøkur hava sett upp á Sornfelli.

Sambært Landsverki flutti umsjónarfólkið við, tá ið landið yvirtók ognirnar; tí var einki skjalatilfar í lønarmálinum uttan setanarskriv. Landsgrannskoðanin kundi tí ikki sanna, at lønin var røtt.

Arbeiðið at umvæla bygning ikki boðið út.

Arbeiðið at umvæla bygningin fyri góðar 100 t.kr. var ikki boðið út. Landsverk hevði mett, at kostnaðurin av at lýsa arbeiðið v.m. fyri at kunna bjóða uppgávur út fór at gera arbeiðið dýrari. Landsgrannskoðanin mælti til at halda rundskrivið um keyp av vørum og tænastum.

9.1.2 Landsins ognir, løgujáttan 17.11.1.62.

Við eykjajáttanarlóg fyri august 2017 vórðu játtaðar 2 mió.kr. til at keypa og seta upp nýggja mastur eftir skaða á jólum 2016. Umvælingararbeiðið varð gjørt beint eftir skaðan og goldið av rakstrarjáttanini. Tá ið eykajáttanin var fingin, varð upphæddin umbókað á løgujáttanina.

Arbeiðið at seta mastur upp ikki boðið út.

Veitingarnar vóru ikki bodnar út. Landsverk valdi at brúka sama veitara, sum Føroya Tele brúkar, sum hevur drúgvar royndir við slíkum arbeiði, tí Landsverk ynskti ikki at taka á seg váðan, sum stendst av at seta eina mastur á ein fjallatind.

9.2 Landsverk (LG 2017/217-0381)

Rakstrarjáttanin til Landsverk á høvuðskontu 17.38.1.02 er býtt á fleiri undirkontur:

20. Landsverksskrivstovan
22. Byggi- og bygningsumsiting landsins
23. Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum
30. Landsvegahald
35. Havnir
38. Flogferðsla
40. Inntøkufíggjað virksemi

9.2.1 Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerð

Inntøkufíggjað virksemi keypir ikki longur amboð.

Landsverk hevur gjørt reglur um prísáseting av maskinleigu fyri maskinur og amboð í roknskaparreglugerðini og hevur áður greitt frá, at Inntøkufíggjað virksemi keypti allan útbúnað og leigaði hann síðani til hinar deildirnar. Endamálið var, at skrásetingarnar skuldu avspegla aktivitetin, og tí brúkti Landsverk sokallaða Activity-based costing, stytt ABC-modellið til roknskapin hjá Inntøkufíggjaðum virksemi.

Í august 2018 hevur Landsverk greitt frá, at *"Tá spurt verður um ABC-modellið til áseting av kostnaði, so verður hetta serliga brúkt í skervframleiðsluni. Hetta var eisini brúkt við maskinum, men tað er nú broytt."*

Ógreitt um ráðið hevur góðkent broytingina.

Spurdur, um Samferðslumálaráðið hevur góðkent broytingina, svarar landsstýrismaðurin, at *"tá Landsverk sendir SMR broytta roknskaparreglugerð til góðkenningar, skal Landsverk vátta fyri okkum, at Gjaldstovan tekur undir broytingunum. Fíggjarráðgevin og starvsfólk á Stjórnardeildini gjøgnumganga roknskaparbroytingarnar, áðrenn endaliga góðkenning."*

Maskinur og amboð

Sambært reglugerð frá 24. apríl 1998 er eitt starvsøki hjá Landsverki: *"Fyrst og fremst at taka sær av landsvegunum í øllum lutum – planlegging, projektering, ognarviðurskiftum, bygging og haldi."*

Landsverk kunnaði um, at stovnurin hevði lagt asfaltbólkin, ið taldi 10 starvsfólk, niður, tí í 2016 komu aðrir útleggjarar, sum gjørdu tað møguligt. Landsverk hevði heldur ikki fíggjarliga orku til at leggja asfalt út.

Landsverk hevði ikki fíggjarliga orku at leggja asfalt út, og hevur tí niðurlagt asfaltbólkin.

Landsgrannskoðanin spurdi Landsverk, um tað er í samsvari við játtanarreglurnar og reglugerðina fyri stovnin, at Landsverk selur amboð, ið stovnurin hevur útvegað sær til at útinna virksemi, ið er lagt til stovnin. Eisini spurdu vit, um loyvi er fingið frá aðalráðnum at leggja virksemið niður.

Til tað svaraði Landsverk, at leikluturin hjá stovninum at leggja asfalt út var í einari tíð, har eingin annar hevði amboð og førleikar til tess. Fleiri aktørar eru komnir á marknaðin seinastu árini, og avráddi Landsverk í samráði við aðalráðið at gevast við at kappast við privatu fyritøkurnar, sum løgdu asfalt út.

Landsverk legði afturat, at eitt annað, sum stuðlaði undir avgerðina, var, at stovnurin helt tað vera óheppið, at Landsverk keypti asfalt frá sær sjálvum í kapping við aðrar, og at tað tí var ruddiligast at sleppa sær av við áleggingarpartin og bert verða framleiðari av asfalti og bert selja til 3. part.

Landsverk helt tað vera óheppið at kappast við privatar fyritøkur.

Í august 2018 sigur landsstýrismaðurin, at tá ið støðan er soleiðis, at fleiri aktørar leggja asfalt á (asfaltera), at teir røkja allan marknaðin, og tað má metast at verða kapping innan økið, er ikki neyðugt, at Landsverk eisini røkir uppgávuna.

Landsstýrismaðurin heldur tað ikki vera neyðugt at leggja asfalt út, tá ið privatir aktørar røkja marknaðin.

Keyp og søla av amboðum

Sambært Landsverki verða øll keyp hjá stovninum boðin út á Keypsportalinum. Ein sermaskina var bert í vøruskránni hjá tí eina framleiðaranum, og varð tí bíløgd haðani. Til nakrar bilar, ið kosta minni enn 500 t.kr., hevur Landsverk biðið um tilboð frá tveimum veitarum og tikið av tí bíligasta.

Landsverk bjóðar mest sum øll keyp út.

Sølan av m.a. útbúnaði til Asfaltverkið fyri 3,4 mió.kr. er mótroknað keypi á St.Rk. 1540 “Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars”. Sambært Landsverki var innanhýsis fíggjarskipanin hjá stovninum ikki so útgreinað sum Búskaparskipan landsins, men nú er kontuplanurin útbygdur, soleiðis at søla av amboðum verður bókað á rætta kontu frameftir.

Keypið av maskinum og amboðum í 2016 og 2017 er skrásett á Landsvegahald. Árini frammanundan varð tað skrásett á Inntøkufíggjað virksemi. Keypini av útbúnaði eru ikki altíð nóg væl skjalprógvað. Landsgrannskoðanin mælti til at útgreina nágreiniligari á sølufakturum, hvat selt er. Landsverk tekur undir við, at betri útgreining skuldi verið á fakturunum, ella at eitt fylgiskjal varð viðheft.

iBinder og Útbjóðing av keypi

Spurt, hví Landsverk nýtir annan pall enn Keypsportalin at bjóða út vøru- og tænastu-keyp, hevur Landsverk svarað, at iBinder er eitt forrit, sum er ment til byggivinnuna. Landsverk metir ikki, at iBinder og Keypsportalurin kunnu samanberast, tí tey loysa ikki somu uppgávu. Sambært Landsverki er útboðsparturin bert ein lítil partur av iBinder.

Landsverk hevur fyrr roynt at nýta Keypsportalin til útboð, uttan at tað hevur eydnast væl. Sambært teimum gongur ov long tíð at samskifta, og Keypsportalurin nøktar ikki tørvin hjá stovninum heilt.

Keypsportalurin nøktar ikki tørvin hjá Landsverki.

Í august 2018 hevur Landsverk boðað frá, at stovnurin brúkar Keypsportalin til øll útboð, og at tað haðani verður víst til iBinder, m.a. tí at Keypsportalurin ikki lýkur lógarkrøvini fyri talgilt útboð. Í útboði av byggiverkætlanum o.l. er tað ein stórur fyrimunur, at byggifrøði er á sama staði sum tey, ið gera sjálvt útboðið, tí nógv samskifti er um útboðið. Ein avbjóðing er eisini, at útbjóðing av byggiverkætlanum ikki er líkt øðrum útboðum, tí serlig lóggáva er innan útboð av bygging.

Landsverk brúkar Keypsportalin saman við iBinder.

Høvuðsskrivstovan flytir deildunum aftur óbrúktar felags-útreiðslur.

Bókingar millum undirkontur

Spurt, hví stovnurin hevur afturført 500 t.kr. av undirkontuni Høvuðsskrivstovan, viðmerkt *"afturført buffara"*, svaraði Landsverk, at *"Høvuðsskrivstovan krevur eina fasta mánaðarliga upphædd frá deildunum fyri felagsútreiðslur, so sum húsaleiga, el, orka, KT o.a. eftir einum ávísum býtislykli. Men óvæntaðar útreiðslur so sum sakarmálskostnaðar, matrikkulering o.a. kunnu altíð stinga seg upp, so tí hevur man valt at innrokna ein buffara í gjaldið. Tá tað so vísir seg, at tað óvæntaða gerst minni, so verður buffarin borðin deildunum aftur."*

Landsverk upplýsti, at Landsvegahald hevði fingið eina mió.kr. aftur frá Høvuðsskrivstovuni, tí at Høvuðsskrivstovan hevði ikki avhildið allar tær útreiðslur, ið budgeterað var við í 2017, og varð upphæddin tí førd aftur.

Leiga og viðlíkahald

Niðanfyri er yvirlit yvir útreiðslurnar á St.kt. 16 "Leiga, viðlíkahald og skattur" hjá Inntøkufíggjaðum virksemi seinastu 5 árini:

t.kr.

Heiti	2013	2014	2015	2016	2017
Húsaleiga	238	298	235	105	26
Leiga av økjum og útr. fyri rættindi	53	45	53	53	183
Langtíðarleiga og leiga annars	90	68	48	7.818	6.725
Umvæl.- og viðlíkahaldsútr., bygningar	68	33	45	134	531
Umvæl.- og viðlíkahaldsútr. av vegum, tunnlum, havnum o.ø.	255	3.782	1.003	565	1.053
Umvæl.- og viðlíkahaldsútr. av flutningsútbúnaði	93	19	8	592	235
Umvæl.- og viðlíkahaldsútr. av maskinum, innbúgvi og øðrum útbúnaði	15	26	173	68	592
Skattir, avgjøld o.t.	521	481	618	598	602
Tilsamans	**1.333**	**4.751**	**2.183**	**9.933**	**9.949**

Umvælingar av asfaltverkinum eru bókaðar á "Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar". Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært kontuvegleiðingini skulu umvælingar av leigaðum bygningum bókast saman við húsaleigu.

Í august 2018 hevur Landsverk boðað frá, at stovnurin hevur ikki tulkað roknskaparvegleiðingina soleiðis, at viðlíkahaldsútreiðslur av einum leigaðum framleiðsluanleggi skulu bókast undir húsaleigu.

Landsgrannskoðanin mælir til, at bókað verður á rætta standardroknskaparkontu, og at bert útreiðslur til umvælingar av egnum bygningum verða bókaðar á St.Rk. 1651.

Í 2017 hevur Landsverk bókað 120 t.kr. fyri eykaarbeiði í sambandi við asfaltarbeiði á Dalavegnum á Viðareiði (St.Rk. 1652[42]). Spurt, hví rokningin ikki er bókað á Landsvegahald, hevur Landsverk svarað, at *"Orsøkin til at Asfaltverkið fær rokningina fyri asfalteringina á Dalavegnum er tann, at tað var feilur í leveransuni frá teirra síðu, og tí máttu HJ-asfalt gera arbeiði av nýggjum, sum Asfaltverkið mátti endurgjalda."*

Á umvæling av bygningum eru 285 t.kr. bókaðar á Skervverk í Suðuroy, viðmerkt umvæling og nýgerð av køki. Spurt, um upphæddin ikki skuldi verðið bókað á høvuðsslag 3 Løguútreiðslur, svaraði Landsverk, at *"talan er um at seta í stand høli, sum hýsa køkinum, umframt at skifta køkselement út í "skúrinum". Man metti nokk, at tað í størri mun var umvæling heldur enn nýgerð, men taka annars undir við sjónarmiðnum hjá LG."*

[42] Upphæddin er bókað á Asfaltverkið í Hundsarabotni.

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at tað eru ov nógvir feilir í konteringunum á St.kt. 16.

Lønir

Landsgrannskoðanin hevur kannað lønarmál hjá Landsverki.

Í lýsing eftir deildarleiðara í 2017 sigur Landsverk: *"Tú ert útbúgvin verkfrøðingur e.l., hevur royndir við starvsfólkaleiðslu og hevur gott innlit í og royndir innan byggi- og entreprenørvinnuna."*

Landsverk setti umsøkjara, ið ikki er útbúgvin verkfrøðingur. Landsverk hevur greitt frá, at tá ið stovnurin metti um umsøkjararnar, legði stovnurin dent á førleikakrøvini í lýsingini: útbúgving, royndir við starvsfólkaleiðslu, innlit í og royndir innan byggi- og entreprenørvinnu, kundafokus, samstarvs- og samskiftisførleikar, leiðsluevni, analytisk evni og førleikar at arbeiða strategiskt. Samanumtikið metir Landsverk, at tann, ið varð settur, leyk útbúgvingarkravið í lýsingini, sæð í ljósinum av lýsingini sum heild.

Deildarleiðarin, ið varð settur, er løntur sum deildarleiðari II eftir Búskapar- og løgfrøðingafelagnum. Sambært BLF-sáttmálanum er tað ein fyritreyt sambært § 1 fyri at verða løntur sum deildarleiðari II, at tann setti er kandidatur í einum av teimum útbúgvingum, ið eru nevndar í Skjal 1 – ískoyti til sáttmálan.

Deildarleiðari settur sum deildarleiðari II uttan at vera kandidatur.

Sambært Landsverki játtaðu Innlendismálaráðið og Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum í 2009 umsókn frá stovninum um at javnseta deildarleiðararnar á Landsverki, soleiðis at tveir deildarleiðarar við Bachelor útbúgving vórðu settir sum deildarleiðari II sambært BLF, fyri at ógrundaður lønarmunur ikki skuldi vera millum deildarleiðararnar á Landsverki. Sambært Landsverki valdi stovnurin við støði í tí at flokka deildarleiðaran sum deildarleiðara II sambært BLF.

Landsgrannskoðanin spurdi landsstýrismannin, um hann er samdur við Landsverki, at umsøkjarin lýkur treytirnar í lýsingini um útbúgving sum verkfrøðingur ella líknandi. Eisini spurdu vit, um góðkenningin frá 2009 av, at deildarleiðarar hjá Landsverki verða flokkaður sum deildarleiðari II uttan kandidatútbúgving, er ein generell góðkenning, t.v.s. eisini av nýggjum deildarleiðarum.

Landsstýrismaðurin svarar ikki spurningunum, men vísir í august 2018 á, at *"í eini viðmerking til málið sigur Landsverk, at Lønardeildin góðkendi í 2009, at leiðarin fyri framleiðsludeildini hjá Landsverki skuldi lønast við hægstu viðbót, tí deildin var so stór. Landsverk tulkaði hetta soleiðis, at nýggi deildarleiðarin eisini kundi lønast við hægstu viðbót, og soleiðis lønast sum hinir deildarleiðararnir á stovninum."*

Landsgrannskoðanin er ikki nøgd við, at landsstýrismaðurin ikki viðger ítøkiligu spurningarnar, sum vit reisa, men bert endurgevur tað, sum Landsverk áður hevur sagt okkum í sínum svari.

Landsstýrismaðurin viðgerð ikki spurningin frá Landsgrannskoðanin.

Broyttur roknskaparháttur

Beint øvut av tí, sum Landsverk hevur gjørt síðani 2006, hevur stovnurin ikki skrásett keyp av flutningstólum og amboðum á Inntøkufíggjað virksemi, men á hvørja deild.

Á "Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar, útreiðslur" eru 4,4 mió.kr. bókaðar við tekstinum *"Eftirregulering, ov nógv fakturerað"*, harav 1,7 mió.kr. eru vegna ov høgt gjald fyri bitumen, 1,3 mió.kr. fyri *"rakstur smiðjan"* og 1,4 mió.kr. fyri *"keyp-goymsla"*. 5,4 mió.kr. eru afturførdar í tíðarskeiði 13/2017, og 3,9 mió.kr. eru bókaðar sum keyp av útbúnaði í tíðarskeiðnum.

Ein mió.kr. er flutt aftur frá Landsverksskrivstovuni. Upphæddin er bókað sum inntøka á Landsvegahald sum innanhýsis flyting millum almennar stovnar.

Landsgrannskoðanin spurdi, hví Landsverk hevði gjørt hesar bókingarnar, tá ið Inntøkufíggjað virksemi[43] sambært Landsverki sjálvum keypti øll arbeiðstól og leigaði tey út til hinar deildirnar hjá stovninum.

Landsverk er farið aftur til gomlu skipanina, tí hon er lættari at umsita.

Landsverk greiddi frá, at stovnurin hevði tikið avgerð um at fara aftur til gomlu skipanina, sum var áðrenn 2006, tí hon er einfaldari og lættari at umsita, og hevði stovnurin miðskeiðis í 2017 broytt roknskaparmannagongd til, at deildirnar keypa og eiga síni amboð sjálvar. Eftir broytingina rinda deildirnar ikki leigu, men rinda smiðjunum fyri viðlíkahald o.a.

Sambært Landsverki ásettu smiðjurnar ein takst fyri viðlíkahald o.a. í 2017, men tá ið árið var av, vísti tað seg, at yvirskot var hjá smiðjunum, og tí gjørdu tey reguleringarnar.

Landsgrannskoðanin vísti á, at yvirskipað snýr játtanarskipanin seg um fíggjarstýring við fíggjarlógini sum høvuðsamboði. Í játtanarskipanini eru nærri reglur um játtanir. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur, vegna landsstýrið, fram uppskot til fíggjarlóg v.m. Einstøku landsstýrismenninir hava ábyrgd av hvør sínum málsøki, jb. § 33 í stýrisskipanarlógini, og teir samskifta við Fíggjarmálaráðið um játtanirnar.

Fíggjarlógin skal vera grundað á veruleikakendar vónir og so hollar ætlanir, sum til ber, jb. § 3, stk. 1 í játtanarlógini. Inntøkur og útreiðslur skulu verða vístar í fleirárs yvirlitum, sum fevna um síðstu roknskapirnar, fíggjarlógina, fíggjarlógaruppskotið og veruligar fíggjarætlanir fyri fylgjandi fíggjarár.

Sambært § 1, stk. 2 í roknskaparlógini skal landsroknskapurin í uppseting fylgja fíggjar- og eykajáttanarlógum fyri árið, talan er um, og skal fevna um allar inntøkur og útreiðslur landsins fyri farna fíggjarár, aktiv og passiv og broytingum hesum viðvíkjandi í árinum.

Í tekstinum í fíggjarlógini 2017 stendur m.a. um Inntøkufíggjað virksemi hjá Landsverki, at *"amboð/smiðjur fevnir um alt arbeiðið viðvíkjandi at reka og røkja amboð, sum Landsverk hevur um hendi, umframt at keypa nýggj amboð. Skerv- og asfaltverk fevnir um alt arbeiðið at reka og røkja hesi verk, og útreiðslur at keypa asfalt og at framleiða hetta."* Fíggjarlógarteksturin í 2018 er óbroyttur, og broytti roknskaparhátturin er ikki upplýstur.

Í august 2018 hevur Landsverk greitt frá, *at "deildirnar hava altíð rindað fyri amboðini, men hava rindað gjøgnum eina leigu, sum tekur hædd fyri viðlíkahaldi og keyp til endurnýggjan av maskinum. So ístaðin fyri at gjalda eitt leigugjald, verða maskinurnar keyptar og rindaðar beinleiðis av deildini. Deildirnar fáa rokning fyri ítøkiliga viðlíkahaldið á hvørji einstøku maskinu."* Landsverk vísti á, at fíggjarlógarteksturin 2018 er ikki broyttur, at uppgávan hjá smiðjunum er nú sum fyrr at reka og røkja amboðini, og at smiðjurnar varða av øllum maskinkeypi eins og fyrr.

Góðkenning av broyttum roknskaparhátti

Vísandi til roknskaparreglurnar heldur Landsgrannskoðanin, at tá ið Landsverk broytir roknskaparhátt, átti tað at verðið góðkent av aðalráðnum og verðið kunnað Gjaldstovuni og roknskapargrannskoðanini sambært grannskoðanarlógini.

Landsgrannskoðanin heldur, at Landsverk kann ikki broyta roknskaparhátt, eftir at fíggjarlógin er samtykt.

Landsverk hevur verið í samband við Gjaldstovuna um broytingina.

Landsverk vísir á, at stovnurin *"hevur verið í samband við Gjaldstovuna ísv broytingina, og var einki til hindurs fyri at fremja hana. Broytingin kemur við í næstu dagføring av roknskaparreglugerðini, sum verður liðug í næstum."*

[43] Høvuðskontu 17.38.1.82 – undirkontu 40

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum greitt frá, at *"í yvirskipaðum málum um roknskaparhættir og roknsskaparviðurskifti, samstarvar og samskiftir Landsverk javnan við evsta sakkunnleika innan økið, nevniliga Gjaldstovuna. Landsverk greiðir frá, at Gjaldstovan heldur tað vera í lagi, at Landsverk hevur broytt roknskaparhátt. Tá so er, tekur Samferðslumálaráðið vanliga undir við broytingunum."*

Landsverk upplýsir, at Gjaldstovan sigur, tað er í lagi at broyta roknskaparhátt.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at "*viðmerkingarnar í fíggjarlógini til "Inntøkufíggjað virksemi" greiða í generellum orðingum frá, hvat virksemi fer fram innan innan økið. Tað, at roknskaparhátturin er broyttur, merkir ikki, at neyðugt er at broyta tekstin, tí virksemið er óbroytt. Arbeitt verður nú við fíggjarlógaruppskotinum, og dagføra vit tekstin um neyðugt."*

9.2.2 Orkutøk

Roknskapar- og játtanarviðurskifti (oljurokningar)

Grundleggjandi reglur í játtanarlógini eru ikki hildnar.

Landsgrannskoðanin heldur, at hátturin, sum Landsverk ætlar at nýta til bókingar av oljurokningum og útreiðslum til umvælingar av almennum bygningum, ger, at grundleggjandi reglur í játtanarlógini og roknskaparlógini verða ikki hildnar.

Meginreglan í játtanarreglunum er, at eingin útreiðsla má verða goldin og ikki má verða tikið ímóti inntøku, er játtan ikki útvegað frammanundan. Fíggjarlógin skal fevna um allar inntøkur og útreiðslur landsins og vera grundað á veruleikakendar vónir og so hollar ætlanir sum til ber um inntøkur og útreiðslur í fíggjarárinum.

Fíggjarlógin skal verða ætlað eftir somu meginreglum, sum eru galdandi fyri ger og uppsetingini av landsroknskapinum, sambært lóg um landsins almenna roknskaparhald v.m.

Landsgrannskoðanin mælir til, at útreiðsla til olju verður játtað til stovnin á ta høvuðskontu (játtan), útreiðslan hoyrir til, so neyvt sum gjørligt, íroknað væntaðan avsláttur, og at nýtslan verður bókað á oljunýtslu við tí upphædd, ið oljan kostar at keypa.

Landsgrannskoðanin mælir eisini til, at umvælingarútreiðslur av landsins bygningum verða játtaðar sum umvælingarútreiðslur, og at tær útreiðslurnar síggjast sum slíkar í roknskapinum.

Landsgrannskoðanin mælir staðiliga frá at bóka soleiðis, at sparingar í oljuútreiðslum og útreiðslur til at umvæla almennar bygningar verða blandaðar saman.

Landsgrannskoðanin mælir staðiliga frá at blanda sparingar í oljuútreiðslum saman við útreiðslum at væla um almennar bygningar.

Bókingin ímillum oljuútreiðslur og umvælingar av bygningum ger, at roknskapurin verður gruggaður; eisini kann tað hava við sær, at Løgtingið játtar ov nógvar pengar til oljunýtslu, og at meira verður brúkt til at umvæla almennar bygningar, enn Tingið hevur játtað í fíggjarlóg. Sum kunnugt samtykkir Løgtingið játtanir til hvørja høvuðskontu sær.

Í august 2018 hevur Landsverk boðað frá, at Landsverk skilir sumt av tí, ið Landsgrannskoðanin førir fram um háttin, Landsverk ætlar at brúka at bóka í sambandi við nýggja átakið, kallað Orkutøk, og at tað ger, at grundleggjandi reglurnar í játtanar- og roknskaparlógini verða ikki hildnar.

Endamálið við verkætlanini Orkutøk er sambært Landsverki at fíggja viðlíkahald og tiltøk fyri at minka orkunýtsluna í landsins bygningum. Við at bjóða almennu oljuna út samlaða, sparir landið ímillum 1,2 mió.kr. og 1,4 mió.kr. um árið, og ætlanin er, at tann upphæddin verður brúkt til at gera orkuumvælingar fyri.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er í samsvari við almennu reglurnar at gera alt fyri at fáa so nógv fyri skattapengarnar sum gjørligt. Tó halda vit, at roknskaparliga viðgerðin av hesari sparing er ikki sambært reglunum um, at landsroknskapurin í uppsetingini skal fylgja fíggjar- og eykajáttanarlógum fyri árið, talan er um.

Um Landsverk vil halda roknskap við, hvussu stórur avsláttur er fingin við at bjóða oljulatingina til landið út í einum, hevði borið til at gjørt tað við innanhýsis roknskapi.

Landsverk sigur, at tey hava kanska ikki gáa nóg nógv um bókingartekniska partin í mun til reglurnar á økinum.

Landsverk hevur í august 2018 kunnað um, at í stuttum kann sigast, at Orkutøk er nýtt og óroynt í Føroyum, og tí hevur Landsverk kanska ikki gáa nóg nógv um bókingartekniska háttin í mun til lógina og reglur innan økið, men gjørt eftir bestu sannføring. Landsverk hevur lagt dent á at gera orkusparingar og at fáa inntøkur og fremja viljan hjá landsstýrinum, sum á landsstýrisfundi í november 2016 tók undir við verkætlanini.

Landsverk ætlar at taka málið upp við Gjaldstovuna og Fíggjarmálaráðið í 2018.

Játtanin til orkuátøk

Í fíggjarlógini 2016 fekk Landsverk játtan til Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum á undirkontu 23 á høvuðskontu 17.38.1.02 Landsverk. Sambært viðmerkingunum er tað ein royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum eftir ESCO leistinum, fyri at minka um orkunýtsluna og samstundis betra landsins bygningar, minka landsins útreiðslur sum frálíður, og stimbra føroyska byggivinnu.

Játtanin var 3 mió.kr. til útreiðslur og 3 mió.kr. til flytingarinntøkur. Eingin rørsla var á undirkontuni í 2016.

Somu upphæddir vórðu játtaðar í 2017. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin til at kanna aðrar møguleikar at fíggja og fremja viðlíkahald av landsins bygningum eftir royndina við ESCO ætlanini, sum ikki varð framd í 2016.

Úrslitið er sambært roknskapinum 20 t.kr. í nettoinntøkum. Ongar flytingarinntøkur eru bókaðar, men 132 t.kr. í inntøkum eru mótbókaðar útreiðslunum á St.kt. 14 Keyp av vørum og tænastum. Útreiðslurnar eru 112.t.kr., býttar á: Keyp av tænastuveitingum viðvíkjandi orkukanning 86 t.kr., sakførarakostnaður í sambandi við orkuútboð 6 t.kr., ferðaútreiðslur 13 t.kr. og keyp av vørum annars 7 t.kr.

Eingi skjalprógv vóru fyri inntøkunum.

Eingi skjalprógv ella journal eru løgd við bókingunum av inntøkunum. Landsgrannskoðanin bað Landsverk um skjalprógv fyri, at upphæddirnar eru rættar, og fekk avrit av peningastovnsflytingum; út frá teimum kunnu vit ikki sanna, at upphæddirnar eru rættar.

Orkutak

Í áliti um orku 26. februar 2016 upplýsir Landsverk m.a. at arbeiði við ESCO verkætlanini hevði ikki verið til fánýtis, og vísir á, at gjøgnum tað arbeiðið hevur stovnurin ognað sær vitan og tilfar at arbeiða víðari við.

Nýggja átakið kallast Orkutak og fatar bæði um at gera orkuátøk á sjálvan bygningin, og eftir at átøkini eru framd, at skipa fyri leiðbeining og kunning til lyklapersónar og starvsfólk. Sambært álitinum verður Orkutak skipað soleiðis, at:

1. Landsverk ger eina umvæling og dagføring av bygninginum, og ymisk orkusparandi tiltøk verða sett í verk.
2. Stovnurin letur Landsverk taka sær av at gjalda fyri el og olju komandi árini.
3. Landsverk sendir stovninum eina rokning fyri orku, sum er nakað undir tí, stovnurin annars hevði goldið.

Íløgan til Orkutak kemur frá viðlíkahaldsjáttani hjá Landsverki. Um oljuprísurin fer upp, skal brúkarin gjalda fyri tað. Landsverk ætlar á hvørjum árið at seta t.d. 4 mió.kr. av til endamálið. Sparingarnar vera so á hvørjum árið lagdar afturat, so játtanin veksur nakað, samstundis sum almenna orkunýtslan verður tálmað nakað.

7. november 2016 hevur Samferðslumálaráðið lagt upprit um at fremja orkusparing í landsins bygningum fyri landsstýrisfund, og í teldupost 29. november 2016 hevur

Samferðslumálaráðið boðað Landsverki frá, at landsstýrismaðurin fekk undirtøku fyri ætlanini um orkusparing, nevnd í uppritinum.

Í 2017 hevur Landsverk gjørt yvirlit yvir mettu oljunýtsluna í bygningum hjá landinum og í hølum, ið landið leigar.

Oljuavsláttur til stovnar goldin til Landsverk.

Sambært útboðstilfarinum í juni 2017 verður avsláttarparturin fluttur mánaðarliga til Landsverk, meðan avsláttarparturin hjá stovnunum verður trektur beinleiðis av faktura. Sambært Landsverki merkir tað, at oljuavslátturin til stovnar verður latin stovnunum beinleiðis fyri at minka um umsiting, meðan Landsverk fær meiravslátturin. Allir stovnar fáa sambært Landsverki sama ella meira í avsláttri, enn teir fingu áðrenn oljuútboðið og fáa á henda hátt ágóðan av, at boðið verður út í felag.

Samstarvssáttmáli við Heilsufrøðiligu starvsstovuna

Í sambandi við grannskoðanina hevur Landsgrannskoðanin fingið avrit av samstarvssáttmála millum Landsverk og Heilsufrøðiligu starvsstovuna frá oktober 2017 um "Orkutøk HFS".

Spurt, hvussu tað skal skiljast, at í samstarvssáttmálanum stendur, at orkusparingin verður nýtt til orkusparandi orkutøk í øðrum bygningum hjá landinum, og sparingin í orkurokningini verður afturborin til byggiharra, hevur Landsverk svarað, at avtalan er ikki sett í verk, men Landsverk ætlar at fíggja orkuverkætlanir við orkusparing samsvarandi Orkutak. *"Eingin sáttmáli er gjørdur enn, tí Landsverk er í einari uppstartsfasu og má læra og finna bestu loysnirnar fyri allar partar. "*

Sambært Búskaparskipan landsins hevur Landsverk fingið avsláttur afturbornan frá oljufelagnum.

9.2.3 Leiga av asfaltvirki

Landsverk hevur gjørt leigusáttmála um asfaltvirkið á Sundi.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið leigusáttmála, sum Landsverk hevur gjørt við P/f Asfaltverkið í oktober 2016. Sáttmálin fevnir um leigu av einum asfaltvirki á Sundi og er liður í at víðka um asfaltvirksemið hjá Landsverki.

Leiguavtalan kom í lag, eftir at annað samskifti hevði verið ímillum Landsverk og P/f Asfaltverkið. Landsverk fekk eitt ítøkiligt tilboð at taka støðu til; tó hevur Landsverk tryggjað sær at kunna keypa virkið fyri 100 t.kr., tá ið leigutíðarskeiðið er av. Tað var ongantíð upp á tal at keypa asfaltvirkið, ella at Landsverk skuldi byggja eitt nýtt virki, tí at tað hevði verðið ov kostnaðarmikið.

Við avtaluni hevur Landsverk víðkað um sína asfaltframleiðslu og er nú einasti framleiðari í Føroyum. Í sama viðfangi gavst Landsverk at leggja asfalt út og hevur selt partar av útbúnaðinum sum lið í leiguavtaluni av asfaltvirkinum.

Landsgrannskoðanin hevur viðgjørt viðurskiftini í sambandi við víðkanina av asfaltvirkseminum við serligum denti á leigusáttmálan og viðkomandi reglur.

Leigusáttmálin

Í § 1 í leigusáttmálanum er ásett, at leigumálið fevnir um eitt asfaltvirki við tilhoyrandi rakstrarútgerð, eykalutum, amboðum, goymslu v.m. Landsverk framleigar eisini undirlendið og hevur yvirtikið goymsluna av tilfari.

Útgerðin er ikki skrásett ella eyðmerkt.

Útgerðin er útgreinað í hjáløgdum skjali, ið fevnir um *"nakrar útvaldar myndir"*. Leigumálið fevnir annars um møguliga útgerð, sum annars er á staðnum ella møguliga fyribils á øðrum staði, men tilhoyrandi virkinum. Útgerð, goymsla o.a., sum eru leigað ella yvirtikin, eru ikki skrásett ella eyðmerkt.

Sambært § 2 skuldi felags sýn av tí leigaða haldast, áðrenn leigusáttmálin tók við. Tað leigaða skuldi yvirtakast í tí standi, sum leigarin hevði sýnað og góðkent. Vóru brek

ella manglar út um tað, sum varð staðfest við yvirtøkusýninum, og sum leigarin átti at hava sæð við vanligum eftiransni, kundi leigarin ikki krevja tað umvælt, um hann ikki hevði boðað eigaranum frá skrivliga, áðrenn sáttmálin varð undirskrivaður.

Asfaltvirkið er týðiliga merkt av sliti.

5. oktober 2016 var ástaðarfundur við sýni. Sambært fundarfrágreiðingini var virkið týðiliga merkt av sliti, men verandi manning hevði drúgvar royndir við at halda virkið koyrandi. Virkið kundi nýtast sum backup til asfaltvirkið í Hundsarabotni, og við tveimum virkjum vórðu heilt aðrir møguleikar at skipa størri umvælingararbeiði.

Landsverk hevur ikki sett krøv til eigaran um ábøtur, tí virkið varð yvirtikið "as is". Leigaðu ognirnar eru ikki virðismettar. Í fundarfrágreiðingini eftir sýnið er mett, at virðið á virkinum liggur í heildini, og at virkið hevði strategiskt góða staðseting.

Eigarin yvirtekur Asfaltvirkið "as is", tá ið leigumálið endar.

Tá ið leigumálið heldur uppat, yvirtekur eigarin leigumálið aftur "as is" og í sama standi, tó við tí sliti, sum stendst av vanligum rakstri. Sambært § 7 hevur Landsverk ábyrgd av viðlíkahaldi og rakstri í leigutíðini, umframt at stovnurin kann nútímansgera asfaltvirkið, herundir skifta verandi útgerð út. Nýgerð, sum Landsverk ger sambært § 7, fellur somuleiðis til eigaran uttan viðurlag.

Spurt, hvussu til- og frágongd í sambandi við viðlíkahald og nýgerð ella aðra útvegan verður skrásett ella eyðmerkt, hevur Landsverk svarað, at tað verður bókað á ávikavist endamál fyri nýgerð og viðlíkahald og kann sporast har.

Í § 10 er avtalaður keypsrættur til virkið. Um Landsverk hevur goldið øll leigugjøldini sambært § 5, hevur stovnurin rætt til at keypa alt tað leigaða fyri 100 t.kr. Eingi veðrættindi o.a. skulu liggja á ognunum. Eisini kunnu leigumálini fyri lendið yvirtakast.

Leigugjald fyri asfaltvirkið

Avtalaða leigan er greinað í § 5 í leigusáttmálanum; samlaða leigugjaldið fram til 31. desember 2021 er 23.498 t.kr. umframt leiguregulering.

Byrjanargjaldið fyri 2016 fevnir m.a. um uppstart og goymslu og er tilsamans 7.733 t.kr.; sambært Landsverki eru 550 t.kr. fyri leigu í november og desember. Restin, 7.183 t.kr., er fyri metta sølu og goymslu. Um sama mundið leigumálið tók við, legði Landsverk sítt virksemið við asfaltálegging niður og seldi nakað av útbúnaðinum til útleigaran sum part av sáttmálanum.

Landsverk rindaði fyri metta sølu hjá P/f Asfaltverkinum.

Landsverk hevur greitt frá, at stovnurin rindaði P/f Asfaltverkinum fyri metta sølu hjá felagnum, tí Landsverk ynskti at byrja leigumálið í 2016 fyri at læra at brúka útgerðina.

Um gjaldið í 2016 sigur Landsverk annars: *"Útleigarin hevði keypt og goldið fyri vørur til framleiðslu fyri 2016 og inn í 2017. Tað var mett at vera sera trupult at gera upp nøgdirnar av sandi, skervi, bitumen o.a. á staðnum, sum útleigarin longu hevði goldið fyri. Tí var avtalað, at mett søla í tíðarskeiðnum november til 31/12-16 skuldi gjaldast til útleigara sum partur av leigugjaldinum fyri 2016, tí hann frammanundan hevði goldið fyri vørur til framleiðslu í 2016. Vørugoymslur fyri 2017, sum útleigarin eisini hevði goldið, skuldu innroknast í leigugjaldinum fyri 2016 sum mett vørugoymsla 31/12."*

Søla av útbúnaði partvíst prísásett útfrá óheftari meting.

Útbúnaðurin, sum Landsverk hevur selt útleigaranum, er partvíst prísásettur út frá einari óheftari meting um sølu av brúktari útgerð. Útleigarin hevur ikki við avtalu ella á annan hátt bundið seg til ikki at framleiða asfalt í leigutíðarskeiðnum.

Fyri tíðarskeiðið 2017 til 2021 er gjaldið 3.133 t.kr. um árið, fyrstu ferð við árslok 2017. Leigan verður regulerað við 3% um árið. Sambært § 3 fevnir leigumálið um tíðarskeiðið

1. november 2016 til 1. november 2021, men hevur Landsverk rætt til at leingja leigumálið við einum ári. Einki stendur um gjaldið, um sáttmálin verður longdur, men roknast má við, at gjaldið verður ásett eftir sama leisti sum hini gjøldini[44].

Vit hava spurt, um eisini partur av gjaldinum árini 2017 til 2021 er fyri metta sølu. Landsverk hevur greitt frá, at tað var útleigarin, sum ásetti gjaldið, og at Landsverk út frá eini heildarmeting metti, at leigukostnaðurin var rímiligur í mun til sølu og útreiðslur annars. Landsgrannskoðanin hevur ikki sæð nøkur skjøl um tað. Vit kunnu tí ikki sanna, um og hvussu metingin er gjørd.

Samlaðu minstugjøldini fyri leigu.

Samlaðu minstugjøldini í leigutíðarskeiðnum, íroknað gjald fyri at leingja leigutíðina og fyri keypsrættin, eru:

kr.

Ár	Upphædd	Regulering	Tilsamans
2016 *(2 mðr.)*	7.733.000		7.733.000
2017	3.133.000	93.990	3.226.990
2018	3.133.000	190.800	3.323.800
2019	3.133.000	290.514	3.423.514
2020	3.133.000	393.219	3.526.219
2021	3.133.000	499.005	3.632.005
2022 (longt tíðarskeið)	*3.133.000*	*607.966*	*3.740.966*
Keypsrættur	*100.000*		*100.000*
Tilsamans	**26.631.000**	**2.075.494**	**28.706.494**

Í 2016 eru bókaðar 7,7 mió.kr. í leigugjaldi av asfaltvirkinum, hóast at størsti parturin av upphæddini er fyri metta sølu og yvirtøku av goymslu.

Í 2017 eru bókaðar 6,5 mió.kr. í leigu; 3,2 mió.kr. fyri 2017 og 3,3 mió.kr. fyri 2018. Gjaldið fyri 2018 er tí forútgoldið, men leigureguleringin er ikki góðskrivað stovninum. Somuleiðis er gjaldið útreiðsluført í 2017, hóast tað viðvíkur 2018.

Landsverk hevur møguleika at rinda leigu forút ella at útseta gjøld.

Tað er grundleggjandi meginregla í almenna roknskaparhaldinum, at útreiðslur skulu verða tiknar við í tí roknskaparári, útreiðslurnar viðvíkja. At leigusáttmálin gevur møguleika at rinda forút ella at útseta gjøld, hevur einans týdning fyri, nær gjaldast skal, ikki nær útreiðslurnar skulu takast við í roknskapin.

Spurt, hvat endamálið er við at hava ásetingar í leigusáttmálanum um at kunna útseta ella at rinda leigu forút, hevur Landsverk svarað, at talan er ikki um at gjalda forút, tí at sáttmálin er gjørdur fyri eitt 5 ára tíðarskeið. Í svarinum verður annars víst til fundarfrágreiðing frá 29. juni 2018 millum sáttmálapartarnar, har báðir partar vátta, at *"tað, sum varð avtalað, var ein samlað leiga fyri 5 ár uppá 23.398.000 kr. umframt leiguískoyti, og ikki nøkur føst leiga. Landsverk kann tí t.d. rinda eina hægri leigu okkurt árið, um tey ynskja tað. § 5 í leigusáttmálanum skal skiljast sambært hesum".*

Rakstur av asfaltvirkinum á Sundi

Sambært § 2 í leigusáttmálanum verður leigumálið latið eigaranum aftur "as is" og í sama standi, sum Landsverk tók við tí, frásæð sliti grundað á vanligan rakstur og við møguligum nýgerðum, sum stovnurin hevur latið gjørt samsvarandi § 7.

Landsverk stendur fyri viðlíkahaldi, rakstri og nútímansgerð.

Í § 7 er ásett, at Landsverk fyri egna rokning skal tryggja, at tað leigaða er nossligt, og stovnurin stendur somuleiðis fyri viðlíkahaldi og rakstri av allari útgerð í leigutíðini. Tað stendur stovninum frítt at nútímansgera virkið, herundir at skifta verandi útgerð út.

Í talvuni niðanfyri síggjast roknskapartølini 2016 til 2018 fyri asfaltvirkið á Sundi[45]. Tølini fyri 2018 eru sambært Búskaparskipan landsins fram til 19. juli 2018.

[44] Landsgrannskoðanin hevur spurt um, hvussu gjaldið í longda tíðarskeiðnum verður ásett, men hevur ikki fingið svar.
[45] Tølini eru sambært høvuðskontu 17.38.1.02 "Landsverk", undirkonta 40 "Inntøkufíggjað virksemi" (stovnsnr. 138182), stað 1310 (Sund) og endamál bólk 59 (asfaltverk).

t.kr.

St.konta	2016	2017	2018	Tils.
Lønir v.m.	167	1.329	603	2.099
Keyp av vørum og tænastum	1.554	6.209	4.872	12.635
Keyp av útbúnaði, netto	169	1.267	2.866	4.302
Leiga, viðlíkahald og skattur	6.816	6.945	1.314	15.075
Søla av vørum og tænastum	-3.211	-16.817	-6.960	-26.988
Innanvirkis bókingar	1.387	5.101	3.984	10.472
Tilsamans	**6.882**	**4.034**	**6.679**	**17.595**

Í november 2016 hevur Landsverk goldið eigaranum av asfaltvirkinum 1 mió.kr. fyri *"acontogjald í sambandi við leigu av Asfaltverkinum á Sundi"* og bóka upphæddina á staðarnr. 1700 (felags). Upphæddin er mótroknað í leigugjaldinum fyri asfaltvirkið á Sundi í 2016. Av røttum skal leiga o.a. í roknskapinum 2016 vera 7.816 t.kr. og samlaða úrslitið eitt hall uppá 7.882 t.kr. Til mitt í juli 2018 er hallið tí 18.595 t.kr.

Sambært Landsverki sæst manglandi søla á Sundi aftur sum meirsøla í Hundsarabotni.

Landsverk ger vart við, at tað ikki gevur *"eina rættvísa mynd at vísa til úrslitið fyri tað eina verkið. Landsverk hevur síðani november 2016 havt alla asfaltsølu í Føroyum. Verkið á Sundi hevur í ávísum tíðarskeiðum í 2016, 2017 og 2018 ikki framleitt orsakað av umvælingum og viðlíkahaldi. Tann manglandi sølan á Sundi kann síggjast aftur sum ein meirsøla í Hundsarabotni".*

Skulu vit gera tílíka niðurstøðu, mugu vit vita ella gera eina góða meting av, hvussu raksturin hjá virkinum í Hundsarabotni hevði sæð út, um Landsverk ikki leigaði virkið á Sundi. Talan er um fleiri ymisk viðurskifti, sum hava týdning í einari tílíkari samanbering, t.d. meirsøla, meirútreiðslur og úrslit, sum virkið í Hundsarabotni annars ikki hevði havt, marknaðarstøða, prísbroytingar, roknskaparháttur o.s.fr.

Í næstu talvuni eru nøkur høvuðstøl fyri árini 2005 til 2018 fyri asfaltvirkið í Hundsarabotni. Tølini eru miðaltøl fyri tey árini, sum líkjast, fyri at fáa eina fatan av, hvussu raksturin hjá virkinum í Hundsarabotni hevur sæð út síðstu árini. Tølini fyri 2018 eru sambært Búskaparskipan landsins fram til 19. juli 2018.

t.kr.

Hundsarabotnur	2005-07	2008-09	2010-11	2012-15	2016-17	2018
Søla	-31.639	-22.358	-15.318	-14.503	-20.775	-11.326
Broytiligir kostnaðir	23.161	17.462	11.752	11.721	14.895	8.240
Aðrir kostnaðir	1.040	-178	165	328	516	20
Lønir	0	0	370	810	1.049	533
Ábøtur og nýgerð	895	519	331	983	706	280
Tilsamans	**-6.543**	**-4.555**	**-2.700**	**-661**	**-3.609**	**-2.253**

Um vit samanbera tíðarskeiðini 2012 til 2015 og 2016 til 2017, er munurin á miðal ársúrslitinum út við 3 mió.kr. um árið. Havast skal tó í huga, at leigumálið ikki tók við fyrr enn 1. november 2016. Ársúrslitini fyri 2015, 2016 og 2017 vóru ávikavist 1,1 mió.kr., 4 mió.kr. og 3 mió.kr. Úrslitið í 2017 er tí góðar 2 mió.kr. frægari enn í 2015, men tað er út við eina mió.kr. verri enn í 2016.

Tað kann tí ikki sigast, at úrslitið av rakstrinum hjá virkinum í Hundsarabotni er bøtt so munandi, eftir at virkið á Sundi varð leigað, at tað samsvarar við hallið hjá virkinum á Sundi tey gott 2,5 árini, leigumálið hevur vart.

Landsverk hevur brúkt 8,1 mió.kr. til viðlíkahald og nýgerð.

Viðlíkahald og nýgerð av asfaltvirkinum

Landsverk hevur higartil brúkt 1,7 mió.kr. til viðlíkahald og størri ábøtur og 6,4 mió.kr. til nýgerð, tilsamans 8,1 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, hvussu stór upphædd av nýgerðini er nýútvegan uttan samsvarandi frágongd, ella at talan er um munandi betring í mun til frágingnu

útgerðina. Vit hava eisini spurt, hvussu stórar upphæddir, Landsverk hevur gjørt avtalur um vegna viðlíkahald ella nýgerð, men sum ikki eru goldnar ella bókaðar enn.

Landsverk hevur ikki svarað spurningunum, men hevur greitt soleiðis frá: *"At Landsverk hevur ikki skrásett verkið sum tilgongd er tí, at Landsverk hvørki hevur keypt ella langtíðarleigað verkið, men talan er bert um vanliga leigu í eitt ávíst tíðarskeið fyri at kunna nøkta tørvin av asfalti til undirsjóvartunlarnar".*

Í februar 2018 gjørdi Landsverk eina samstarvsavtalu (konsortium) við Sp/f H. J. Asfalt í sambandi við asfaltarbeiðið í Eysturoyartunlinum. Í broti 2.3.2 í ískoyti til avtaluna stendur, at asfaltvirkið á Sundi *"er nedslidt og trænger alvorligt til fornyelse. Landsverk er gået i gang med en fornyelse af værket".*

Landsgrannskoðanin hevur biðið um skjøl við ætlanum og metingum viðvíkjandi viðlíkahaldi og nýgerð av asfaltvirkinum á Sundi. Vit hava eisini spurt, um Landsverk hevur gjørt nýggjar metingar av, hvussu nógvan pening stovnurin skal nýta afturat til umvælingar og nýgerð av asfaltvirkinum.

Landsverk hevur greitt frá, at *"tann nýgerð og størri ábøtur, sum eru framdar higartil, eru gjørdar eftir ætlan fyri at kunna nøkta søluordran til undirsjóvartunlarnar. Inntøkan til verkið kemur ikki til sjóndar, fyrr enn "stóri ordrin" til undirsjóvartunlarnar verður inntøkuførdur. Undirskotið higartil kann tilskrivast nýgerðir og størri ábøtur fyri at kunna veita ordran".*

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, hvørjar ætlanir fyri viðlíkahald og nýgerð eru gjørdar.

Landsgrannskoðanin hevur ikki fingið skjøl við ætlanum ella metingum. Vit kunnu tí ikki sanna, um ella hvørjar ætlanir eru gjørdar.

Yvirtøka av starvsfólki hjá P/f Asfaltverkið

Sambært § 11 í sáttmálanum hava partarnir avtalað, at Landsverk skuldi bjóða starvsfólkum, sum vóru knýtt at asfaltvirkinum, starv við samsvarandi lønartreytum.

Landsverk bjóðaði starvsfólkum at halda fram.

Spurt, hevur Landsverk svarað, at *"vanlig mannagongd innan fyri tað almenna er, at man bjóðar starvsfólkum framhaldandi starv, hóast fyritøkan skiftir eigara".*

Onnur viðurskifti

Í § 11 er avtalað, at eigarin ella tann, hann vísir á, skal yvirtaka tól frá Landsverki til treytir, sum eru ásettar í skjali 3. Skjalið er eitt yvirlit yvir áleggingarútgerð við neyvari eyðmerking; samlaða metta virðið er 3.410 t.kr. Sambært § 5 kann yvirtøkan av útgerðini mótroknast í fyrsta leigugjaldinum. Vit hava umrøtt keyp og sølu av útgerð umframt niðurløgu av virksemi í tí sambandi aðrastaðni í frágreiðingini.

Sambært § 9 kann Landsverk ikki sleppa sær undan at gjalda leigu fyri asfaltvirkið, um stovnurin hevur onnur mótkrøv móti eigaranum av virkinum. Landsverk hevur greitt frá, at P/f Asfaltverkið í dag ikki keypir vørur ella tænastur frá stovninum, sum ger, at felagið kann skylda stovninum pening.

Játtanarskipan og roknskaparligar reglur

Leigusáttmálin og yvirtøkan av asfaltvirkinum á Sundi hava við sær fleiri játtanarligar og roknskaparligar spurningar. Vit hava tí gjøgnumgingið tær reglur, sum eru viðkomandi fyri leiguna og raksturin av asfaltvirkinum.

Leigusáttmálin og yvirtøkan av asfaltvirkinum setir fleiri játtanarligar og roknskaparligar spurningar.

Sambært § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini er bert heimild at halda útreiðslur, um játtan er til endamálið í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Í § 42 er harumframt ásett, at lán og borgan o.a.m., ið skuldbindur løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, kann ikki verða tikið ella veitt uttan við heimild í løgtingslóg. Í viðmerkingunum til § 42 er greitt frá, at *"greinin eisini fevnir um ymsar skipanir at sleppa uttanum reglurnar í greinini eitt nú ymsar langfreistaðar langleigusáttmálar o.t."*

Í lógini um landsins játtanarskipan eru neyvari ásetingar um, hvussu farast skal fram í sambandi við játtanir. Landsstýrismaður kann gera avtalur, sum hava útreiðsluvirknað í seinni fíggjarárum, um tað er ein náttúrlig fortreyt fyri einum skynsamum og framhaldandi rakstri, jb. § 17. Sambært viðmerkingunum til greinina kann tað gerast, hóast eingin greið heimild er fyri tí. Sum dømi verða nevnd *"setan av starvsfólki og tænastuavtalur við uppsagnarfreist, ið røkkur inn í næsta fíggjarár. Ásetingarnar lógarfesta siðvenjuna higartil".*

Samanumtikið er høvuðsreglan, at stovnar hava eina játtan fyri eitt fíggjarár í senn og kunnu ikki binda landið í komandi fíggjarárum. Tó kunnu vanligar avtalur gerast, t.d. starvsfólkasetanir ella avmarkað leigumál, sum ganga longur enn verandi fíggjarár. Í § 4 í kunngerðini um rakstrarjáttan er eisini greitt frá hesum.

Langtíðarleiga

Langtíðarleiga kann verða operationell ella fíggjarlig.

Langtíðarleiga er eisini kent sum leasing, sum er viðgjørd í m.a. IAS 17 og IPSAS 13[46]. Langtíðarleiga verður antin bólkað sum operationell ella fíggjarlig. Fíggjarlig langtíðarleiga verður viðgjørd sum útvegan av aktivum. Operationell langtíðarleiga verður hinvegin útreiðsluførd so hvørt yvir leigutíðina[47] .

Sum nevnt um § 17 í játtanarskipanini um avtalur, sum hava útreiðslur við sær í seinni fíggjarárum, er talan um at lógarfesta siðvenju. Í árunum fram til og við 2009, tá lógin um játtanarskipanina kom í gildi, var játtanarskipanin partur av fíggjarlógini. Um langtíðarleigu verður sagt:

Vanliga er ikki loyvt at langtíðarleiga.

"Vanliga er ikki loyvt at langtíðarleiga. Tó kunnu sáttmálar um operationella langtíðarleigu gerast, um tað eru eyðsýndir fyrimunir fyri landskassan at langtíðarleiga í staðin fyri at keypa. Sáttmálar upp á meira enn kr. 250.000 skulu góðkennast av Fíggjarmálaráðnum.

Fíggjarlig langtíðarleiga sambært siðvenju.

Hinvegin kunnu sáttmálar ikki gerast fyri fíggjarliga langtíðarleigu, sum reelt kemur í staðin fyri keyp ella bygging. Talan er um fíggjarliga langtíðarleigu, tá ein av niðanfyrinevndu treytum er lokin:

- *Sambært avtaluni verður ognarrætturin latin langtíðarleigaranum, tá leigutíðin er av.*
- *Leigarin hevur optión til at keypa aktivið fyri ein prís, ið væntandi verður so nógv lægri enn handilsvirðið, tá optión verður nýtt, at tað má metast rímuliga vist, at optiónin fer at verða nýtt.*
- *Langtíðarleigan er galdandi størsta partin av tíðini, sum aktivið verður nýtt, og í so máta er líkað mikið, um ognarrætturin verður fluttur ella ikki í endanum av tíðarskeiðnum.*
- *Nútíðarvirðið av langtíðarleigugjøldunum er størri enn ella í øllum førum tað sama sum handilsvirðið av langtíðarleigaða aktivinum. Í hesum sambandi hevur tað einki at siga, um ognarrætturin møguliga verður fluttur við endan av tíðarskeiðnum."*

Treytirnar í hesum 4 punktunum eru í samsvari við IAS 17 og IPSAS 13, sum tó eisini nevna aðrar ábendingar um fíggjarliga langtíðarleigu; eitt nú at aktivini eru serútgjørd og ikki kunnu brúkast av øðrum uttan størri tillagingar, ella at aktivini ikki lættliga kunnu skiftast út við onnur aktiv. Havast skal í huga, at tað er innihaldið í avtaluni, heldur enn avtaluformurin, sum ger av, hvat slag av leigu talan er um.

[46] IAS 17 er altjóða roknskaparligur standardur, ætlaður vinnufyritøkum. IPSAS 13 er eisini tílíkur standardur, men er ætlaður tí almenna. IPSAS 13 er grundaður á IAS 17. Landið hevur ikki bundið seg at fylgja IPSAS standardunum, men nógvar av reglunum eru líka.

[47] Havast kann í huga, at ein nýggjur standardur, IFRS 16, um sama evni kom í januar 2016 og avloysir IAS 17 (roknskapir, sum byrjar 1. januar 2019 ella seinni). Standardurin hevur við sær, at í høvuðsheitum verður øll langtíðarleiga viðgjørd sum keyp.

Langtíðarleiga í kunngerðini um rakstrarjáttan

Langtíðarleiga sambært kunngerð.

§ 3 í kunngerðini um rakstarjáttan er soljóðandi: *"Tað er ikki loyvt at gera avtalur um langtíðarleigu. Langtíðarleiga er í hesi merking, at váðar og fyrimunir, sum eru tongdir at ognarrættinum til ognina, verða fluttir frá útleigara til leigara. Í hesum føri er langtíðarleiga at rokna sum eitt keyp og skal verða viðgjørt samsvarandi.*
Stk. 2. Tó kunnu avtalur um langtíðarleigu verða gjørdar, um landsstýrismaðurin í fíggjarmálum metir, at slíkar avtalur hava munandi og eyðsýndar fyrimunir fyri landið".

Landsverk hevur fulla ábyrgd av asfaltvirkinum eftir at hava sýnað og góðkent tað. Sáttmálin ásetir ikki avmarkingar fyri nýtsluna hjá Landsverki, stovnurin fær allar inntøkur av at brúka asfaltvirkið, og ber stovnurin allan kostnaðin av rakstri, viðlíkahaldi og nýgerð. Sáttmálin ásetir ikki serliga ábyrgd fyri eigaran í leigutíðini. Hesi viðurskifti geva greiða ábending um, at talan er um langtíðarleigu sambært § 3 í kunngerðini um rakstrarjáttan.

Málið er somuleiðis serstakt, tí tað er ikki vanligt, at tað almenna leigar eitt virki fyri eina stóra upphædd, umframt at virksemið hjá einum almennum stovni verður ávikavist niðurlagt og víðkað í sambandi við ein leigusáttmála við eitt privat virki.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, um Landsverk hevur biðið um loyvi frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum at langtíðarleiga asfaltvirkið á Sundi.

Landsverk heldur ikki at talan er um langtíðarleigu.

Landsverk hevur víst á, at talan er ikki um langtíðarleigu, men hevur annars greitt frá, *at "vanlig mannagongd er, tá samskift verður við FMR, at hetta samskiftið fer ígjøgnum Samferðslumálaráðið, sum er tað ráðið, sum Landsverk vísir til. Samferðslumálaráðið var kunnað bæði skrivliga og munnliga, leypandi um tilgongdina og um avtaluna".*

Landsgrannskoðanin hevur ikki sæð nøkur skjøl um samskiftið.

Fíggjarlig langtíðarleiga sambært siðvenju í játtanarskipanini

Tað ber til at samanbera leigusáttmálan við tær treytir (punktini), sum vóru í játtanarskipanini í fíggjarlógini.

Keypsprísur lægri enn handilsvirðið (pkt. 2)

Keypsprísurin er til fyrimuns fyri leigara.

Eitt nú er prísurin á keypsrættinum 100 t.kr., tá ið leigumálið gongur út. Tað er langt undir tað handilsvirðið, sum tað leigaða má metast at hava til ta tíð. Út frá hesum er talan um fíggjarliga langtíðarleigu.

Nútíðarvirðið av gjøldunum hægri enn handilsvirðið (pkt. 4)

Nútíðarvirðið av gjøldunum er hægri enn handilsvirðið.

Vit kunnu somuleiðis samanbera handilsvirðið á tí leigaða, tá ið leigumálið byrjar, við nútíðarvirðið á leigugjøldunum. Vit hava ikki fingið upplýsingar um handilsvirðið, men í roknskapinum hjá P/f Asfaltverkinum eru m.a. hesi tølini:

t.kr.

Roknskapur	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**
Bruttoúrslit	4.005	4.101	4.667	11.711	3.043
Starvsfólkakostnaðir	-1.265	-951	-1.056	-940	-2
Avskrivingar v.m.	-682	-681	-648	-758	-758
Fíggjarligir kostnaðir	-420	-245	-162	-118	-1
Skattur	-296	-385	-504	-1.786	-411
Úrslit	**1.342**	**1.839**	**2.297**	**8.109**	**1.871**
Vinningsbýti		-1.800		-10.500	-1.800
Materiell støðisogn *)					
Keypsvirði	12.042	12.042	12.336		12.345
Avskrivingar higartil	-5.626	-6.306	-6.954		-7.712
Materiell støðisogn, roknsk. virði	6.416	5.736	5.382	5.391	4.633
Goymsla	1.473	1.184	1.107		
Materiell støðisogn + goymsla	**7.889**	**6.920**	**6.489**		

*) Notan um materiella støðisogn manglar í ársfrásøgnini 2016; eingin goymsla er við árslok

Sambært Landsverki var goymslan partur av byrjanargjaldinum við 2,5 mió.kr. Um vit leggja ta upphæddina saman við roknskaparliga virðinum av materiellu støðisognini á 5,4 mió.kr. við árslok 2016, verður virðið á tí, sum verður leigað, 7,9 mió.kr.

Gjøldini sambært sáttmálanum, uttan rentureguleringina á 3%, eru 23,5 mió.kr. í vanligu leigutíðini; verður sáttmálin longdur eitt ár, verður upphæddin 26,6 mió.kr. Brúka vit eina hægri diskonteringsrentu, t.d. 10%, verður nútíðarvirðið 20,7 mió.kr. í vanligu leigutíðini og 22,8 mió.kr., um sáttmálin verður longdur eitt ár.

Roknskaparliga virðið av tí leigaða er nógv lægri enn samlaðu leigugjøldini.

Roknskaparliga virðið er ikki altíð tað sama sum handilsvirðið. Eisini má roknast við, at samlaða virðið á tí leigaða helst er hægri enn, um ognirnar verða seldar hvør sær. Roknskaparliga virðið av tí leigaða er tó nógv lægri enn samlaðu leigugjøldini. Treytin, um at nútíðarvirðið av leigugjøldunum skal vera størri enn handilsvirðið av tí leigaða, má tí sigast at vera lokin, soleiðis at talan er um fíggjarliga langtíðarleigu.

Uppsagnarfreistin (IAS 17/IPSAS 13)
Landsverk hevur víst á, at stovnurin hevur 6 mánaða uppsagnarfreist, men at útleigarin ikki hevur rætt til at uppsiga leigumálið í leigutíðini. Í langtíðarleigumálum verður leigutíðin, tá ið leigumálið tekur við, tó roknað sum óuppsigiliga tíðarskeiðið umframt tíðin eftir tað, um tað er rímiliga sannlíkt, at leigarin heldur fram í leigumálinum.

Nýgerðin fellur til eigaran, um sáttmálin verður uppsagdur.

Tað er ikki sannlíkt at uppsagnarrætturin verður brúktur.

Havast kann í huga, at stovnurin er í gongd við at endurnýggja virkið á Sundi og hevur higartil bókað 6,4 mió.kr. uppá nýgerð, sum annars fellur til eigaran av virkinum, um sáttmálin verður uppsagdur. Tað er tí ósannlíkt, at uppsagnarrætturin verður brúktur. Tað er tí einki, sum bendir á, at talan ikki er um fíggjarliga langtíðarleigu.

Løguverkætlan sambært játtanarskipanini
Sum greitt frá í broti 2.1 skal Landsverk rinda 25 mió.kr. fyri leigumálið í vanligu leigutíðini. Verður leigumálið longt eitt ár, er upphæddin 28,7 mió.kr. Umframt bókaða nýgerð higartil, 6,4 mió.kr., er upphæddin ávikavist 31,4 mió.kr. og 35,1 mió.kr. Eisini hevur Landsverk brúkt pening til viðlíkahald av tí leigaða og fer væntandi at brúka meira pening til bæði nýgerð og viðlíkahald.

Løguverkætlan skal fremjast við verklagslóg.

Sambært § 22 í játtanarskipanini skal løgujáttan nýtast í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum og skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði. Í § 4 í kunngerðini um løgujáttan er ásett, at løguverkætlanir, sum eru 10 mió.kr. ella meira, skulu gerast við grundarlagi í verklagslóg.

Búskaparlig atlit
Sambært § 17 í játtanarskipanini kunnu avtalur gerast, sum hava útreiðslur við sær í seinni fíggjarárum, um tað er ein náttúrlig fortreyt fyri skynsomum og framhaldandi rakstri. Í § 7 er somuleiðis ein aðalregla, *at "tá ið veitt játtan verður nýtt, skulu neyðug búskaparlig atlit verða tikin".* Sambært viðmerkingunum til greinina ber tað við sær, at *"sýnast skal í verki effektivitetur ... , framleidni ... umframt sparsemi...".*

Búskaparlig atlit skulu takast.

Stovnar fáa í fíggjarlógini eina játtan, sum skal vera grundað á veruleikakendar vónir og so hollar ætlanir, sum til ber, um inntøkur og útreiðslur, jb. § 3 í játtanarskipanini. Út frá játtanini til endamálið og virksemið hjá stovninum skulu búskaparlig atlit verða tikin. Samanumtikið snýr tað seg um at røkja tær uppgávur, sum m.a. er greitt frá í tekstinum til játtanina, og at nýta tað tilfeingi, sum stovnurin hevur, til fulnar.

At vera sparin inniber, at hóskandi orka verður brúkt til at loysa eina uppgávu, at ymisku útreiðslurnar eru á rímiligum støði, at avsláttrarskipanir verða gagnnýttar, at keyp av vørum og tænastum javnan verða boðin út, at ognir verða røktar o.s.fr.

Ymiskar reglur eru ásettar í rundskrivum frá Fíggjarmálaráðnum, eitt nú um keyp av vørum og tænastum og um eftirlit og at taka neyðug búskaparlig atlit. Í rundskrivinum um eftirlit og at taka neyðug búskaparlig atlit eru, umframt ásetingar um eftirlit,

sparsemi o.a., eisini ásetingar um fíggjarstýring, eitt nú um støðugt at meta um fíggjarliga samanhangin millum tilfeingisnýtslu, framleiðslu og málfulnað.

Talan er tí um fleiri viðkomandi viðurskifti, serliga í hesum føri tá talan er um at leiga eitt virki. Nakrir týðandi spurningar kunnu vera:

- er talan um eina uppgávu fyri Landsverk út frá givnum fortreytum og játtan,
- er neyðugt at víðka um virksemið hjá Landsverki,
- er neyðugt at útvega bygningar, útgerð o.a.,
- verður tilfeingið gagnnýtt til fulnar,
- eru útreiðslur til útveganir og rakstur hóskandi í mun til virksemið,
- eru inntøkurnar nøktandi í mun til útreiðslurnar, og
- er gjørd nøkur fíggjarætlan fyri leigutíðina.

Nøkur av viðurskiftunum hava ikki bert týdning fyri stovnin ella kunnu ikki bert setast í verk av stovninum sjálvum, men mugu eisini viðgerast av hægri politiskum myndugleika, sum eisini nevnt omanfyri. Sæð burtur frá tí, hevur leigusáttmálin um asfaltvirkið á Sundi serliga týdning í spurninginum um at útvega aktiv. At leiga í staðin fyri at keypa.

Landsverk hevur greitt soleiðis frá: *"Fyri at svara spurninginum er neyðugt at síggja hann eitt sindur yvirskipað. Í tíðarskeiðnum, áðrenn Landsverk fór undir at leiga asfaltverkið á Sundi, var støðan tann, at bæði asfaltverkini vóru í eini prískapping, sum gjørdi tað trupult at endurnýggja og viðlíkahaldi framleiðslutólini og annleggini og harvið tryggja, at verkini framhaldandi kundi veita asfalt til føroyska marknaðin. Av tí at asfaltverk eru kostnaðarmikil, og asfaltmarknaðurin í Føroyum er lítil, so er ilt hjá tveimum virkjum at kunna skapa yvirskot til nýgerð og viðlíkahald. Allir partar kendu støðuna. Og tá so Landsverk fekk boðið at leiga Sundsverkið í eitt 5 ára tíðarskeið, varð tikið av. Tá Landsverk fekk stóra sáttmálan at levera asfalt til undirsjóvartunlarnar, var ein ætlan gjørd fyri at gera tær neyðugu ábøturnar og nýgerðirnar á Sundsverkið fyri at kunna levera til undirsjóvartunlarnar. Neyðugt hevur tí verið at steðga framleiðsluni á Sundsverkinum í einum tíðarskeiði í 2017 og 2018, soleiðis at umvælingar og íløgur kundi gerast. Manglandi søla á Sundi í sama tíðarskeiði sæst tó aftur sum meirsøla í Hundsarabotni. Tað er vanlig mannagongd og siðvenja, at útleigari bjóðar leigara at keypa tað, sum verður leigað, um samlaða leigutíðin hevur eina longd, sum ger, at tað kann loysa seg fyri leigara at keypa. Hetta varð eisini gjørt í hesum føri. Landsverk metir, at stovnurin við hesum hevur tikið búskaparlig og fíggjarlig atlit í trá við rundskrivið hjá FMR um at sýna fíggjarlig atlit."*

Asfaltvirki eru kostnaðarmikil, og marknaðurin er lítil, so at tað er torført at skapa yvirskot til nýgerð o.a.

Tá Landsverk fekk bjóðað at leiga virki í 5 ár, tóku tey av.

Sum nevnt skal Landsverk rinda 25 mió.kr. fyri leigumálið í vanligu leigutíðini; 28,7 mió.kr., um leigumálið verður longt. Samanbera vit kostnaðin av leigusáttmálanum við roknskaparliga/metta virðið á tí, sum er leigað og yvirtikið, tilsamans 7,9 mió.kr., kunnu vit ivast í, um búskaparlig atlit eru tikin.

Men onnur viðurskifti hava eisini týdning fyri betri at kunna taka støðu til spurningin um keyp ella leigu, tað veri seg um alt virkið ella hvørt aktiv sær, t.d.:

- er nøktandi yvirlit yvir, hvat verður leigað,
- er nøktandi virðismeting gjørd,
- er biðið um prís fyri at keypa tað leigaða ella partar av tí,
- er mett um kostnaðin av at keypa nýtt ella brúkt, ella
- hevur samskifti, t.d. umbøn um tilboð, verið við onnur um leigu, keyp o.a.

Landsgrannskoðanin hevur biðið um frágreiðing til einstøku spurningarnar og um viðkomandi skjøl. Vit hava ikki fingið skjalprógv fyri, at prísir o.a. eru kannað. Vit kunnu tí ikki sanna, um og hvørjar atgerðir eru framdar fyri at taka búskaparlig atlit.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, um búskaparlig atlit eru tikin.

Inntøkufíggjað virksemi

Sambært § 19 í játtanarskipanini kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva, at inntøkufíggjað virksemi kann verða framt undir rakstrarjáttan, um tað er sprottið náttúrliga úr vanliga virksemi stovnsins.

Meðal langtíðarkostnaðurin skal vera fíggjaður.

Í §§ 17-27 í kunngerðini um rakstrarjáttan eru neyvari ásetingar um inntøkufíggjað virksemi. Ein treyt í § 20 er, at meðal langtíðarkostnaðurin verður fíggjaður, og í greinini er eisini ásett, hvørjir kostnaðir verða roknaðir við. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann gera av at niðurleggja virksemið, vísir roknskapurin fyri inntøkufíggjaða virksemið undirskot í minst 3 ár, jb. § 24.

Asfaltvirkið á Sundi hevur higartil havt eitt samlað hall á 18,6 mió.kr.

Munur er á vanligum og inntøkufíggjaðum virksemi. Er virksemið fíggjað við søluti til t.d. privat, soleiðis at tørvur ikki er á meirjáttan til virksemið, er stovnurin nakað frælsari at leggja virksemið til rættis. Tó galda vanligar reglur um rakstrarjáttanir, og allar útreiðslur skulu verða skrásettar eftir veruligu nýtsluni. Omanfyri er víst á, at asfaltvirkið á Sundi higartil hevur eitt samlað hall á 18,6 mió.kr.

Í sambandi við víðkanina av virkseminum av asfaltframleiðsluni og leigumálið av asfaltvirkinum høvdu vit hesar spurningar:

- er víðkanin av virkseminum ella leigan av virkinum sprottin náttúrliga úr vanliga virkseminum,
- er tað neyðugt – herundir hvør er orsøkin – at víðka um virksemið og leiga eitt virki, sum frammanundan framleiddi asfalt,
- er spurt um loyvi frá, ella er spurningurin um víðkan av virkseminum og leigu av virkinum umrøddur við landsstýrismannin í samferðslumálum ella landsstýrismannin í fíggjarmálum,
- er nøkur fíggjarætlan fyri leigutíðarskeiðið (bæði upprunaliga, áðrenn leigumálið byrjaði, og endurskoðað),
- hvussu eru prísirnir til keyparar ásettir, herundir eisini avsláttrarskipan o.a.,
- verður øll søla goldin kontant, ella koma aðrar avrokningarskipanir fyri, og
- kemur mótrokning fyri keyp hjá stovninum av útgerð, vørum ella tænastum fyri, herundir um samstundisavtalur um keyp og søluti eru.

Víðkanin er gjørd í samráði við Samferðslumálaráðið

Landsverk hevur greitt frá, at víðkanin av virkseminum er sprottin náttúrliga úr vanliga virkseminum og er gjørd í samráði við Samferðslumálaráðið, sum er kunnað í tilgongdini og hevur havt sáttmálan til viðmerkingar.

Um fíggjarætlan, prísir o.a. hevur Landsverk greitt soleiðis frá: *"Marknaðurin var kendur, tá avtalan varð gjørd. Tá Landsverk leigaði verkið, yvirtók Landsverk søluna til allan marknaðin og kendi tískil inntøkur og útreiðslur. Men neyvari fíggjarætlan er ikki gjørd. Prísurin er roknaður út frá beinleiðis og óbeinleiðis og herundir langtíðarkostnaðinum. Útgangsstøðan er, at alt eru kontantkundar. Nakrir fáir stórir kundar eru tó kredittkundar, men tá seta teir altíð trygd. Nei, vit avrokna bert í peningi og ikki í naturalium."*

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, um víðkanin er í samsvari við reglurnar um inntøkufíggjað virksemi.

Landsgrannskoðanin hevur fingið eitt skjal frá 6. juli 2018 við nýggjum prísum á asfalti, men hevur ikki fingið onnur skjøl. Vit kunnu tí ikki sanna, um og hvørji tøl fyri útreiðslur og inntøkur liggja til grund fyri prísásetingini; heldur ikki fáa vit sannað, um víðkanin er í samsvari við reglurnar um inntøkufíggjað virksemi.

Niðurstøður frá grannskoðanini

Landsverk hevur víðkað um asfaltframleiðslu sína og hevur gjørt leigusáttmála við P/f Asfaltverkið um at leiga asfaltvirkið á Sundi við útgerð og at yvirtaka goymslu og starvsfólk. Landsverk er nú einasti asfaltframleiðari í Føroyum. Landsverk hevur í sama viðfangi lagt virksemið hjá sær við asfaltálegging niður og hevur selt partar av útgerðini til eigaran av asfaltvirkinum á Sundi.

Í tíðindaskrivi 19. oktober 2016 ásannar Landsverk, at pláss ikki er fyri meira enn einum asfaltframleiðara í Føroyum. Í skrivinum stendur, at asfaltvirkið á Sundi liggur væl fyri í mun til infrakervið, og at stovnurin sum frálíður flytir framleiðsluvirksemið av asfalti til virkið á Sundi.

Landsverk hevur yvirtikið eitt virki, sum var niðurslitið og í stóran mun trongdi til at verða endurnýggjað. Stovnurin er farin í holt við tað arbeiðið. Landsverk skal rinda 25 mió.kr. fyri leigumálið; 28,7 mió.kr., um leigumálið verður longt. Stovnurin hevur higartil brúkt aðrar 8,1 mió.kr. til viðlíkahald og nýgerð, harav 6,4 mió.kr. til nýgerð.

Landsgrannskoðanin hevur samanborið leigumálið við játtanarligar og roknskaparligar reglur og heldur, at talan greitt er um fíggjarliga langtíðarleigu. Heldur ikki er málið vanligt og fevnir um stóra upphædd. Sambært stýrisskipanarlógini kunnu almennir stovnar ikki skuldarbinda landið við langtíðarleigumálum, sum koma í staðin fyri keyp, uttan at tað verður gjørt við heimild í lóg.

Stovnar kunnu ikki skuldarbinda landið við leigumálum, sum koma ístaðin fyri keyp.

Játtanarskipanin ásetir, at langtíðarleiga er at rokna sum keyp og skal verða viðgjørd samsvarandi. Løgujáttan skal nýtast til endamálið, og er talan um 10 mió.kr. ella meira, skal løguverkætlanin gerast við grundarlagi í verklagslóg.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað máar støðið undan skipanini, at týðandi játtanar-reglur verða ikki tiknar í álvara.

Alment virksemi skal vera skipað út frá heimildum, sum eru í fíggjarlóg og aðrari lóggávu, og landsstýrið hevur evstu ábyrgd av fyrisitingini. Ein almennur stovnur kann tí ikki sjálvur gera av at leggja niður ella víðka um munandi partar av sínum virksemi, sum eru sambært siðvenju og játtan, og enn minni at yvirtaka privat virksemi. Tað er ábyrgd landsstýrisins at taka tílíkar avgerðir, og um neyðugt, við lóg ella samtykt Løgtingsins.

Gjøgnumgongdin av leigumálinum

Einki yvirlit ella skrá er yvir ognir, sum eru leigaðar og yvirtiknar, bert nakrar myndir. Eingin virðismeting er gjørd av ognunum. Til- og frágongd í sambandi við virkið verður ikki skrásett uttan sum útreiðslur ella inntøkur í rakstrinum. Øll nýgerð o.a. fellur til eigaran, um virkið ikki verður keypt. Tað hoyrir til vanligt fíggjarligt ansni at hava eina skrá yvir ognir, sum verða keyptar ella leigaðar, serliga í sambandi við tílíka leigu. Í minsta lagi mugu ognirnar verða virðismettar, um støða skal kunna takast til leigu og fíggjarligar avleiðingar annars.

Einki yvirlit ella skrá er yvir ognir sum vera leigaðar ella keyptar.

Leigugjaldið er eisini fyri væntaða sølu og goymslu hjá útleigaranum. Ognirnar, sum Landsverk seldi í sambandi við sáttmálan, vórðu virðismettar av óheftum persóni, og útleigarin hevur ikki bundið seg til ikki at framleiða asfalt. Landsgrannskoðanin undrast á, at ójavni skal vera millum sáttmálapartarnar, herundir gjald fyri væntaða sølu.

Landsverk helt, at prísurin, sum útleigarin ásetti, var rímuligur út frá eini heildarmeting. Landsgrannskoðanin heldur, at tílík meting eigur at vera skjalfest. Vit hava ikki sæð nøkur skjøl um tað og kunnu tí ikki sanna, um og hvussu metingin er gjørd.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, um og hvussu virðis-metingin er gjørd.

Sambært sáttmálanum kann Landsverk rinda forút ella seinni. Partarnir hava síðani avtalað, at talan er um leigu fyri eitt 5 ára skeið, og tí er ikki nøkur føst árlig leiga. Tað er grundleggjandi regla, at allar útreiðslur skulu tíðargreinast eftir einum føstum leisti. Í leigumáli skal leigan útreiðsluførast javnt yvir leiguáramálið. Landsgrannskoðanin heldur, at grundleggjandi roknskaparligar reglur verða ikki virdar.

Leiguútreiðslur skulu takast við javnt yvir leigutíðarskeiðið.

Hallið hjá virkinum á Sundi er higartil 18,6 mió.kr. Landsverk hevur greitt frá, at tá ið virkið hevur ligið stilt vegna umvælingar, kann tað síggjast aftur sum meirsøla í Hundsarabotni. Landsgrannskoðanin heldur ikki, at eitt betri úrslit av rakstrinum hjá virkinum í Hundsarabotni samsvarar við hallið hjá virkinum á Sundi.

Landsverk hevur eisini greitt frá, at nýgerð og størri ábøtur higartil eru gjørdar eftir ætlan fyri at kunna nøkta søluordra til undirsjóvartunlarnar. Inntøkurnar av tí koma seinni. Landsgrannskoðanin hevur ikki fingið skjøl við ætlanum ella metingum og kann tí ikki sanna, um og hvørjar ætlanir eru gjørdar.

Landsgrannskoðanin hevur ikki fingið skjal-prógv og kann tí ikki sanna, um og hvørjar ætlanir um nýgerð eru gjørdar.

Landsgrannskoðanin ivast í, at búskaparlig atlit eru tikin.

Landsverk hevur greitt frá støðuni áðrenn leigumálið við prískapping, vantandi viðlíkahaldi o.ø. Asfaltvirki eru kostnaðarmikil, og marknaðurin er lítil. Stovnurin tók tí av, tá hann fekk boðið at leiga virkið á Sundi, og hevur gjørt eina ætlan fyri neyðugar ábøtur og nýgerð. Landsgrannskoðanin hevur ikki fingið skjalprógv fyri, at prísir o.a. eru kannað, og kann tí ikki sanna, um og hvørjar atgerðir eru framdar fyri at taka búskaparlig atlit. Kostnaðurin av leigumálinum er eisini munandi hægri enn roknskaparliga/metta virðið á tí leigaða og yvirtikna. Vit ivast tí í, at búskaparlig atlit eru tikin.

Eingin fíggjarætlan ella skjøl um prísáseting.

Landsverk hevur greitt frá, at víðkanin av asfaltframleiðsluni er sprottin náttúrliga úr vanliga virkseminum. Stovnurin sigur, at marknaðurin var kendur, men hevur ikki gjørt nakra fíggjarætlan fyri yvirtikna virksemið. Landsgrannskoðanin hevur ikki sæð nøkur skjøl í hesum sambandi, onnur enn eitt skjal frá 2018 um prísbroytingar. Vit kunnu tí ikki sanna, hvørji tøl liggja til grund fyri prísásetingum; heldur ikki kunnu vit sanna, um víðkanin er í samsvari við reglurnar um inntøkufíggjað virksemi.

Landsgrannskoðanin undrast á, at málið ikki er betri skjalfest. Tað hevur í sjálvum sær við sær, at m.a. fíggjarlig atlit ikki eru tikin, og at ivast kann í, um reglurnar um inntøkufíggjað virksemi eru hildnar.

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Sambært landsstýrismanninum byggir sáttmálin um asfaltverkið á Sundi ikki á langtíðarleigu.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin svarað, at *"Landsverk leggur stóran dentin á, at sáttmálin um asfaltverkið á Sundi ikki byggir á langtíðarleigu, men at talan er um vanliga leigu, sum kann sigast upp eftir slíkum reglum. Sáttmálin er orðaður soleiðis, at hann ikki bindur Landsverk í eina langtíðaravtalu, men at stovnurin við vanligari uppsagnartíð uppá 6 mánaðar, til eina og hvørja tíð kann uppsiga sáttmálan við eigaran."*

Í svari sínum vísir landsstýrismaðurin síðani til frágreiðing, sum hann hevur fingið frá Landsverki. Hann heldur, at frágreiðingin gevur eina heildarmynd av málinum um asfaltvirkið á Sundi.

Í frágreiðingini til Samferðslumálaráðið hevur Landsverk greitt frá orsøkini til leigumálið og tilgongdini annars. Stovnurin hvørki ynskti ella hevði fíggjarliga orku at keypa asfaltvirkið á Sundi. Við tveimum asfaltvirkjum kundi stovnurin veita størri trygd fyri veitingum av asfalti til Eysturoyartunnilin og føroyska marknaðin sum heild.

Landsverk fekk advokatar at meta um leigumálið við atliti at fíggjarligari leasing.

Landsverk viðgjørdi spurningin um fíggarliga leasing, áðrenn sáttmálin varð undirskrivaður. Stovnurin fekk advokatar at meta um leigumálið við atliti at fíggjarligari leasing og eisini fyri at tryggja, at áhugamálini hjá stovninum vórðu tryggjað í sáttmálanum.

Løgfrøðiliga ráðgevingin vísti á, hvussu hugtakið leasing vanliga verður nýtt, tá fíggjarstovnur verður lagdur millum eigara og leigara, og hvør ber fíggjarliga váðan. Í sáttmálanum hevur Landsverk eina uppsagnarfreist uppá 6 mánaðir, í fyrsta lagi til árslok 2017. Landsverk heldur tí, at fíggjarligi váðin liggur hjá eigaranum, og at talan ikki er um fíggjarliga leasing.

Landsverk heldur, at asfaltframleiðslan skal síggjast sum ein eind, og at løgur o.a. skulu javnast yvir árini.

Landsverk vísir eisini á, at asfaltvirkið á Sundi er ein partur av asfaltvirkseminum hjá stovninum. Tað gevur tí ikki eina rættvísa mynd at taka asfaltvirkið á Sundi úr samlaða virkseminum at framleiða asfalt. At Landsverk hevur tvær framleiðslueindir ger, at tað ber til at leggja umvælingar o.a. til rættis. Asfaltvirkið á Sundi hevur eitt "sokallað" hall, tí at virkið hevur ligið stilt eitt tíðarskeið vegna umvælingar og dagføringar. Roknskapurin í Búskaparskipan landsins er ein gjaldførisroknskapur, har útreiðslur og løgur verða bókaðar fult út í árinum, heldur enn at løgur verða avskrivaðar yvir longri tíð.

Í frágreiðingini hevur Landsverk tikið eina talvu við, sum vísir rakstrarúrslitini fyri alla asfaltframleiðsluna og bitumengoymsluna árini 2013 til 2017. Í 2015 er úrslitið eitt avlop á 1,3 mió.kr., men í 2016 og 2017 er úrslitið eitt hall á ávikavist 1 mió.kr. og 0,8 mió.kr. Stórar útreiðslur av at betra virkini síggjast aftur tey árini, og í 2018 eru eisini tillagingar

gjørdar. Tær útreiðslurnar eiga at verða periodiseraðar, so tær leggja seg at tíðarskeiðnum, tá inntøkurnar koma.

Samanumtikið

Landsgrannskoðanin hevur víst á fleiri týðandi viðurskifti í niðurstøðunum av framdu grannskoðanini, herundir brot á játtanarligar og roknskaparligar reglur. Landsstýrismaðurin hevur ikki í svari sínum tikið støðu til viðurskiftini, men hevur víst til frágreiðing frá Landsverki. Landsgrannskoðanin heldur ikki, at frágreiðingin frá Landsverki broytir týðandi niðurstøður av framdu grannskoðanini.

Frágreiðingin frá Landsverki broytir ikki týðandi niðurstøður av framdu grannskoðanini.

Landsgrannskoðanin hevur staðfest, at leigusáttmálin um asfaltvirkið á Sundi kemur undir fíggjarliga langtíðarleigu. Tílík leiga er at rokna sum keyp og skal viðgerast samsvarandi. Tá talan er um upphædd, sum er hægri enn 10 mió.kr., skal løguverkætlan gerast við grundarlagi í verklagslóg.

Fíggjarlig langtíðarleiga er at rokna sum keyp.

Um Landsverk ikki hevur játtanarligan ella roknskaparligan fakkunnleika í málinum, eigur stovnurin at venda sær til Fíggjarmálaráðið at fáa vegleiðing. Í øðrum lagi hevur Landsverk ikki biðið um loyvi frá Fíggjarmálaráðnum um at langtíðarleiga asfaltvirkið, sum annars ásett í kunngerðini um rakstrarjáttan.

Virðið á tí, sum verður leigað, stendur ikki mát við kostnaðin av leigumálinum. Landsverk rindar eisini fyri annað enn bara leigu og hevur heldur ikki gjørt virðismetingar, prískanningar o.a. fyri at tryggja sær, at stovnurin rindar hóskandi gjald. Tað ber tí ikki til at siga, at stovnurin hevur tikið neyðug búskaparlig atlit.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann loyva inntøkufíggjaðum virksemi, um tað er sprottið náttúrliga úr vanliga virkseminum. Stovnurin kann tí ikki av sínum eintingum leggja niður og víðka um virksemið og útvega eitt virki til endamálið.

Landsgrannskoðanin hevur ikki sæð fíggjarætlanir ella skjøl við eitt nú viðlíkahaldsætlanum ella útrokningum av prísum. Í kunngerðini um rakstrarjáttan er ásett, at meðal langtíðarkostnaðurin skal fíggjast; einstøku prísirnir skulu grundast á hann. Landsgrannskoðanin heldur, at málið er so mikið illa skjalfest, at tað ber ikki til at sanna, um Landsverk hevur borið seg nøktandi at viðvíkjandi stýring, búskaparligum atlitum, ella um víðkanin av virkseminum er í samsvari við reglurnar um inntøkufíggjað virksemi.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, um nøktandi stýring, búskaparlig atlit v.m. eru í samsvari við reglurnar.

9.2.4 Løgujáttanir

Norðoya røktarheim

Í august 2016 greiddi landsstýrismaðurin frá, at bygningarnir, Norðoya røktarheim og Suðuroyar røktarheim, fylgdu ikki við, tá ið eldraøkið varð flutt til kommunurnar at fyrisita og fíggja. Heimini eru á matriklunum hjá Klaksvíkar-, og Suðuroyar sjúkrahúsi, sum eru bygningar, ið landið eigur, og eru í stóran mun samanbygdir og integreraðir partar av sjúkrahúsunum við fleiri felags funktiónum og útreiðslum.

Sambært Samferðslumálaráðnum arbeiddu avvarðandi partarnir við at finna eina praktiska loysn at býta útreiðslurnar eftir. Prinsippið var, at kommunurnar rinda fyri rakstur og viðlíkahald av tí partinum av bygningunum, sum røktarheimini brúka.

Avvarðandi partarnir arbeiða við loysn at býta útreiðslurnar eftir.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at eingin avtala var gjørd, og at talan helst var um eitt mál millum Almannamálaráðið og Klaksvíkar kommunu.

Í seinasta uppskoti til samtyktar hildu løgtingsgrannskoðararnir, at tað er ikki nøktandi, at eingin avtala er gjørd. Hetta er enn eitt dømi um, at bygnaðarbroytingar verða gjørdar uttan at neyvari reglur fylgja við.

Tað er ikki nøktandi, at eingin avtala er gjørd, siga løgtingsgrannskoðararnir.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað er ikki nøktandi at eingin avtala er komin í lag. Landsverk hevur tí tikið málið upp við Heilsu- og innlendismálaráðið, sum varðar av ognunum, men eingin loysn er funnin enn.

Eingin loysn er funnin enn.

Landssjúkrahúsið, útbygging
Landsverk hevur ræðisrættin á høvuðskontu "Landssjúkrahúsið, útbygging" og kann gera av, hvørjar útreiðslur verða skrásettar á verkætlanina. Landsgrannskoðanin undraðist á, at umsitingargjaldið, ið Landsverk legði oman á tímalønina, ikki fevndi um útreiðslur til skeiðsgjøld og ferðing hjá starvsfólkunum hjá Landsverki. Landsverk kundi á henda hátt fáa tvær ferðir fyri somu tænastu, eina ferð gjøgnum sítt "overhead", og eina ferð við at bóka útreiðsluna beinleiðis á verkætlanina, sum Landsverk sjálvt hevur ræðisrætt til.

Í uppskoti til samtyktar undraðust løgtingsgrannskoðararnir á, at landsstýrismaðurin í samferðslumálum ikki tók støðu til viðmerkingarnar, men bara vísti á, at sambært Landsverki hevði stovnurin ikki rindað nakra upphædd tvær ferðir.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin vístá, at Landsverk hevur ikki rindað nakra upphædd tvær ferðir. Útreiðslur til ferðing og skeið, sum beinleiðis eru tongdar at einari ávísari verkætlan, verða rindaðar av verkætlanini. Vanlig skeið og ferðing í tí sambandi verða rindað umvegis eitt overhead, og soleiðis ikki tvær ferðir. Landsstýrismaðurin heldur, at tað sostatt er í lagi.

9.3 Strandfaraskip landsins (LG 2017/217-0382)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin 2017 hjá Strandfaraskipum landsins. Vit hava eisini tikið afturíaftur nøkur av teimum viðurskiftum, ið vórðu umrødd í frágreiðingini til løgtingsgrannskoðararnar í august 2017.

Innaneftirlit
Í ársfrágreiðingini 2015 vísti Landsgrannskoðanin á, at eftirlitsumhvørvið hjá stovninum var ov veikt, og at tað m.a. vantaðu skrivligar mannagongdir og skjalfestingar av teimum eftirlitum, ið leiðslan fremur t.d. í sambandi við góðkenningina av tíðarskeiðsroknskapum.

Leiðslan hevur bøtt um innaneftirlitið.

Í juni 2017 greiddi leiðslan frá, at tey høvdu bøtt um innaneftirlitið og um skjalfestingina av teimum átøkum, leiðslan ger í sambandi við roknskapargóðkenningar.

Strandferðslan hevur ikki lýst mannagongdirnar fyri roknskapargóðkenningarnar skrivliga enn. Stovnurin er farin undir at greina eftirlitsmál og ætlar at seta tey í eina kekklistskipan.

Roknskaparviðurskifti
Strandferðslan hevur søkt um formligt loyvi til egna búskaparskipan.

Strandferðslan hevur egna búskaparskipan og hevur, eftir áheitan frá Landsgrannskoðanini, sent formliga umsókn til Fíggjarmálaráðið um loyvi at brúka skipanina. Gjaldstovan hevur sent Strandferðsluni 16 punkt, sum skulu verða grundarlagið undir loyvinum, og heitir á stovnin um at lýsa nøkur viðurskifti nærri.

Í 2017 vórðu 148 mió.kr. játtaðar til Strandferðsluna á høvuðskontu 17.38.2.01. Roknskapartøl fyri árini 2014 til 2017:

t.kr.

Heiti	2014	2015	2016	2017
Lønir v.m.	70.632	73.395	79.444	82.653
Keyp, leiga, viðlíkahald o.a.	134.850	104.676	107.983	108.690
Søla av vørum og tænastum	-59.521	-63.819	-67.502	-67.372
Bygging, tilskot og rentur	272	0	0	0
Innanh. flyt. millum alm. stovnar (netto)	-545	4	18	14
Tilsamans	**145.686**	**133.226**	**148.930**	**147.752**

Kassaskipanin og munir

Strandferðslan hevur í fleiri ár havt stórar, afturvendandi kassamunir, og torført hevur verið at funnið orsøkina. Sambært Strandferðsluni er ein orsøk til munirnar, at uppsetingin av kassaskipanini hevur verið skeiv.

Í 2010 skifti Strandferðslan kassaskipanina til LS-retail, og øll táverandi vørunummur vórðu flutt yvir í nýggju skipanina, eisini vørunummur, ið ikki vórðu brúkt longur. Um ein vøra varð seld, og vørunummarið ikki var til, so komu pengarnir í kassan, men sølan varð ikki skrásett.

Í 2017 skifti Strandferðslan veitara. Nýggi veitarin gjørdi eina koyring fyri tíðarskeiðið januar 2000 til november 2017 at samla allar óbókaðar kassaavgreiðslur í kioskini og í kafeteriuni á Smyrli, soleiðis at tær kundu bókast.

Strandferðslan hevur styrkt um eftirlitið fyri at byrgja fyri kassamunum.

Tað hava eisini verið aðrir feilir, sum hava ført til kassamunir. Til tess at byrgja fyri størri kassamunum í framtíðini, hevur Strandferðslan styrkt um eftirlitið.

Stakroyndir av útreiðslum

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar aðrar posteringar. Einki var at finnast at.

Lønarumsiting

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at ein tann størsti váðin í roknskaparviðurskiftunum hjá Strandferðsluni lá í avgreiðslu av lønum. Orsøkin var, at lønarumsitarin var einsamallur á økinum, og at lønirnar vórðu avgreiddar í rokniørkum.

Stovnurin hevur síðani verið í einari tilgond at seta í verk VaktPlan sum amboð at skráseta arbeiðstíð hjá sjófólkunum. Skipini Sam, Sildberin og Ritan hava brúkt VaktPlan síðani mars 2018; harvið verða lønirnar avgreiddar við tveimum skipanum. Ætlanin er, at øll skipini skulu brúka VaktPlan við ársenda 2018. Fíggjarleiðarin gjøgnumgongur lønarlistarnar, áðrenn lønirnar verða rindaðar út.

Sam, Sildberin og Ritan hava brúkt VaktPlan síðani mars 2018.

Lønir hjá Strandferðsluni í 2016 og 2017:

t.kr.

StRk	Heiti	2016	2017
1110	Mánaðarlønt	55.064	56.539
1111	Tænastumenn	-13	-
1112	Tímalønt	15.353	14.978
1140	Samsýningar, viðbøtur o.a.	21	19
1160	Arbeiðsmarknaðargjøld	3.057	3.078
1170	Eftirlønir	7.226	8.210
1180	Endurgjald í sambandi við lønir	-	-5
1190	Ymiskt	-1.010	-166
	Tilsamans	**79.444**	**82.653**
0888	Skyldug løn	1.437	2.080

Skylduga lønin er hækkað úr 1,4 mió.kr. í 2016 til 2,1 mió.kr. í 2017. Sambært leiðsluni eiga starvsfólk ikki meira enn eina vakt tilgóðar, og orsøkin til hækkingina er, at avsetingar eru gjørdar til lønarhækkingar.

VaktPlan

VaktPlan er sett í verk við vegleiðing og hjálp frá Gjaldstovuni. Tað hevur verið neyðugt við nógvari umforritan, tí arbeiðstíðirnar skulu taka atlit at ferðaætlanum, hvílutíð og sáttmálaviðurskiftum annars.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er eitt stig á rættari leið, at stovnurin hevur raðfest nýggja skipan til at skráseta arbeiðstíð. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at eftirlit verða gjørd við manuellum skrásetingum.

Strandferðslan hevur raðfest nýggja skipan til at skráseta arbeiðstíð.

Landsgrannskoðanin fekk útskrift av vaktunum fyri mars og apríl 2018 hjá Sam og Rituni. Vit kannaðu, um vaktirnar stemma við ferðaætlan og hvílutíð, og um tímarnir samsvara við lønarbrøkin á lønarseðlunum.

Landsgrannskoðanin hevði nakrar spurningar, sum vit fingu svaraðar. Tó ivast vit í, um vaktirnar eru lagdar nóg neyvt inn í skipanina, og fara vit at taka málið upp aftur við Strandferðsluna.

Stakroyndir av lønarmálum

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum lønarmál, um lýsingar, umsóknir, prógv og setanarsáttmálar vóru í málunum. Eisini kannaðu vit við støði í lønargjaldingum fyri apríl 2018, um lønirnar vóru rættar. Vit høvdu nakrar viðmerkingar.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Strandferðslan skipar setanarmál soleiðis, at greitt er, at starv er lýst leyst, best skikkaði umsøkjari er settur, og at formlig krøv í lýsingum eru hildin.

KT viðurskifti

Strandferðslan hevur fleiri kritiskar skipanir.

Strandferðslan hevur fleiri KT skipanir, sum hava kritiskan týdning fyri stovnin, t.d. billetteringsskipanina FARA og bókhaldsskipanina Navision/LS-retail. Skipanirnar eru settar í rakstur í Landsneti við SLA, í Landsneti við FAK-SLA og uttan fyri Landsnet; onkur skipan í øðrum landi. Strandferðslan hevur skift veitara av roknskaparskipanini Navision/LS-retail.

Politikkur um KT trygd

Strandferðslan er við í trygdarpakkanum hjá Gjaldstovuni.

Sum part av trygdarpakkanum hjá Gjaldstovuni hevur Strandferðslan ein orðaðan KT trygdarpolitik og orðaðar KT leiðreglur til starvsfólkini. Strandferðslan brúkar KT leiðreglurnar í trygdarpakkanum hjá Gjaldstovuni.

Landsgrannskoðanin vísti á, at ein orðing eigur at vera í brotinum “Avtaluviðurskifti” í KT trygdarpolitikkinum, soleiðis at eingin ivi er um, at KT trygdarpolitikkurin eisini fevnir um tær skipanir, hvørs rakstur er útveittur til onnur enn KT Landsins. Vit mæltu Strandferðsluni til at taka upp samband við Gjaldstovuna um at orða politikkin samsvarandi.

Sambært Strandferðsluni hevur stovnurin gjørt kekklista fyri árliga dagføring av váðameting og KT politikki.

Skipan av KT trygd

KT trygdarpolitikkurin ásetur, at KT ábyrgdarbýtið hjá stovninum skal vera greitt skipað; m.a. skal verða staðfest:

- Hvør hevur ábyrgdina av SLA,
- hvør hevur ábyrgdina av KT trygdini,
- hvør eigur ymisku KT skipanirnar,
- hvør er dátueigari,
- hvør skal syrgja fyri, at øll á stovninum kenna krøvini, sum verða sett brúkarunum, og
- hvør hevur heimild at taka avgerðir mótvegis Gjaldstovuni

KT leiðarin hevur ábyrgd av rakstraravtalum við veitararnar og av KT trygdini. Hann hevur upplýst, at starvs- og ábyrgdarlýsingar verða gjørdar fyri KT økið.

Strandferðslan hevur gjørt KT leiðreglur, sum eisini fevna um nýtslu av farútgerð, og stovnurin kunnar áhaldandi starvsfólkini um KT leiðreglurnar.

Flokking og váðameting

Strandferðslan er við í trygdarpakkanum hjá Gjaldstovuni og hevur, saman við Gjaldstovuni, gjørt dátuflokking og váðameting av sínum skipanum. Harumframt eru

ábyrgdarpersónar skilmarkaðir fyri hvørja skipan. Vit samanbóru flokkingarskjalið við skjalið við ábyrgdarum. Samsvar var ikki ímillum skjølini.

Stýring av aktivum
Sambært Strandferðsluni eru servarar og verja av teimum sett upp eftir dátuflokkingini. Landsgrannskoðanin mælti til, at Strandferðslan tryggjar, at servarar og skipanir, ið ikki liggja hjá Landsneti, verða sett upp samsvarandi dátuflokkingini.

Atgongdarstýring
Strandferðslan hevur sett í verk gjøgnumgongd av atgongdum. Harumframt er kekklisti stovnaður fyri at tryggja, at tað verður gjørt árliga. Leiðararnir hava ábyrgd av at tryggja røttu atgongdinar hjá sínum starvsfólkum.

Landsgrannskoðanin mælti til regluliga at ganga ígjøgnum atgongdir til skipanir og dátur og at tryggja, at atgongdir eru avmarkaðar so nógv sum gjørligt í mun til uppgávurnar, starvsfólk skulu røkja. Gjøgnumgongdin eigur eisini at fata um viðlíkahalds- og menningaratgongdir, databasu-, administrator-, log-, backupatgongdir og annars allar atgongdir, sum eru til dátutilfeingið hjá stovninum.

Sum liður í at tryggja, at brúkararnir taka ábyrgd av at tryggja sínar brúkaraupplýsingar, ætlar Strandferðslan á sumri 2018 at kunna øll starvsfólkini um KT leiðreglurnar hjá stovninum, har tey samstundis skulu undirskriva brúkaraváttan. Landsgrannskoðanin hevur mælt til at skjalfesta, nær og fyri hvørjum KT leiðreglurnar eru kunnaðar við t.d. dagbók, frágreiðing ella kvittanarteigi.

KT tilbúgving
Strandferðslan hevur ikki nakra tilbúgvingarætlan fyri KT trygdarhendingar. Sambært Strandferðsluni má metast um, í hvønn mun tað er neyðugt fyri stovnin m.a. við støði í váðametingini. Landsgrannskoðanin mælti til at taka støðu til, hvat trygdarhendingar eru, hvussu tær skulu handfarast og fráboðast fyri allar skipanir og dátur hjá Strandferðsluni. Somuleiðis mæltu vit stovninum til at taka støðu til, um tilbúgving er neyðug fyri trygdarhendingarnar.

Strandferðslan tekur undir við tilmælunum.

Compliance
Spurd, um Strandferðslan hevur sett í verk KT trygd í samsvari við rundskrivið um KT trygd frá juni 2007, vísti Strandferðslan á, at raksturin er útveittur til Landsnet, sum hevur sett í verk KT trygd í samsvari við rundskrivið, og at stovnurin harumframt hevur gjørt avtalu um trygdarpakkan. Trygdarskoðan hevur verið, og stovnurin hevur sett eitt projekt upp, ið skal tryggja, at hann kemur á mál við tilmælunum.

Strandferðslan metir seg fylgja reglunum í rundskrivinum um burturbeining ella sølu av teldum, teldlum og telefonum. Stovnurin beinir teldur burtur umvegis Landsnet, ið tekur harðdiskar úr og oyðileggur teir. Telefonir verða latnar stovninum aftur, men verða tó ikki oyðilagdar.

Sáttmáli um rakstur av KT kervi við SLA
Strandferðslan hevur rakstraravtalu við Landsnet og FAK-SLA sáttmálar fyri tær fakskipanir, har raksturin er útveittur til Landsnet. Stovnurin hevur ikki rakstraravtalur við allar veitararnar av skipanunum, ið liggja uttan fyri Landsnet. Skoðanin hjá Gjaldstovuni hevði tilmæli um at fáa hesi viðurskifti í rættlag. Strandferðslan hevur eitt punkt í projektyvirlitinum “Avtalur við veitarar”, sum stovnurin væntar verður avgreitt í 2019.

Samanumtikið um KT viðurskifti
Strandferðslan hevur skipanir, bæði innan fyri Landsnet og uttan fyri Landsnet. Innan fyri Landsnet er raksturin skipaður við SLA og FAK-SLA rakstraravtalum, og KT trygdin

er skipað í trygdarpakkanum hjá Gjaldstovuni. Skipanirnar innan fyri Landsnet verða skoðaðar av Gjaldstovuni. Sama er tó ikki galdandi fyri skipanirnar uttan fyri Landsnet.

Landsgrannskoðanin vísti á, at Strandferðslan hevur meiri fokus á KT trygdini fyri skipanirnar, ið eru innan fyri Landsnet, enn tær, sum eru uttanfyri. Hóast eingin skipan, ið liggur uttan fyri Landsnet, sambært flokkingarskjalinum er kritisk, eigur KT trygdin at skipast soleiðis, at hon fevnir um *alt* KT kervið hjá Strandferðsluni.

Tilmælir frá 2016

Landsgrannskoðanin mælti í 2016 til, at stovnurin tryggjaði sær, at backup/restore/recovery virkaðu eftir ætlan.

Sambært Strandferðsluni verður backup/restore av infrakervi (fíluservari, exchange og Sharepoint) testað regluliga av KT Landsins. Backup/restore/recovery av fakskipanum verður testað við støði í váðameting av einstøku skipanini.

Landsgrannskoðanin mælti í 2016 til, at Strandferðslan gjørdi Change Management mannagongdir. Sambært Strandferðsluni eru mannagongdirnar ikki gjørdar enn.

Landsgrannskoðanin mælti í 2016 til, at mannagondir til brúkarastýring vórðu gjørdar. Sambært Strandferðsluni er mannagongdin, sum verður praktiserað, at avvarðandi leiðari sendir skrivliga umbøn viðvíkjandi brúkarastýring. Mannagongdin er ikki skjalfest.

Aðrar viðmerkingar í seinastu ársfrágreiðing

Starvsfólkaágóðar

Í februar 2014 mælti táverandi grannskoðari stovnsins leiðsluni til at taka støðu til, um reglurnar viðvíkjandi fríum ferðum hjá starvsfólkunum til og frá arbeiði við bussum og skipum hjá stovninum framvegis skuldu galda, og hvussu tað fyrisitingarliga skuldi skipast. Grannskoðarin vísti eisini á, at tað mátti metast at vera sera avmarkaðir møguleikar at fylgja við, um ferðirnar eru í tráð við reglugerðina hjá stovninum. Í juli 2015 vísti grannskoðarin á, at málið enn var opið.

Í juni 2016 boðaði Strandferðslan frá, at hon heldur, at starvsfólk eiga at hava rætt til at ferðast ókeypis til og frá arbeiði við skipum og bussum hjá stovninum.

Í juli 2017 upplýsti Strandferðslan, at stovnurin hevði sent kunning til Samferðslumálaráðið um, at leiðslan heldur, at starvsfólk skulu hava fríar ferðir, bústað v.m.

Í august 2018 hevur Samferðslumálaráðið greitt frá, at ráðið hevur tikið til eftirtektar ta skipan, sum Strandfaraskip landsins brúkar viðvíkjandi ferðing hjá starvsfólki millum arbeiðspláss og heim. Tað er drúgv siðvenja, sum síðani varð ásett í *"Mannagongd (vegleiðing) um ferðing til/frá arbeiði"* frá 7. desembur 2009. Tilskilað verður í vegleiðingini, at starvsfólk ikki kunnu fáa endurgoldið ferðastuðul frá TAKS. Samferðslumálaráðið leggur afturat, at eingi starvsfólk hava frían bústað.

Landsgrannskoðanin ivast í heimildini at lata starvsfólkunum fríar ferðir millum arbeiði og bústað.

Landsgrannskoðanin ivast í, um stovnurin hevur heimild at lata starvsfólkunum fríar ferðir millum arbeiði og bústað, uttan mun til at tað er ein siðvenja, ella at Strandferðslan hevur ásett reglurnar í einari mannagongd (vegleiðing).

Stjórabilur

Strandferðslan keypti stjórabil í 2016, tó at tað er ásett í stjórasáttmálanum, at stovnurin rindar fyri nýtslu av egnum bili eftir almennu reglunum.

Sambært stjóranum varð bilurin keyptur, áðrenn stjórin undirskrivaði serstakan stjórasáttmála. Stovnurin kunnaði fíggjarfulltrúan í Samferðslumálaráðnum um ætlanina at keypa bil til nýtslu hjá stjóranum.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Samferðslumálaráðið ætlaði at kanna málið um stjórabilin nærri og tryggja, at øll viðurskifti komu í rættlag.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2016 undraðust løgtingsgrannskoðararnir á, at Strandferðslan hevur keypt bil til stjóran, tá ið tað í sáttmálanum stendur, at stovnurin rindar fyri nýtslu av egnum bili.

Í august 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Samferðslumálaráðið hevur ikki beinleiðis tikið málið um stjórabilin upp, men skilir sjónarmið stovnsins um tørvin á bilinum. Stjórin og Strandferðslan hava víðfevnt sambond úteftir, sum stava frá virkseminum hjá Oyggjaleiðum, Bygdaleiðum og tyrluflúgving. Tað krevur regluligar túrar kring alt landið til ymiskar veitarar, manningar á skipum, myndugleikar, kommunur og annað.

Samferðslumálaráðið hevur ikki beinleiðis tikið málið upp.

Sambært landsstýrismanninum hevur Strandferðslan í juni 2018 sent Akstovuni umsókn um at eyðmerkja bilin við nummarplátu SSL12.

Sakarmál
Strandferðslan hevði eitt sakarmál um mishald av sáttmála um koyring av skúlabørnum. Kravið var ein mió.kr. Sambært landsstýrismanninum kemur rættarmálið til dómsviðgerð í Føroya Rætti 17. september 2018.

9.4 Stuðul til útoyggjar (LG 2017/217-0382)

Sambært L.l. nr. 86/1998 “um útjavningarstuðul til útjaðaraøki” kann stuðul latast til at javna ein part av meirkostnaðinum av at flyta olju og annan farm til fastbúgvandi í útjaðaraøkjum í Føroyum. 1,5 mió.kr. eru játtaðar til endamálið.

Í 2017 fekk Strandfaraskip landsins 667 t.kr. í stuðli av játtanini. Landsgrannskoðanin hevur váttað eina grannskoðaða uppgerð. Vit kannaðu við stakroyndum, um skrásetingarnar hjá Strandferðsluni lúka treytirnar í reglugerðini fyri útjavningarstuðul til útjaðaraøki, m.a. um útjavningarstuðulin bert verður latin til fastbúgvandi á oyggj/bygd sambært §§ 1, 2 og 5 í reglugerðini.

Stakroyndirnar vístu, at móttakararnir búðu á útoyggj sambært Landsfólkayvirlitinum.

Strandfaraskip landsins hevur í 2017 bókað slakar 20 t.kr. fyri olju, ið er send til móttakarar, ið ikki eru fastbúgvandi á útoyggj.

Lógin heimilar bert at útlíkna part av meirkostnaðinum hjá fastbúgvandi, men í innanhýsis telduposti november 2011 hevur Innlendismálaráðið mett, at loyvast kann flutningur av oljutunnum hjá ikki fastbúgvandi, um samlaða árliga upphæddin ikki fer upp um 20 t.kr., og hevur Strandferðslan nýtt ta tulkingina. Landsgrannskoðanin undrast á, at Innlendismálaráðið er komið til ta tulkingina.

Okkum kunnugt eru ikki upphæddir, sum mangla at verða skrásettar. Landsgrannskoðanin heldur tað vera óheppið, at tað á fleiri av fakturunum ikki sæst hvør móttakarin er.

Á fleiri fakturum sæst ikki, hvør móttakarin er.

Burtursæð frá viðmerkingunum omanfyri er niðurstøðan hjá Landsgrannskoðanini, at skrásetingarnar hjá Strandfaraskipum landsins í 2017 geva eina rætta mynd av, hvat stuðulin er latin til.

Umframt Strandfaraskip landsins hava P/f Atlantic Airways og P/f Posta fingið stuðul, ávikavist 580 t.kr. og 151 t.kr. Grannskoðanarvirkið Januar hevur latið Atlantic Airways og Posta váttan.

9.5 Akstovan (LG 2017/217-0384)

Roknskaparviðurskifti

Játtanin til Akstovuna er nettojáttan. Stovnurin hevur dagførda roknskaparreglugerð. Størru ognirnar eru skrásettar í Búskaparskipan landsins, og stovnurin hevur yvirlit yvir smærri ognir.

Akstovan fær inntøkur fyri t.d. nummarspjøldur, sýn og koyrikort. Næstan øll gjøldini eru ásett í lóg og kunngerðum og verða goldin forút.

Serstøk konta stovnað til tinglýsing og veðhavara-lýsingar.

Akstovan leggur út fyri tinglýsing og veðhavaralýsingar, sum stovnurin krevur inn aftur frá viðskiftafólkum. Í 2015 mælti Landsgrannskoðanin til, at mannagongd verður skipað at stemma av ímillum tað, sum verður lagt út, og tað sum verður kravt inn. Akstovan kunnaði um, at í oktober 2017 er serstøk konta stovnað til tinglýsing og veðhavaralýsingar, sum verður stemmað av.

Kassi og peningastovnskontur

Í 2018 hevur Landsgrannskoðanin verið á ófráboðaðum kassaeftirlitið á Akstovuni. Vit høvdu einki at finnast at.

Landsbankin tømir javnan peningastovnskonturnar í landskassan. Starvsfólk hava bert lesiatgongd til netbankan. Konturnar verða stemmaðar av. Stovnurin hevur VISA/Dankort, sum verður brúkt til at rinda ymiskar kostnaðir hjá Akstovuni og til smærri keyp.

Lønir

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur lønarmál. Eisini kannaðu vit tíðarskrásetingar. Einki var at finnast at.

KT viðurskifti

Akstovan nýtir journalskipanina 360. Stovnurin hevur persónsviðkvæmar upplýsingar, so sum heilsuupplýsingar og upplýsingar frá løgregluni. Bert starvsfólk, sum arbeiða við málunum, hava atgongd til tær upplýsingarnar.

Akstovan luttekur í trygdarpakkanum hjá Gjaldstovuni.

Akstovan hevur skipanir, sum hava stóran týdning fyri stovnin og landið sum heild, m.a. akfarsskrá, koyrikortskrá og vegskattaskrá umframt sýnsskrá og kassaskipan. Stovnurin eigur skipanirnar. Akstovan luttekur í Trygdarpakkanum hjá KT Landsins, og fylgja felagsskipanirnar hjá stovninum teimum trygdartiltøkunum.

Høvuðsambætarin og ein speglambætari standa í einum rúmi á stovninum, ið ikki er brandtrygt. Í 2015 mælti Landsgrannskoðanin til, at trygdaravrit vórðu goymd trygt og á øðrum stað enn á Akstovuni.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Akstovan fór at flyta ambætara-útbúnaðin, soleiðis at hann frameftir varð hýstur á Elektron. Eisini ætlaði Akstovan at seta firewall upp í sínum egnu hølum, sum skuldi binda flutta útbúnaðin í restina av kervinum.

Í november 2017 kunnaði Akstovan um, at stovnurin samstarvar við KT Landsins um at flyta skipanirnar til Elektron at umsita, soleiðis at Elektron tekur sær av rakstrar- og trygdarviðurskiftum. Akstovan væntaði, at skipanirnar fóru at vera fluttar um 1. mars 2018. Akstovan hevur enn ikki gjørt SLA avtalu (rakstraravtalu) við Elektron.

Akstovan hevur ikki klassifiserað dáturnar.

Akstovan hevur ikki klassifiserað dáturnar eftir trúnaði, atgeingi og rættleika. Stovnurin hevur tríggjar skráir, harav ein hevur viðkvæmar upplýsingar. Landsgrannskoðanin mælti til at klassifisera dáturnar eftir leisti frá Gjaldstovuni.

Akstovan hevur ikki gjørt váðameting og hevur ikki mannagongdir fyri, hvussu váðameting og KT trygdarpolitikkur verða hildin viðlíka. Landsgrannskoðanin mælti til, at váðameting, trygdarpolitikkur, trygdarleiðreglur, dátuflokking o.t. verða endurskoðað sambært tilmæli frá KT Landsins. Stovnurin hevur ikki change management mannagongdir. Um skipanir ikki rigga, sum tær skulu, tá ið rættingar/broytingar eru gjørdar, verður forritarin boðsendur at rætta feilin.

Akstovan hevur ikki gjørt váðameting.

Akstovan hevur egna kassaskipan, og skrásetingarnar verða dagliga fluttar talgilt til Búskaparskipan landsins.

9.6 Arbeiðs- og brunaeftirlitið (LG 2017/217-0391)

Roknskaparviðurskifti

Stovnurin hevur roknskaparreglugerð frá juni 2017. Landsgrannskoðanin hevði nøkur tilmæli viðvíkjandi roknskapinum, eisini vístu vit á fleiri manglar viðvíkjandi ferðauppgerðum.

Umsitingin av tíðarskrásetingunum hevði ikki verið nøktandi, men stovnurin hevur gjørt ein leist at tryggja, at starvsfólk halda seg innan fyri reglurnar um +100/-40 tímar.

KT viðurskifti

Arbeiðs- og brunaeftirlitið brúkar trygdarpolitikkin hjá KT Landsins og hevur saman við KT Landsins gjørt dátuflokkingar eftir leistinum hjá Landsneti.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið brúkar trygdarpolitikkin hjá KT Landsins.

Stovnurin hevur ikki gjørt váðameting. Sum partur av trygdarpakkanum hjá KT Landsins nýtir stovnurin váðametingina frá tí pakkanum. Sambært kunngerð “um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum” skal dátuábyrgdarin gera váðameting í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum fyri at fáa greiði á sannlíkindum fyri brotum á trygdarreglurnar og avleiðingarnar av tí. Landsgrannskoðanin mælti til, at gera váðametingina.

9.7 Barsilsskipanin (LG 2017/217-0394)

Árliga gjaldið fyri persónliga teknaða trygging er 500 kr. Í 2013 vísti Landsgrannskoðanin á, at í mun til tað A-skattgjaldarar rinda, var tann upphæddin í lægra lagi. Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Samferðslumálaráðið arbeiddi við málinum um at hækka sjálvbodna tryggingargjaldið.

Í seinasta uppskoti til samtyktar mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum í samferðslumálum til at dagføra gjaldið.

Løgtingsgrannskoðararnir mæltu til at dagføra sjálvbodna tryggingargjaldið.

TAKS umsat reglurnar sum, at tryggingarnar galda fyri eitt kalendaraár. Landsgrannskoðanin vísti á, at lógin ásetti, at gjaldið var fyri eitt ár. Í apríl 2017 boðaði TAKS frá, at stovnurin hevði sent áheitan til Samferðslumálaráðið um at broyta ásetingina soleiðis, at kunngerðin samsvaraði við praksis.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at lógarbroytingin eisini skuldi fata um, at tryggingargjaldið skuldi galda fyri eitt kalendaraár.

Í september 2018 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Samferðslumálaráðið hevur ikki hækkað sjálvbodna tryggingargjaldið ella ásett, at tryggingargjaldið skal galda fyri eitt kalendaraár (sum er praksis). Tryggingargjaldið er ásett í § 1 í K. nr. 59/2002 “um gjald til sjálvbodnu barsilspeningatryggingina”. § 2 ásetir, nær tryggingargjaldið skal vera galdandi. Sostatt er tað bert neyðugt at broyta kunngerðina sjálva, og verður tað gjørt í næstum.

Landsstýrismaðurin hevur ikki hækkað sjálvbodna tryggingargjaldið.

Barsilsgrunnurin

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin varð m.a. nevnt, at í 2015 varð Barsilsgrunnurin settur á stovn. Grunnurin hevur sjálvstøðugan roknskap og fíggjarstøðu í landsroknskapinum sum eksternur grunnur. Sambært lógini umsitur landsstýrismaðurin grunnin, men kann leggja umsitingina til annan almennan stovn.

Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um umsiting og virksemi grunsins í kunngerð. Samferðslumálaráðið helt, at umsitingaravtalan við TAKS var nøktandi, og at tað ikki var neyðugt at gera nevndu reglugerð í kunngerð.

Løgtingsgrannskoðararnir mæltu til, at landsstýrismaðurin setti nærri reglur um umsiting í kunngerð.

Løgtingsgrannskoðararnir mæltu í seinasta uppskoti til samtyktar til, at landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um umsiting og virksemi grunsins í kunngerð.

Í september 2018 hevur landsstýrismaðurin aftur kunnað um, at Samferðslumálaráðið heldur, at avtalan frá 2011 millum Vinnumálaráðið og TAKS um umsiting av pørtum av Barsilsskipanini sum heild er nøktandi, og at tað tí ikki er neyðugt at gera nevndu kunngerð. TAKS fylgir ásetingum landsins um roknskaparhald, játtanarlógir o.a. og fyrisitur Barsilsskipanina eftir galdandi rættarreglum fyri skipanina.

Landsstýrismaðurin heldur ikki, tað er neyðugt at gera kunngerð, tí avtalan frá 2011 er nøktandi.

Sambært lógini ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur fyri íløgurøkt Barsilsgrunsins, soleiðis at hon er í samsvari við íløgupolitikk landsins.

Í august 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at avlopið er ein partur av gjaldføri landskassans, og at ein loysn, sum var verd at kanna, var møguleikin fyri at gera avtalu við Landsbankan um at røkja fæ grunsins.

Sambært landsstýrismanninum er eingin avtala gjørd við Landsbankan um at røkja fæ grunsins.

Umsiting av Barsilsskipanini

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at veruligu útreiðslurnar fyri umsiting av Barsilsskipanini verða útgreinaðar í Búskaparskipan landsins.

Samferðslumálaráðið var samt við Landsgrannskoðanina um, at útreiðslurnar til rakstur kundu verða meira útgreinaðar í Búskaparskipan landsins.

Landsgrannskoðanin vísti á, at heimild var ikki at fara út um játtanina til umsiting uttan mun til, um tað var Barsilsgrunnurin, ið rindaði fyri umsitingina. Í 2017 vísti landsstýrismaðurin á, at rakstrarjáttanin er ein nettoútreiðslujáttan, og at hægri inntøkur kundu fíggja hægri útreiðslur, bara nettojáttanin helt.

Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at farið var út um heimildina til at hava rakstrarútreiðslur fyri 2 mió.kr., og at Barsilsgrunnurin hevði rindað meirnýtsluna uttan játtan.

Í september 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, *"at játtanarroknskapurin til umsiting av Barsilsskipanini er væl útgreinaður í landskassaroknskapardøminum í Leiðslukunningarskipanini. Tørvur er ikki á neyvari útgreining.*

Viðvíkjandi rakstrarjáttanini, er hon ein nettoútreiðslujáttan, har játtanarlógin, og kunngerð um rakstrarjáttanir tilskila, at hægri inntøkur kunnu fíggja hægri útreiðslur, bara nettojáttanin heldur. Tað er ikki rætt at siga, at rakstrarjáttanin til at umsita Barsilsskipanina ikki er hildin.

Útreiðslurnar kunnu falla eitt sindur ymiskt yvir ár, til dømis útreiðslur til kunningartøkni.

Inntøkurnar til Barsilsskipanina/grunnin fíggja lógarbundnu útreiðslurnar (høvuðskonta 17.39.4.01. Barsilsskipan) og rakstrarútreiðslurnar. Útreiðslujáttanin í 2017 var 2,0 mió.kr., meðan nýtslan var 2,05 mió.kr."

Avstemman av inngjøldum

Í 2013 mælti Landsgrannskoðanin TAKS til, at orsøkir til munir í avstemmanum vórðu staðfestar, og møguligar rættingar gjørdar, so skjótt sum gjørligt.

TAKS góðtók munir, ið vóru undir 0,5%, tí tey hildu, at talan var um avrundingarmunir. Sambært avstemmingum 31. desember 2016 millum Barsilsskipanina og útgoldna A-inntøku var munurin í arbeiðsgevaragjøldunum 127.567 kr. ella 0,2%, og í løntakaragjøldunum var hann 56.001 kr. ella 0,1%.

TAKS tók stakroyndir, tá ið prosentvísa inngjaldið broyttist fyri at tryggja, at tað var broytt í skipanini. TAKS kannaði ikki, um munirnir, ið Elektron upplýsti fyri TAKS, vóru staðfestir munir, ella um teir vóru rætt bókaðir.

Sambært landsstýrismanninum var tað ikki nøktandi, at TAKS bert gjørdi stakroyndir, tá ið inngjaldið broyttist. Eitt hugskot var, at TAKS eisini gjørdi stakroyndir fyri at kanna, um upplýsingar frá Elektron sum heild vóru staðfestir munir, og um teir vóru rætt bókaðir.

Avstemman av útgjøldum

TAKS stemmaði hvønn mánað av millum Barsilsskipanina og tað, sum varð flutt til Gjaldstovuna. TAKS hevði ikki stemmað Barsilsskipanina av við upphæddirnar, ið vóru skrásettar í rakstrinum í Búskaparskipan landsins, men hevði stemmað av við St.Rk. 0849 í fíggjarstøðuni. Tey stemmaðu ikki av millum Barsilsskipanina og skatta-skipanina hjá TAKS.

Tað, at allar almennar lønir verða goldnar um V-talið hjá Gjaldstovuni, ger, at TAKS fekk ikki havt eftirlit við teimum lønunum. TAKS hevði fingið lyfti frá Gjaldstovuni um, at Gjaldstovan skrivaði V-talið hjá stovninum á yvirlitið frameftir.

Tá ið Búskaparskipan landsins er grundarlagið undir landsroknskapinum, er neyðugt, at skipanir, sum skulu fóðra Búskaparskipan landsins, eru stemmaðar av við endaligu tølini í landsroknskapinum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at avstemmanir vórðu gjørdar og skjalfestar, soleiðis at roknskapurin var so gjøgnumskygdur sum gjørligt, og eftirlitsslóðin var greið. Samferðslumálaráðið tók undir við tilmælinum.

Í september 2018 hevur landsstýrismaðurin vístá, at allar skipanir hjá Elektron grann-skoðaðar av grannskoðanini hjá Elektron. TAKS avstemmar mánaðarliga útgjøldini frá barsilsskipanini við Búskaparskipan landsins; bæði rakstur og fíggjarstøða fyri øll útgjøld. Tað er eisini ein sjálvvirkin avstemman millum Barsilsskipanina og Búskapar-skipan landsins, soleiðis at um munur kemur fyri, fær fíggjarleiðarin fráboðan um tað.

Landsstýrismaðurin heldur, at yvirhøvur er avstemmanin av inngjøldum og útgjøldum nøktandi.

Áogn hjá Barsilsskipanini

Í 2010 hækkaði áognin hjá Barsilsskipanini frá 1,3 mió.kr. til 5,1 mió.kr. Áognin er støðugt hækkað síðani, við undantaki av 2014. Sambært TAKS var orsøkin til hækkingina, at tá ið peningastovnarnir fluttu frá Elektron til SDC í 2010, misti TAKS møguleikan at krevja inn barsilsgjald, samstundis sum lønir vórðu fluttar. Tá var ikki longur tekniskt møguligt at fáa gjaldið inn sjálvvirkandi. Elektron hevði ment eina skipan, har virki kundu stovna gjaldsavtalu. Sambært TAKS virkaði tann skipanin ikki optimalt fyrstu árini, men hon var dagførd, og sá tað út til, at fleiri virki nýttu skipanina.

Áognin hjá Barsilsskipanini er komin upp á 7,6 mió.kr.

Í 2017 er áognin vaksin við 300 t.kr. og er komin upp á 7,6 mió.kr.

Í september 2018 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at TAKS upplýsir, at arbeitt verður nú við at fáa gomlu skipanina at virka aftur. Komið er fram til, at tænastan ikki hvarv, tá ið peningastovnarnir fluttu frá Elektron til SDC í 2010. TAKS arbeiðir saman við øðrum grunnum við at fáa gomlu gjaldsavtaluna at koma í gildi aftur.

Innheinting av ov nógv goldnum barsilspeningi

TAKS kravdi ikki upphæddir inn, ið vóru undir 2.500 kr. TAKS hevði gjørt eina meting av, hvat tað kostaði at krevja inn eftirstøður, og helt, at tað loysti seg ikki at seta arbeiðsorku av til at heinta upphæddir minni enn 2.500 kr. inn.

Landsgrannskoðanin helt, at ein tílík regla átti at verið heimilað í lóg, og samanbar við regluna í skattalógini um at írestandi skattur, sum er 100 kr. ella minni, verður ikki kravdur.

Í august 2017 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Samferðslumálaráðið fór at gera eina áseting í barsilslógini um, at upphæddir undir 2.500 kr. ikki skuldu krevjast inn.

Í seinasta uppskoti til samtyktar hildu løgtingsgrannskoðararnir, at TAKS hevur ikki heimild at lata vera við at krevja inn, og mæltu til, at lógarheimild varð fingin til vega.

Í september 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at lógin er ikki dagført, soleiðis at heimild er fyri at áseta, at TAKS ikki krevur upphæddir, sum eru undir 2.500 kr. Markið verður í staðin sett til 500 kr.

TAKS hevur í verki broytt markið til 500 kr. Hetta hevur leingi verið mannagongdin. 2.500 kr. markið varð brúkt í sambandi við stóra upprudding, tá ið TAKS yvirtók Barsilsskipanina frá ALS.

Fleiri upphæddir “hingu” sum skuld í skipanini, bæði munir í sambandi við lógarbroytingina og eisini upphæddir, ið persónar høvdu rindað aftur, tí teir høvdu fingið ov nógv goldið út. TAKS kundi ikki bóka upphæddirnar burtur, tí KT skipanin var ikki gjørd til tað, og TAKS hevði ikki raðfest uppgávuna.

Landsgrannskoðanin spurdi, hví dagføringar av KT kervinum hjá Barsilsskipanini vóru partur av raðfestingini hjá TAKS, tá ið Barsilsgrunnurin rindar fyri menningarútreiðslurnar. TAKS svaraði, at tey raðfestu uppgávurnar hjá Barsilsskipanini saman við samlaðu uppgávunum hjá TAKS.

Landsgrannskoðanin helt, at tað átti at borið til at gjørt neyðugu dagføringarnar av KT skipanunum, soleiðis at bókhaldið kundi virka eftir reglunum. Samferðslumálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini.

Elektron hevur ikki havt orku til menningaruppgávur.

Í september 2018 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at stórar broytingar eru á KT økinum hjá TAKS, og upplýsir TAKS, at Elektron ikki hevur havt orku til menningaruppgávur. Seinast í ár er arbeiðið liðugt, og fer TAKS at raðfesta sínar menningaruppgávur, herímillum eisini bókhaldsskipanina. Sigast kann tó ikki við vissu, nær hon verður gjørd.

10 Fíggjarstøða

10.1 Fíggjarstøða (LG 2017/300-0000)

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við í fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir "kapitalinnskot", og partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

Landsgrannskoðanin hevur í stóran mun bygt grannskoðanina av postum í fíggjarstøðuni 2017 á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

Í talvuni niðanfyri eru samandráttir úr fíggjarstøðuni við árslok árini 2013 til 2017.

mió.kr.

	2103	2014	2015	2016	2017
OGN					
Kapitalinnskot	285	459	451	460	487
Virðisbrøv	1.470	1.480	1.485	1.521	1.556
Útlán	127	126	125	122	121
Áogn o.a.	496	544	440	543	575
Tøkur peningur	3.150	2.536	2.792	2.905	3.505
Ogn tilsamans	**5.528**	**5.145**	**5.293**	**5.551**	**6.244**
SKULD					
Skuld	6.113	5.750	6.120	6.076	6.155
Útjavningarkonta	-585	-605	-827	-525	89
Skuld tilsamans	**5.528**	**5.145**	**5.293**	**5.551**	**6.244**

10.1.1 Kapitalinnskot (LG 2017/300-0102)

Við árslok 2017 fevnir kapitalinnskotið um Fíggingargrunnin frá 1992, sum eigur 33,4% av P/f BankNordik.

t.kr.

Kapitalogn í landsfyritøkum	2015	2016	2017
Kapitalogn við ársbyrjan	459.468	451.312	460.425
Javning, kapitalognin samsvarar við eginognina í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum	-77.656	78.613	26.886
Uppskriving av partapeninginum í Lív	69.500	-69.500	0
Kapitalogn við ársenda	**451.312**	**460.425**	**487.311**

Í 2016 hækkaði kapitalognin í Fíggingargrunninum 78,6 mió.kr., frá 381,8 mió.kr. til 460,4 mió.kr., og í 2017 hækkaði hon 26,9 mió.kr. til 487,3 mió.kr. Kapitalognin verður javnað hvørt ár, soleiðis at hon samsvarar við eginpeningin í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum fyri roknskaparárið frammanundan. Sostatt verður ognin í landsroknskapinum javnað eitt ár afturút.

Kapitalinnskot fevnir um Fíggingargrunnin frá 1992.

Av tí at roknskapurin hjá Fíggingargrunninum fyri farið roknskaparár ikki er tøkur fyrr enn eftir, at landsroknskapurin er liðugur, og fyri ikki at bóka eitt fyribils tal út frá einari meting, hevur Gjaldstovan valt at nýta tølini úr seinast lidna roknskapinum hjá Fíggingargrunninum, sí talvuna omanfyri.

Í ársfrásøgnini hjá Fíggingargrunninum fyri 2016 var ognarparturin í P/f BankNordik bókaður til 452,9 mió.kr., sum svaraði til kursvirðið á partabrøvunum 31. desember 2016. Kursvirðið var 26,8 mió.kr. hægri enn við árslok 2015, tá ið kursvirðið var 426,1 mió.kr. Í ársfrágreiðingini greiðir leiðslan frá, at kursurin á partabrøvunum hjá P/f BankNordik hækkaði úr 127,5 við árslok 2015 í 135,5 við árslok 2016.

Viðmerkjast kann, at eginpeningurin í Fíggingargrunninum við árslok 2017 var 389,9 mió.kr., t.v.s. 97,4 mió.kr. lægri enn við árslok 2016. Sambært ársfrásøgnini 2017 er høvuðsorsøkin til lækkingina, at virðið á partabrøvunum í P/f BankNordik er lækkað. Kursurin við árslok 2016 var 135,5; hann var 106 við árslok 2017.

Fíggingargrunnurin hevur fingið 100,3 mió.kr. í vinningsbýti frá P/f BankNordik fyri fíggjarárið 2016. 100 mió.kr. eru lutaðar víðari til landskassan í 2017.

Landsgrannskoðanin hevur samanborið tølini í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum frá 1992 við tølini í landsroknskapinum árini 2016 og 2017, umframt at vit hava eftirroknað ognarpartin í P/f BankNordik. Landsgrannskoðanin hevur einki at finnast at.

Løgtingið hevur mælt til at fáa greiði á roknskaparpostinum og fáa skrásett aðrar grunnar o.l..

Í nógv ár hevur Løgtingið mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum, t.d. sum “Kapitalogn í landsfyritøkum”.

Í oktober 2013 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hesir grunnar verða ikki tiknir við í landsroknskapin, men verða partur av samlaða almenna roknskapinum.

Í 2014, 2015 og aftur í august 2016 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður framvegis við spurninginum, hvussu samlaði almenni roknskapurin skal gerast upp. Ætlanin var, at Frítíðargrunnurin, eins og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, skuldi bóka beinleiðis í Búskaparskipan landsins, meðan krøvini frá arbeiðsgevarum skuldi verða kravd inn um TAKS skipanina.

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir partinum “Eksternir grunnar”. Frameftir er ætlanin, at eginpeningurin í Húsalánsgrunninum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframagrunninum verður tikin við í landsroknskapin undir “Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.”

Eftir er at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kunnu takast við í landsroknskapin.

Húsalánsgrunnurin og Búnaðargrunnurin aftur við í landsroknskapinum.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað verður áhaldandi arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Húsalánsgrunnurin og Búnaðargrunnurin eru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt varð við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýti til landsroknskapin.

Landsstýrismaðurin hevur aftur í september 2018 greitt frá, at tað framhaldandi verður arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fer fram í stigum, og miðað verður ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 verður eginpeningurin í eksternu grunnunum tikin við undir ”Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.” Arbeitt verður framvegis við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, sum ætlanin er at leggja fyri Løgtingið í hesari tingsetuni.

10.1.2 Virðisbrøv

t.kr.

	2015	2016	2017
Sambært roknskapinum	1.484.821	1.520.988	1.555.788

Frá 2015 til 2016 eru virðisbrøvini hækkað 36,2 mió.kr., og frá 2016 til 2017 eru tey hækkað 34,8 mió.kr. Orsøkin til hækkingina frá 2016 til 2017 er, at landið sambært Ll. nr. 30/2014 hevur sett 35 mió.kr. í partapeningi í P/f Eystur- og Sandoyartunlar. Hinvegin eru partabrøvini í P/f Føroya Dátusavn, 200 t.kr., strikað. Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum:

t.kr.

Skrásett í landsroknskapinum	2015	2016	2017	Til skjals
P/f Vágatunnilin	160.300	160.300	160.300	Ja
P/f Norðoyatunnilin	235.000	235.000	235.000	Ja
P/f Føroya Tele	77.948	77.948	77.948	Ja
P/f Postverk Føroya	43.000	43.000	43.000	Ja
P/f Fiskaaling	17.375	17.375	17.375	Ja
P/f Føroya Lívstrygging	500	11.667	11.667	Ja
P/f Vága Floghavn	807.818	807.818	807.818	Ja
P/f Atlantic Airways	86.912	86.912	86.912	Ja *)
P/f Elektron	2.347	2.347	2.347	Ja
P/f Føroya Dátusavn	200	200	0	Ja
Sp/f Ítróttavedding	20	20	20	Nei
P/f Smyril Line	32.760	32.760	32.760	Ja
P/f Tjaldur	140	140	140	Nei
P/f Føroya Banki	1	1	1	Ja *)
P/f Visit Faroe Islands	500	500	500	Nei **)
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	20.000	45.000	80.000	Nei **)
Partabrøv tilsamans	**1.484.821**	**1.520.988**	**1.555.788**	

*) Partabrøvini eru skrásett elektroniskt og tí pappírsleys. Útskrift er fingin til vega frá Værdipapircentralen.
**) Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hevur kunnað um, at partabrøv verða ikki útskrivað longur.

P/f Føroya Dátusavn er tikið av og strikað í partafelagsskránni í januar 2016. Gjaldstovan bókaði partapeningin burtur í 2017.

Í 9 feløgum eigur landið allan partapeningin:

t.kr.

Roknskapartøl fyri feløg, sum landið eigur einsamalt.

Roknskapartøl 2017	Brutto-vinningur	Ársúrslit	Samlað ogn	Egin-peningur
P/f Vágatunnilin	14.368	5.855	195.276	183.791
P/f Norðoyatunnilin	15.172	4.349	264.186	257.486
P/f Føroya Tele (samtak)	260.012	52.877	753.506	489.311
P/f Postverk Føroya (samtak)	64.305	3.531	119.406	35.347
P/f Fiskaaling	22.602	3.952	16.720	-4.370
P/f Vága Floghavn (samtak)	20.056	15.382	857.832	822.872
P/f Atlantic Airways	178.310	3.341	799.995	232.384
P/f Visit Faroe Islands	3.800	6	2.234	513
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	-1.265	-3.200	2.821	71.182
Tilsamans	**577.360**	**86.093**	**3.011.976**	**2.088.516**

Samlaða úrslitið hjá hesum feløgum var 86,1 mió.kr. í vinningi eftir skatt, og samlaði eginpeningurin varð 2.089 mió.kr. Í 2016 var samlaða úrslitið hjá feløgum, sum landið eigur allan partapeningin í, 71,3 mió.kr. og eginpeningurin 1.991 mió.kr.

Í 2017 áttu minnilutapartaeigararnir í dótturfeløgum hjá P/f Føroya Tele 11 mió.kr., og minnilutapartaeigararnir í dótturfeløgum hjá P/f Vága Floghavn áttu 8,5 mió.kr.

Samlað roknskapartøl hjá feløgunum

Yvirlit yvir samlaðu roknskapartølini árini 2008 til 2017, fyri feløg sum landið eigur allan partapeningin í, síggjast í talvuni niðanfyri:

t.kr.

Ár	Brutto vinningur/søla	Ársúrslit	Samlað ogn	Eginpeningur
2008	925.524	-42.241	5.005.434	1.300.876
2009	695.048	-23.045	5.185.597	1.421.735
2010	714.585	27.672	5.983.268	1.524.940
2011	732.782	-268.123	7.241.118	2.201.249
2012	608.022	-513.502	3.730.656	1.631.006
2013	620.290	91.263	3.898.691	1.710.169
2014	660.020	67.148	4.201.625	1.819.871
2015	866.069	48.714	4.856.817	2.038.028
2016	607.125	71.277	5.835.015	1.990.572
2017	577.360	86.093	3.011.976	2.088.516

Virðismeting

Gjaldstovan hevur ásett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey verða keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Skrásetti partapeningurin gevur ikki ábending um virðið á feløgunum.

Í landsroknskapinum 2017 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, yvirkurs og útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um ítøkiliga virðið á feløgunum.

Niðanfyri sæst innara virðið á 12 feløgum, samanborið við keypsvirðið sambært landsroknskapinum fyri 2017:

t.kr.

	Keypsvirðið sambært landsroknskapinum	Innara virðið
P/f Vágatunnilin	160.300	183.791
P/f Norðoyatunnilin	235.000	257.486
P/f Vága Floghavn *)	807.818	822.872
P/f Føroya Tele **)	77.948	489.311
P/f Postverk Føroya	43.000	35.347
P/f Fiskaaling	17.376	-4.370
P/f Føroya Lívstrygging	11.667	22.769
P/f Atlantic Airways	86.912	232.384
P/f Elektron	2.347	5.022
P/f Smyril Line	32.760	42.443
P/f Visit Faroe Islands	500	513
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	80.000	71.182
Partabrøv tilsamans	**1.555.628**	**2.158.750**

*) Parturin hjá minnilutapartaeigarum var 8,5 mió.kr.
**) Parturin hjá minnilutapartaeigarum var 11,0 mió.kr.

Sum sæst í yvirlitinum, er keypsvirðið í nøkrum førum munandi lægri enn innara virðið. Í 2012 segði landsstýrismaðurin, at Gjaldstovan hevði slept ætlanini at nýta innara virðið í landsroknskapinum, í øllum førum fyribils.

Í 2008 kannaði Landsgrannskoðanin, um partabrøvini vóru til skjals í teimum førum, har “pappírs” partabrøv eru. Landsgrannskoðanin fekk goymsluyvirlit frá Værdipapircentralen, har partabrøvini bert eru elektroniskt skrásett. Síðani hevur Landsgrannskoðanin bert kannað broytingar í partabrævagoymsluni.

Vinningsbýti frá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari:

t.kr.

	2015	2016	2017
P/f Føroya Tele	32.000	25.000	20.000

Í 2017 fekk landskassin harafturat 100 mió.kr. frá Fíggingargrunninum frá 1992 í sambandi við, at BankNordik lat vinningsbýti fyri 2016, 81 tkr. í sambandi við at P/f Føroya Dátusavn varð strikað og 3,2 mió.kr. vórðu útlutaðar frá Føroya Realkreditt-stovni.

Fíggingargrunnurin frá 1992 lat landskassanum 100 mió.kr. í 2017.

10.1.3 Útlán

t.kr.

	2015	2016	2017
Útlán ársbyrjan	329.646	330.748	328.747
Tilgongd í árinum	20.132	19.142	20.928
Frágongd í árinum	-19.030	-21.143	-47.659
Útlán ársenda brutto	**330.748**	**328.747**	**302.016**
Sett av ímóti tapi	-205.534	-207.096	-181.561
Sambært roknskapinum	**125.214**	**121.651**	**120.455**

Heitið útlán fevnir um veðhaldsútlegg, lestrarlán, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán. Tilgongdin stavar í høvuðsheitum frá, at nýggj lestrarlán eru veitt, og at ábyrgdarlán er veitt til P/f Føroya Fiskaaling. Frágongdin stavar í høvuðsheitum frá, at lestrarlán eru goldin aftur, og at onnur lán eru niðurgoldin. Samanlagt eru útlánini lækkað netto 1,2 mió.kr. frá 2016 til 2017.

Sett er av ímóti tapi. Virðini á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðuls-lánum sambært roknskapinum eru sett til 0 kr. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

Rentu- og avdráttarfrí útlán

t.kr.

	2015	2016	2017
Rentu- og avdráttarfrí lán ársbyrjan	272.427	278.427	284.677
Tilgongd í árinum	6.000	6.250	0
Frágongd í árinum	0	0	0
Rentu- og avdráttarfrí lán ársenda	**278.427**	**284.677**	**284.677**
Sett av móti tapi	-278.427	-284.677	-284.677
Sambært roknskapinum	**0**	**0**	**0**

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, sjálvsognarstovnar, studningslán, eldrasambýlir og Postverk Føroya. Sí notu nr. 3 í landsroknskapinum.

Eingin broyting var í 2017.

Sambært landsroknskapinum verða rentu- og avdráttarfrí lán tikin við í roknskapin við virðinum 0 kr. Orsøkin er, at talan er um treytað lán, sum bert skulu rindast aftur, um bygningar o.t., sum lán eru veitt til, verða brúkt til annað enn upprunaliga endamálið.

10.1.4 Áogn o.a.

Skatta-, toll- o.t. skuldarar

t.kr.

	2015	2016	2017
Áogn landskassans brutto	346.743	381.846	469.657
Sett av ímóti tapi	-120.414	-95.114	-86.466
Sambært roknskapinum	**226.329**	**286.732**	**383.191**

Skatta-, toll- o.t. skuldarar eru hækkaðir 96,5 mió.kr. í 2017.

Frá 2016 til 2017 eru skuldararnir hækkaðir 96,5 mió.kr. netto. Størstu broytingarnar kunnu útgreinast soleiðis:

t.kr.

Broytingar 2016 – 2017	
Kapitalvinningsskattur	32.191
FAS endurgjald	26.979
Tollavgjøld	18.768
Meirvirðisgjald	17.469
Felagsskattur	5.139
Vanligur landsskattur	-6.625

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Apoteksverkinum, Landsverki, Kringvarpinum, Landssjúkrahúsinum og øðrum stovnum. Aðrir skuldarar eru m.a. inntøkur og endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað. Eisini er talan um millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá TAKS, kommunum o.a.

Niðanfyri eru upphæddirnar útgreinaðar:

t.kr.

	2015	**2016**	**2017**
Apoteksverkið	28.308	29.921	35.687
Inntøkufíggjað virksemi, Landsverk	9.089	20.993	15.116
Uppboðssøla av fiskatilfeingi	-	-	11.176
Tøkugjald á alivinnu	1.615	32.887	9.145
Landssjúkrahúsið	6.330	6.661	8.028
Avgjald á fiskatilfeingi	20.795	7.039	7.342
Ríkisstuðul, endurgjøld	6.269	6.333	6.385
Kringvarp Føroya	11.612	6.794	6.219
Fróðskaparsetur Føroya, stuðulsf. virksemi	4.850	6.477	5.670
Gjald til Heilsutrygd	4.927	5.643	5.662
Heilsufrøðiliga starvsstovan	5.287	5.648	4.592
Kapitalvinningsskattur	5.587	3.943	2.344
Ymiskir skuldarar	39.736	56.137	9.914
Tilsamans sambært roknskapinum	**144.405**	**188.476**	**127.280**

Talan er um fleiri hækkingar og lækkingar, sum netto geva eina lækking 61,2 mió.kr. frá 2016 til 2017.

Goymslur

t.kr.

	2015	**2016**	**2017**
Sambært roknskapinum	68.898	67.308	64.509

Talan er um vørugoymslurnar hjá Rúsdrekkasølu landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum landsins, Námi (útgávuvirksemi), Glasi, Miðnámi á Kambsdali, Landsverki, KT Landsins og Tekniska skúla í Klaksvík.

Netto er virðið á goymslunum lækkað 2,8 mió.kr. frá 2016 til 2017. Millum annað er goymslan hjá Apoteksverkinum lækkað 2,3 mió.kr. og goymslan hjá Námi er lækkað 1,4 mió.kr. Hinvegin er goymslan hjá Rúsdrekkasøluni hækkað 0,9 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur hugt eftir, um goymsluuppgerðir hjá nøkrum stovnum samsvara við Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin hevur eisini við stakroyndum kannað goymsluna hjá Rúsdrekkasølu landsins við árslok 2017, og tá ið kassaeftirlit eru gjørd.

Ognir og útbúnaður (LG 2016/300-0101)

Roknskaparkunngerðin er broytt í 2017.

Í 2017 varð roknskaparkunngerðin broytt við K. nr. 110/2017. Sambært § 20 í kunngerðini skulu stovnar gera yvirlit yvir ognir, so sum verkløg, bygningar, maskinur, før, innbúgv og annan virðismiklan útbúnað. Yvirlitini skulu fevna um ognir og útbúnað, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr. Ognirnar og útbúnaðurin skulu skrásetast í Búskaparskipan landsins, um ikki stovnurin hevur fingið loyvi til at nýta egna búskaparskipan.

Landsgrannskoðanin kann enn eina ferð staðfesta, at reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað, verða ikki hildnar.

Í august 2017 boðaði landsstýrismaðurin frá, at broyting í roknskaparkunngerðini um ognaryvirlit var komin í gildi, men enn vantaði tøknilig menning av ognaryvirlitum í Búskaparskipan landsins til tess at fáa skrásett ognir við virði yvir 50 t.kr.

Stovnar kunnu skráseta ognir í BSL.

Í september 2018 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at ognarmodulið í Búskaparskipan landsins er broytt soleiðis, at størri stovnar við fakligum førleika fáa atgongd til at skráseta til- og frágongd av ognum. Smærri stovnar skulu framvegis venda sær til Gjaldstovuna fyri at fáa ognirnar skrásettar.

Nú tøkniliga menningin av ognaryvirlitinum í Búskaparskipanini er framd, fer Fíggjarmálaráðið at dagføra ognaryvirlitið og at heita á stjórnarráð og stovnar undir ráðnum um at dagføra síni yvirlit.

10.1.5 Tøkur peningur

Tøkur peningur fatar um gjaldføri landsins. Sambært § 10, stk. 1 í Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" er gjaldføri landsins umsitið av Landsbanka Føroya eftir ásetingum frá landsbankanevndini. Sambært stk. 2 er endamálið við umsitingini, at:

- landið altíð hevur neyðugt gjaldføri tøkt, soleiðis at tað kann halda sínar skyldur,
- landsins gjaldføri verður fyrisitið væl við atliti at tryggleika, herundir at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin verður sum minst, og
- landsins gjaldføri verður rentað til marknaðarkor.

Sambært § 10, stk. 3 og 4 fevnir gjaldføri landsins um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum o.ø. Gjaldførið verður roknað sum landsins kassapeningur, innistandandi í peningastovnum, ótrektir kredittir í peningastovnum og óveðsettar virðisbrævaognir.

Í fíggjarstøðuni er tøkur peningur býttur í tveir bólkar:

1. Virðisbrøv o.tíl., og
2. Bankakontur, girokontur og kassapeningur.

Virðisbrøv o.t.

Landsbanki Føroya hevur sett part av tøka peninginum í stuttfreistað virðisbrøv. Posturin nevnist "Virðisbrøv o.tíl." Hesi virðisbrøv eru tikin við til marknaðarvirðið.

t.kr.

	2015	2016	2017
Sambært roknskapinum	2.374.359	2.339.213	3.355.497

Landsbankin hevur dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum.

Landsbanki Føroya hevur dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum. Plaseringin byggir á ein íløguinstruks frá landsbankanevndini, har ásetingar eru um m.a., hvussu nógv kann plaserast í ávís sløg av virðisbrøvum.

Landsgrannskoðanin hevur m.a. kannað, um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært íløgureglunum í Ll. nr. 116/2016, og eisini um tær eru sambært íløguinstruksinum frá landsbankanevndini. Landsgrannskoðanin hevði einki at finnast at.

Bankakontur og kassapeningur

t.kr.

	2015	2016	2017
Sambært roknskapinum	417.996	566.036	149.841

Banka- og girokontur

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv landskassin tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar við leysum tilknýti til fíggjarlóg ella landsroknskap hava nógvan pening standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Í 2017 kann upphæddin greinast sundur í tær kontur, sum Landsbankin og Gjaldstovan umsita, og tær, sum aðrir stovnar í landsroknskapinum umsita.

Landsgrannskoðanin hevur kannað:

1. um kontuavrit fra peningastovnum stemma við Búskaparskipan landsins,
2. um peningur í fremmandum gjaldoyra er tikin við í roknskapin við røttum virði,
3. um saldur av plaseringum hjá Landsbankanum eru rætt skrásettar í landsroknskapinum og Búskaparskipan landsins,
4. um Landsbankin liggur inni við ov nógvum gjaldføri, og
5. um reglurnar um minsta gjaldføri eru hildnar.

Ad. 4) Landsbankin hevur gjørt innanhýsis reglugerð um, hvussu nógvur tøkur peningur kann standa í føroyskum peningastovnum, í hvørjum peningastovni sær og samanlagt. Við árslok 2017 var innistandandi í peningastovnunum í tráð við reglugerðina.

Ad. 5) Sambært § 11 í Ll. nr. 116/2016 skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyriskipa, at landsins gjaldføri, sambært § 10, stk. 3 og 4 í minsta lagi samsvarar við 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári. Landsbankanevndin skal í august mánað áseta minsta gjaldførið. Landsbankin hevur upplýst, at av tí at bruttotjóðarúrtøkan fyri undanfarna ár ikki altíð er gjørd upp, tá ið landsbankanevndin skal áseta minstagjaldførið, verður seinasta uppgjørda talið brúkt, eisini um talan er um fyribilstal.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í tøka peninginum 2015 til 2017:

t.kr.

	2015	2016	2017
Sambært roknskapinum	2.792.356	2.905.250	3.505.338
Harav minstagjaldføri	2.150.000	2.290.000	2.475.000
Munur millum gjaldføri og minstagjaldføri	**642.356**	**615.250**	**1.030.338**

§ 11 ásetir, at gjaldførið fevnir um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum v.m., og sum er trygt og lætt tøkt. Gjaldførið fevnir eisini óveðsett virðisbrøv. Sambært Landsbankanum kemur allur tøki peningurin í fíggjarstøðuni undir hesar treytir og verður tí roknaður sum gjaldføri hjá landskassanum.

Tøki peningurin er hækkaður 600 mió.kr.; kravið til minstagjaldførið er hækkað 185 mió.kr.

Tøki peningurin hjá landskassanum er hækkaður 600 mió.kr. frá 2016 til 2017, meðan kravið til minstagjaldførið er hækkað 185 mió.kr., t.v.s. at munurin millum tøka peningin (gjaldførið) og minstagjaldførið er vaksin við 415 mió.kr. frá 2016 til 2017.

Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar til gjøgnumgongdina enn tær, sum eru til pkt. 4 og 5.

Kassapeningur

Landsgrannskoðanin hevur framt fleiri kassaeftirlit í 2017, har vit hava stemmað kassapening av við kassauppgerðir, Búskaparskipan landsins v.m. Hava stovnarnir peningastovnskontur, verða tær stemmaðar av við kontuavrit frá peningastovnum og

Búskaparskipan landsins. Eisini hava vit kannað konturnar fyri óvanligar bókingar í ávís tíðarskeið. Kassaeftirlitini eru umrødd undir hvørjum stovni sær.

10.1.6 Skuld

Innanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

	2015	2016	2017
Sambært roknskapinum	4.677.984	4.634.235	4.643.735

Við árslok 2017 var talan um 5 lánsbrævarøðir:

- FO-LB 190620, áljóðandi 1.100 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 20. juni 2019.
- FO-LB 200611, áljóðandi 1.045 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 11. juni 2020.
- FO-LB 210622, áljóðandi 1.350 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 22. juni 2021.
- FO-LB 230627, áljóðandi 550 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 27. juni 2023.
- FO-LB 320503, áljóðandi NOK 550 mió.kr. (svarandi til 416,13 mió.kr. við árslok 2017), sum fellur til gjaldingar 3. mai 2032.

Við árslok 2017 var samlaða áljóðandi skuldin 4.461,13 mió.kr.

Lánini verða gjørd upp til marknaðarvirði.

Frá fíggjarárinum 2016 eru lánini gjørd upp eftir marknaðarvirði.

Landsbankin selur meginpartin av brævalánunum uttanlands, og óvist er, hvør keyparin er. Heitið á roknskaparpostinum, “Innanlandsskuld, langfreistað”, er tí helst ikki so beinrakið.

Uttanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

	2014	2015	2017
Sambært roknskapinum	500.000	500.000	500.000

Upphæddin er eitt lán, 500 mió.kr., ið stavar frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Sambært avtaluni er lánið rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: “*Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer*.”

500 mió.kr. í láni sambært avtalu við donsku stjórnina er dottið burtur í 2018.

Viðmerkjast kann, at lánið er dottið burtur 10. juni 2018, sambært avtaluni millum donsku stjórnina og Landsstýrið.

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar í komandi ári

t.kr.

	2015	2016	2017
Sambært roknskapinum	1.360.000	1.010.000	10.579

Sambært Landsbankanum vóru veruligu afturgjøldini:

- Í juni 2016 fullu eftir skránni 1.350 mió.kr. av FO-LB 160622 og 9,8 mió.kr. av FO-LB 180610. Tilsamans vórðu 1.359,8 mió.kr. goldnar í 2016.
- Í juni 2017 fullu eftir skránni 1.000 mió.kr. av FO-LB 170627 og 10,2 mió.kr av FO-LB 180610. Tilsamans vórðu 1.010,2 goldnar í 2017.

Sambært Landsbankanum er seinasti avdráttur av FO-LB 180610, 10,6 mió.kr., goldin í juni 2018.

Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

t.kr.

	2015	2016	2017
Sambært roknskapinum	942.566	941.431	1.010.733

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkingar og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

10.1.7 Útjavningarkonta (LG 2017/300-0203)

t.kr.

	2016	2017
Salda 1. januar	-817.836	524.705
RLÚ-úrslit	213.638	224.008
Búskapargrunnur Føroya	23.333	313.419
Ymiskar broytingar	56.159	76.682
Salda 31. desember	**-524.705**	**89.404**

"Ymiskar broytingar" fevnir um broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskapar-meginreglum, rættingum av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøkum av grunnum, úrslitum hjá internum grunnum, broytingum í avsetingum, mótbókingum til útlánsroknskap og mótbókingum til kapitalinnskot.

Útjavningarkontan líkist ikki "kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Ognirnar í landsroknskapinum verða virðismettar øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip og vegir, verða ikki virðisásett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

Upphæddin við árslok 2016 er javnað við 9,4 mió.kr. úr -534,1 mió.kr., soleiðis at saldan við ársbyrjan 2017 er -524,7 mió.kr. Sambært landsroknskapinum á síðu 227 varð Barsilsgrunnurin av misgáum skrásettur sum eksternur grunnur. Í 2017 er tað rættað, soleiðis at hann nú er skrásettur sum internur grunnur. Harafturat hevur Glasir yvirtikið vørugoymslurnar hjá sjálvsognarstovnunum Føroya Handilsskúla og Tekniska Skúla í Tórshavn.

Landsgrannskoðanin hevur kannað rørslur á útjavningarkontuni.

Landsgrannskoðanin hevur kannað rørslurnar á útjavningarkontuni fyri árini 2014 – 2017.

Rakstrar- og íløguúrslitið samsvarar við RLÚ II í landsroknskapinum. Landsgrann-skoðanin hevur ongar viðmerkingar.

Landsgrannskoðanin hevur hugt eftir hvørjar posteringar eru skrásettar undir "Ymsar broytingar". Vit hava kannað nakrar upphæddir, um tær eru rættar. Vit hava einki at finnast at.

10.2 Fyrisiting av gjaldføri og skuld (LG 2017/300-0104 og 0202)

Gjaldføris- og skuldarviðurskifti landsins verða fyrisitin av Landsbankanum.

Gjaldføris- og skuldarviðurskifti landsins verða fyrisitin av Landsbanka Føroya. Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" kom í gildi 1. januar 2017 og setti úr gildi Ll. nr. 140/2012 "um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting". Gjaldstovan fyrisitur tí ikki longur gjaldføris- og skuldarviðurskifti landsins, men er uppgávan løgd til Landsbankan at røkja frá 2017.

Í broti 3.9 undir fíggjarmálum er greitt frá Landsbankanum og grannskoðan okkara av stovnsrakstrinum. Í brotunum 10.1.5 og 10.1.6 undir fíggjarstøðuni er stutt greitt frá um tøkan pening og skuld landsins.

Grannskoðanin er ikki útveitt í 2017.

Áður hevur Landsgrannskoðanin við heimild í § 9, stk. 3, í grannskoðanarlógini útveitt grannskoðanina av porteføljuskipanini og plaseringum av gjaldførinum til løggilt grannskoðanarvirki. Í 2017 er grannskoðanin ikki útveitt.

10.2.1 Landskassaskuld - brævalán

Heimild at læna

Sambært § 42 í Ll. nr. 103/1994 “um stýrisskipan Føroya” kunnu lán ella borgan, ið skuldbinda løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, ikki verða tikin ella veitt uttan við heimild í lóg. Sambært § 1 í Ll. nr. 116/1991 “um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum” verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka lán til at rinda avdráttir av lánum, til afturrindan av lánum og til framskundaða afturrindan av lánum í Føroyum og uttan fyri Føroyar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað lániheimildirnar fyri árini 2011 til 2017. Einki var at finnast at.

Lániheimildirnar eru í lagi.

Lánini í tráð við prospektini

Í sambandi við lántøku ger Landsbankin kunningartilfar til íleggjarar og onnur, nevnt prospekt. Í prospektinum er m.a. kunning um búskaparviðurskifti, upplýsingar um útgevaran av lánsbrøvunum og upplýsingar um lánsbrøvini, so sum samlaða upphædd, rentu, kurs, leypitíð og fondskotu.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um lánini, sum vóru virkin við árslok 2017, eru í tráð við prospektini. Einki prospekt er gjørt í sambandi við brævalán á NOK 550 mió.kr.

Lánini eru í tráð við prospektini.

Skráseting av brævalánum

Brævalánini síggjast í landsroknskapinum sum langfreistað innanlandsskuld í fíggjarstøðuni. Í notu 8 eru sundurgreiningar, sum vísa marknaðarvirði og viðhangandi rentu. Notan vísir eisini samanhangin millum navnvirði og marknaðarvirði, eitt yvirlit yvir einstøku brævalánsrøðirnar, umframt hvussu stórur partur av skuldini fellur til gjaldingar í komandi ári, og hvussu stór restskuldin er um 5 ár.

Samlaða bókaða virðið av brævalánunum við árslok 2017 er 4.644 mió.kr. í mun til 4.634 mió.kr. við ársbyrjan. Upphæddirnar eru sambært roknskaparmeginreglunum í landsroknskapinum grundaðar á marknaðarvirðið á brævalánunum umframt tíðargreinaðar rentur.

t.kr.

Brævalán	**2016**	**2017**		
	Brævalán	*Brævalán*	*Lánsbýti *)*	*Tilsamans*
Marknaðarvirði	4.605.240	4.568.386	48.783	4.617.169
Viðhangandi renta ****)**	28.995	28.974	-2.408	26.566
Tilsamans	**4.634.235**	**4.597.360**	**46.375**	**4.643.735**

*) Talan er um sonevndan swap, sum t.d. kann fevna um lán, rentu og gjaldoyra.
**) Tíðargreinað renta viðvíkjandi roknskaparárinum, men sum er goldin eftir roknskaparlok.

Brævalánini hava síðani 2016 verið virðisásett til marknaðarvirði. Áður vórðu lánini bókað til kursvirðið útgávudagin; kursmunurin varð avskrivaður liniert yvir lánstíðina.

Broytta virðisásetingarmeginreglan hevði í 2016 við sær, at bókaðu upphæddirnar við ársbyrjan 2016 vórðu 104 mió.kr. hægri enn tær við árslok 2015. Samsvarandi upphædd er mótbókað á javningarkontuna í landsroknskapinum. Upphæddin á javningarkontuni verður tann sama, so leingi meginreglan ikki verður broytt. Kursbroytingar eftir tað verða rakstrarførdar á hvørjum ári.

t.kr.

FO-LB	Restskuld við byrjan 2017	Virði við byrjan 2017	Munur	Restskuld við árslok 2017	Virði við árslok 2017	Munur	Broyt. í markn. virði
180610	20.775	20.775	0	10.578	10.578	0	0
170627	1.000.000	1.009.299	9.299	0	0	0	-9.299
190620	1.100.000	1.147.210	47.210	1.100.000	1.135.640	35.640	-11.570
200611	1.045.000	1.072.518	27.518	1.045.000	1.078.963	33.963	6.445
210622	1.350.000	1.355.438	5.438	1.350.000	1.372.950	22.950	17.512
	4.515.775	***4.605.240***	***89.465***	***3.505.578***	***3.598.131***	***92.553***	***3.088***
	Upptøka í árinum	*Virði*	*Munur*				
Lánsbýti	0	0	0	0	48.783	48.783	48.783
320503	447.883	447.883	0	447.883	447.883	0	0
320503 – gjaldoyramunur ***)**			0	0	-31.753	-31.753	-31.753
230627	550.000	551.133	1.133	550.000	554.125	4.125	2.992
Tilsamans				**4.503.461**	**4.617.169**	**113.708**	**23.110**

*) FO-LB 320503 er tikið í norskum krónum – gjaldoyramunurin við árslok 2017 er her vístur fyri seg.

Kursmunirnir eru hækkaðir 23 mió.kr.

Í talvuni hava vit greinað restskuldina á brævalánunum, sum vóru virkin ávikavist við árslok 2016 og við árslok 2017. Sum sæst, er kursmunurin við árslok 2017 vaksin í mun til við ársbyrjan. Kursbroytingin verður tikin við í raksturin undir høvuðskontu 20.50.1.01. ”Rentur at gjalda” sum staðfestur og ikki staðfestur kursmunur.

t.kr.

FO-LB	Restskuld við árslok 2017	Kursur smbr. roknskapi	Kursur smbr. VP *)	Virði smbr. roknskapi	Virði smbr. VP *)	Munur í virði
Lánsbýti				48.783		
180610	10.578	100,0000	95,6000	10.578	10.113	-465
190620	1.100.000	103,2400	103,2400	1.135.640	1.135.640	0
200611	1.045.000	103,2500	103,1500	1.078.963	1.077.918	-1.045
210622	1.350.000	101,7000	101,7000	1.372.950	1.372.950	0
320503 ****)**	416.130	100,0000	100,0000	416.130	416.130	0
230627	550.000	100,7500	101,1000	554.125	556.050	1.925
Tilsamans	**4.471.708**			**4.617.169**	**4.568.801**	**415**

*) VP Securities A/S tekur sær av skráseting og handli av børsskrásettum virðisbrøvum.
**) Lánið í norskum krónum til kursvirðið við árslok 2017.

Í talvuni síggjast brævalánsrøðir og lánsbýti við árslok 2017. Sambært roknskaparmeginreglunum verða árligu broytingarnar í keypsskála skrásetta kursvirðinum tiknar við í roknskapin. Vit hava samanborið lánini og kursin, sum er brúktur í landsroknskapinum, við upplýsingar sambært skjølum frá VP Securities A/S fyri at vissa okkum um upphæddirnar, sum eru í umferð, og at brúkti kursurin samsvarar við marknaðarkursin við árslok. Virðið á lánsbýtinum er stemmað av við “market value report” frá Nordea. Munur er í nøkrum av brævalánsrøðunum í mun til kursin hjá VP við árslok 2017.

Landsbankin hevur greitt frá, at munurin helst stavar frá, at bankin brúkar PandaConnect sum virðisbrævabókhaldara, og PandaConnect heintar kursirnar frá keypsskálum og Bloomberg. Munurin er ikki týðandi fyri 2017.

t.kr.

FO-LB	Restskuld við árslok 2017	Tíðargreinað renta *)	Rentudagur	Dagar *)	Roknað renta í % *)	Ásett renta í %
180610	10.578	222	10-06-2017	204	3,7500	3,7500
190620	1.100.000	10.231	20-06-2017	194	1,7500	1,7500
200611	1.045.000	5.812	11-06-2017	203	1,0000	1,0000
210622	1.350.000	3.551	22-06-2017	192	0,5000	0,5000
320503 ****)**	416.130	7.397	03-05-2017	237	2,7000	2,7000
230627	550.000	1.761	27-06-2017	187	0,6250	0,6250
	4.471.708	***28.974***				
Lánsbýti ****)**	-416.130	-7.745	03-05-2017	237	-2,8270	-2,7000
Lánsbýti *****)**	447.883	5.337	03-05-2017	237	1,8100	1,8100
Tilsamans	**4.503.461**	**26.566**				

*) Í norska láninum verða nýttir 30/360 dagar í mánaðinum/árinum; í øðrum lánum eitt vanligt ár.
**) Lánið í norskum krónum til kursvirðið við árslok 2017.
***) Lánið í norskum krónum býtt um til danskar krónur og útgoldið landinum.

Landsgrannskoðanin hevur eftirroknað tíðargreinaða rentu.

Í talvuni hava vit eftirroknað tíðargreinaðu rentuna av hvørjum láni sær í mun til restskuldina við árslok 2017. Norska lánið hevur eina rentu á 2,7%, men varð býtt um til danskar krónur við einari rentu á 1,81%. Rentumunurin verður góðskrivaður landinum.

Sum sæst í talvuni, er tíðargreinaða renta av láninum í norskum krónum 7.397 t.kr., men samsvarandi rentan í sambandi við lánsbýtið, sum er bókað landinum til góðar, er 7.745 t.kr. Munurin er 348 t.kr. Sambært Pandaskipanini er gjaldoyrakursurin á norsku krónuni frá 3. mai 2017 brúktur í sambandi við lánsbýtið.

Greining av brævalánum í notu 8 í landsroknskapinum

Nota 8 við brævalánunum er ikki røtt.

Í Búskaparskipan landsins og í notuni til landsroknskapin tykist ein villa at vera komin í viðvíkjandi upphæddini fyri lánsupptøkuna í árinum. Lánið í donskum krónum uppá 550 mió.kr. er skrásett at vera 557 mió.kr.; sama upphædd er í greinaða yvirlitinum í notuni. Samlaða lánsupptøkan í árinum er ikki 1.004,9 mió.kr., men 997,9 mió.kr. Samsvarandi eru samlaðu kursbroytingarnar ikki 106,7 mió.kr., men 113,7 mió.kr. Tað hevur tí ikki ávirkan á samlaðu bókaðu upphæddina fyri lánsbrøvini.

Skráseting av rentuútreiðslum o.ø.

Rentuútreiðslur o.a vóru 80 mió.kr.; 60 mió.kr. vórðu fluttar á § 80 undir RLÚ II.

Sambært landsroknskapinum vóru rentuútreiðslur o.a. 80 mió.kr. í 2017. Av hesum eru 60 mió.kr. fluttar undir "Frávik frá játtan til rentur", soleiðis at rentur o.a. undir høvuðskontu 20.50.1.01. "Rentur at gjalda" samsvara við játtanina uppá 20 mió.kr. Í talvuni eru rentuútreiðslur o.a. sundurgreinaðar.

t.kr.

Heiti	2016		2017	
	Játtan	*Roknskapur*	*Játtan*	*Roknskapur*
Goldnar rentur ***)**		94.765		54.729
Munur – tíðaravmarkað og goldin renta		-18.974		-398
Rentur tilsamans		***75.791***		***54.331***
Staðfestir kursmunir		-24.336		-9.299
Ikki staðfestir kursmunir		7.728		30.378
Kursmunir tilsamans		***-16.608***		***21.079***
Ómaksgjøld o.a.		2.700		3.280
Aðrar rentuútreiðslur		1.125		834
Innanh. flyt. millum alm. stovnar		-9.008		-59.524
Tilsamans	**54.000**	**54.000**	**20.000**	**20.000**

*) Í Búskaparskipan landsins eru renturnar ikki greinaðar í goldnar og tíðargreinaðar – upphæddirnar eru sambært yvirlitum úr Pandaskipanini.

Í talvuni niðanfyri eru goldnar rentur og tíðargreinaðar rentur í 2017 býttar á brævalánini. Vit hava roknað, hvat samlaða rentuupphæddin fyri hvørt lánið er í mun til eina miðalsaldu á láninum í árinum. Roknaða rentan er samanborin við ásettu rentuna á hvørjum láni.

t.kr.

FO-LB	Miðalsalda í 2017	Goldin renta	Tíðargreinað renta	Renta tilsamans	Roknað renta í %	Ásett renta í %
180610	15.677	779	-214	565	3,6063	3,7500
170627	500.000	17.500	-8.966	8.534	1,7500	1,7500
190620	1.100.000	19.250	0	19.250	1,7500	1,7500
200611	1.045.000	10.450	0	10.450	1,0000	1,0000
210622	1.350.000	6.750	0	6.750	0,5000	0,5000
320503	208.065	0	7.397	7.397	2,7000	2,7000
230627	275.000	0	1.761	1.761	0,6250	0,6250
Tilsamans	***4.493.742***	***54.729***	***-22***	***54.707***		
Lánsbýti	-208.065	0	-7.745	-7.745	-2,8270	-2,7000
Lánsbýti	223.941	0	5.337	5.337	1,8100	1,8100
Tilsamans	**4.509.618**	**54.729**	**-2.430**	**52.299**		

Sambært Búskaparskipan landsins er netto viðhangandi rentan av lánsbýtinum í fíggjarstøðuni 2.408 mió.kr. Upphæddin fevnir um 376 t.kr. í rentu og 2.031 t.kr. í ikki staðfestum gjaldoyravinningi. Útreiðsluførda rentan er tí 54.707 – 376 = 54.331 t.kr.

Sum sæst í talvuni á síðu 160 við marknaðarvirðinum av hvørjum brævaláni, hava vit eftirroknað samlaðu kursbroytingina, t.e. munurin á marknaðarvirðinum við ársbyrjan og við árslok. Somuleiðis hava vit eftirroknað býtið í staðfestar og ikki staðfestar kursbroytingar.

Samlaða kursbroytingin í 2017 var 23.110 t.kr. Verða tær 2.031 t.kr. í sambandi við viðhangandi rentu av lánsbýtinum drignar frá, verður nettokursbroytingin 21.079 t.kr. í tapi. Í 2016 hevði landið 16.608 t.kr. í kursvinningi av brævalánunum.

Renturnar eru nú lægri.

Renturnar av brævalánunum vóru 54.331 t.kr. í 2017. Í 2016 og 2015 vóru tær ávikavist 75.791 t.kr. og 101.546 t.kr. Høvuðsorsøkin til munandi lækkingina er, at brævalánið FO-LB 160622 uppá 1.350 mió.kr. varð afturgoldið í juni 2016. Renturnar av tí láninum hava verið um 50 mió.kr. hvørt árið. Í 2016 varð nýtt lán somuleiðis uppá 1.350 mió.kr. upptikið við 0,5% rentu, svarandi til út við 7 mió.kr.

Útreiðslur í árinum av rentu, kursi og lánsbýti

Í talvuni niðanfyri hava vit samanhildið brævalánini við samlaðu rakstrarbroytingarnar, sum lánini hava við sær í árinum.

t.kr.

FO-LB	Restskuld við árslok 2017	Renta smbr. roknskapi	Kursbroyt. o.a. smbr. roknskapi	Rakstrar-broytingar tilsamans	Roknað broyting í % *)
180610	10.578	565	0	565	3,6063
170627	0	8.534	-9.299	-765	-0,1530
190620	1.100.000	19.250	-11.570	7.680	0,6982
200611	1.045.000	10.450	6.445	16.895	1,6167
210622	1.350.000	6.750	17.512	24.262	1,7972
320503	447.883	7.021	14.999	22.020	9,8327
230627	550.000	1.761	2.992	4.753	1,7284
Tilsamans	**4.503.461**	**54.331**	**21.079**	**75.410**	

*) Broytingin er roknað sum samlað rakstrarbroyting í mun til miðal av restskuldini við ársbyrjan og við árslok.

Rentur og kursbroytingar av norska láninum vóru næstan 10% í 2017.

Í kursbroytingum o.ø. er ikki kursmunur í sambandi við útgávu. Útgávukursmunir verða staðfestir, tá lánini verða innfríað. Lán nr. FO-LB 170627 er innfríað í árinum. Kursmunir á øðrum lánum eru ikki staðfestir. Sum sæst, eru bókaðu útreiðslurnar av norska láninum á 550 mió.NOK í 2017 næstan 10% av restskuldini.

Aðrar útreiðslur av brævalánunum

Aðrar útreiðslur av brævalánum vóru 4,1 mió.kr. í 2017.

Aðrar útreiðslur av brævalánunum enn rentur og kursmunir eru 4,1 mió.kr. Talan er um ómaksgjøld í sambandi við upptøku av nýggjum lánum, gjald fyri ráðgeving, skráseting, eftirlit o.a. Eisini eru nakrar útreiðslur av føroyskum peningastovnskontum hjá Landsbankanum og Gjaldstovuni. Landsgrannskoðanin hevur áður mælt til at áseta, hvørjar útreiðslur kunnu takast við í játtanina.

Útreiðslurnar av sjálvari porteføljuskipanini verða rindaðar av játtanini til Landsbankan. Útreiðslur í sambandi við plasering av gjaldføri, t.d. kurtaga, fara av høvuðskontu 20.50.2.01. ”Rentuinntøkur av innistandandi”.

Landsbankin hevur brúkt Nordea sum ráðgeva síðani fyrst í 90’unum. Uppgávan at røkja gjaldførið varð boðin út í 2012. Í 2017 greiddi Landsbankin frá, at hann ætlar at bjóða út av nýggjum. Sum nevnt í frágreiðing okkara í fjør er porteføljuskipanin ikki boðin út, men Landsbankin hevur áður kannað fleiri skipanir til endamálið. Tá vóru ikki nógvar skipanir at velja ímillum, m.a. tí at fleiri av skipanunum vóru gjørdar til stórar peningastovnar og hóskaðu tí ikki.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at Landsbankin hevur bjóðað út íløgurøktina til 8 útlendskar veitarar. Støða verður tikin til tilboðini í heyst. Seinni í heyst er eisini ætlanin at bjóða út høvuðsbankasamband Landsbankans millum útlendskar veitarar.

Landsbankin hevur bjóðað út íløgurøktina til 8 útlendskar veitarar.

Virðisásetingarmeginreglan fyri brævalán varð broytt í 2016

Í ársfrágreiðingini í fjør greiddu vit frá, at virðisásetingarmeginreglurnar vóru broyttar, soleiðis at brævalánini verða tikin við í roknskapin til marknaðarvirði. Fígging landsins mælti til broytingina í 2015, soleiðis at somu meginreglur vóru galdandi fyri fíggjarliga ogn og skuld. Fígging landsins vísti á, at onnur lond hava tjóðbanka, sum hevur reservarnar hjá landinum um hendi, og tá síggjast rentur o.a. ikki beinleiðis í landsroknskapinum.

Virðisásetingar-meginreglan varð broytt í 2011 og aftur í 2016.

Í 2011 vórðu meginreglurnar annars broyttar soleiðis, at skuldin ikki longur varð tikin við í roknskapin til marknaðarvirði. Endamálið við broytingini tá var, at útreiðslurnar ikki skuldu vera merktar av teimum sveiggjum, sum kursbroytingar kundu hava við sær.

Landsgrannskoðanin helt, at tað var óheppið at broyta roknskaparligar meginreglur við stuttum millumbili. Tað ávirkar gjøgnumskygni og møguleikan at samanbera.

Landsgrannskoðanin helt eisini, at tær brúktu roknskaparmeginreglurnar eiga at vera tær, sum á bestan hátt endurspegla tær avgerðir, sum verða tiknar í einum fíggjarári.

Í § 3 í lógini um játtanarskipan landsins stendur m.a., at fíggjarlógin skal vera grundað á veruleikakendar vónir og so hollar ætlanir, sum til ber. Fíggjarlógin skal vera ætlað eftir somu meginreglum, sum eru galdandi fyri gerð og uppseting av landsroknskapinum sambært lógini um landsins almenna roknskaparhald v.m.

Roknskaparligar meginreglur eru ásettar í roknskaparkunngerðini. Fíggjarmálaráðið tekur somuleiðis avgerð í samráði við Gjaldstovuna um meginreglur, og um tær skulu broytast. Landsgrannskoðanin veit ikki um nakað savnað yvirlit yvir skriv ella avgerðir frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparligar meginreglur, men í landsroknskapinum er greitt frá ymiskum roknskaparmeginreglum.

Sigast kann, at eitt høvuðsendamál við fíggjarlógini og landsroknskapinum er at halda saman tað, sum er brúkt ella rátt yvir, í mun til tað, sum er samtykt. Tann mest rættvísandi myndin av landsroknskapinum er tí tær upphæddir, sum samsvara við tær avgerðir, sum ein landsstýrismaður ella stovnsleiðsla tekur.

Er endamálið við at taka lán einans at fíggja almennan rakstur, og lánini ætlandi ikki verða innfríað fyri tíð, hava kursbroytingar á hvørjum ári ikki útreiðslur ella inntøkur við sær yvir samlaðu lánstíðina. Tað er goldna rentan, sum hevur útreiðslur við sær á hvørjum ári, og sum endurspeglar veruligu avgerðirnar. Árligu kursbroytingarnar geva tí ikki betri upplýsingar, men kunnu heldur hinvegin órógva veruligu myndina av útreiðslunum av skuldini.

Verða lán ætlandi ikki innfríað fyri tíð, hava kursbroytingar ikki útreiðslur ella inntøkur við sær yvir lánstíðina.

Í 2017 vóru útreiðslurnar av rentum, kursbroytingum o.ø. 80 mió.kr. Játtanin var bert 20 mió.kr. Goldin renta í árinum sambært rentusatsunum á brævalánunum var tilsamans 55 mió.kr. Landsgrannskoðanin ivast í, um broyttu roknskaparmeginreglurnar hava við sær, at bókaðu útreiðslurnar á bestan hátt endurspegla tær avgerðir og tiltøk, sum eru framd innan játtanarøkið.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at Fíggjarmálaráðið fer í samráði við Landsbankan at tryggja, at í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2019 verður játtanin til rentuútreiðslur á § 20 Inntøkur ásett sum effektiva rentan við upptøku av lánsbrævaskuldini, soleiðis at hon endurspeglar miðalrentustig í mun til støddina á skuldini.

Fíggjarmálaráðið fer at tryggja, at játtanin til rentuútreiðslur á § 20 verður ásett til effektiva rentu.

Rentur o.a. av brævalánum

Frávikið í mun til játtan verður flutt til § 80 undir RLÚ II.

Í ársfrágreiðingini í fjør greiddu vit eisini frá, at broytingar vóru gjørdar í upplýsingunum av rentum o.ø. Viðgerðin av rentuinntøkum og -útreiðslum, kursbroytingum o.ø. er nú soleiðis, at inntøkurnar og útreiðslurnar gjøgnum árið verða tiknar við í § 20, sum er partur av RLÚ I, men við árslok verða tær javnaðar soleiðis, at frávikið í mun til játtan verður flutt til § 80 Rentur, sum er partur av RLÚ II. Bókaðu rentuútreiðslurnar uppá 80 mió.kr. í 2017 eru tí býttar sundur við 20 mió.kr. undir vanliga rakstrinum og 60 mió.kr. undir óvanligum útreiðslum.

Í fíggjarlógini 2017 undir høvuðskontu 20.50.1.01. Rentur at gjalda er greitt frá, at nýggja meginreglan er, at fyri rentuútreiðslurnar verður effektiva rentan brúkt. Metingin av rentuútreiðslunum er grundarlag undir bæði játtan og roknskapi, og frávik í mun til játtan, vegna ikki staðfestar kursbroytingar, verða skrásett sum óvanligar útreiðslur og inntøkur.

Í § 6 í lógini um játtanarskipan landsins stendur, at játtanir verða veittar á høvuðskontum sum bruttojáttanir við serstakari játtan til at halda útreiðslur og hava inntøkur. Í fíggjarlógini 2017 er eingin § 80 og tíansheldur nøkur játtan. Til renturnar undir § 20 er heldur eingin átekning um at flyta millum høvuðskontur í tráð við § 13 í lógini um játtanarskipan landsins. Í fíggjarlógini 2018 er ein § 80 til rentur, men eingin átekning er um at kunna flyta millum høvuðskontur.

Fíggjarmálaráðið tekur til eftirtektar, at betri var um heimild fekst við átekning til at gera innanhýsis flyting millum rentupostarnar á ávikavist § 20 Inntøkur og § 80 Rentur. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2019 verður tað tikið við í uppsetingina.

Landsgrannskoðanin er í iva, um tað er rætt at flyta ímillum kontur, soleiðis at nýtslan samsvarar við játtanina.

Omanfyri hevur Landsgrannskoðanin vístá, at tað er eitt høvuðsendamál við fíggjarlógini og landsroknskapinum at halda saman tað, sum er brúkt ella rátt yvir, í mun til tað, sum er samtykt. Tað eigur at vera sjónligt fyri hvørja høvuðskontu sær. Landsgrannskoðanin er tí í iva um, hvørt tað er rætt at javna ella flyta millum høvuðskontur, soleiðis at nýtslan samsvarar við játtanina.

Fíggjarmálaráðið heldur, at við at brúka effektiva rentu, livir uppsetingin upp til, at játtanin endurspeglar miðalrentustig.

Fíggjarmálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina um, at tað er óheppið, at roknskaparmeginreglur fyri uppgerð av rentuútreiðslum og -inntøkum javnan verða broyttar. Í sambandi við fíggjarlógina 2016, í desember 2015, varð uppgerðarhátturin seinast broyttur eftir áheitan frá fakliga myndugleikanum, sum er Landsbankin. Tískil gevur tað lítla meining enn eina ferð at gera broytingar í uppgerðarháttinum. Við at tryggja at tað er metta effektiva rentan, ið verður ásett sum játtan fyri rentuútreiðslur, er tað meting Fíggjarmálaráðsins í samráði við Landsbankan, at uppsetingin livir upp til, at játtanin endurspeglar miðalrentustig í mun til støddina á skuldini.

10.2.2 Porteføljuskipanin og plaseringar av gjaldføri

Porteføljuskipanin:

Landsgrannskoðanin hevur útvegað og mett um grannskoðanarváttan, um skipanina, og hevur kannað:

- um øll trygdartiltøk verða hildin (innritan, funktiónsskilnaður, trygdaravrit o.s.fr.), og
- um samsvar er millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins.

Plaseringar av gjaldføri:

Landsgrannskoðanin hevur kannað:

- um Landsbankin hevur nøktandi og dagførdar skrivligar mannagongdir um, hvar hann plaserar gjaldførið,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært Ll. nr. 116/2016,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru í tráð við instruksin frá landsbanka-nevndini, og
- um Landsbankin heldur seg til roknskaparinstruksin frá landsbankanevndini viðvíkjandi plaseringum av gjaldføri.

Einki var at finnast at.

Transaktiónsslóðin er ikki optimal.

Tó skal viðmerkjast, at transaktiónsslóðin millum porteføljeskipanina og Búskapar-skipan landsins er ikki optimal, tí at tað ber ikki til at finna allar skrásetingar av einari bóking í Búskaparskipan landsins, men neyðugt er at fara víðari til porteføljuskipanina, um skrásetingar av einari transaktión skulu finnast fram.

11 Orðalisti

360 - er ein journalskipan, sum fleiri almennir stovnar brúka.

Brúkararættindi - eru rættindini hjá tí einstaka til at lesa og/ella broyta dátur í KT skipanum.

Búskaparskipan landsins - er felagsheiti fyri allar skipanirnar, sum Gjaldstovan umsitur.

C.átekning - við C.átekning kann heimild verða givin til at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár, ella til innanhýsis flytingar millum høvuðskontur sama ár.

Change management - Broytingarleiðsla ella stýring av broytingum fyri at tryggja, at allar broytingar verða gjørdar eftir ávísum standardum at tryggja kvalitetin á broytingunum.

Doculive - er ein journalskipan.

Eftirlitsumhvørvi - leggur støði undir hugburðin, starvsfólkini hava til eftirlit og stýring, og er grundarlagið undir, hvussu væl innaneftirlitið er skipað.

Eksternir grunnar - eru grunnar, sum ikki eru tiknir við í fíggjarstøðu landskassans, og sum hava sjálvstøðugan roknskap.

Eykajáttanarlóg - fevnir um broytingar, sum Løgtingið ger í játtanum, eftir at fíggjarlógin er samtykt.

Fígging Landsins – fyrrverandi deild hjá Gjaldstovuni, sum umsat av gjaldførið hjá landinum.

Fíggjargrannskoðan - er, at ansa eftir, at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

Fyrisitingargrannskoðan - er, at ansa eftir, at tað er hóskandi atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.

Grannskoðanarlógin - løgtingslóg nr. 25/1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

Høvuðskonta - játtanir verða veittar á høvuðskontum, og tað er høvuðskontan, ið er sjálv játtanin, sum Løgtingið atkvøður um.

Íløgujáttan/løgujáttan - er eitt játtanarslag. Løgujáttan verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum og skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði.

Innaneftirlit - eru tiltøk, sum leiðslan setir í verk fyri at fáa nóg stóra vissu fyri, at roknskapurin er rættur og álítandi, at raksturin er effektivur, og at lógir og reglur verða hildnar.

Innheintingarskipanin hjá TAKS (IK skipanin) - er ein KT skipan til at krevja inn skatt og o.a., sum er fallið til gjaldingar.

Inntøkufíggjað virksemi - er virksemi, ið ber handilsligan dám, og kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva stovnum at hava inntøkufíggjað virksemi. Nærri reglur um inntøkufíggjað virksemið eru í kap. 6 í K. nr. 84/2011 "um rakstrarjáttan".

Kervisgrannskoðan - er grannskoðan av KT skipanum.

Kontuskipan landsins - er kontuplanur fyri tað almenna.

KT-heildarskipanin - í frágreiðingini meinast við nýggju KT-heildarskipanina hjá Almannaverkinum, sum partvíst er tikin í brúk.

KT Landsins - er deild hjá Gjaldstovuni, sum hevur til uppgávu at veita almennum stovnum KT tænastur og at samskipa KT á yvirskipaðum stigi.

Landsnet - er tænasta, sum KT Landsins veitir. Tænasturnar fevna um hýsing og rakstur av servarum og netverkum, uppseting og atgongd til grundleggjandi forrit á brúkarateldum og KT support til brúkarar.

Landspartafelag - er eitt partafelag, sum landið hevur sama tilknýti til, sum móðurfelag til dótturfelag.

Landsroknskapurin - er samlaði ársroknskapurin hjá landinum og fevnir um allar inntøkur og útreiðslur landsins fyri farið fíggjarár og aktiv og passiv landsins. Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.

Løgfrøðilig-kritisk grannskoðan - er grannskoðan, har hugt verður eftir, at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

Markamót - er heit á sambindingarliði millum ymiskar skipanir.

Ræðisrættur - er at hava ræði á einari kontu ella játtan.

Rakstrarjáttan - er ein játtan, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslur í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur og tænastur o.a.

Roknskapargóðkenningarskipanin - stytt RGS, er ein KT skipan, sum góðskutryggjar tann almenna roknskapin við góðkenningum av stovnsroknskapum.

Roknskaparlógin - løgtingslóg nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m."

Roknskaparkunngerðin - Kunngerð nr. 22/2007 "um roknskaparverk landsins"

Roknskaparreglugerð - er ein reglugerð fyri roknskaparhaldið hjá stovninum við ábyrgdar og heimildarreglum.

Roknskaparrundskrivið - Roknskaparrundskriv frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001 um vegleiðing um roknskaparreglugerðir.

ScanJour – journal-, málsviðgerðar- og útgjaldsskipan hjá Almannaverkinum.

SE skipanin – serviceskipan hjá TAKS, til at taka ímóti krøvum frá Almannaverkinum.

SLA – Service Level Agreement - er heiti á einari rakstrar- og viðlíkahaldsavtalu millum partar.

Standardkonta (St.kt.) – Sundurgreinar inntøkurnar og útreiðslurnar í t.d. sølu, lønir, vørukeyp, tænatuveitingar o.a.

Standardroknskaparkonta (St.Rk.) – Neyvari útgreining av standardkontu.

Stovnskassi - er ein peningakassi til smákeyp.

TAKS-skipanir - í frágreiðingini verður heitið brúkt um KT skipanir hjá TAKS

TGumsitingarskipan - er nýggj KT skipan hjá Trygdargrunninum, til m.a. at rokna og skjalfesta gjøld fyri sjúkratrygd.

Totalview - er klokkuskipan, sum fleiri almennir stovnar brúka.

Trygdarpolitikkur - er ein yvirskipaður politikkur, ið tekur atlit at váðum, ið hótta.

Undirkonta - verður brúkt, tá ið neyðugt er at býta eina játtan sundur í fleiri virkisøki.

Váðameting - er at eyðmerkja og greina teir vandar, sum mest sannlíkt kunnu raka stovnin meint.

VaktPlan - er KT skipan at skráseta arbeiðstímar í og at avgreiða lønir við.

Verkætlan - er t.d. bygging av einum bygningi ella vegi og granskingarverkætlanir.

Verkætlanarleiðsla - leiðslan fyri einari verkætlan.

Verklagslóg - er lóg, sum eigur at verða løgd fyri Løgtingið, tá ið íløguætlan er 10 mió.kr. ella størri.

Víðkað fyrisitingargrannskoðan - er ein størri og meira víðfevnd kanning, enn vanlig fyrisitingargrannskoðan, sum løgtingsgrannskoðararnir kunnu biðja um.

Vinnugluggin - er ein portalur, har virkir og feløg kunnu avgreiða síni viðurskifti við TAKS.

Web-løn - er ein KT skipan til lønaravgreiðslu hjá Gjaldstovuni.